

RE



Nas

Na

Nat

Telephone: +47 75

LØGTINGS-
TIDINDI

1966

LØGTINGSTÍÐINDI

1966

TÓRSHAVN 1968

dagprent

INNIHALD:

ÓLAVSØKUTINGIÐ 1966

	bls.
Tingsetingin	1
Tingmenninir	1
Tingmenninir	1
Frágreiðing frá løgmanni 1966	3

ALMENN MÁL

Broytingar í Sosiallóggávuni	29
Broyting í sjúkakassafyriskipanini	37
Broyting í fyriskipanini um vanlukkutrygging	40

FÍGGJARMÁL

Fíggjarløgtingslóg 1967/68	29
Partapeningur í Snarfrost í Miðvági	44
Stuðul til Húsalánsgrunnin	66

HAVNARMÁL

Løgtingslóg um útbygging av Havnini í Leirvík	64

LANDSKASSAÁBYRGDIR OG LANDSKASSAMÁL

Veðhald av láni til p/f Clupea í Klakksvík	62
Veðhald av láni til P/f Skipafelagið Føroyar	68
Veðhald av láni til P/f Suðuroyar fiskiídnað	73

SJÓVINNUMÁL

Prísviðbót til útróðrarmenn í Grønlandi	47

SKATTAMÁL

Broyting í skattalógini	32

SKÚLAMÁL

Keyp av lendi til studentaskúlan 38

TÆNASTUMANNALÓG

Løgtingslóg um broytingar í tænastumannalógini 48

VETRARTINGIÐ 1966/67
LØGTINGIÐ

Tingsetanin 75
Tingmenninir 75
Varamenn 76- 77
Løgtingið verður upploystur 82

LANDSSTÝRIÐ

Val av løgmanni og landsstýrismonnum 77
Landsstýrismálini 113

ALMENN MÁL

Arbeiðsloysistrygging 127

FÍGGJARMÁL

Fíggjarløgtingslóg 1967/68 88
Fíggjarætlan fyri kirkjugrunnin 125
Partapeningur í p/f OVA 137
Stuðul til bygging av farmaskipum 148
Spariskipan hjá ikki-uppihaldarum 159
Eykafíggjarløgtingslóg 171
Fíggjarligur stuðul til trolarafeløg 183
Lutapeningur í flakavirki í Skopun 197

FYRISPURNINGAR

Fyrispurningur frá Johan Poulsen til løgmann 194
Fyrispurningur frá Kj. Mohr til løgmann 202

ÍTRÓTTUR

Sømdarpeningur til ítróttarfeløg 201

KOMMUNUMÁL

Samanlegging og sundurtøka av kommunum 188
Avhending av faslari ogn 196

LANDBÚNAÐARMÁL

Jarðarlóggávan 135

LANDSKASSAÁBYRGDIR OG LANDSKASSAMÁL

Veðhald av útgerðarlánum til útróður í Grønlandi 86
Veðhald av lánum til keyp av agni 87
Veðhald av lánum til sildavirkir 123
Veðhald av lánum til skipabygging 150
Eykaveðhald av láni til Suðuroyar fiskiídnað 152
Veðhald av láni til Klakksvíkar kommunu 169

POLITISK UPPLÝSING

Studningur í samband við politiska upplýsing 116

RÍKISLÓGIR

Ymiskar ríkislógir 141
Ymiskar ríkislógir 159

SAMFERÐSLUMÁL

Brúgv um hvannasund 157
Vegir og lendingar 173

SJÓVINNUMÁL

Sáttmálaloysi í fiskivinnuni 79
Landingarprísir á síld 84
Loyvi til trolveiðu innanfyri fiskimarkið 129
Oyðing av kópi 136
Eykaviðbót til fiskaprísin 142
Sunnudagshvíld á skipum 145
Reglur um uppmáting av skipum 146
Endurnýgging av fiskiskipaflotanum 154
Forboð at skjóta grindafisk 155
Studning til heimaútiróður 156
Prístilskot til útróðrarfisk 168
Stuðul til fiskiídnaðin 172
Prísstudningur til ídnaðarsild 193
Prisviðbót til saltsild 199

SKATTAMÁL

Broyting í skattalógini 117

SKÚLAMÁL

Kvøld- og ungdómsskúlaundirvising 109

TRYGGINGARMÁL

Broyting í lívstryggingarlógini 185

UTTANRÍKISMÁL

Føroyar gerast partur í EFTA 104

VAL AV NEVNDUM O.Ø.

Tingnevndir 78
Val av eftirlitsmanni til Føroya Lívstrygging 82
Val av álitismonnum og nevndum 132

Ólavsökutingið 1966.

Ár 1966, ólavsøkudag kl. 13 var Føroya løgting sett.

Tingformaðurin frá seinastu tingsetuni, Samuel Petersen, lýsti at ólavsøkutingið 1966 var sett sambart skriv frá løgmanni d. 5. juli s. á.

Tingmenninir eru:

Hans Lützen, Klaksvík, ff.
Johan Simonsen, Klaksvík, tf.
Poul Jacob Olsen, Klaksvík, jv.
Samuel Petersen, Klaksvík, sj.
Johan Poulsen, Strendur, sb.
Reinhold Thomsen, Norðagøtu, sb.
Frederik Hansen, Søldarfirði, tf.
Hans J. Ellingsgaard, Eiði, tf.
J. Fr. Øregaard, Gøtu, jv.
Poul Petersen, Tórshavn, ff.
Hans Iversen, Kvívík, sb.
Sigurð Joensen, Tórshavn, tf.
Leon Joensen, Sørvági, sb.
Haldor Hansen, Sørvági, jv.
Vilhelm Nielsen, Sandavági, ff.
Trygve Samuelsen, Tórshavn, sb.
Marius Johannesen, Tórshavn, sj.
Hanus við Høgadalsá, Tórshavn, tf.
Kjartan Mohr, Tórshavn, fb.
Jacob Lindenskov, Tórshavn, jv.
Knút Wang, Tórshavn, ff.
Sigfried Skaale, Tórshavn, ff.
Erlendur Patursson, Tórshavn, tf.
Johan P. Davidsen, Sandi, jv.

Johan H. Danbjørg, Porkeri, jv.
Peter Mohr Dam, Tvøroyri, jv.
Dion Nolsøe, Vági, jv.
Andreas Djurhuus, Vági, sb.
Niels Holm Jacobsen, Hvalba, ff.

Formaðurin bað K. Wang og Jákup Lindenskov vera fyribils skrivarar.

Formaðurin legði fram skriv frá fólkaflokkinum, framburðsflokkinum, sjálvstýrisflokkinum og tjóðveldisflokkinum d. 28. juli at teir stóðu í valbólki til val av tingfyrisæti og nevndum.

So fór fram val av tingfyrisæti.

Eftir uppskoti frá Poul Petersen var Samuel Petersen valdur til tingformann og eftir uppskoti frá P. M. Dam var J. Fr. Pregaard valdur til varaformann.

Sum tingskrivarar vóru K. Wang og Jákup Lindenskov valdir.

Tingformaðurin bað tingmenn rópa eilt 9 falt hurrá fyri kongi og eitt 3 falt fyri Føroyum.

Løgmaður gav frágreiðing.

12. august var Jógvan Høgnesen í Fuglafirði góðtikin sum varamaður fyri Hans J. Elkingsgaard av Eiði.

Frágreiðing frá lögmanni 1966

Eftir fornum siði og løgtingslóg nr. 1. dagsett 13. mai 1948 um stýrisskipan í sermálum er í dag Føroya Løgting sett, og løgtingssetan 1966/67 er byrjað.

Hetta er síðsta løgtingssetan á hesum sinni hjá tí meirihluta, ið setti landsstýrið 3. januar 1963, og verður, um vanlig mannagongd verður fylgd, løgtingsval í heyst 8. november. Tað er tí rímuligt at nomið verður eitt sindur við tann arbeiðssetning, ið teir fýra sjálvstýrisflokkarnir settu sær, tá teir skipaðu landsstýrið, ið var grundað á politiskari samgongu av Fólkaflokkinum, Tjóðveldisflokkinum, Sjálvstýrisflokkinum og Framburðsflokkinum.

Vanligt er hjá einstaklingum sum hjá felagsskapum at seta sær ein arbeiðssetning fyri stytri og lomgri tíðarrím, og er tað rímuligt, at politiskir felagsskapir og politiskar samgongur gera tað sama.

Tann arbeiðssetningur, ið flokkarnir saundust um, bar í sær eina mál- og miðvisa útbygging á teimum stjórnarligu, figgjarligu, búskaparligu, vinnuligu, sosialu og mentunarligu økjunum.

Eitt er at gera slíkar ætlanir, men eitt annað er at føra tær út í livið, tí tað sigur seg sjálvt, at ein ongantíð kennir til fulnar umstøðurnar, ið liggja fyri frammran, og sum skulu verða lunnar undir teimum ætlanum, ið avgerð er tikin um at fremja. Samanfikið var hugsanin við teimum ætlaðu framtøkum á áðurnevndu økjum tann, at tey skuldu bera í sær eina útbygging, ið skuldi vera ein upplaðing av grundini undir tí sjálvbjargnishugsjón, ið hevur verið og má vera kjarnan í øllum sjálvstýrispolitikki her á landi.

Tað vil so vera, at áskoðanirnar og metingarnar um skjótleikan framyvir vera ymiskar hjá einstaklingum og flokkum, men tað er bara rímuligt, at so er, tí sakmaðu vit tann partin, ið ótolin trystir á, var ikki alt í lagi, á sama hátt sum hin meiri varsemi parturin, ið ikki vil loypa framav fyri ikki at skula renna upp á tjólegg og kanska detta niður aftur á langlegg, eisini er fyri neyðini. Slík viðurskifti koma allir politiskir flokkar og politiskar samgongur at hava at dragast við, og sjálvandi verður tí tann útskurður, ið spyrst burturúr, forvitnisligur, tí hann vísir, hvat flokkar við til dømis ymiskum stevnuskráum, men felags tjóðskaparligum høvuðssjónarmiðum kunnu í senju avrika.

Tað skuldi verið løgið, um ein samgonga av fýra flokkum viðhvørt ikki skuldi havt sínar trupulleikar, og tað er onki dulsmál, at hendan hevur havt sínar, men tíbetur hava teir knútar verið loyslir, ið á eru komnir, soleiðis at sjálvstýrisflokkarnir kundu halda politiska samgonguna valskeiðið út.

Tá og her nýti orðið tíbetur, so er tað út frá tí sjónarmiði, at ein fjøld av teimum sjálvstýrishugaðu veljarunum í Føroyum, uttan mun til hvørm flokk teir velja, fegin sá og sær eina sjálvstýrisfylking um leiðina framyvir, ið hevur da røttu kósina og vísir móti stavnhaldi, ið skal tryggja okkum Føroyingum lív sum tjóð.

Tað røttu kósina við tí rætta stavnhaldinum mettu vit á samgonguflokkunum la arbeiðsætlan at hava, tó flokkarnir samdust um at nýta sum arbeiðssetning, tá sjálvstýrissamgongan kom í lag.

Henda arbeiðsætlan var í 5 bólkum, ið nam við stjórnarviðurskifti, figgjar- og vinnulívsmál, sosialmál, mentunarmál og onnur mál.

STJÓRNARVIÐURSKIFTINI

Tann løggáva, ið okkara stjórnarlag hvílir á var í 1963 15 ára gomul, og segði landsstýrið frá í sínt fyrstu løgmansrøðu, at tað vildi virka fyri at fáa hana broytta, so miklum annað heimastýrislógin kom at geva føroyskum myndugleikum øktan samráðingarrætt við lond í avtalu og millumlandaskipanarspurningum, ið bert viðviktu Føroyum. Afturat hesum var vístá og tilmeldar aðrar broytingar, ið hildnar vóru neyðugar, og sum samantikið vóru mettar at bera í sær, at okkara støða sum tjóð kom at verða munandi tryggjað, tí tær góvu okkum Føroyingum størri og størri ábyrgd.

Samsvarandi hesum sjónarmiðum var uppskot av landsstýrinum lagt fyri løgtingið í løgtingsmáli nr. 80/1964: Broytingar í heimastýrislógini.

Úrslitið av tingviðgerðini var, at ein meirihuti við 15 atkvøðum samtykti at broyta greinirnar 7, 8, stk. 3 og 4, 11, 12 og 15 í heimastýrislógini samsvarandi uppskoti landsstýrisins, meðan landsstýrisins uppskot um broyting eisini av greinum 2, 3, 10 og 14 bert fekk 14 atkvøður og sostatt ikki meirluta fyri sær.

Tær greinirnar í heimastýrislógini, ið vóru samtyktar høvdu hetta orðaljóð:

Gr. 7:

«Love og andre retsforskrifter givet af de danske rigsmyndigheder træder i kraft på Færøerne, når disse er tiltrådt af de færøske myndigheder.

På tilsvarende måde forholdes der med traktater og andre internationale overenskomster.»

Viðmerkingin til hesa greinabroyting var heudan:

Eftir galdandi skipan skulu ríkislógaruppskot, sum bert viðvikja Føroyum leggjast fyri løgtingið til umhugsan, áðrenn tey verða lagd fyri fólkatingið, meðan ríkislógir, ið eisini umfata føroysk lokal viðurskifti, skulu leggjast fyri heimastýrið til ummælis, áðrenn tær verða settar í gildi í Føroyum. Tíðarfreistir kunnu setast fyri ummælunum, eins og undantak kann gerast undir serligum umstøðum. Somu reglur galda fyri traktatir og aðrar millumlanda sáttmálar, sum viðgera serlig føroysk áhugamál.

Tað er vorðin praksis, at ongin ríkislóg ella aðrar almennar fyriskipanir frá ríkismyndugleikunum verða settar í gildi í Føroyum, áðrenn heimastýrið, annaðhvørt løgtingið, tá ið talan er um lógir, kongiligar fyriskipanir og millumlanda sáttmálar, ella landsstýrið annars hevur havt málið til umhugsunar. Hóast ríkisstýrið eftir reglunum ikki er bundið av tilmælinum hiðani, hevur, landsstýrinum kunnugt, enn ongantíð verið tvídráttur við ríkisstýrið um hvørjar lógir v.m. skulu galda her.

Uppskotið lógfestir henda praksis og haraftanat tað, at tær nevndu rettarfyriskipanir fáa ikki gildi her, uttan so heimastýrið góðkennir at so verður. Tað er ikki tilskilað hvør parturin av heimastýrinum, ið hevur myndugleikan í ti einstaka føriinum, tað má vera heimstýrið sjálvt, sum tekur hesa avgerð.

Gr. 8. stk. 3 og 4:

«I anliggender, der udelukkende vedrører Færøerne, fører de færøske myndigheder forhandlinger og slutter aftaler med udlandet.

Hvor det drejer sig om anliggender, der iøvrigt vedrører Færøerne, har de færøske myndigheder ret til at lade sig repræsentere, når rigets myndigheder fører forhandlinger og slutter aftaler med udlandet.»

Greinabroytingin hevði hesa viðmerking:

Nú gera ríkismyndugleikarnir av, um føroysku myndugleikarnir kunnu gera tey serligu føroysku áhugamálini galdandi í samráðingum við útlandið í handils- og fiskivinnumálum, men sum limur av danskari sendinevnd. Tá ið serlig føroysk mál eru fyri kann utanríkismálaráðherrin geva loyvi til beinleiðis samráðingar, tó saman við uttanríkistænastuni.

Uppskotið gevur føroyskum myndugleikum rett at samráðast og gera avtalu við útlandið í málum, sum bert viðvíkja Føroyum, og í málum sum annars eisini viðvíkja Føroyum, rett at lata seg umboða í sendinevndum ríkisins.

Gr. 11:

«Det færøske sprog anvendes i alle offentlige forhold på Færøerne, dog kan dansk efter aftale med rigsmyndighederne og de færøske myndigheder anvendes på områder, der ikke er overtaget som færøske særanliggender.»

Við hesari viðmerking:

At føroyskt er høvuðsmálið er góðkent í lógini. Í hvønn mun danskt skal lærast hoyrir heldur serlóggávuni til enn hesari lógini.

Um danskt kann nýtast í almennum viðurskiftum er ein praktiskur spurningur, sum óivað kann loysast í avtalu millum partarnar.

Gr. 12:

«Rigsmyndighederne meddeler andre stater anerkendelse af det færøske flag, som Færøernes officielle flag inden og udenfor Færøerne.

Rigsmyndighederne anvender på Færøerne Dannebrog også for skibenes vedkommende. Der skal være ret for private – såvel personer som selskaber, foreninger og institutioner – til på land at anvende Dannebrog.»

Viðmerkingin var:

Hóast Føroyar fingu góðkent flaggið í heimastýrislógini, eru dømir um, at tað ikki hevur fingið viðurkenning í útlandinum javnt við onnur tjóðarmerki, eitt nú Dannebrog. Tað er ætlanin við hesi lógarbroyting. at fáa merkinum hesa viðurkenning, so tað í øllum lutum er sýnligt tekin um Føroyar sum partur í alheimsfelagsskapinum.

Gr. 15:

«I stk. 2 sidste punktum udgår ordene «eller landsstyret».

Viðmerkingin:

Ríkisumboðsmaðurin skal beinanvegin m.a. fáa boð um samtyktir, landsstýrið hevur tikið. Hetta verður praktiserað soleiðis, at ríkisumboðsmaðurin fær sendandi so hvørt útskrift av gerðabókini hjá landsstýrinum.

Allar samtyktir í landsstýrinum verða tó ikki førdar í gerðabók t.d. mong vanlig avgreiðslumál, og um hesi fær ríkisumboðsmaðurin eingi boð.

Tað er ein spurningur, hvør motiveringin er fyri, at myndugleiki, sum ikki beinleiðis hevur við ley allarflestu málini, landsstýrið viðger, at gera, skal hava rætt til uttan at krevja at fáa boð um hvørja stoðu, landsstýrið tekur.

Ríkisumboðsmaðurin hevur rætt at sita í tinginum, tá skuldi ikki verið neyðugt at givið honum størri rætt enn løgtinginum at kanna gerðabókina hjá landsstýrinum.

Broytingarnar til gr. 2, 3, 10 og 11, ið ikki fingu meiraluta fyri sær, vóru viðvíkjandi tí, at øll mál skuldu kunna yvirtakast eftir reglunum higartil fyri A málini,

at definitiónin um, hvør føroyingur er, fellir burtur, somuleiðis setningarin um at munur ikki má gerast á føroyingi og øðrum donskum ríkisborgarum, at «Føroyingur» og Føroyar skulu standa í føroyskum passi»

og at fólkatingsumboðini skuldu verða tikin av.

Hjá einum landsstýri er tað mangan hugstoytt ikki at fáa síni uppskot samtykt, men soleiðis er mannagongdin, har satt fólkaræði valdar, tað er fólkavalda tingið, ið hevur seinasta og avgerðandi orðið at siga til tað, ið lagt verður fyri tað sum uppskot til viðgerðar.

Tað skerst tó ikki burtur, at tær samtyktu greinirnar av landsstýrisins uppskoti ikki eru politiskir lættisoppar, men bera og vísa ávegis á teirri leið, ið «ber móti borgum heim».

So langt rukku vit á hesum sinni.

Spell bara, at andstøðan ikki orkaði at verða eitt sindur meira positiv í hesum týdningarmikla politiska máli, enn hon var við sínari uppskotsleysari ikki- og nei atkvøðustøðu.

Løgtingsins samtykt í hesum máli er avgreidd og send ríkisstýrinum.

TJÓÐARROKNSKAPUR FYRI 1964

Á triðja sinni leggur búskaparráðið nú fram tjóðarroknskap fyri Føroyar. Fyrstu ferð var í 1964 á ólavsøku, tá tjóðarroknskapurin fyri 1962 varð framlagdur.

Tjóðarroknskapurin gevur eina heildarmynd í tølum av samfelagsbúskapinum. Í grovum linjum verður víst á samskipaðum yvirtiti av mongum serstøkum tallýsingum, hvat í fyriferst búskaparliga í samfelagi okkara í ávísum tíðarskeiði.

Tey týdningarmiklastu heitini í tjóðarroknskapinum fyri 1964 sammett við tølini 1963 geva hesar talmyndir:

Bruttotjóðarúrtøkan, ið sigur okkum, hvussu stór hin samlaða virðisskapanin í samfelagnum hevur verið, var í 1964 354,8 milj. kr. ímóti 316 milj. kr. í 1963 í ársprísum, ið gevur ein vøkstum uppá 38,8 milj. kr. ella 12,3 % í ársprísi.

Bruttofaktorinntøkan, ið er inntøkan hjá framleiðslufaktorinum í kostprísi, var í 1964 332,8 milj. kr. ímóti 295,8 milj. kr. í 1963, ein vøkstur uppá 37,0 milj. kr. ella 12,5 % í ársprísum.

Bruttoløgan, ið er lann partur av vørum og tænastum, sum fer til at halda uppi og endurnýggja realfarfangið landsins, t.v.s. nýløga og umvælingar, var í 1964 133,1 milj. kr. ímóti 99,8 milj. kr. í 1963 í ársprísum, ein vøkstur uppá 33,3 milj. kr. ella 33,4 %.

Einstaklinganýtslan, ið eru vørur og tænastur, sum einstaklingurin nýtur árliga, var í 1964 tilsamans 251,6 milj. kr. ímóti 225,2 milj. kr. í 1963, ein vøkstur uppá 26,4 milj. kr. ella 11,7 % í ársprísi.

Sannýtslan, ið er nýtsla landskassans, kommununna og sosialu tryggingarnna av vørum og tænastum innan landsstýrisfyrisitingina og landsumsitingina, var í 1964 32,6 milj. kr. ímóti 29,6 milj. kr. í 1963, ein vøkstur uppá 3,0 milj. kr. ella 10,1 %.

Samanlagda nýtslan, ið er einstaklinganýtsla og sannýtsla var sostatt í 1964 284,2 milj. kr. ímóti 254,8 milj. kr. í 1963 í ársprísum, ein vøkstur uppá 29,4 milj. kr. ella 11,5 %.

Bruttouppsparingin, ið er ein fyritryl fyri, at nakað av tjóðarúrtøkuni verður til íløgu, er í 1964 útroknað til 69,9 milj. kr.; av teimum eru umleið 45,0 milj. kr. einstaklingauppsparing og umleið 24,9 milj. kr. er uppsparing hins almenna. Í 1963 var bruttouppsparingin í Føroyum 56,6 milj. kr. í ársprísum er sostatt vøkstur í bruttouppsparingini 13,3 milj. kr. frá 1963 til 1964. Bruttouppsparingin var í 1964 umleið 19,7 % av bruttotjóðarúrtøkuni. Í hesari bruttouppsparing eru ikki roknaðar gávur og útreiðslur danska ríkiskassans. Ein stórur partur av hækkingini í bruttotjóðarúrtøkuni frá 1963 til 1964 stavar frá hækkandi prísum á útflutningsvørum. Útrokning vísir, at býtivirðið í uttanlanda handli Føroya, er batnað við umleið 15 % frá 1963 til 1964.

Hesar talmyndir geva í stuttum sagt prógv fyri støðugt hækkandi livifóti her á landi.

GJALDSJAVNVÁG, BRUTTOÍLØGUR OG BRUTTOUPPSPARING FYRI 1965

Fyribils gjaldsjavnvágin, ið búsknaðarráðið hevur gjørt fyri 1965, sigur okkum, at í 1965 haya Føroyar økt skuldirnar mótvegis útlondunum við 4 milj. kr. Í fjør fyri árið 1964 var skuldin økt við 24,9 milj. kr., men vóru samstundis goymsluirnar av útflutningsvørum øktar við 11 milj. kr., so veruliga skuldøkingin var 13,9 milj. kr. Vøru- og tænastuviðurskiftini

tilsamans við 45,0 milj. kr. frá danska statinum hava givið 244,4 milj. kr. í inntøku og 246,7 milj. kr. í útreiðslu, ið gevur í halli 2,3 milj. kr., meðan skuldin av kapitalrørsluyvirlitinum vísir 4 milj. kr. og verður fyribils hildið at vera rætta talið. Samanløgdu bruttoíløgurnar vóru í 1965 137 milj. kr. og vóru av hesum meltar 27,0 milj. kr. til uuvaslingar av fastum fæfangi og fastar nýíløgur vóru 110 milj. kr. Fyribilstølini viðvíkjandi gjaldsjavnvágini og bruttoíløgunni vísa, at samlaða bruttouppsparingin í føroyska samfelaginum í 1965 hevur verið 118,3 milj. kr. í ársprísum ímóti 108,2 milj. kr. í 1963; um tað, ið danski staturin letur, verður tikið við sum inntøka.

Verður tað ikki tikið við, verður føroyska uppsparingin 73,3 milj. kr. í 1965 í ársprísum ímóti 69,9 milj. kr. í 1964.

ÍLØGUÆTLAN FRAMYVIR

Ilt er í dag at siga, hvussu figgjarmøguleikarnar framyvir fara at roynast, men tað er at vóna, at tann útbygging á øllum økjum, ið nú er og útflutningsøking í vinði kann koma at halda fram, og er fyri árini 66 — 69 gjørd henda ætlan um nýíløgur í Føroyum, bygd á 1965 prísirnar.

Einstaklingaíløgur:	1966	1967	1968	1969
milj. kr.	73,5	72,0	94,0	94,0
Almennar íløgur:	1966	1967	1968	1969
milj. kr.	47,7	57,8	58,7	44,1

Uppi í einstaklingaíløgunum eru fiskiveiðifør og fiskiídnaður ætlaði til 25 milj. kr. í 1966, 25 milj. kr. í 1967, 27 milj. kr. í 1968 og 27 milj. kr. í 1969.

Í almennu íløgunum er sjúkalúsbygging o.l. ætlað til 10,9 milj. kr. í 1966, 10,9 milj. í 1967, 8,3 milj. í 1968 og 6,3 milj. í 1969 og vegir; havnir og flogvøllur 15,7 milj. í 1966, 20,1 milj. í 1967, 20,3 milj. í 1968 og 14;2 milj. í 1969.

Henda íløguætlan skuldi tryggjað framhaldandi útbygging av samfelagnum við 121,2 milj. kr. í 1966, 129,8 milj. kr. í 1967, 152,7 milj. kr. í 1968 og 138,1 milj. kr. í 1969.

ALMENN FÍGGJARTØL O. A.

Figgjar- og cykafiggjarlógirnar vísa løgtingsins útreiðslu og inntøkutøl fyri eitt ár í senn, og endaligu støðumyndina gevur landskassarokn-skapurin grannskoðaður.

Í sluttum geva eftirsettu tøl eina mynd av, hvussu til stendur.

Upptikin landskassalán (restskuld) pr. 21/7—1966		29.336.052,11
Avdráttur og renturútreiðslur á figgjarløgtingslógini 1966/67:		
Avdráttir	2.800.000,—	
Rentur	2.400.000,	5.200.000,00
Rakstvaravlopið á landskassarokuskapinum 1965/66 fyribils uppgjørt til umleið brutto		5.000.000,00
Herav er ætlanin at seta av:		
í grunn til byggjan av vaktarskipi	1.000.000,	
Við tí, tí er sett á løgtingsfiggjarlógaruppskotið fyri 1967/68 kemur at vera í grunninum komandi ár kr. 5.000.000. At seta av til at ganga ímóti tapum av útlánum, veðhaldi v.m.	1.000.000,	2.000.000,00
Eftiri umleið		3.000.000,00

Kontoin: Sett av til at ganga ímóti tapum av útlánum, veðhaldi v.m. vísir aftaná flyting av avlopinum frá 1965/66 kr. 6.948.768,39 og aftaná at brúktar eru í ár at ganga ímóti tapum kr. 2.274.504,00.

Henda konto vísti ultimo 1962: 644.308 kr. og er sostatt konsoliderað við sløkum 6,5 milj. kr. aftaná at avskrivaðar eru stívar 3,6 milj. kr.

Av endaliga avlopinum skal samhært lóg 50% í grunn til endurnýggjan skipaflotans, og verður tað 1.500.000,00

Hesin grunnur hevur áðrom hesa flyting um 18,2 milj. kr.

Herav eru brúktar um 16,7 milj. kr., so hann eigur aftaná flytingina um 3 milj. kr.

Hini 50 %ini av endaliga avlopinum 1.500.000,00

verða at flyta til kapitalkonto landskassans, ið aftaná hesa flyting vísir um 16.000.000,00

og er tað ein konsolidering uppá 6 milj. kr. *síðani* 1962.

Kommunurnar skyldaðu í milluanrokning við landskassan við lok av fíggjarárinum 1965/66 (pr. 31/3—1966)	1.514.288,90
Henda skuld er síðani minkað við	540.169,25
soleiðis at saldoin pr. 21/7—66 er	974.119,65

og er hon sostatt um 300.000 kr. minni enn hon var um somu tíð í fjør, tá hon var munandi lægri enn hon makrantíð hevur verið í nógv, nógv ár.

Av lánum, ið tikin eru, hevur landskassin goldið avdrátt og rentu ræðstundis samsvarandi lánitreytirnar.

Skattainnkrevjingin, sum nú fer um gjaldstovuna, tykist at roynast vael.

Álikningin 1964/65 var uppá 33. milj. kr. bæði í kommunu- og landsskatti.

Tann 31/3—65 vóru eftirstøðurnar 4.080.000 kr. ella 12,2 %.

Tann 31/3—66 vóru tær komnar niður í kr. 1.385.000 ella um 4 % og tann 18/7—66 vóru tær komnar niður í 1.180.000 kr. ella um 3,6 %.

Álikningin 1965/66 var uppá 39,9 milj. kr. tilsamans.

Tann 31/3—66 var eftirstøðan 5.030.000 kr. ella 12,6 % og er hon 18/7—66 komin niður í 3.333.000 kr. ella 8,36 %.

Kommunurnar hava eisini fingið um 1,3 milj. kr. av gomlum eftirstøðum inn, so at hesar nú eru minkaðar niður í smáar 2 milj. kr.

Kommunurnar eru at kalla á jour við sínum lánum og eisini sum sagt við millumrokningini við landskassan.

Nú er at kalla komið upp undan við grannskoðingini av kommunurokuskapunum og hevur eisini verið møguligt at latið menn ferðast eitt sindur í fanna ári, bæði í samband við kanning av kommunurokuskapum og fyri at veita kommunumum hjálp við rokuskapi og øðrum. Kommunur, sum yuskja hjálp t.d. til at gera rokuskap upp, kunna altíð venda sær til kommunala eftirlitið.

Løgtingið hevur í seinastu tingsetu samtykt at seta nevnd til at kanna kommunulóggávuna og møguleikan fyri samanlegging av kommunum, eins og gjørt verður í grannalondum okkara, og er henda nevnd sett av landsstýrinum.

Eisini samtykti løgtingið í seinastu tingsetu broytingar í reglunum um val til Føroya løgting og til kommunustýri, herundir líkningarnevndir og skúlanevndir, soleiðis at bert persónligar atkvøður gera av, hvør

valdur verður. Í bygdakommunuvallógini er gjørd tann broyting, at nú skulu fólk bert hava verið um ¾ ár í kommununi fyri at velja, meðan tey fyrr skuldu hava verið út við 2 ár.

Undir seinastu skattaálíkning sendi líkningarráðið eisini menu út fyri at vegleiða kommunalu líkningarvaldini undir líkningini, og er ætlanin at halda frum við hesum, men sjálvandi verður ikki gjørligt at røkka allar kommunur í einum ári, so skift verður ár um ár.

Sáttmáli er gjørdur við Danmark um serstakar reglur til at fyribyrgja, at somu inntøkur verða skattaðar bæði í Føroyum og í Danmark. Í hesum sambandi var neyðugt at gera ymsar broytingar í skattalógini og eru hesar nú avrikaðar, so sáttmálin nú skuldi verið greiður at sett í gildi. Her er serliga talan um, at skattskyldan tekur við og heldur uppat við byrjan og enda ársfjórðing móti fyrra mánaða, og at tilflytarar verða settir í skatt av ætlaðari inntøku, teir koma at forvinna í Føroyum.

SOSIALMÁL

Sum stavnhald viðvíkjandi okkara sosialpolitikki var sagt, tá sjálvstýrissamgongan kom í lag, at endamálið var at vissa okkara gomlu, avlamnu o.ø. óvinnuførum eins og teimum, ið mist hava uppihaldara sín, trygg livikor. Vit vildu umhugsa neyðug hjálpartiltøk og ansa eftir møguligum lógarbroytingum á sosiala økinum í okkara grannalondum og leggja fyri løgtingið okkum bóskandi uppskot til ábøtur.

Sosialu málini eru felagsmál og var seinasta ár av landsstýrinum mælt til, at nevnd varð sett niður fyri at kanna sosiallóggávuna við tí í byggju at gera ábøtur, har tað var hildið neyðugt. Henda nevnd varð sett av sosialmálaráðharranum, og eru í nevndini: sum formaður, skrivstovustjóri Engberg, fulltrúi Gammelgaard, ríkisumboðsmaður Wahl, skrivstovustjóri Johan Djurhuus og løgmaður Hákun Djurhuus. Aftaná fundir í Kjøpinhavn og í Føroyum eru uppskot gjørd til broytingar og ábøtur í sosialu lógunum viðvíkjandi fólkapensjón, avtamispensjón, almennari forsorg og barnatilskoti til einligar forsyrgjarar, við tí í byggju, stórt sæð at føra sosialu studningsveitingarnar ber á hædd við tær, ið galdandi eru í Danmark. Harumframt eru uppskot gjørd til broytingar í Vanlukkutryggingarlóggávuni og sjúkrakassalóggávuni.

Viðvíkjandi fólkapensjónini er ætlanin, at í tíðini frá 1. apríl 1967 til 1. apríl 1970 skulu verða gjørdar hækkingar í galdandi grundgjaldi. Hækkingarnar verða gjørdar hvønn 1. apríl við eins stórum gjøldum. Samlaðu hækkingarnar í grundgjaldinum koma at verða um 1/1 av tí grundgjaldi, sum er í dag.

Eisini er ætlanin at geva fulla fólkapensjón til øll uttan mun til inntøku. Hetta vil tó fyrst koma at galda frá 1. april 1970, og vil fólkapensjónin inntil tá vera inntøkuavmarkað, men tó eftir munandi lagaligari reglu enn higartil

Umfram hetta er ætlanin frá 1. april 1968 at geva eitt pensjónsuppiskoyti, sum verður sett í mun til inntøkurnar hjá teimum, ið fáa pensjón. Pensjónsuppiskoytið verður hækkað pr. 1. april 1969 og 1. april 1970. Eisini koma aldursuppiskoytini til pensjónistar yvir 80 ár at verða hækkaði munandi.

Viðvíkjandi avlamispensjón verður eisini ein hækking av grundgjaldinum á sama hátt sum hjá fólkapensionistunum. Týdningarmikluri er tó, at uppskotið hevur í sær eina broyting í reglunum fyri at fáa avlamispensjón. Eftir hesi reglu fáa fólk, ið hava fulla avlamispensjón uppibornað, munandi hægri pensjón enn hon, ið verður latin fólkapensionistum, og verður henda hædd sett betri í samsvar við lønarkorini á arbeiðsmarknaðinum. Royst verður at veita hesum fólkum, ið orsakað av, at tey vegna avlami ikki eru før fyri at arbeiða, eina inntøku, ið ikki í sama mun sum higartil skal koma at liggja undir øðrum inntøkum.

Tað er ætlanin, at avlamispensjónin í framtíðini bert skal verða latin fólkum í teim aldursflokkum, ið vanliga eru virkandi í vinnulívinum, og sum með alla heilt ella partvís hava mist arbeiðsevnini. Krovini til lækking í arbeiðsevnunum verða gjørd lagaligari á sama hátt, sum reguleringin av pensjónsstøddini eftir inntøkum hjá pensionistunum í ein vissan mun eisini verður gjørd lagaligari.

Í framtíðini verða triggjar ymiskar avlamispensjónstøddir, ið verða settar í mun til arbeiðsevnini, pensionisturin verður hildin at hava. Full avlamispensjón verður latin fólki, ið heilt hava mist arbeiðsevnini ella bert hava lítil arbeiðsevni eftir, og vil uppskotið veita hesum fólkum munandi hægri pensjón enn sambæt galdandi reglu.

Eru arbeiðsevnini hjá fólki sett niður við 2/3 - - sum eftir galdandi reglu er markið fyri at fáa avlamispensjón - - vil fulla avlamispensjónin vera nokað størri enn eftir galdandi reglu. Fólk, hvørs arbeiðsevni er minkað niður í helvt, hava higartil ikki kunnað fingið avlamispensión. Í framtíðini vilja slík fólk kunna fáa avlamispensjón, men støddin av henni kemur at liggja munandi undir tí núgaldandi fullu avlamispensjónini.

Ein lítil, men tó týdningarmikil broyting verður í tí, at uppskotini heimila, at ein eftirlivandi kona ella maður í framtíðini - - antan tað so viðvíkir fólka- ella avlamispensjón - - skal kunna fáa pensjónina, sum bæði hava havt, 3 mánaðir aftaná deyðsfallið.

Viðvíkjandi almennu forsorgini, ið m.a. umfatar einkjupensjón, einkjuhjálp, undirhaldshjálp v.m. verður eisini framyvir møguleikin at kunna hjálpa fólki, ið eru avskorin frá at kunna fáa avlanispensjón, tí arbeiðsevnini ikki við alla eru minkað. Eisini kemur at vera ein mannandi hækking av útgjøldunum eftir hesi lóg svarandi til hækkingarnar í fólkapensjónini.

Eisini barnatilskotið og barnauppiskoytið verða hækkaði og í framtíðini veit uttan mun til inntøkuna.

Tann størsta broytingin *í vanlukkutryggingarlóggávuni* er, at «fólkaringurin» verður viðkaður, soleiðis at hann eisini kemur at fevna onnur sjófólk, t.d. á fraktskiptum. Harumframt verður tann ársløn, sum tryggingarstøddin verður roknað eftir í framtíðini prístalsregulerað, og avmarkingin í endurgjaldinum til børn verður avtikin.

Viðvíkjandi sjúkakassalóggávuni er tað ætlanin, at medisinhjálpin skal vera tvungin, og at betri møguleikar verða útvegaðir til spesiallæknahjálp. Eisini verður jarðarferðshjálpin hækkað mannandi.

Hetta eru tær týdningarmiklastu broytingarnar í nevnda lógum, men aftanat hesum kemur ein rað av øðrum broytingum av minni avgerandi týdningi, men sum føra við sær aðrar áhøldur og nýmótansgerð av áðurnevndu lóggávu.

Um hesar lógir verða samtyktar sambæret uppskotinum, koma tær samlaðu útreiðslurnar til fey sosialu endamálini, ið lógirnar fevna, um ongin broyting kemur í prístalinum í tíðini til 1. apríl 1970 at hækka við um 10 milj. kr. býtt við slakari helvt til landskassan og tær føroysku kommununurnar og stívari helvt til ríkiskassan.

Fyri partvís at úlvega tær útreiðslur, ið hesar lógir bera í sær, er tað ætlanin, at fólka- og avlanispensjónsgjaldið, ið higartil hevur verið 1¼% av tí skattaleggjandi inntøkuni, verður hækkað til 2½%, og verður hetta uppkravt sum tilskot til fólkapensjónina. Ætlanin er kortini, at tær lægstu inntøkurnar skulu sleppa nakað lættari.

Á komandi figgjarlógaruppskoti eru útreiðslutølini sett samsvarandi teim lógaruppskotum, ið her eru ummødd.

EYKAFÓLKAPENSJÓN

Sum eitt lið í arbeiðinum at bøta um koríni hjá gomlum og óarbeiðsførum fólki, hevur landsstýrið sett nevnd at gera fyrireikingar til eina eykapensjónsskipan.

Ætlanin við hesi skipan er, at øll fólk sum eru í vinnu sammu við ar-

beiðsgevaranum leggja pening í grunn, hvørs høvuðsendamál verður at veita óarbeiðsførum fólki eina eykapensjón umframt ta vanligu fólkapensjónina. Harafturat skal grunsins peningur kunna nýtast til uppbygging av vinnulívinum t.d. til ílegging, tá ið nýggj virki verða stovnað.

LØNJAVNINGARGRUNN FISKIMANNA

Sín sosiala dám hevur eisini Lønjavningargrunnur fiskimanna. Eginognin hjá hesum grunni er í hesum valskeiðium vaksin frá um 1,6 milj. kr. til 5,9 milj. kr., ið seinasti roknskapur visti sum eginogn grunsins. Ein konsolidering uppá 4,3 miljónir, ið ger hann betur føran fyri at røkja sínar uppgávur og millum annað hevur ført til, at forskotið um mánaðin er hækkað úr 660 kr. uppi 1.200 kr., uttan at grunnurin tørvar bankalán til hetta.

ARBEIÐARAVIÐURSKIFTI

Sambært lyftini í samgonguskjalinum millum landsstýrisflokkarnar um at tryggja og økja inntøkumøguleikarnar vinnustættanna, hevur landsstýrið saman við vinnufeløgunum starvast fyri øktum inntøkum bæði á sjógvi og landi. 44 tíma arbeiðsvikan, sum var ein veruleiki frá 1. apríl í ár og hækkanin av frítíðarlønini, hava givið arbeiðarum javnbjóðis kor við arbeiðarar í okkara grannalondum, samstundis sum hesi tiltøk hava veitt ein munandi lønarbata. Arbeiðslønin fyri fiskaarbeiði, sum var lægri enn fyri vanligt arbeiði, er broytt, og verður nú latin sama løn fyri bæði arbeiði.

Landsstýrið hevur fyri løgtingið lagt millumlanda sáttmála um eina løn fyri sama arbeiði, og hevur tingið viðtikið, at tað í prinsippinum gongur undir henda sáttmála og vil virka fyri, at kvinnur og menn fáa somu løn fyri sama arbeiði.

Inntøkan hjá fiskimonnum er eisini vaksin. Í 1962 var miðal inntøkan á línubátum 14.706,— kr., í 1965 20.300,— kr. ella ein vøkstur uppá 38%.

Í sama tíðarskeiði er forskotsrindan og minstalønin hækkað og minstalønin verður nú prístalsviðgjørd.

Taka vit tíðirnar 1/7-1958, 1/7-1962 og 1/7-1966 vórn forskot og minstaløn:

	Forskot	Minstaløn
1/7-1958	500	700
1/7-1962	660	1.000
1/7-1966	1.200	1.392,30

Tiltøk hava verið gjørd at fremja eitt lønarlag, ið eggjar til framleiðsluøking, tað vil sigja, til størri virðisskapan hjá hvørjum einstøkum arbeiðandi fólki. Landsstýrið vil framvegis saman við vinnufelagum styðja hesi tiltøk.

Eins og í londum uttan um okkum hevur pristalið havt lyndi til at vaksa meiri enn gott var tey seinastu árini. Prisirnir hava verið hækkandi, men lønirnar eru hækkaðar munandi meira enn prisirnir. Samanbera vil tíðarskeiðini 1/7-1958 til 1/7-1962 og 1/7-1962 til 1/7-1966 hava pristalsvøkstur, tímalønir og tímalønsvøkstur verið:

	pristal	pristals-vøkstur %	Tímaløn kr.	Kvinnur vøkstur %	Tímaløn kr.	Menn vøkstur %
1/7-1958	346		2,51		4,06	
1/7-1962	398	15	3,62	44	5,03	23,9
1/7-1966	468	15,1	5,21	44	7,39	44,9

Tølini vísa, at prísvøksturin hevur verið javnur og eins stórur hvørt tey seinastu valskeiðini. Vøksturin í tímalønum hjá kvinnum hevur eisini verið eins stórur, meðan tímalønsvøksturin hjá mannum var næstan dupult so stórur í tíðini frá 1/7-1962 til 1/7-1966, sum hann var frá 1/7-1958 til 1/7-1962.

Ásannandi, at landsins størsta virði er hitt arbeiðandi fólki vil landsstýrið framvegis royna at leggja so til rættis, at arbeiði verður til allar vinkisfúsar hendur, og at inntøkumøguleikar vinnustaðanna verða tryggjaðir.

HANDVERK OG ÍDNAÐUR

Landsstýrið hevur og fer framvegis at stuðla ollum handverks- og ídnaðarvirkjum, sum hildin vera at hava náttúrligar møguleikar at bera og skapa økt framleiðsluvirði í landinum. Serstøkliga verður dentur lagdur á at stuðla teimum virkjum, sum byggja og hakla okkara skipaflota, og teimum, sum virka fiskin uppi á landi.

Í jøvnum vøkstri er føroyskt handverk og føroyski ídnaðurin.

Í 1962 høvdu vit sildaverksmiðjur, ið kundi avgreiða eini 25 tons um samdøgrið, ídag er avgreiðslumegin 6-700 tons um samdøgrið.

Fyri fáum árum síðani var føroyskt skipasmíð ein følin nút, ið spirandi føldi seg fyri.

Nú koma á hvørjum ári nýbygningar av føroyska skipasmiðjunum, og eru hesir nýbygningar bæði smærri og størri fiskifør, farmafør og ferðamannafør.

Tað var ein tíð, tá føroyingar keyptu skip — gomul skip. Nú byggja vit sjálvir skip — selja skip og keypa skip, tað skuldi verið innmur á.

ENDURNÝGGING SKIPAFLOTANS

Tann lóggáva, ið var lynning undir endurnýgging skipaflotans og hevur útvegað vinnulívinum 30–40 milj. kr., síðani hon var skapt, er støðugt í gildi, og hevur av tí peningi, hon veitir, eisini studningur verið latin til nýmótans veiðutól, sum til dømis til «kraftblokk» veiðitólið.

Herfyri var trekleiki komin í skipaendurnýggingina. Feløg seldu skip, uttan at nýggj komu í staðin. Men nú tykist gongd at vera komin á aftur. Umsókn er um studning til nýtt línuskip, stórt um 475 tons brutto og tveir hekkutrolarar um 1400 tons brutto hvør, og hevur landsstýrið fyri sín part játtað studning til hesar byggingar um 3,7 milj. kr., ið vorða at økja okkara bruttotonnagu við um 32-3300 tonsum.

Í vár keyptu Vestmenningar hekkutrolara, ið er 724 tons brutto.

Skipafloti okkara er í dag 215 skip yvir 20 tons og samlaða tonsatalið 42084 tons brutto.

Undir bygging eru á føroysku skipasmiðjuni í løtinni ferðamannaskip 500 brt. eitt farmaskip og so nakrir 20 tons bátar.

SKIPARAKSTUR, FISKIVEIÐA OG ÚTFLUTNINGUR

Tá sitandi stjórnarflokkar fingu meiralurta við valið í 1962, stóð ikki vel til við skiparakstrinum. Tó at skipini moug vóru nýggj, bar ikki vel til at fáa tey at bera seg.

Hjá linuskipum var meðaltalið fyri avlop til rentur, avskrivingar og administrationir í 1962 hert 100.800 kr. Í 1963 var meðaltalið vaksið til 144.700 kr., í 1964 154.200 kr. og í 1965 184.200 kr., ein hækking frá 1962 uppá 83%

Í sama tíðarskeiði var fiskiveiðan hendan í óslægdum fiski:

143.500 tons í 1962, 137.100 tons í 1963, 139.100 tons í 1964 og 144.000 tons í 1965.

Útflutningsvirðið hækkaði munandi orsakað av prishækkingum.

Í 1962 var útflutningur í virði 126,3 milj. kr., í 1963 137,0 milj. kr., í 1964 135,9 milj. kr. og í 1965 177,8 milj. kr., ein hækking frá 1962 uppá sløk 41%.

LANDBÚNAÐUR

Roynt hevur verið at bøta um viðurskiftini hjá landbúnaðinum á ymiskan hátt: Korini fyri at fáa lagalig lán til ílegging eru gjørd rúmari, tiltak búnaðarmanna at skipa seg í felag til sølu av búnaðarvørum, hevur landsstýrið styðjað eftir førimuni. Lutafelagið «Grøði» er nú stovnað og fer undir virki sitt longu komandi heyst. Ætlanirnar at bøta um viðurskiftini hjá royndarstøðini fara at verða framdar. Nevnd hevur starvast við at broyta búnaðarlóggávuna, og er hetta arbeiði nú um at verða liðugt.

Landsstýrið vil framvegis stuðla landbúnaðinum soleiðis, at hann skal fáa størri týdning í landshúsarhaldinum, enn hann hevur havt tey seinastu undanfarnu árini, og soleiðis, at tey fólk, sum koma at fáast við jarðarbrúk, undir rúmum íleggingar- og sølulíkindum og við góðum kunnleika og góðum amboðum verða før fyri at røkja okkara jørð og skapa sær kor, ið einki geva korunum hjá øðrum stættum eftir.

Móti hesum endamáli eigur vinnan, stuðla av tí almenna at stíla.

SAMFERÐSLUMÁL

Vit vóru ov seinir á sjóvarfallinum viðvíkjandi havna- og vegabygging. Neyðugt hevur tí verið at tikið ódnartak á hesum økjum seinastu árini, og verður tað støðugt neyðugt enn í mong ár, at tung tøk mugu verða tikin.

Lendingar og havnarløg eru gáttirnar hjá bý og bygd út móti stóra havinum, haðani vit skulu fáa til lívsins uppihald, og er tað tørvandi, at hesar gáttir, ið farið verður út um og innum á og av veiðiferðum, verða gjørdar so góðar, sum vit eru førir fyri.

Somuleiðis er tað við sambindingini bygdanna millum. At hon verður í lagi og tíðarhóskandi er av alstórum samfelagsligum týdningi.

Mál- og miðvíst verður og hevur verið arbeitt fyri at byggja ávegis, og eru tað stórarbeiði, ið hava verið gjørd seinastu árini. Bygdirnar, ið ikki hava fingið vegasamband, men kunnu fáa tað, fækkast í hvørjum, tíbetur, men fyrr enn allar hava fingið tað, og veganetini eru samanbundin, er ikki komið á mál, og samstundis vaksa krøvini til vegirnar, ið longu

eru gjørdir fyri at gera teir tiðarhóskandi bæði viðv. breidd og øðrum. Í hesum sambandinum kann verða víst á, at asfaltverk verða nú uppsett.

Í løtuni eru hesi vegarbeiði í gerð:

Borðoyarhergholini við sambindingarvegum, Viðareiðisvegurin, Oyndarfjarðarvegurin, vegurin millum Tjørnuvík og Haldórsvík, vegurin millum Streymnes og Langasand, Kollafjørð og Vestmanna, Fútaklettsvegurin og Hvítanesvegurin.

Lendingararbeiði verða gjørd í Kunoy, Gøtu, Húsavík, Skúvoy og í Hvalba, og havnaarbeiði í Fuglafirði, Norðagøtu, Sørvági, Skopun og Tvøroyri.

Frá 1963 og til 1. juli í ár eru brúktar til vegagerð slakar 23 milj. kr., og í sama tiðarskeiði undantikið árið í ár eru slakar 8 milj. kr. brúktar til havna- og lendingararbeiði.

Av øðrum vegabygging viðvíkjandi kann verða nevnt, at 16. apríl í ár varð av forsætisráðharra Krag og løgmanni Hákun Djurhuus í København undirskrivaður sáttmáli, har landsstýrið yvirtók tann partin av Oyggjarvegunum, ið gjørdur varð fyri natopening inúti, at ríkismyndugleikarnir rindaðu 3,2 milj. kr.

FLUGVINGIN

Í seinastu løgmannsrøðuni varð víst á møguleika fyri, at nýtt og størri flogfar kundi verða nýtt, tá leingingin av flogvøllinum í Vágum var fullført. Hetta er nú veruleiki, og nýta tvey flogfeløg vøllin, so ferðinsambandið loftvegin úr og til Føroyar nú er mannandi betur, enn það nakreantið hevur verið.

STRANDFERDSLAN

Orsaka av streiku og øðrum truplleikum kom nýggi «Smyril» ikki at verða tikin í brúk til hesa ólavsøkuna, sum ætlað, men hevur skipasmiðja boðað frá, at hann verður liðugur um tveir-tríggjar mánaðir. Ætlanin er at nýta hann í sigling millum Havnina, Suðuroynna og Vágoynna.

Landsstýrið hevur fyri sín part samtykt at mæla løgtinginum til at byggja nýtt strandfaraskip til Sandoynna og er farið undir fyrireikingar av hesum máli.

Eisini hevur landsstýrið samtykt peningaveiting til bát til Mykinesar.

TELEFONMÁL

Í 1965/66 hevur telefonverkið brúkt kr. 1.291,480 til nýbyggingar — av hesum er kr. 740.495 farið til tilfar og kr. 550.985 til løn o.a.

Í Tórshavn vóru 500 nýggj nummur sett upp, so nú eru 2.500 nr., men tilgongdin av nýggjum felagum er so stór, at tilboð upp á 500 nr. afturat er biðið um. Í Klakksvík vóru eisini 500 nr. sett upp afturat, so har eru nú 1000 nr., harav 650 eru í brúk. Í Runavík vóru 220 nr. sett upp afturat, so har eru nú 500 nr., harav 350 eru í brúk, men tilgongdin bæði í Klakksvík og Runavík eins og í øðrum bygdum er stór. Tilgongdin av nýggjum felagum var 537 og 681 apparatir. Av innanbýggjalinjum vóru 2.760 km av dupultari linju lagdir í jørðina og 482 km hongdir upp í luftkaðal. Av uttanbýggjalinjum vóru 143 km av dupultari linju lagdir í jørðina og 332 km hongdir upp í luftkaðal, 30 km av dupultari linju vóru lagdir út í sjókaðal. Av millumbygdalinjum vóru 10 gjørdar ímillum Eiði og Hvalvík, 20 ímillum Hvalvík og Kollafjørð, 30 ímillum Hvalvík og Hósvík, 10 ímillum Vestmanna og Kvívík, 20 ímillum Kvívík og Kollafjørð, 10 ímillum Fuglafjørð og Gøtu og 20 ímillum Gøtu og Runavík.

Í samband við landsautomatiseringina er sáttmáli undirskrivaður við L. M. Ericsson A/S, um levering av transitútgerð til støðirnar Klakksvík, Runavík og Tórshavn, støðir í Søldarfirði og á Skála, ið skulu koyra í samband við Runavík og støð á Velbastað (til felagarnar á Velbastað og í Kirkjubø), ið skal koyra í samband við støðina í Tórshavn. Í samband við hetta verður viðkað um telefonhúsini í Tórshavn, Klakksvík og Runavík og nýggj hús bygd í Søldarfirði og á Skála. Nýggj berufrekvensútgerð við 12 linjum kemur afturat til sambandið Tórshavn-Runavík so har verða 20 linjur, 8 linjur afturat til sambandið Tórshavn-Klakksvík, so har verða 17 linjur og nýtt samband ímillum Klakksvík og Leirvík við 6 linjum.

Hetta fyrsta stigið í landsautomatiseringini, ið er grundarlagið undir viðari automatisering, kostar 3.250.000 kr. og er fíggjað soleiðis:

Ileggingargrunnurin hevur veitt í lán kr. 1.850.000, Post- og telegrafverkið letur í sín part kr. 600.000 og telefonverkið kr. 800.000. Fyri at kunna útvega sín part, varð telefonverkið noytt til at hækka telefontakstirnar. Hetta var eisini ein treyt frá íleggingargrunninum, fyri at veita lán.

Fyrsta stigið er roknað at vera í drift í december 1968, men vel áðrenn ta tíð má sáttmáli gerast um næsta stig, automatiseringin av Suðuroy, Sandoy og Vágoy, fyri at landsautomatiseringin kann halda fram, so landið kann verða fullautomatiserað um fá ár.

Annars heldur telefonverkið fram við at útbyggja telefonnetið, innanbiggja og uttanbiggja, alt eftirsum neyðugt er og peningur kann útvegast.

VAKTARSKIPIÐ

Hvussu liggur fyri við hesum máli verður best lýst við hesum avriti úr fíggjarnevndarinnar gerðabók.

Ár 1966, hósdagin 28. apríl kl. 15.00 var fundur í fíggjarnevndini. Á fundi møttu Kjartan Mohr, Sámal Petersen, Hanus við Høgadalsá, Knút Wang, og Andrias Djurhuus, Petur Mohr Dam og J. Fr. Øregaard.

Til viðgerðar:

5. *Vaktarskip.*

Løgmaður Háknn Djurhuus kom nú á fund og legði fyri nevndina spurningin um bygging av vaktarskipi. Hann sagði frá, at sambært galdandi lóg skal málið verða avgjørt av landsstýrinum og fíggjarnevndini. Málið hevur fleiri ferðir verið viðgjørt og menn hava verið ójavnir á máli. Landsstýrið hevur á fundi 16. november 1965 samtykt at byggja vaktarskip eftir uppskoti frá Skála skipasmiðju, sum áður hevur verið viðgjørt, men at hetta verður reint vaktar- og bjargingarskip, tí spurningurin um ramsóknarskip er loystur við «Jens Chr. Svabo» og spurningurin um hjálp til strandferðskuna er loystur við nýggja Smirli.

Tøkar til bygging av vaktarskipi eru 3 milj. kr. (nú 5 milj.).

Løgmaður skjeyt upp at heimila landsstýrinum at bjóða skipið út í Føroyum.

Samtykt at lata menn umráða seg saman við flokkum sínum, so at avgerð verður tikin á næsta fundi.

Skipið er 39,70 metrar langt og menn vóru samdir um at tað má hava sterka maskinkraft.

Ár 1966, friggjadagin 29. apríl hevði fíggjarnevndin fund í Tinganesi. Allir fastir limir vóru á fundi uttan J. Fr. Øregaard, fyri hann møtti Haldor Hansen.

Til viðgerðar:

1. *Vaktarskipið.* Vísst verður til fundin í gjár.

Einmælt samtykt at biðja landsstýrið um at fyrireika til útbjóðingar tað á fundinum í gjár umtalaða skip og at leggja málið aftur fyri fíggjarnevndina, tá ið tað er fyrireikað og áðrenn tað verður útbjóðað.

MENTUNARMÁL.

Fróðskaparsetrið.

Hetta tiltak er tað, sum einamest hevur verið við til at gera Føroyar kendar í útheiminum, og tey bond, sum setrið í framtíðini kemur at

knýta við lærdar stovnar í útheiminum, kunnu koma at verða Føroyum at størsta gagni.

I summar hevur setrið havt fyrsta fremmanda gestafyrilesara, dr. Bekker Nielsen frá Keypmannahavn, sum hell tveir almennar fyrilestrar í fundarhøllini á Sjómansskúlanum fyri nógvum áhoyrarum.

Vónandi verður setrið enn meira útbygt í framtíðini.

Í løtuni verða hús gjørd at hýsa Fróðskaparsetrinum, Fiskirannsóknarstovuni og Fiskiídnaðarstovuni.

STUDENTASKÚLIN

«Leingi er tað, ið væl skal vera», og «Róma varð ikki bygt eftir einum degi» eru tilløk, ið nýit verða um tað, ið kann sigast at vara leingi.

Tað skerst ikki burtur, at nakað soleiðis kann eisini verða sagt um Studentaskúlan. Umstøðurnar hava gjørt, at henda bygging hevur tikið langa tíð. Men nú er kortini laugt síðan, at skúlin er tikin í brúk, tað hevur verið gjørt, so hvørt klassarúmini hava verið liðug — og nú eru tey øll í brúki og farið er úr «gamla húsi», sum nú líður væl við at innrætta til kostdeild fyri dreingir.

Øll kømrini skulu verða liðug til komandi skúlaár og kunnu tá har hýsast gott og vel 40 dreingir, meðan «nýggja hús» verður til at hýsa nøkrum og tjúgu gentum.

Tá víkingafundirnir vóru í fjør, kom tað vel við, at fundarhøli skúlans var tøk til at halda fundir í og matstovan at eta í.

Somuleiðis var fundarhøllin lænt til hordhaldið við fráfaringarveitsluna hjá norrønu feløgunum í summar. Aðrastaðni var ógjørligt at fáa høli fyri so nógvum fólki (*ca.* 450).

SKÚLASKAPUR OG SKÚLABYGGING

Tann veldiga skúlabygging, sum nú hevur verið í fleiri ár, heldur fram, og sum áhugin er hjá kommununum at bøta um skúlaviðurskiftini, verður ikki helmað, fyrrenn øll okkara børn koma at ganga í skúla undir góðum og tíðarhóskandi viðurskiftum.

Kommunur hava, og tað er framvegis áhugi fyri at halda fram við at samskipa skúlaviðurskiftini, so børnini kunnu fáa sum mest burtur úr skúlatíðini.

Nýliga hava kommunurnar í einari heilari sýslu viðtikið at ganga í skúlafelagsskap fyri 8. og 9. skúlaár og real deild; við viðtøka, sum landsstýrið fyrsta dagin fær til góðkenningar.

Slík tiltøk eru gleðilig, og tað er eftirynskjandi, at kommunurnar meira og meira gangga tann vegin eisini at loysa aðrar kommunalar uppgávur í felag.

Skal landskassin halda sínar skyldur viðvíkjandi skúlabygging, verður neyðugt á komandi fíggjarlóg at hækka íleggingina til skúlabyggigrunnin munandi.

Maskinskúli Føroya hevur undirvist til maskinistprógv og føroyskt maskinmeistaraprógv.

Fyri at undirvísa til hitt stóra maskinmeistaraprógvið krevst, at skúlin fær neyðuga starvsstovu (laboratorium).

Farið verður undir bygging av starvsstovubyggingini á økinum, sum hoyrir til Sjómannaskúlan, og avgjørt er, at landið letur byggibúnu grund til hesa bygging, sum helst skuldi verið liðugt til heystar (1. okt.), tá fleiri av teim, sum tóku føroyska prógvið, ætla at halda fram at lesa til hitt stóra maskinmeistaraprógvið.

ÍTRÓTTARHÚS OG VALLIR

Serliga í teim størru plássunum er álugi fyri bygging av ítróttarhøllum, og hetta má eisini sigast at vera neyðugt fyri ungdómin.

Landsstýrið sær við størstu vælvild upp á slík mál, og eisini í hesum føri verður neyðugt at vaksa um tølini á fíggjarlógini, tí slíkar uppgávur kann hitt almenna ikki skjóta frá sær.

Í hesum sambandi kann verða nert við tað hannilliga, ið heudi, at lógin um kvøld- og ungdómsundirvísing ikki varð samtykt, við teim møguleikum hon innibar fyri bygging av ungdómshúsum.

Studningur hevur eisini verið veittur til ítróttarvallir.

Í báðum hesum førum er tað treytin fyri studningi, at væl av peningi er fingið til vega frá lokalari síðu, og at bæði hallir og vallir eru til taks fyri skúlaungdómin ókeypis; ein treyt, sum landsstýrið heldur vera bæði rímuliga og rætta.

FILMUR FRÁ GERANDISLÍVINUM

Mong av teim arbeiðun t.d. kornvelting, torvarheiði o.a., sum áður hoyrdu til gerandislívið og øll tóku lut í, tí tað var ein lívstreyt, eru nú smátt um smátt við at fara yvir í søguna.

Eru tí menn farnir at upptaka filmir, áðrenn ov seint er, fyri soleiðis

at varðveita fyri komandi sluktum hesar tættir í dagligu vinnuni hjá forfedrunum.

Hetta hevur landsstýrið hildið vera av stórum týdningi, og heldur vera rætt, at hitt almenna ognar sær hesar filmar; tí má ansast eftir, at løkur peningur verður í framtíðini til slík mentunarmál, sum her nevnt.

FORNMINNINI O. A.

Fornminnini eru tað, sum siga okkum søguna um livihátt og byggimátar forfedranna, og tað verður hildið ein sjálvsøgd skylda hjá einhvørjari tjóð at fjálga um og varðveita øll slík minni, alt tað er gjørligt.

Ein hin størsti dýrgripur okkara eru tær gomlu kirkjurnar, og seinastu árini hevur munandi peningur verið veittur til umvælan av gomlum kirkjum.

SKÚLABÓKAÚTGÁVAN

um Skúlabókagrunnin heldur fram.

Málið er at fáa føroyskar læruhøkur í flest øllum greinum, og tað gongur stútt fram móti hesum máli.

ORÐABÓKAÚTGÁVA

Við studningi úr landskassanum verður gjørt uppískoyti til hina føroysk/donsku orðabókina, og í gerð er donsk/føroysk orðabók, sum vil koma at hava stóran týdning fyri tey, ið nýta føroyskt mál.

Hon er farin til prentingar, og kemur helst einaferð í hesum árinum.

MEGINFELAG FØROYSKU STUDENTA

hevur landsstýrið havt positivt samarbeiði við og roynt hevur verið m.a. at styðja felagið í stremban tess fyri at vinna alljóða viðurkenning. Hetta sær tíbetur út til at fara at eydnast.

STUDNINGUR TIL LÆRLINGAR OG LESANDI

Tann peningur, sum settur er á fíggjarlógina til hesu endamál, verður

umsitin av landsstýrinum og royst hevur verið at úthýta soleiðis, at studningurin kemur at gera so stóra nyttu sum gjørligt.

Viðvíkjandi studningi og lánveiting til lærdan lestur hevur landsstýrið havt samarbeiði við Meginfelag føroyska studenta um úthýtingina, eitt samarbeiði, sum hevur gingið vel og verið til gagns fyri allar partar.

Talið á lærlingum er í støðugum vøkstri, og neyðugt verður kanska í framtíðini at gera fastari reglur viðvíkjandi studningi og lánum.

Landsstýrið hevur eisini fingið heimild til at veita studning úr lærlingagrunninum til lærlingaheim.

ÚTVARPIÐ

Við ti í hyggju at fáa útvarpið at hoyrast um alt landið er ætlan gjørd fyri at fáa eina útbygging við FM støðum, einasti vegur, teir sakkøma halda vera at ganga.

Í seinastu løgtingssetu varð málið av landsstýrinum lagt fyri løgtingið, sum viðtók at geva landskassaábyrgd fyri lánið uppí 1,8 milj. kr. til fyrsta stig av útbyggingini.

Tá lán er fingið til vega, verður farið undir arbeiðið, sum «Direktoratet for Post- og Telegrafvæsenet» skal standa fyri.

Tað *kann vera,* at hetta fyrsta stigið av útbyggingini gevur til úrslit, at Útvarpið — sum er eitt so týdningarmikið lið í samhindingini av okkara fólki fer at hoyrast eins vel um alt landið.

YVIRLIT YVIR TÝDNINGARMESTU LØGTINGSLÓGIR UNDIR HESUM LANDSSTÝRINUM

. *Undir sjóvinnuni.*

1. Útflutningsgjøldini : saltfiski og klippfiski til landskassan og vrakaraslovnin avtikin.
2. Broyting í gjøldunum til lanjavningargrunnin so gjøld bert verða latin av saltfiski sum fluttur verður beinleiðis til marknað og av feskum fiski.
3. Stuðul til bygging av farmaskipum.
4. Nýggj lóg um endurnýgging fiskiskipaflotans.
5. Veðhald og studning til innlegging av krafiblokki.
6. Stuðul til keyp av hekkatrolara.

7. Avtala við Vestur-Týskland um fiskalandingar.
8. Veðhald fyri lánum til sildamjøl og sildaolju á goymslu.
9. Studningur til fiskiroyndir við kraftblokki eftir sild til bræðingar.
10. Keyp av royndarskipi. (Svabo)
11. Projektering av sildaídnaða- hermetikkverksmiðju.
12. Ráfiskaprísnevndin.
13. Minstalønin hækkað og verður prístatsviðgjørd.
14. Manningarlóg
15. Sjómanslóg.
16. 12-míla fiskimark.

II. *Fíggjarmál.*

1. Eyka fíggjarlóg
2. Val av løgtingsgrannskoðarum.
3. Búskaparráð.
4. Nýggj skattalóg.
5. Nýtt býti av rakstraravloপi landskassans.
6. Húsalánsgrunn.
7. Avtøka av umsetningsgjaldinum á motorakfarum.

III. *Vega- og samferðslumál.*

1. Umsitingin av landsvegum yvirtikin av vegagrunninum (landinum)
2. Ferðslulóg.

IV. *Arbeiðaraviðurskifti.*

1. 44 tíma arbeiðsvika.
2. Nevnd at kanna prístalsgrundarlagið.
3. Broyting í prístalsviðgerðini av arbeiðsløninni fyri fiskaarbeiði, so her verður latin sama løn sum fyri annað arbeiði.
4. Nevnd at kanna møguliga eykapensjónsskipan.
5. Frítíðarsamsýningin hækkað frá 6 til 7%.
6. Ymsar broytingar í lærlingalógini.

V. *Mentunarmál.*

1. Fróðskaparsetur Føroya.
2. Lán til útbygging av útvarpinum.

VI. *Ymisk onnur mál.*

1. Broytingar í valgreglunum til løglingið og kommunurnar.
2. Nevnd at kanna kommunalu lóggávuna.
3. Nevnd at kanna rúsdrekkalóggávuna.

4. Nevnd at kanna landbúnaðarlóggávuna.
5. Raksturin av hvíldarheimunum Naina í trygga legu.
6. Lívstryggingarlóg.

VIÐURSKIFTI ÚTEFTIR

Hjá okkum, ið hava dupulta umsiting, eina, ið stendur løgtinginum og Føroya fólki til svars fyri sítt arbeiði, og hina, ið stendur ríkisstýrinum og harvið danska fólkatinginum til svars, má tað verða soleiðis, at hesi bæði umsitingarøkini dagliga hava nógv við hvørt annað at gera. Samarbeiðið hevur verið gott og grundað á sakliga eftiransan, har hvør partur gjølla hevur hildið seg til galdandi skrivaðar og óskrivaðar reglur virkisøkinum viðvíkjandi.

Tær samráðingar, ið fórdar hava verið við ríkisstýrið, hava ikki í øllum førum givið tað av løgtinginum ynskta úrslit, eg hugsi her um lógirnar viðvíkjandi verjuskyldu og deyðarevsing til dømis, men í øðrum førum er veittur okkum fullur stuðul, sum til dømis tá síðsta takið varð tikið viðvíkjandi landleiðini og í málum í sambandi við avleiðingar av útflutningi.

Eisini tá kuril mestsum var komin á viðvíkjandi flúgvingini uppá Føroyar, vísti ríkisstýrið í teirri avgerð, ið tikin varð, at landsstýrisins sjónarmið vóru respekteraði.

Umboðsmenn fyri fleiri fremmanda tjóðir hava alment vitjað Føroyar í seinnu árum, og hava eisini aðrar vitjanir verið álugaverdar. Eg hugsi her serliga um víkingafundin, ið var her í fjør, um grønlendska landsráðsvitjanina í mai, vitjanina av norrønu feløgunum seinni í summar og vitjanirnar av skotska varafiskivinnuráðharranum lord Hughes og Hans Hækkerup, innanríkisráðharra við fylgisfeløgum.

Hjá øllum tjóðum er tað fyri meyðini at vinna sær vinir, ikki minst hjá teimum, ið lítlar eru. Eg meti, at hesar vitjanir hava givið okkum Føroyingum ikki fáar vinir av týdningi og knýtt bond, ið koma at hava varandi virði.

Úr søguni vita vit, at rómverski politikarin og lingmaðurin, Cato, endaði hvørja røðu, hann helt í rómverska senatinum, við orðunum: og so haldi eg annars, at Kartago eigur at verða oyddur. Hetta segði hann av teirri grund, at hann var ræddur fyri hesum stóstaði á Norðurafrika-

strondini og óttaðist fyri, at hann kanska kom at verða rómverjum at bana.

Í teimum trimum løgmansrøðunum, mær hevur verið und at halda undan hesari, havi eg endað við at víst á sannleikan um, at fíggjarligt frælsi er støðið undir øðrum frælsi, og skal tað eydnast okkum at loga haldgott støði undir hetta frælsi, so er tað neyðugt, at ættararvurin: sparsemi og sparivilji, ið sat í hásætinum hjá okkara forfedrum, ikki verður týndur, men verður nýttur sum tað ákit, hann í mong ættarlið var.

Tann tíðarstreymur, ið nú rekur um lond, er í nongum førum nýggjur og tekur av fótum mangt gamalt, ið rímuligt er eigur at verða skift út við nýtt, men viðvikjandi áðurnevnda ættararvi hava vit ikki ráð til at lata hann fara við streyminum ella lotinum, tí hann er og má vera ein av grundstólpunum undir tí nýmótans úthygging á øllum økjum, ið fram er farin, og sum má halda fram, um okkum skal verða lagað at liggja borð um borð við aðrar tjóðir, og um vit skulu umseta politiskar áskoðanir til veruleika.

Tíðin, ið sitandi ting hevur eftir at virka til val, er stutt. Eg loyvi mær tí at takka fyri tíðina, ið farin er síðani 3. januar 1963. Eg takki tí meiraluta, sum verið hevur, og tí minniluta, ið sitið hevur í andstøðu.

Skal sait fólkaræði valda, er tað neyðugt, at andstøða eisini er, og er tað náturligt í hesi løtu at minna um lær mongu samtyktir, ið gjørdar eru á hesum høga tingi í hesum valskeiðinum við fullari undirtøku bæði av stjórnarflokkunum og andstøðuni.

Eg vóni, at ongin mótmælir ella tekur sær tykni av, tá og sigi sum mína meting, at her á tingi unna menn sum heild landi og tjóð okkara best, so kunnu sjónarmiðini annars vera ymisk mongum øðrum viðvikjandi.

Lat meg enda í teirri vón, at so má altíð koma at verða her á Føroya løgtingi, og at hetta verður ein veruleiki, ið kemur at festa seg meir og meir sum tíðir líða.

Harrin fylgi okkum fraunyvir.

1. Fíggjarlögtingslóg 1967-68

Ár 1966, 2. augnst legði løgmaður fram uppskot til fíggjarløgtingslóg 1967/68 (samb. skjal 2).

---

2. Broytingar í sosiallóggávuni

Ár 1966, 2. august legði løgmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til samtyktar

Løgtingið samtykkir at mæla til at viðløgdu lógaruppskot verða sett í gildi í Føroyum:

1. Uppskot til «lov for Færøerne om invalidepension m.v.»
2. Uppskot til «lov for Færøerne om folkepension»
3. Uppskot til «lov for Færøerne om offentlig forsorg».
4. Upppskot til «lov for Færøerne om børnebidrag til enlige forsørgere m.v.»

Viðmerking:

Lóggávan um avlamispensión, fólkapensión, almanna forsorg og barnastyrk til stakar forsyrgjarar var seinast reviderað í 1960 og 1961, soleiðis at hjálpin og veitingarnar á hesum økjunum svaraði til tær í hinum partinum av ríkinum.

Í teimum 4 til 5 árunum, sum síðani eru liðin, eru ymsar broytingar so við og við framdar, serliga hækkingar í pensiónum og øðrum veitingum, uttan tilsvarandi ájourføring her.

Fyri at rætta uppá hetta heitti landsstýrið á ríkisstýrið um at seta niður nevnd til revisión av sociallóggávuni. Hesum tók ríkisstýrið undir í, og varð nevndin sannansett soleiðis:

N. Engberg, skrivstovustjóri, formaður,
Hákun Djurhuus, løgmaður,
Johan Djurhuus, skrivstovustjóri,
J. Gammelgaard, fulltrúi,
M. Wahl, ríkisumboðsmaður.

Herumframt skrivarar bæði frá socialministeriinum og ríkisumboðnum.

Umframt lóggávuna á teimum nevndu økjum, hevur nevndin eisini kannað lóggávuna um varlukkutrygging og sjúkratrygging, uppskot hesum viðvíkjandi verða løgd fyri løgtingið í tingsetuni 1966, og herafturat hava vinnufeløgini fingið frágreiðing í spurninginum um arbeiðsloysistrygging.

Viðvíkjandi broytingunum í nevndu fýra lógum verður víst til viðmerkingarnar í uppskotunum.
(smbr. skjal 3).

1. viðgerð 4. og 9. august legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Í málinum liggja lógaruppskot, sum landsstýrið mælir til at seta í gildi í Føroyum og eru tey:

1. Uppskot til «lov for Færøerne om invalidepension m.v.»
2. Uppskot til «lov for Færøerne om folkepension.»
3. Uppskot til «lov for Færøerne om offentlig forsorg.»
4. Uppskot til «lov for Færøerne om børnebidrag til enlige forsørgere.»

Og eru hetta 4 av teim tilsamans 6 lógaruppskotunum á sosiala økinum, sum løgd eru fram og útarbeidd av nevnd sett av ríkisstýri og landsstýri.

Fíggjarnevndin mælir til, at tann av løgmanni upplisni og til tingmenn útbýtti samandráttur av broytingunum verður tikin í løgtingstíðindi.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt uppskotini og mælir einmælt til at samtykkja tey, men undir viðgerðini er komið brev frá landsstýrinum um vissar redaktionellar broytingar, sum eisini ríkisumboðið og sosialmálaráðið mælir til at samtykkja.

Nevndin mælir tí til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum við hesum broytingum.

UPPSKOT
(frá allari nevndini)

Uppskotið frá landsstýrinum verður samtykt við hesum broytingum í viðløgdu lógaruppskotum:

1) I pkt. 3 (Uppskot til «lov for Færøerne om offentlig forsorg») verða gjørdar hesar broytingar í tí av landsstýrinum framlagda uppskoti:

1. I § 17, stk. 2, ændres «§ 39» til «§ 40».
2. I § 28, stk. 1, 1. pkt. ændres « 23» til «§ 27».
3. I § 28, stk. 1, 2. pkt., ændres «§ 23, stk. 1, nr. 1» til «§ 27, stk. 1, nr. 1».
4. I § 28, stk. 1, 2. pkt., ændres «§ 23, stk. 1, nr. 2» til «§ 27, stk. 1, nr. 2.»

2) I pkt. 4 (Uppskot til «lov for Færøerne om børnebidrag til enlige forsørgere) verða gjørdar hesar broytingar í tí av landsstýrinum framlagda uppskoti:

I § 24, stk. 2, erstattes:

«bidrag efter § 5: i anledning af fødslen	87	92	98
til moderens underhold før og efter fødslen	153	162	171»

med følgende:

«bidrag efter § 5: i anledning af fødslen	76	80	85
til moderens underhold før og efter fødslen	133	141	149»

2. viðgerð 10. august 1966.

Broytingaruppskotini frá nevndini samtykt 25—0.
Landsstýrisins uppskot so broytt samtykt 25—0.

3. Broyting í skattalógini

Ár 1966, 2. august legði Leon Joensen løgtingsmaður fyri sambandsflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 við seinni broytingum um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

I § 9, 7) verður aftaná orðið «prísviðbót» sett: «og útróðrarmenn í Grønlandi».

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin og álíkning sambært henni fer fram roknað frá skattaárinum 1964/65.

lagtingslov om ændring i lagtingslov nr. 50 af 2. juli 1963 med senere ændringer vedrørende landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I § 9, 7) tilføjes efter ordet «pris tilskud»: «og hådefiskeri i Grønland».

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft og påligning i henhold til denne finder sted regnet fra skatteåret 1964/65.

Viðmerkingar:

Tá uppskot til nýggja skattalóg varð lagt fram á ting í 1963, gjørdi landsstýrið hesar viðmerkingar til § 9, 7) um frádrátt í skattaleggjandi inntøkuni hjá fiskimonnum, ið starvast langt burtur frá heiminum stóran part av árinum:

«Í nr. 7 er ásannað, at fiskimenn sum starvast langt burtur frá heimi stóran part av árinum, kunnu ikki nýta vanligu frítíðina, sum fólk á landi hava til at røkja og fjálga um ogn sína heima, men mugu lata alt tilfkt upp í hendurnar á øðrum. Hetta ber størri útreiðslur í sær í mun til hann, sum heima er, og verður tí hildið rímuligt, at hesir fáa ein lætta í skattaálíkningini, sum kann vega eitt sindur upp móti tí, teir missa.»

Tað, sum her er sagt, er eisini galdandi fyri fiskimenn, sum røgva út í Grønlandi, men hava líkningarmyndugleikarnir tolkað lógina soleiðis,

at hon ikki fær gildi fyri teir, og verður tí hetta lógaruppskot sett fram.

1. viðgerð 4. og 15. august legði figgjarnevndin fram soljóðandi

ALIT

Uppskotið snýr seg um at broyta skattalógina grein 9 nr. 7, so teir harnevndu frádráttir eisini verða gakdandi fyri føroyskar útróðrarmenn til lands í Grønlandi og at henda broyting verður afturvirkandi frá skattaárinum 1964/65.

Spurningurin um nevndu útróðrarmenn skulu fáa lut í hesum frádráttum kann avgerast av tinginum nú, og er nevndin sinnað til at viðmæla, at so verður í framtíðini.

Men landsstýrismeirilutin í nevndini ynskir at úttala, at orsakað av tí, sum býr undir framløgum av hesum máli í bløðunum hevur verið nýtt til ósaklig álop á landsstýrið, ávísar stovnar og menn, og tað uttan grund, verður her givin gjøllig frágreiðing í tí, sum fram er farið í hesum máli.

Hartil skal verða nevnt, at sambandsflokkurin endar viðmerkingar snar í málinum við hesum orðum:

«.... men hava líkningarnyndugleikarnir tolkað lógina soleiðis, at hon ikki fær gildi fyri teir (útróðrarmenn) og verður tí hetta lógaruppskot sett fram.»

Tað, sum hetta vísir til, er ikki til lógina, men viðmerkingar til hennara, og sambandsflokkurin vísir júst við broytingaruppskoti sínum, at lógin krevur at broytast fyri eisini at umfata útróðrarmenn í Grønlandi.

At teir — útróðrarmenn — ikki hava fingið frádrátt, er ikki ein feiltolking av lógini, men tí at summi kommunal líkningarvøld hava ikki fylgt vegleiðingini frá líkningarráðinum, og við seinni eftirliti er hetta komið fram.

Nevndin hevur fingið hesar upplýsingar um nevndu regla í skattalógini:

Sum eitt framhald av tí, at fáa menn at støðast á føroyskum fiskiskipum var tikið við í nýggja skattalógaruppskotið grein 9 (seinni samtykt og lýst sum lóg nr. 50 frá 2. juli 1963) um loyvdan frádrátt:

7) hjá mynstraðum fiskimonnum, sum fáa inntøku sum løn og/ella part í veiði, herundir minstuløn og prísviðbót ....» og síðan verður sagt frá undir hvørjum umstøðum so ella so stórur frádráttur er loyvdur hvønn *siglingarmánað.*

Í vegleiðingarskrivum til kommunalu líkningarvøldini hevur Líkningarráðið sagt frá, hvussu hesin frádráttur skal roknast.

Í vegleiðingarskrivi nr. 24 — januar 1964 (fyrsta árið lógin var

í gildi) hevur líkningarráðið givið henda innstruks um frádráttin:

«Fiskimenn fáa roknað frádráttin eftir gr. 9 nr. 7.»

Í vegleiðingarskrivi nr. 24, januar 1965, verður skoytt uppí:

Fiskimenn, *sum eru mynstraðir við føroyskum skipum* fáa frádrátt eftir gr. 9 nr. 7 í skattalógini.»

Í vegleiðingarskrivi nr. 25, januar 1966, verður enn skilligari sagt:

«Fiskimannafrádrátturin verður bert roknaður hjá føroyskum fiskimonnum, sum eru mynstraðir við føroyskum fiskiskipum, soleiðis at hann ikki er loyvdur, har maður er við fremmandum skipi, *ella tá ið tað er beinleiðis útróður.*

Hesi vegleiðingarskriv eru viðløgd málinum.

Aftaná at Líkningarráðið hevur havt hesa støðu, hevur tingið sjálvt havt skattalógina til viðgerðar av nýggjum, og í seinastu tingsetu serstakliga grein 9 punkt 7, soleiðis at nevndin undir síni viðgerð broytti tað uppskot, sum landsstýrið hevði sett fram um broyting. Og við hesi broyting hevur tingið givið líkningarráðnum rætt, soleiðis at í lógini kom nú at standa, at frádrátturin er galdandi fyri teir sum eru «mynstraðir fiskimenn við føroyskum fiskiskipum», og var henda broyting lýst í løgtingslóg nr. 39 frá 16. juni í ár.

Tað kann sjálvsagt ongan undra, at tað kemur útróðrarmonnum dátt við, at tað hjá summum fyri fleiri ár kemur upp, at teir ikki hava havt loyvi til nevnda frádrátt og tjakast kann verða um, hvussu hetta átti at verið rættað, men tað sæst skilliga, hvørja støðu líkningarráðið hevur havt. Tann mistolking av lógini, sum er farin fram, er framd av kommunala líkningarvaldinum ella tí, at tey ikki hava fylgt vegleiðingarskrivum líkningarráðsins. Og er talan um nakra misskiljing, so er hon framd av teim tingmonnum, sum hava hugsað nakað annað, uttan at fáa hetta við í lógina.

At málið nú er komið upp, kemst av tí, at líkningarráðið fyrst nú við eftirliti av kommunalu álíkningini er komið eftir tí, at vegleiðing teirra ikki er fylgd av summum kommunalum líkningarvaldum. Við tí manning, sum líkningarráðið hevur havt, hevur ikki verið møguligt hvørt ár at fáa kannað álíkningina hjá øllum kommunum.

Hartil kemur, at summar kommunur *hava fylgt* vegleiðingini hjá líkningarráðnum og ikki hava loyvt útróðrarmonnum nevnda frádrátt.

Eitt annað mál er, at líkningarráðið átti at havt hugsað um, at mangir av teim monnum tað er talan um, eru staddir í Grønlandi, tá ið teir nú fáa at vita av hesum.

Fíggjarnevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta (Andrias Djurhuus).

Meirilutin mælir til at føroyskir útróðrarmenn til lands í Grønlandi fáa sama frádrátt sum mynstraðir fiskimenn við føroyskum fiskiskipum,

men at hetta verður skilliga sett í lógina, so at tíðarskeiðið frádráttur kann fáast verður roknað eftir sama tíðarskeiði, sum er grundarlagið undir reglunum um minstulon; í hesum reglum verður munur gjørdur á mynstraðum fiskimonnum og útróðrarmonnum.

Men tað fer neyvan at hera til at geva eini skattalóg afturvirkandi kraft longur enn í verandi skattaári. Vanlig eftirgeving av skatti má fara fram eftir somu reglum sum higartil.

Meirilutin setir fram hetta

UPPSKOT
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

gr. 1.

Til § 9, 7. punkt í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt verður skoytt uppí:

«Undir somu treytum verður sami frádráttur loyvdur útróðrarmonnum til lands í Grønlandi innanfyri tíðarskeið, próført sum eftir reglunum í gr. 1, 2. stk. í reglugerð fyri lønjavningargrunn in frá 26. april 1966.»

gr. 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin og álikningin sambært henni fer fram roknað frá skattaárinum 1966/67.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

Til § 9, punkt 7 i lagtingslov nr. 50 af 2. juli 1963 om landsskat og kommuneskat tilføjes:

«Under samme betingelser indrømmes samme fradrag for baadfiskere i Grønland for et tidsrum dokumenteret, som foreskrevet i par. 1, stk. 2, i regulativ for lønjavningargrunnin af 26. april 1966.»

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks og påligning i henhold til denne finder sted regnet fra skatteåret 1966/67.

Minnilutin Andrias Djurhuus mælir til at samtykkja uppskotið frá sambandsflokkinum.

og 16. løgdu Haldor Hansen og P. M. Dam soljóðandi

Greint broytingaruppskot

Uppskot I:

Í nr. 7 í § 9 í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt sum broytt við løgtingslóg nr. 39 frá 16. juni 1966 verður aftaná «føroyskum fiskiskipum», «færøske fiskefartøjer» sett: «og útróðrarmonnum í Grønlandi», «og hådefiskere i Grønland».

Uppskot II:

Mælt verður til, at landsstýrið eftirgevur tann í málinum umrødda eftirliknaða skatt fyri 3 seinastu árini á útróðrarmenn í Grønlandi.

Viðmerking:

Minnilutin (P. M. Dam og Haldor Hansen) heldur tað vera rætt, at føroyskir útróðrarmenn í Grønlandi fáa sonn skattasøndir sum mynstraðir fiskimenn við føroyskum fiskiskipum. Minnilutin setur uppskot um at broyta lógina samsvarandi hesu støðu.

Tá ið tað misslyndi, sum er komið í skattleggingini á útróðrarmenn í Grønlandi, má sigast fyri ein part at skyldast seinføri í eftirlitinum, og tá ið tað verður at falla ov tungt fyri fiskimenn at rinda skatt 3 ár aftur í tíðina, verður mælt til, at landsstýrið eftirgevur umtalaða cykaskatt ella ókravdan skatt fyri seinastu 3 árini hjá umrøddu útróðrarmonnum.

2. viðgerð 16. august.

§ 1 í uppskotinum frá samhandsflokkinum var sett undir atkvøði við navnakall:

Ja atkvøddu: J. Lindenskov, J. H. Danbjørg, P. M. Dam, Tr. Samuelsen, Leon Joensen, A. Djurhuus, Johan Poulsen, Reinhold Thomsen, J. P. Davidsen, Hans Iversen, Dion Nolsøe, Poul J. Olsen og Haldor Hansen.

Atkvøddu ikki: K. Wang, P. Petersen, S. Skaale, M. Johannesen, N. H. Jacobsen, Fr. Hansen, K. Mohr, E. Paturssøn, H. Lützen, J. Høgnesen, S. Joensen, Johan Simonsen, H. við Høgadalsá og S. Petersen.

Burturstaddir: Fr. Øregaard, Vilhelm Nielsen.

§ 1 fall 13—0.
Broytingaruppskotið frá Haldor Hansen o. fl. fall 14—0.
§ 1 í lógaruppskotinum frá meirahlutanum í nevndini samtykt 27—0.

Hinar greinirnar samtyktar uttan atkvøðugr.

3. viðgerð 18. august 1966.

Lógaruppskotið frá nevndini samtykt 24—0.

---

4. Broyting í sjúkakassafyriskipanini

Ár 1966, 3. august legði løgmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til samtyktar

Løgtingið samtykkir at mæla til at viðlagda uppskot til broytingar í kongiligari fyriskipan nr. 59 frá 21. februar 1930 «om anerkendte sygekasser» við seinni broytingum verður sett í gildi í Føroyum.

Viðmerkingar:
Hetta er fimta uppskotið frá nevndini til kannan av sociallóggávuni, jbr. løgtingsmál nr. 2/1966: Broytingar í sociallóggávuni.
Viðvíkjandi broytingum verður víst til viðmerkingarnar í uppskotinum.
(skjal 4)

1. viðgerð 5. og 9. august legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT
Uppskotið miðjar ímóti at broyta tær hígartil galdandi reglur í kgl. fyriskipan frá 21. februar 1930 «om anerkendte sygekasser» við seinni broytingum.

Uppskotið er útarbeitt av sama nevnd, ið hevur gjørt uppskotini til broytingar í sosialu løggávuni, og hevur eisini ráðført seg við umboð fyri føroyskar sjúkrakassar, sum eins og landsstýrið hava mælt til at samtykkja umtalaðu broytingar.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og mælir til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

2. viðgerð 10. august 1966.

Uppskotið samtykt 25—0.

---

5. Keyp av lendi til studentaskúlan

Ár 1966, 5. august legði N. Winther Poulsen landsstýrismaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um keyp av lendi til Føroya Studentaskúla.	lagtingslov om køb af areal til Føroya Studentaskúla.
§ 1.	§ 1.
Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna at ognast tvær traðir í Hoydølum, Hoyvíkar bygd.	Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at erhverve to træer i Hoydølum, Hoyvikar bygd.
§ 2.	§ 2.
Henda lóg fær gildi beinanvegin.	Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Føroya studentaskúli kann nú sigast at vera so nær sum liðugur. Skúlin sjálvur er liðugur, tó umdantikið læknarúm, sum nú verða innrættað. Kostdeildin í gamla húsi er komin so mikið á leið, at kostskúlanamningarnir kunnu flyta inn, tá ið skúlaárið byrjar; tað sum eftir er at gera har, er innrætting av hæðirúmum, klædnagoymslu o.t. og skuldi hetta helst ikki tikið meira enn tveir mánaðir. Nýggja hús hevur verið nýtt sum kostdeild í nøkur ár.

Undirlendið er jørð í almannari ogn og var í sinari tíð av Tórshavnar kommunu leigað frá festarinum av Hoyviksgarði, og soleiðis at amtskommunan, nú landið, fekk fullan brúksrætt í 50 ár við loyvi at leingja brúksrættin 50 ár afturat, kommunan skuldi gjalda leiguna. Endamálið var at útvega neyðugt grundøki til bróstsjúkrahúsið. Kommunan skuldi eisini tryggja at fáa amtskommununi tað lendið, bróstsjúkrahúsið var bygt á og hóskandi øki uttanum, jbr. løgtingstíðindi 1907, bls. 147.

Hesar skyldur hevur Tórshavnar kommuna tikið uppá seg, sjálvandi við tí fyrifeyt, at bygningarnir vórðu nýttir sum bróstsjúkrahús. Landsstýrið er gingið út frá hesum, og hevur tí samráðst við jarðarráðið um annaðhvørt framhald av leigumálinum ella, at landsstýrið skúlin fær formligt skeyti uppá alt tað lendið, sum bróstsjúkrahúsið hevur brúkt, haruppí eisini viðarlundina. Hesar samráðingar eru ikki lidnar enn, uppí er eisini komin spurningurin um at friða Hoyviksbø, samstundis sum garðurin verður fluttur.

Á fløtuni, sunnan fyri kostdeildina, er trød um 3.000 m² til støddar og niðri móti Boðanesgjógv onnur trød um 17.500 m² til støddar. Traðirnar vórðu í 1934 leigaðar til uppdyrking og í 1958 skjeytaðar traðarmanninum.

Síðani tað er av stórum týdningi, at landið er eigari av lendi, sum liggur so nær skúlanum, sum hesar traðir, hava samráðingar verið við eigaran um keyp, og er málið komið so langt, at semja er eisini um prísin treytað av góðkenning løgtingsins.

1. viðgerð 8. og 10. august legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og er samd um, at tað er beint at keypa hesi lendi.

Nevndarlimir hava havt høvi saman við núverandi eigara at ganga um tey umtalaðu traðarstykki, eins og nevndin hevur havt høvi til at gera seg kunnuga við avtalaða prísin fyri traðirnar, og má hann haldast at vera hóskiligur í meðal í mun til, hvat jørð annars verður keypt fyri,

sum liggur so nær høvuðsstaðnum, og munandi minni enn hagajørð er seld fyri til privatar húsagrundir.

Hesi í málinum umtalaðu traðarstykki eru bert ein partur av tí, sum liggur uppat Studentaskúlanum, og sum átti at verið almenn ogn, nevndin heldur tí, at landsstýrið eigur at halda fram við at samráðast við aðrar ognarar har um keyp, og til sína tíð leggja eitt møguligt úrslit av hesum samráðingum aftur fyri tingið.

Í hesum føri mælir nevndin til at samtykkja uppskot landsstýrisins um keyp av teim báðum traðunum í Hoydølum.

2. viðgerð 11. og 3. viðgerð 12. august 1966.

Uppskotið frá landsstýrinum samtykt 23—0.

---

6. Broyting í fyriskipanini um vannlukkutrygging

Ár 1966, 5. august legði løgmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til samtyktar

Løgtingið samtykkir at mæla til, at viðlagda uppskot til kongiliga fyriskipan fyri Føroyar «om forsikring mod følger af ulykkestilfælde» verður sett í gildi í Føroyum við hesum broytingum og uppískoytum:

1. Í § 1A, 1. stk., nr. 13 verður aftaná orðið «smitte» skotið inn «ombord på skibe».
2. Í § 2, 3. stk. verður aftaná 3. punktum skotið inn sum 4. punktum «Landsstyret yder de under dette ansatte tjenestemænd og arbejdere erstatning efter denne anordnings regler». 4.—5. punktum verða hereftir 5.—6. punktum.
3. Í § 3, 2. stk. verða orðini «dagpenge — og» strokin.
4. Í § 3, 3. stk. verður orðið «lovens» broytt til «anordningens».

5. Í § 12, 1. stk., nr. 3 verður aftaná «12» skotið inn «stk. 2.–5».
6. Í § 12, 1. stk. nr. 9 verður orðið «bestemmelsen» broytt til «bestemmelserne».
7. Í § 12, 2. stk. 1. punktum verða orðini «vedkommende forsikringsselskab» broytt til «forsikringsselskabet».
8. Í § 16, 1. punktum verður aftaná orðið «lagtinget» skotið inn «landsstyret».
9. Í § 16 verður 2. punktum strokið.
10. Í § 17 verða orðini «Stat og kommune» broytt til «Staten, landsstyret og kommunerne».
11. Í § 25, 1. stk. verður aftaná orðini «årsløn af» skotið inn talið «12.000».
12. Í § 25 verður 2. stk. strokið.
13. Í § 26 verður tað fyrra sum 2. stk. tilskilaða stk. strokið.
14. Í § 26, 2. stk. verður orðið «betingelse» broytt til «betingelser».
15. Í § 39, 1. stk., nr. 4, litra d verða orðini «han mere varigt ydede væsentlig» broytt til «han ydede væsentlige».
16. Í § 41 verður aftaná orðið «indtil» skotið inn talið «750».
17. Í § 42 verður skotið inn sum nýtt 2. stk.: «Det samme gælder tilskadekomne eller efterladte, hvem der tilkommer pension eller anden årlig ydelse fra landskassen. Afgørelse træffes i disse tilfælde af rådet i samråd med landsstyret.» 2.–5. stk. verða hereftir 3.–6. stk.
18. Í § 42, 3. stk. verður orðið «indenrigsministeren» broytt til «landsstyret.»
19. Í § 44, 2. stk. verður aftaná orðið «højere end» skotið inn talið «12.000» og aftaná «lavere end» talið «6.000».
20. Í § 44A verður 1. punktum orðað soleiðis: «For hver fulde 5-points udsving over eller under 470 i det færøske pristal pr. 1. januar forhøjes eller nedsættes årslønnens maksimums- og minimumsbeløb jfr. § 44, stk. 2, samt begravelseshjælpen, jfr. § 41, med henholdsvis 125 kr., 62,50 kr. og 8 kr.»
21. Í § 55, 1. stk., 1. punktum verða orðini «med statstilskud..... beløb» broytt til «til fordel for sig selv».
22. Í § 55 verður 2. stk. strokið.
23. Í § 68 verður 1. stk.strokið.
24. Í § 68, 2. stk., sum nú verður 1. stk. verða orðini «sådant skib» broytt til «skib, der omfattes af bestemmelser i § 56.»
25. Í § 73, 1. stk. verða orðini «med statstilskud..... .. beløb» broytt til «til fordel for sig selv.»

26. Í § 73 verður 4. stk. strokið.
27. Í § 74 verður 1. stk. strokið og 2. og 3. stk. verða nú 1.—2. stk.

Viðmerkingar:

Hetta er 6. og seinasta uppskotið frá nevndini til kanman av socialløggávuni, jbr. løgtingsmál nr. 2/1966.

Síðani kongiliga fyriskipanin nr. 161 frá 29. mars 1939 «om forsikring mod følger af ulykkestilfælde» er broytt fleiri ferð, og það nú er talan um at fremja eina gjøtla ájour-førsðslu av reglunum verður øll fyriskipanin gjørd av nýggjum.

Viðvíkjandi broytingunum verður vist til viðmerkingarnar til uppskotið.

Til broytingarnar hjá landsstýrinum er at siga:

Undir nevndarviðgerðini serliga á fundi í Tórshavn uttimo juni 1966 høvdu umboð fyri vanlukkutryggingina, vanlukkuráðið, meginfelagið fyri sjúkrakassarnar, læknafelagið og tannlæknafelagið høvi til at seta fram uppskot. Summi av hesum uppskotunum eru ikki komin við. Tey flestu av misgáu. Tey verða nú tikin uppaftur. Í øðrum føri, har talan er um at seta tryggingarhæddina er spurningurin latin til landsstýrið at taka støðu til. Summi punktum eru orðarættingar.

VIÐMERKINGAR TIL YMISK PUNKTUM

Til punkt 1.

Hóast hesi orðini ikki hava staðið fyrr, hevur það verið praksis í mong ár, at eisini í teimum førum, har maður hevur fingið smittuna umborð á skipi, hevur hann havt rætt at krevja endurgjald eftir fyriskipanini. Her er tí bert talan um at lógfesta gamlan praksis.

Til punkt 3.

Vanlukkutryggingin hevur skotið upp, at egin skuld ikki skal føra við sær, at dagpeningur kann lækkast ella falla burtur. Viðkomandi hevur so rætt til hesa hjálpina til málið hevur fingið sína avgerð.

Til punkt 11, 12 og 19.

Maksimum og minimum fyri árslønina er eftir galdandi reglum ávikavist 10.000 kr. og 5.000 kr. Vanlukkutryggingin hevur skotið upp at hækka hesi markini til ávikavist 12.000 kr. og 6.000 kr., ella ein hækking uppá um 20 pst. Hækkingin ger tað ikki neyðugt at hækka tryggingargjøldini.

Til punkt 15.

Orðini «mere varigt» verða hildin at kunna bera í sær eina órimiliga avmarking við tí úrslitið, at hóast persónur hevur latið nummandi og kanska fult uppihald fáa eftirsitandi ikki endurgjald.

Til punkt 16.

Begravilsishjálpin, tá hon verður sett til 750 kr., svarar til begravilsishjálpina eftir uppskotinum í sjúkrakassafyriskipanini.

Til punkt 20.

Maksimums- og minimumsárslønin og begravilsishjálpin verður javnað eftir føroyska prístalinum. Prístalið pr. 1. juli 1966 er 468.

Til punkt 21, 22, 25, 26 og 27.

Eftir upplýsingum frá vanlukkutryggingini hevur tað ongan týdning havt, at tryggingartakarar við ávísari litlari skattainntøku kunnu fáa statsstudning at lekka um tryggingargjaldið. Tryggingin hevur tí skotið upp, at henda ásetanin verður strokin.

Til punkt 23 og 24.

Tað verður ikki praktiserað á skipum, at fyriskipanin verður sligin upp. Tá ið so er, og tað eisini verður hildið óneyðugt at krevja tað, tá eintak skal vera hjá skiparanum til taks hjá manningini, verður skotið upp, at strika kravið um uppslag.

Til punktini: 2 4 5 6 7 8 9 10 13 14 17 og 18.

Broytingarnar her eru okkurt einstakt, sum er komið fyri undir gjøgnumgongdini, heruppií eisini tað, at landsstýrið og fólk undir landsstýrinum í mun til fyriskipanina eiga vera javnmett við stat og kommunu og fólk hjá hesum.

1. viðgerð 9. og 10. august legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Undir viðgerðini av hesum máli eins og málinum viðvíkjandi broytingum í sosialu lóggávuni og sjúkrakassaskipanini, vóru á fundi í fíggjarnevndini Klaus Hermann og Trygve Strøm frá sosialu deild ríkisumboðsins.

Tað er upplýst undir viðgerðini, at uppskotið, sum tað nú liggur fyri við broytingum frá landsstýrinum, er skapað í samráðing við allar avvarandi partar, og at tað nú er stórt sæð, sum allir eru samdir um.

Tey punkt, har allir ikki hava verið á einum máli, heldur nevndin ikki vera grund til at taka uppaftur undir nýggjum samráðingum, og mælir tí til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum við teim har í umtalaðu broytingum til tað í málinum viðlagda uppskot um «Anordning for Færøerne om forsikring mod følger af ulykkestilfælde.», við einum undantaki. Tað er so, at sosiala deild ríkisumboðsins hevur gjørt vart við ein feil í landsstýrisins uppskoti, sum her verður rættaður.

Nevndin mælir til til, at landsstýrisins uppskot verður samtykt við teirri broyting, at pkt. 5 gongur út.

UPPSKOT
frá allari nevndini

I landsstýrisins uppskoti gongur út punkt 5 og punktini 6–27 verða 5—26.

2. viðgerð 11. august 1966.

Broytingaruppskot frá nevndini samtykt 25—0.
Landsstýrisins uppskot so broytt samtykt 25—0.

---

7. Partapeningur í Snarfrost í Miðvági

Ár 1966, 9. august legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Framlagt á tingi nú í óluvsøkufíngsetuni, stílað til Føroya Løgtings og vist í fíggjarnevndina, er soljóðandi brev, dagsett 21. juni 1966, frá D. P. Danielsen, sakførara, Tórshavn:

«Bygdirnar Miðvágur og Sandavágur eru gingnar saman um at stovna eitt partafelag, p/f Snarfrost, við tí endamáli at byggja og reka fiska- og frystivirki, reka fiskivinnu og ísgerð, handil og annað virki í hesum sambandi. Felagið varð skrásett í apríl í ár.

Tann tekniði partapeningurin er kr. 500.000. Harav hava Miðvágs og Sandavágs kommuna teknað kr. 125.000 hvør. Teir báðir keypmennirnir Gotfred Joensen, Miðvági, sum er nevndarformaður og Zacharias Nielsen, Sandavági, sum er stjóri, hava teknað umleið 120.000 kr. tilsamans, og restin, umleið kr. 130.000 er teknað av fólki í báðum bygdunum.

Í sambandi við hetta virki ætla kommunurnar eisini at byggja út sjálvt

havnalagið, har sum virkið skal standa. Ein byggiætlan, bæði til virkið og til havnagerð, er undir arbeiði hjá landsbyggifelagnum, og verður ætlandi liðugt einaferð í summar.

Tá byggiætlanin viðvíkjandi virkinum, kostnaðarætlan og rakstrarætlan, eru gjørdar, verða tær lagdar fyri Virkisnevndina. Og síðan er ætlanin at søkja báðar bankarnar um byggi- og financieringslán. Tosnið hevur verið við bankarnar um hetta, og teir hava ikki vist málinum frá sær. Men teir taka sjálvandi ikki støðu fyrrenn tær ymisku ætlanirnar liggja greiðar, góðtiknar av Virkisnevndini.

Ætlanin er at virkið í fyrstu syftu skal haldast niðanfyri kr. 1.200.000,-, ella harumleið. Bankarnir ynskja sjálvandi at avmarka sini lán mest møguligt. Og tí ræður um at hava sum mest av eginpeningi.

Nevndin í p/f Snarfrost hevur tí biðið meg senda umsókn til tingið um at tekna partapening í felagið, eins og tingið hevur gjørt í øðrum føri, har talan hevur verið um virkir av líknandi slagi og hetta.

Og av tí at ætlanin er at fara undir arbeiðið komandi heyst, verður biðið um, at málið verður lagt fyri ólavsøkutingið og avgreitt har.»

Frá sama er eisini komið bræv dagsett 23. juli 1966 soljóðandi:

«Í framhaldi av bræví mínum frá 21. juni í ár viðvíkjandi einari umsókn frá partafelagnum Snarfrost, frá Miðvági og Sandavági, um at biðja háttvirda Føroya Løgting tekna partapening í nevnda partafelag, skal eg loyva mær at skoyta uppí, at tann peningaheddlin, sum felagið ynskir, at tingið skal tekna, er kr. 150.000,—.»

Í seinasta tingsetu viðgjørdi fíggjarnevndin eitt líknandi mál, nevnliga viðvíkjandi partapeningi í p/f Suður-Fisk, Vági, og var tá sagt í álitinum (løgtingsmál nr. 66/1965):

«Hildið verður, at tað er rætt at hjálpa bygdum, sum einki virki hava, um tílík virki ikki kunnu fáast upp á annan hátt, men hin almenni partapeningurin eigur at standa í hóskiligan mun til tann pening, sum kann útvegast á plássinum.»

Í nevnda føri fanust fíggjarnevndin at tí, at umsóknin ikki var komin frá felagnum sjálvum, men tað er hon í hesum føri. Hartil er at siga, at bygdirnar Sandavágur og Miðvágur hava sýnt eitt fyrimyndarligt samarbeiði á ymsum økjum, sum við skúlabygging og havnarbygging, og henda seinast nevnda útbygging er eisini grundarlagi undir umtalaða flaka- og frystivirki.

Fíggjarnevndin heldur tí, at løgtingið um neyðugt eigur at styðja p/f Snarfrost við upp til 150.000 kr. í partapeningi, men at tað eins og í málinum viðvíkjandi p/f Suður-Fiski verður sagt *upp til* 150.000 kr., við

sonu motivering, eins og at eisini fyrivarni í grein 2 verður samtykt, so at ráðgevandi stovnur landsstýrisins, eitt nú Virkisnevndin, hevur sítt viðmæli, áðrenn peningurin allur verður útgoldin.

Vísandi til frammanfyristandandi mælir fíggjarnevndin til at ganga umsókninni á møti, og at tingið samtykkir fylgjandi:

UPPSKOT
til

løgtingslóg um partapening í p/f Snarfrost, Miðvági.	lagtingslov om aktier i p/ Snarfrost, Miðvági.
§ 1.	§ 1.
Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at seta upp til 150.000 kr. í partapeningi í p/f Snarfrost, Miðvági, og at leggja út peningin úr landskassanum.	Landsstyret bemyndiges til at tegne aktier i p/f Snarfrost, Miðvági med et beløb på indtil 150.000 kr. og at disponere over beløbet af landskassens midler.
§ 2.	§ 2.
Eingin partapeningur verður teknaður ella útgoldin fyrr enn allar treytir, landsstýrið skuldi ásett, eru loknar.	Ingen del af aktiebeløbet kan tegnes eller udbetales før alle betingelser, landsstyret måtte stille, er opfyldt.
§ 3.	§ 3.
Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.	Denne lov træder i kraft straks.

2. viðgerð 10. og 3. viðgerð 11. august 1966.

Uppskotið frá nevndini samtykt 26 0.

8. Prísviðbót til útróðrarmenn í Grönlandi

Ár 1966, 10. august legði Poul J. Olsen løgtingsmaður fyri javnaðarflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar.

Løgtingið mælir til, at reglugerðin fyri lønjavningargrunn skipsfiskimanna verður broytt soleiðis, at prísviðbótin hjá útróðrarmonnum í Grønlandi verður hendan:

30 oyru fyri kg av saltfiski og
15 oyru fyri kg av feskfiski.

Viðmerking:
Tað má haldast at vera rættvist og tørvandi, at útróðrarmenn í Grønlandi fáa sonna prísviðbót sum útróðrarmenn, ið rógva út í Føroyum.

1. viðgerð 10. og 19. august legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur fingið upplýst, at fyriliggjandi uppskot vil kosta lønjavningargrunninum ca. 1 mill. kr.

Meirilutin (Niels Holm Jacobsen, Frederik Hansen og Johan Simonsen) setur einki uppskot fram í hesum máli.

Minnilutin (Poul J. Olsen og Leon Joensen) mælir til at samtykkja uppskotið frá javnaðarflokkinum.

2. viðgerð 19. august.
Uppskoti frá javnaðarflokkinum fall 7—0.

9. Løgtingslóg um broytingar í tænastumannalógini

Ár 1966, 18. august legði løgmaður fram soljóðandi

UPPSKOT

til

løgtingslóg um broytingar í tænastumannalógini.

§ 1.

Løgtingslóg nr. 31 frá 18. mai 1961 um tænastumenn landsins, sum hon er broytt við løgtingslógunum nr. 59 frá 31. august 1961, nr. 21 frá 22. mai 1962, nr. 38 frá 12. juni 1962 og nr. 29 frá 20. mai 1965, verður broytt soleiðis:

1) Í § 26 verður skoytt uppí sum nýtt 9. stk.:

«Um tænastumaður hevur verið tænastumaður undir ríkinum, fólkakirkjuni, fólkaskúlanum ella Københavnar kommunala skúla í tilsvarandi embæti ella lønarflokki, kann tað verða loyvt honum at flyta lønaraldurin við sær allan ella ein part.»

2) Í § 29, 1. stk. verður skoytt uppí:

«Landsstýrið kann geva loyvi til útgjalding upp til 6 ynkadagar áðrenn forfallsdag. Doyr tænastumaður ella verður hann loystur úr starvi í tíðarskeiðinum miltum útgjalding og forfallsdag, kann peningurin krevjast aftur.»

lagtingslov om ændringer i tjenestemandsloven.

§ 1.

Lagtingslov nr. 31 af 18. maj 1961 om landets tjenestemænd, som denne er ændret ved lagtingsloven nr. 59 af 31. august 1961, nr. 21 af 22. maj 1962, nr. 38 af 12. juni 1962 og nr. 29 af 20. maj 1965, ændres således:

1) I § 26 tilføjes som nyt stk. 9:

«Såfremt en tjenestemand har været tjenestemand i staten, folkekirken, folkeskolen eller Københavns kommunale skolevæsen i et tilsvarende embede eller lønningsklasse, kan det tillades, at han overfører lønningsanciennitet den hele eller en del af denne.»

2) I § 29, stk. 1 tilføjes:

«Landsstyret kan tillade, at udbetaling finder sted indtil 6 søgnedage før forfaldstid. Dør eller afskediges tjenestemanden i tidsrummet mellem udbetalingen og forfaldsdagen, kan det udbetalte beløb kræves tilbage.»

3) § 45 verður orðað soleiðis:

«Tey í 46. § hesi lóg nevndu tænastumannastørv veroa sett í hesar lønarflokkar:

1. lønarflokkur:
   Lønin 12.000 kr. um árið, hækkandi 2. hvørt ár við 300 kr. til 13.200 kr.
2. lønarflokkur:
   Lønin 12.600 kr. um árið, hækkandi 2. hvørt ár við 300 kr. til 13.500 kr. og so 2. hvørt ár við 600 kr. til 14.700 kr.
3. lønarflokkur:
   Lønin 13.500 kr. um árið, hækkandi 2. hvørt ár við 600 kr. til 15.900 kr.
4. lønarflokkur:
   Lønin 14.820 kr. um árið, hækkandi 3. hvørt ár við 1.080 kr. til 18.060 kr.
5. lønarflokkur:
   Lønin 17.820 kr. um árið, hækkandi 3. hvørt ár við 1.440 kr. til 20.700 kr.
6. lønarflokkur:
   Lønin er hin sama, sum tilskilað er í 32. § og 38. §, 1. stk. í lóg nr. 210 frá 18. mai 1960 «om lønninger m.m. til lærere ved folkeskolen på Færøerne» fyri 2. og 4. lønarflokk.
7. lønarflokkur:
   Lønin 15.000 kr. um árið, hækkandi 3. hvørt ár við 1.500 kr. til 21.000 kr.
8. lønarflokkur:
   Lønin 19.800 kr. um árið, hækkandi 3. hvørt ár við 1.380

3) § 45 affattes således:

«De i § 46 i denne lov nævnte tjenestemandsstillinger henføres til følgende lønningsklasser:

1. lønningsklasse:
   Lønning 12.000 kr. årlig, stigende hvert 2. år med 300 kr. til 13.200 kr.
2. lønningsklasse:
   Lønning 12.600 kr. årlig, stigende hvert 2. år med 300 kr. til 13.500 kr. og derefter hvert 2. år med 600 kr. til 14.700 kr.
3. lønningsklasse:
   Lønning 13.500 kr. årlig, stigende hvert 2. år med 600 kr. indtil 15.900 kr.
4. lønningsklasse:
   Lønning 14.820 kr. årlig, stigende hvert 3. år med 1.080 kr. indtil 18.060 kr.
5. lønningsklasse:
   Lønning 17.820 kr. årlig, stigende hvert 3. år med 1.440 kr. indtil 20.700 kr.
6. lønningsklasse:
   Lønnen er den samme, som den, der er fastsat for 2. og 4. lønningsklasse i §§ 32 og 38, stk. 1 i lov nr. 210 af 18. maj 1960 om lønninger m.v. til lærere ved folkeskolen på Færøerne.
7. lønningsklasse:
   Lønning 15.000 kr. årlig, stigende hvert 3. år med 1.500 kr. indtil 21.000 kr.
8. lønningsklasse:
   Lønning 19.800 kr. årlig, stigende hvert 3. år med 1.380 kr.

kr. til 23.940 kr.

9. lønarflokkur:
Lønin 21.300 kr. um árið, hækkandi 3. hvørt ár við 2.400 kr. til 26.100 kr.

10. lønarflokkur:
Lønin 22.500 kr. um árið, hækkandi 3. hvørt ár við 1.500 kr. til 27.000 kr.

11. lønarflokkur:
Lønin 25.800 kr. um árið, hækkandi 3. hvørt ár við 2.100 kr. til 30.000 kr.

12. lønarflokkur:
Lønin 29.700 kr. um árið, hækkandi eftir 3 árum til 32.100 kr.

13. lønarflokkur:
Lønin 33.000 kr. um árið, hækkandi eftir 3 árum til 35.100 kr.

14. lønarflokkur:
Lønin 36.000 kr. um árið, hækkandi eftir 3 árum til 39.000 kr.»

4) § 46 verður orðað soleiðis:

«Tey í hesi grein nevndu tænastumannastørv, sbr. 1. § í hesi lóg, verða normerað sum niðanfyri tilskilað, soleiðis at teir í 45. § í hesi lóg skrásettu lønarflokkar verða nýttir við flokkingina á henda hátt:

1. lønarflokkur:
Skúlatænarar (1).
Núverandi skúlatænari fær árliga starvsviðbót uppá 1.200 kr.

2. lønarflokkur:
Tollarar (10).
Vrakieftirlitsmenn (8).
Landsstýrinum verður heim-

indtil 23.940 kr.

9. lønningsklasse:
Lønning 21.300 kr. årlig, stigende hvert 3. år med 2.400 kr. til 26.100 kr.

10. lønningsklasse:
Lønning 22.500 kr. årlig, stigende hvert 3. år med 1.500 kr. til 27.000 kr.

11. lønningsklasse:
Lønning 25.800 kr. årlig, stigende hvert 3. år med 2.100 kr. til 30.000 kr.

12. lønningsklasse:
Lønning 29.700 kr. årlig, stigende efter 3 år til 32.100 kr.

13. lønningsklasse:
Lønning 33.000 kr. årlig, stigende efter 3 år til 35.100 kr.

14. lønningsklasse:
Lønning 36.000 kr. årlig, stigende efter 3 år til 39.000 kr.»

4) § 46 affattes således:

«De i nærværende paragraf omhandlede tjenestemandsstillinger, jfr. § 1 i denne lov, normeres som nedenfor anført, idet de i § 45 i denne lov angivne lønningsklasser finder anvendelse ved klassificeringen på følgende måde:

1. lønningsklasse:
Skolebetjente (1).
Der tillægges den nuværende skolebetjent et årligt bestillingstillæg på 1.200 kr.

2. lønningsklasse:
Toldere (10).
Vragerkontrollører (8).
Landsstyret bemyndiges til at

ilað at flyta upp til 4 tollarar og upp til 4 vrakieftirlitsmenn í 3. lønarflokk, tá ið arbeiðskrøvini serliga tala fyri tí.

Landsstýrinum verður eisini heimilað at flyta 1 tollara og 1 vrakieftirlitsmann í 4. lønarflokk.

3. lønarflokkur:
Hjálparmenn á matrikulstovuni (3).
Hjálparmenn hjá landsverkfrøðinginum (2).
Hjálparmenninir verða flutlir upp í 4. lønarflokk í seinasta lagi aftaná 10 ára starvstíð. Landsstýrinum verður eisini heimilað at flyta 1 hjálparmann á matrikulstovuni og 1 hjá landsverkfrøðinginum upp í 5. lønarflokk, tá ið kvalifikatiónir og arbeiðskrøv tala fyri tí.
4. lønarflokkur:
5. lønarflokkur:
Fulltrúar á landsskrivstovuni á 2. stigi við ongum embætisprógvi (1).
Núverandi fulltrúin fær í persónligari, eftirløngevandi viðbót 3.240 kr. um árið.

Fulltrúar á gjaldstovuni á 2. stigi (2).
Leiðarar av gjaldstovudeildum (3).
Yvirvrakari (1).
Yvirtollari (1).
6. lønarflokkur:
Lærarar á studentaskúlanum (4).
Viðvíkjandi aspiranttænasta og lønaraldri galda reglurnar í 42. § í lóg nr. 210 frá 18. mai 1960 «om lønninger m.v. til

oprykke indtil 4 toldere og indtil 4 vragenkontrollører i 3. lønningsklasse, når de krav, arbejdet stiller, særlig taler derfor.
Landsstyret bemyndiges endvidere til at oprykke 1 tolder og 1 vragenkontrollør i 4. lønningsklasse.

3. lønningsklasse:
Assistenter ved matrikelkontoret (3).
Assistenter hos landsingeniøren (2).
Assistenterne oprykkes i 4. lønningsklasse senest efter 10 års tjenestetid. Landsstyret bemyndiges endvidere til at oprykke 1 assistent ved matrikelkontoret og 1 hos landsingeniøren i 5. lønningsklasse, når kvalifikationer og de krav, arbejdet stiller, taler derfor.
4. lønningsklasse:
5. lønningsklasse:
Fuldmægtige på landskontoret af 2. grad uden embedseksamen.
Der tillægges den nuværende fuldmægtig et personligt, pensionsgivende tillæg på 3.240 kr. årlig.
Fuldmægtige ved oppebørselskontoret af 2. grad (2).
Ledere af oppebørselskontorets filialer (3).
Overvrager (1).
Overtolder (1).
6. lønningsklasse:
Lærere ved studenterskolen (4).
Vedrørende aspiranttjeneste og lønningsanciennitet gælder reglerne i § 42 i lov nr. 210 af 18. maj 1960 om løninger

lærere ved folkeskolen på Færøerne», og soleiðis at lønasta á studentaskúlanum eisini telur við eftir sama reglum. Tann myndugleiki, skúlastjórnin hevur, er tó hjá landsstýrinum.

7. lønarflokkur:
Fulltrúar á 2. stigi við embætisprógvi: á landsskrivstovuni (3), hjá landsverkfræðinginum (1).
Adjunktar (5).
Sjómansskúlalærarar (3).
Landmálarar (3).
Hesir tænastumenn verða allir fluttir upp í 10. lønarflokk í seinasta lagi eftir 15 ára starvstíð.
Kassameistarar á gjaldstovuni (2).

8. lønarflokkur:
Fulltrúi á landsskrivstovuni á 2. stigi, ið er leiðari av fiskivinnustovuni (1).
Fulltrúin fær árliga starvsviðbót upp á 1.200 kr.

Sendifulltrúar (1).
Meðan sendifulltrúi er í tænastu í útheiminum, fær hann eina viðbót, hæddin verður ásett á fíggjarlógini.

Bókhaldarar á gjaldstovuni (1).

9. lønarflokkur:
Fulltrúar á gjaldstovuni á 1. stigi (1).
Fulltrúi á 1. stigi á landsskrivstovuni við ongum embætisprógvi, sum samstundis er stjóri hjá líkningarráðnum (1).
Landsbókavørður (1).
Telefonverkstjóri (1).

m.v. til lærere ved folkeskolen på Færøerne, således at også tjeneste på studenterskolen medregnes efter samme regler. Den myndighed, der er tillagt skoledirektionen, er dog hos landsstyret.

7. lønningsklasse:
Fuldmægtige af 2. grad med embedseksamen: Ved landskontoret (3), hos landsingeniøren (1).
Adjunkter (5).
Navigationsskolelærere (3).
Landmålere (3).
Disse tjenestemænd oprykkes alle i 10. lønningsklasse senest efter 15 års tjenestetid.

Kasserere ved oppebørselskontoret (2).

8. lønningsklasse:
Fuldmægtig ved landskontoret af 2. grad, der er leder af fiskeriskontoret (1).
Der tillægges fuldmægtigen et årligt bestillingstillæg på 1.200 kr.
Udsendte fuldmægtige (1).
Medens en fuldmægtig er i tjeneste i udlandet, tillægges der ham et særligt tillæg, hvis størrelse fastsættes på finansloven.
Bogholdere på oppebørselskontoret (1).

9. lønningsklasse:
Fuldmægtige af 1. grad ved oppebørselskontoret (1).
Fuldmægtig af 1. grad ved landskontoret uden embedseksamen, som samtidig er leder af ligningsrådet (1).
Landsbibliotekar (1).
Telefondirektør (1).
Den nuværende telefondirek-

Núverandi telefonverkstjóri fær persónliga eftirløngevandi viðbót uppá 2.400 kr. um árið.
Landbúnaðarráðgevari (1).
Núverandi landbúnaðarráðgevari fær persónliga eftirløngevandi viðbót uppá 1.680 kr. um árið.
Fyristøðumaður á fiskiídnaðarstovuni (1).
Landsstýrinum verður heimilað at flyta eitt ella fleiri av seinast nevndu 5 tænastumonnum upp í 10. lønarflokk, tá ið arbeiðskrøv og kvalifikatiónir hjá tí mannni, ið hevur starvið, tala fyri tí.

10. lønarflokkur:
Yngri løktorar.
Talið á lektorum í hesum lønarflokki og adjunktum í 7. lønarflokki er tilsamans 5.
Fulltrúar á landsskrivstovuni á 1. stigi við embætisprógvi (1). Civilverkfrøðingur hjá landsverkfrøðinginum (1).
Landsstýrinum verður heimilað at flyta seinast nevndu 2 tænastumenn upp í 11. lønarflokk, tá ið arbeiðskrøv og starvsaldur tala fyri tí.

11. lønarflokkur:
Fyristøðumaður á sjómansskúlanum (1).
Stjóri á matrikulstovuni (1).
Stjóri á gjaldstovuni (1).
Telefonverkstjóri, um hann er civilverkfrøðingur (1).
Landsstýrinum verður heimilað at flyta hesar tænastumenn upp í 12. lønarflokk, tá

tør får et personligt pensionsgivende løntillæg på 2.400 kr. årlig.
Landbrugskonsulent (1).
Den nuværende landbrugskonsulent får et personligt pensionsgivende løntillæg på 1.680 kr. årlig.
Forstander for fiskeriøkonomisk laboratorium (1).
Landsstyret bemyndiges til at oprykke et eller flere af de senest nævnte 5 tjenestemænd i 10. lønningsklasse, når de krav, arbejdet stiller samt anciennitet og kvalifikationer hos den person, der bestrider stillingen, taler derfor.

10. lønningsklasse:
Yngre lektorer.
Antallet af lektorer i denne lønningsklasse samt adjunkter i 7. lønningsklasse er ialt 5. Fuldmægtige af 1. grad ved landskontoret med embedseksamen (1).
Civilingeniører hos landsingeniøren (1).
Landsstyret bemyndiges til at oprykke de 2 sidstnævnte tjenestemænd i 11. lønningsklasse, når de krav, arbejdet stiller, samt tjenesteanciniteten, taler derfor.

11. lønningsklasse:
Forstander for navigationsskolen (1).
Chef for matrikelkontoret (1).
Chef for Oppebørselskontoret (1).
Telefondirektør, såfremt han er civilingeniør (1).
Landsstyret bemyndiges til at oprykke 1 eller flere af nævn-

ið arbeiðskrøv, starvsaldur og kvalifikatiónir tala fyri ti.

te tjenestemænd i 12. lønnings klasse, når de krav, arbejdet stiller, anciennitet og kvalifikationer taler derfor.

12. lýnarflokkur:
Eldri lektorar á studentaskúlanum (3).
Landsgrannskoðari (1).
Landsdjóralækni (1).
Landsstýrinum verður heimilað, uttan mun til aldur at veita núverandi landsdjóralækna eftirlønarrætt.

12. lønningsklasse:
Ældre lektorer ved studenterskolen (3).
Landsrevisorer (1).
Landsdyrelæge (1).
Landsstyret bemyndiges til at yde den nuværende landsdyrelæge pensionsret uanset alder.

13. lønarflokkur:
Rektor á studentaskúlanum (1).

13. lønningsklasse:
Rektor ved studenterskolen (1).

14. lønarflokkur:
Stjóri á landsskrivstovuni (1).
Landsverkfrøðingurin (1).
Yvirlækni* (1).
Núverandi yvirlækni fær løn samsvarandi sáttmála millum «Sygehusforeningen i Danmark og Den almindelige danske lægeforening.»

14. lønningsklasse:
Landskontorets chef (1).
Landsingeniøren (1).
Overlæge (1).
Den nuværende overlæge aflønnes i overensstemmelse med overenskomst mellem «Sygehusforeningen i Danmark og Den almindelige danske lægeforening.»

5). Til 3. kapitul verður innihalds tilskilingin «Pristalsviðgerð av lønum» broytt til «Viðgerð av lønum og starvsviðbótum.»

5) Til kapitel 3 bliver inholdsangivelsen «Pristalsregulering af lønninger» ændret til «Regulering af lønninger og bestillingstillæg».

6) Sum nýggj 48 A § verður skotið inn:
«Tær í 45. § nevndu byrjunarlønir við møguligum aldursviðbótum og eftirløngevandi viðbótum verða hækkaðar við somu viðbótum, sum fólkaskúlalærarar í Føroyum hava og fáa.»

6) Som ny § 48 A tilføjes:
«De i § 45 nævnte bemyndigelseslønninger med eventuelle alderstillæg og pensionsgivende tillæg forhøjes med de samme overenskomstportioner som folkeskolelærere på Færøerne har fået og får.»

7) Sum nýggj 48. B § verður skotið inn:

«Afturat starvsviðbótum verður veitt viðbót við 120% av grundtalinum. Procentviðbótin verður lækkað ella lækkað við 5% fyri hvørji 10 stig, prístalið eftir 47. § hækkar uppum 364 ella lækkar niðurum 368. Somu viðbót fáa tær serlønir, sum seinni skulu javnast eftir prístalinum. Annars fer javningin fram, sum tilskilað í 47. §.»

§ 2.

Í sambond við, at lógin fær gildi flytir fingin lønaraldur yvir í lønarflokkin eftir hesi lóg.

2. stk. Fer tænastumaður við yvirflytingina í nýggja lønarflokin niður í normeraðari løn, verður hann flutur á tað stigið í lønarflokkinum, sum liggur nærmast omanfyri stigið, hann var komin á í tí flokkinum, hann flytir úr. Fer hann, hóast hetta, niður í normeraðari løn fær hann persónliga eftirløngevandi viðbót at javna munin.

§ 3.

Henda lóg fær gildi frá 1. apríl 1965.

2. stk. Samstundis fara úr gildi løgtingslógirnar nr. 59 frá 31. august 1961, nr. 21 frá 22. mai 1962, nr. 38 frá 12. juni 1962 og nr. 29 frá 20. mai 1965.

7) Som ny § 48 B tilføjes:

«Til bestillingstillæg ydes et tillæg på 120% af grundbeløber. Dette procenttillæg forhøjes eller nedsættes med 5% for hver 10 points, pristallet i henhold til § 47 stiger udover 364 eller falder under 368. Samme tillæg ydes der de honorarer, som hidtil er reguleret og de for hvilke det vedtages, at de skal reguleres efter pristallet. Reguleringen foretages iøvrigt som bestemt i § 47.»

§ 2.

I forbindelse med lovens ikrafttræden overføres erhvervet lønningsanciennitet til lønningsklassen efter nærværende lov.

stk. 2. Såfremt en tjenestemand ved overgang til den nye lønningsklasse går ned i normeret lønning indplaceres han på det løntrin, der ligger nærmest over det løntrin, han var kommet på i den hidtidige lønningsklasse. Går han uanset dette ned i normeret lønning får han forskellen som et personligt pensionsgivende tillæg.

§ 3.

Denne lov får gyldighed fra 1. april 1965.

stk. 2. Samtidig træder ud af kraft lagtingslovene nr. 59 af 31. august 1961, nr. 21 af 22. maj 1962, nr. 38 af 12. juni 1962 og nr. 29 af 20. maj 1965.

Viðmerkingar:

Løgtingslóg nr. 31 frá 18. mai 1961 um tænastumenn landsins skal sambært § 42, 3. stk. fjórða hvørt ár leggjast fyri løgtingið til umhugsunnar, tó fyrstu ferð í 1965.

Lógin hevur tó áðrenn verið løgd fyri løgtinglið til broytingar: í 1961, har adjunktar og lektorar og rektor á studentaskúlanum vórðu uppnormeraðir, í 1962 har landsdjóralæknin og landsgrannskoðarin eisini vórðu uppnormeraðir, sáttmálaviðbøtur vórðu veittar tænastumonnum, og at tænastumenn kundu flyta lønaraldur við sær frá tænastu undir ríkinum o.l. tænastu, og í 1965 har ymsar broytingar í normeringini vórðu gjørdar, serliga øking í normeringstølum, og at nøkrum tænastumonnum vórðu veittar starvsviðbøtur, víst verður til løgtingslógirnar nr. 59 frá 31. august 1961, nr. 21 frá 22. mai 1962, nr. 38 frá 12. juni 1962 og nr. 29 frá 20. mai 1965.

At fyrireika møguliga broyting í lógini setti landsstýrið niður 3-mannanevnd og valdi sum limir leiðararnar á høvuðsfyrisitingarstovnunum: gjaldstovnni, landsskrivstovuni og landsverkfræðingsskrivstovuni.

Hesir setlu fram uppskot dagfest 14. apríl 1966.

Síðani aðalsjónarmiðið í uppskotinum er, at lønarlagið eigur at verða umleið hitt sama, sum hjá ríkinum bæði viðv. lønarflokkunum og dýrtíðarjavningi. Grundirnar eru tær, at ríkisfelagsskapurin og við hesum felags arbeiðsmarknaður førir tað við sær, at skal heimastýrið hava møguleikar fyri at fáa tænastumenn í kapping við ríkið, er tað neyðugt ikki at bjóða landsins tænastumonnum verri lønarkor enn teimum, ríkið veitir sínum. Nevndin heldur, at bæði løgting og landsstýri hava givið seg undir hesar treytir á ymsum økjum.

Fólkaskúlalærarar og eisini seminaristarnir á studentaskúlanum eru komnir undir sonnu lønarvilkor sum starvsfelagar teirra í Danmark, sama er við tænastumonnum og meginpartinum av starvsfólkinum á sjúkrahúsunum, tænastumenn og starvsfólk á ymsum stovnum, har landið rindar helvt av lønini og á øðrum l.d. fróðskaparsetrinum, har landið rindar alt. Fíggjarliga sað, skuldi tænastumenninir, um teir fingu sonnu kor, ikki verið avgerandi fyri orku landsins.

Uppskotið fekk felag tænastumanna landsins høvi at kanna, og setti felagið síðani fram uppskot um ymsar broytingar.

Hesar bóru á tað borið, at normeringin, serliga fyri teir lægru lønarflokkarnar varð betri. Herumframmt vóru ymisk onnur broytingaruppskot.

Av ymsum orsøkum varð málið ikki lagt fyri løgtingið í tingsetuni 1965.

Sum fyrisett í kapitul 10 í tænastumannalógini, hava samráðingar verið við tænastumannafelagið um broytingar í lógini.

Eftir at bæði uppskotið frá 3-mannanevndini og uppskotið frá tænastumannafelagnum eru kannað, heldur landsstýrið seg partvís til hitt fyrra, tó við ymsum broytingum í lønarflokkunum og við einum høvuðsfráviki, at dýrtíðarjavningin ikki verður broytt, men verður hin sama

sum eftir tænastumannalógini frá 1961. Orsøkin til hesa støðu er, at tað ikki liggur greitt fyri hvørja ávirkan ein javning eftir donskum prístali kann fáa á arbeiðsmarknaðin her.

Fyri hentleika skuld eru broytingar, sum eru framdar undantikuar við í hesum lógaruppskoti.

Til tær ymsu broytingarnar er at viðmerkja: *ad 1)*. Er fraint við løgtingslóg nr. 38 frá 12. juni 1962.

ad 2). Av praktiskum grundum hevur gjaldstovan mælt til, at lønir o.t. til tænastumenn og starvsfólk undir landinum kann gjaldast upp til 6 yrkadagar áðrenn forfallsdag, soleiðis sum frammanundan er, tá talan er um fólka- og avlamispensjón og lønum, sum statskassin stendur fyri.

Hjá teimum stovnum, sum hava løngjaldingina undir hondum, vil tað lætta nógv um arbeiðsbyrðina, sum er størst um mánaðarskiftið.

Eftir § 29, 1. stk., sum hon nú er orðað, verða tænastumannalønir, hiðipeningur og eftirlønir útgoldnar og frammanundan fyrst í mánaðinum, men um 1. er halgidagur verður goldið seinasta yrkadag í mánaðinum frammanundan.

Eftir uppskotinum fær landsstýrið heimild at geva loyvi til útgjalding tann 25. í mánaðinum frammanundan, uttan at forfallsdagurin fyri tað verður broyttur.

ad 3) og 4).
1. lønarflokkur:

Er óbroyttur, tó so, at starvsviðbótin hjá skúlatænaranum,ið er, er hækkað frá 720,— kr. til 1.200,— kr. um árið.

2. lønarflokkur:

Er óbroyttur, tó so, at tar seinru aldursviðbøturnar eru hækkaðar frá 300,— kr. til 600,— kr. um árið og soleiðis, at 4 tollarar og 4 vrakieftirlitsmenn, nú 2, kunnu flytast upp í 3. lønarflokk og harafturat 1 tollari og 1 vrakieftirlitsmaður í 4. lønarflokk.

3. lønarflokkur:

Er óbroyttur, tó so, at aldursviðbøturnar eru hækkaðar frá 300,— kr. til 600,— um árið.

Normeringstalið hjá hjálparmonnum hjá landsverkfrøðingunum er hækkað við 1 til 2.

Herafturat flyta allir upp í 4. lønarflokk og kann 1 á hvørjum stovninum flyta upp í 5. lønarflokk.

4. lønarflokkur:

Nú: 14.640,— kr. hækkandi 3. hvørt ár við 480,— kr. til 17.040,— kr.

Uppskotið: 14.820,— kr. hækkandi 3. hvørt ár við 1.080,— kr. til 18.060,— kr.

5. lønarflokkur:

Nú: 15.600,— kr. hækkandi 3. hvørt ár við 780,— kr. til 19.500,— kr.

Uppskotið: 17.820,— kr. hækkandi 3. hvørt ár við 1.440,— kr. til 20.700,— kr.

Núverandi fulltrúin á landsskrivstovuni á 2. stigi við ongum embætisprógvi fær persónliga eftirløngevandi viðbót uppá 3.240,— kr., so hann í løn fær tað sama sum tænastumenn í 8. lønarflokki.

Leiðararnir á gjaldstovudeildunum eru nú løntir eftir starvsmannasáttmálanum. Deildir eru í løtuni í Klaksvík og í Runavík, og kemur ein afturat í Fuglafirði pr. 1. apríl 1967.

Av tí at leiðararnir á deildunum taka ímóti nógvum peningi til landskassan, og hetta leggur stóra ábyrgd á teir, eiga teir at verða normeraðir sum tænastumenn við skyldum og rættindum teirra.

Yvirvrakarin var í 6. lønarflokki, § 2 í uppskotinum førir við sær, at løn hansara verður óbroytt.

Yvirtollarin er fluttur frá 4. til 5. lønarflokk.

6. lønarflokkur:

Lærarar við seminaristprógvi á studentaskúlanum eru normeraðir í hesum flokki, sum svarar til lønarflokkin 6 a, framt við løgtingslóg nr. 29 frá 20. mai 1965, jbr. § 1, punkt 6.

7. lønarflokkur:

Nú: 18.600,— kr. hækkandi 3. hvørt ár við 1.080,— kr. til 24.000,— kr.

Uppskotið: 15.000,— kr. hækkandi 3. hvørt ár við 1.500,— kr. til 21.000,— kr.

Í hesum flokki eru normeraðir tænastumenn, ið hava staðið embætisprógv á lærdum háskúla ella sum hava læru, ið kann javnmetas við hesa. Teir verða allir fluttir upp í 10. lønarflokk eftir 15 ára starvstíð, í hesum flokki er endaløn 27.000,— kr. Henda uppflytanin er longu galdandi fyri adjunktarnar á studentaskúlanum, jbr. løgtingslóg nr. 59 frá 31. august 1961. Fulltrúin hjá landsverkfroðinginum er nýggj normering.

Kassameistararnir á gjaldstovuni eru fluttir upp í henda flokk frá 5., teir flyta tó ikki upp í 10. frá 7.

8. lønarflokkur: (19.800 23.940)

Leiðarin á fiskivinnustovuni er fluttur frá 5. (15.600—19.500), sum leiðari av skrivstovu hevur hann dagligu ábyrgdina. Starvsviðhótina 1.300,— kr. hevur hann frammanundan.

Seudifulltrúin er eisini fluttur frá 5. lønarflokki.

Bókhaldarin á gjaldstovuni er fluttur frá 6. (16.200—21.240).

9. lønarflokkur:

Nú (8.lfl.): 19.800,— kr. hækkandi 3. hvørt ár við 1.080,— kr. til 24.120,—.

Uppskotið: 21.300,— kr. hækkandi 3. hvørt ár við 2.400,— kr. til 26.100,— kr.

Fulltrúin á gjaldstovuni er fluttur frá 6. (16.200—21.240).

Stjórin á líkningarráðnum er fluttur frá 6., og samstundis fellur persónliga eftirløngevandi viðhót hansara uppá 3.360,— kr. burtur.

Landsbókavørðurin er fluttur frá 6.

Landbúnaðarráðgevarin og telefonvenkstjórin hava eftir persónligu pensiónsgevandi viðbøturnar uppá ávikavist 1.680,— kr. og 2.400,— kr.

10. lønarflokkur:

Nú (9.lfl.): 21.000,— kr. hækkandi 3. hvørt ár við 1.800 kr. til 26.400,—.

Uppskotið: 22.500,— kr. hækkandi 3. hvørt ár við 1.500,— kr. til 27.000,— kr.

Fulltrúin á 1. stigi við embætisprógvi á landsskrivstovuni og civilverkfrøðingurin hjá landsverkfrøðingimum kunnu flytast upp í 11., endaløn 30.000,— kr.

11. lønarflokkur:

Nú (10. lfl.): 22.200,— kr. árliga hækkandi 3. hvørt ár við 2.400,— kr. til 27.000,— kr.

Uppskotið: 25.800,— kr. árliga hækkandi 3. hvørt ár við 2.100,— kr. til 30.000,— kr.

Hesi tænastumannastørv kunnu øll flytast upp í 12., endaløn 32.100 kr.

12. lønarflokkur:

Nú (11.lfl.): 26.040,— kr. hækkandi 3. hvørt ár við 3.000,— kr. til 32.040,— kr.

Uppskotið: 29.700,— kr. hækkandi eftir 3 árum til 32.100,— kr.

13. lønarflokkur:

Nú (12.lfl.): 26.400,— kr. hækkandi 3. hvørt ár við 3.600,— kr. til 33.600,— kr.

Uppskotið: 33.000,— kr. hækkandi eftir 3 árum til 35.100,— kr.

14. lønarflokkur:

Uppskotið: 36.000,— kr. hækkandi eftir 3 árum til 39.000,— kr.

ad 5). Síðani hetta kapitul nú ikki bert viðv. dýrtíðarjavningini, men eisini veiting av sáttmálaviðbótum verður innihaldstilskilingin broytt.

ad 6). Er framt við løgtingslóg nr. 21 frá 22. mei 1962, jbr. § 1, 5. punkt.

ad 7). Er framt við løgtingslóg nr. 29 frá 20. mei 1965, jbr. § 1, 8. punkt.

ad § 2. Vanligur praksis er, at tænastumenn við framflutning ikki flyta lønaraldurin við sær. Tá ið nú ikki verður broyting í dýrtíðarjavningini, og teir nógvu av tænastumonnunum hava sitið so leingi í størvunum, at teir eru komnir á endaløn, er skotið upp, at undantak verður gjørt hesa ferð, so teir flyta lønaraldurin við sær.

Í 2. stk. er skipað so fyri, at teir, sum hóast regluna í 1. stk. fara niður í løn, nú lønarflokkarnir verða broyttir, verða flutfir á tað stigið, sum liggur nærmast omanfyri stigið, í tí lønarflokki, teir flyta frá. Seinasta punktum sipar til teir, har lønarflokkurin, teir verða settir í, hevur lægri endaløn, enn flokkurin teir flyta frá.

ad § 3. Lógin fær afturvirkandi kraft frá 1. apríl 1965. Hon skuldi verið løgd fyri løgtingið í tingsetuni 1965.

1. viðgerð 19. og 20. august legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Landsstýrið hevur í sínum viðmerkingum til lógaruppskotið gjøfliga greitt frá teim broytingum uppskotið inniheldur.

Lógin átti at havt verið til kanningar í tingsetuni 1965, og eigur soleiðis næsta ferð at koma fyri í 1969 í seinasta lagi. Í lógaruppskotinum eru tiknar við tær broytingar, sum løgtingið hevur framt síðan tænastumannalógin sjálv var samtykt.

Til fíggjarnevndina er síðan 1. viðgerð komið bræv gjøgnum landsstýrið frá Matrikulstovuni við atfinningum til uppskotið og somuleiðis frá Tænastumannafelag landsins, eisini við atfinningum til uppskotið, og eru hesi brøv viðløgd málinum.

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá lønarráðnum, sum hevur sent tað aftur til landsstýrið uttan viðmerkingar.

Nevndin er samd um, at av tí, at tingið skal fara heim í morgin, verða ikki stundir til samráðingar við ymsar partar, um málið skal fremjast í hesu tingsetu.

Undir nevndarviðgerðini er komið fram á skrivifeilir o.t. í lógaruppskotinum og verða teir rettaðir við broytingaruppskoti.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Kjartan Mohr, Sámal Petersen, Hanus við Høgadalsá og Knút Wang) mælir til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum við umtalaðu redaktionellu broytingum.

Minnilutin (Poul J. Olsen og Jákup Lindenskov og Andrias Djurhuus) setir einki uppskot fram.

Meirilutin (Kjartan Mohr, Sámal Petersen, Hunus við Høgadalsá og Knút Wang) mælir til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum við hesum broytingum:

1. § 1 í innleiðninginum:
   donsk tekst: millum «nr. 21» og «22. maj» verður skotið inn «af».
2. § 1 nr. 3 í innleiðninginum:
   føroysk tekst: millum «16. §» og «hesi» verður skotið inn «í».
3. § 1, nr. 4, 5. lønarflokkur:
   donsk tekst: aftaná «embedseksamen» verður sett «(1)».
4. § 1, nr. 4, 9. lønarflokkur seinasta stk.:
   føroysk tekst: orðið «eitt» verður broytt til «ein» og millum «arbejðskrøv» og «og» verður skotið inn «starvsaldur».
5. § 1, nr. 4, 10. lønarflokkur:
   donsk tekst.: reglubrot aftaná «dalt 5», og í seinasta stk. verður orðið «tjenesteanciennitet» broytt til «anciennitet».
   føroysk tekst.: reglubrot aftaná «embætisprógvi (1)»

6. § 1 nr. 6:
   føroysk tekst: orðið «viðbótum» verður til «sáttmálaviðbótum.»
7. § 1 nr. 7:
   føroysk tekst: í 3. punktum verður millum «sum» og «seinni» skotið inn «higartil eru jarvnaðar, og tær sum».

2. viðgerð 20. august 1966.

Broytingaruppskotið frá nevndini til § 1 samtykt 15—0.
§ 1 í landsstýrisins uppskoti so broytt fall 14—0.
Lógaruppskotið so statt burturdottið.

10. Veðhald av láni til p-f Clupea í Klakksvík

Ár 1966, 19. august legði Samuel Petersen løgtingsmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til
løgtingslóg um veðhald fyri láni til p/f Clupea, Klakksvík.

§ 1.
Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri láni til p/f Clupea, Klaksvík, hægst 80% av kr. 3.690.000.

§ 2.
Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

lagtingslov om garanti for lån til p/f Clupea, Klaksvik.

§ 1.
Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for et lån til p/f Clupea, Klaksvik, der højst andrager 80% af kr. 3.690.000.

§ 2.
Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Seinastu tingsetu var hetta mál til viðgerðar, men fekk ikki nóg stóra undirtøku, við tað at bert 14 atkvøður vóru fyri at fremja málið. Tann ætlaði kostnaðurin av verksmiðjuni var settur til umleið 4.900.000 kr. og skuldi kunna viðgera 250 tons um sandøgrið. Hetta er broytt til 150 tons pr. sandøgur við møguleikum at viðka um verksmiðjuna seinri. Byggiprísurin verður 3.690.000 kr.

Seinastu tingsetu varð samtykt at veita studning og ábyrgd fyri láni til havnagerð á Strond, Klakksvík. Henda havnagerð er neyðug, men full nytta fæst ikki burturúr, um ikki virkir eisini verða bygd har, so sum ætlanir hava verið.

Kostnaðarætlan.

Fabrik	1.820.000,
Farmagjald og lossing	110.000,
Bygningar	100.000,
Fiskipaunar v.m.	250.000,
Uppsetan av maskinum o.a.	110.000,
El-installatiónir v.m.	80.000,
Sildaoljutangar	350.000,

Innflutningsgjøld	120.000,—
Projektering og eftirlit við arbeiðinum	100.000,—
Rentutap í byggitíðini	250.000,—
Ymist at standa ímóti við	100.000,—
	3.690.000,—

Vísur verður til tey skjøl, ið liggja í løgtingsmáli nr. 6/1965.

1. viðgerð 19. og 20. august legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið er greitt frá, hvat ið skilir hetta uppskot frá tí, sum viðgjørt var í seinastu tingsetu (løgtingsmál nr. 6/1966: Veðhald fyri láni til P/f Clupea, Klaksvík).

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sámal Petersen, Andreas Djurhuus, Poul J. Olsen og Jákup Lindenskov) mælir til at samtykkja uppskotið frá tingmonnum úr Norðuroyum.

Minnilutin (Kjartan Mohr, Hanus við Høgadalsá og Knút Wang) vísir til ta støðu hesin sami minnilutin hevði í løgtingsmáli nr. 6/1966: Veðhald fyri láni til P/f Clupea, Klaksvík. Minnilutin heldur ikki viðurskiftini vera broytt nakað síðan tá og setir tí einki uppskot fram.

2. viðgerð 20. august 1966.

§ 1 í lógaruppskotinum fall 12 -0.
Alt uppskotið so statt burturdottið.

11. Lögtingslóg um útbygging av Havnini í Leirvík

Ár 1966, 19. august legði Frederik Hansen løgtingsmaður fyri Eysturoyar tingmenn soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um útbyggjan av havnini í Leirvík.

§ 1.

Úr landskassanum verður veittur studningur til útbyggjan av Leirvíkar havn við 50% av byggipeninginum, tó hægst 50% av kr. 3.900.000, at rinda við eins stórum ársgjøldum í 10 fylgjandi fíggjarár frá og við fíggjarárinum 1969/70 at rokna.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

lagtingslov om udbygning af havnen i Leirvík.

§ 1.

Af landskassen ydes der tilskud til udbygning af Leirvíkar havn med 50% af byggesummen dog højst 50% af kr. 3.900.000, at udrede med lige store årsrater i 10 på hinanden følgende finansår fra og med finansåret 1969/70 at regne.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Leirvíkar kommuna hevur við skrivi dagfest 1. mai 1965 til Føroya løgtings søkt um studning til útbyggjan av havnini í Leirvík.

Henda útbyggjan er lýst í einum skitsuprojekti, sum er viðlagt umsóknini, og sum Landsbyggifelagið p/f hevur gjort og metir at kosta kr. 3.900.000,—.

Vísandi til tað, sum er flutt fram í umsóknini loyva undirriaðu Eysturoyar tingmenn hervið at leggja hetta mál fram samstundis sum vit seta uppskot um løgtingslóg fram samsvarandi hesum.

1. viðgerð 19. og 20. august legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og vísir til, at umsókn um meira studning til Skopunnar havn hevur eisini verið viðgjørd í fíggjarnevndini og var víst til landsstýrið til kanningar í sambandi við eina nýggja

havnaætlan. Somuleiðis hevur brav verið á tingi um meira studning til Fuglafjarðar havn, men var hetta mál vist til landsverkfroðingin at koma uppí eina nýggja havnaætlan.

Í seinasta tingsetu viðgjørdi figgjarnevndin fleiri mál, sum øll fingu somu lagnu, at tey vóru vist til eina nýggja komandi havnaætlan.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Kjartan Mohr, Sámal Petersen, Hanus við Høgadalsá, Andrias Djurhuus og Knút Wang) vísir á frammanfyristandandi og mælir til, at Leirvíkar havn kemur við í eina komandi havnaætlan, men setir einki uppskot fram, tí hetta er longu samtykt í seinastu tingsetu.

Minnilutin (Poul J. Olsen og Jákup Lindenskov) mælir til at samtykkja uppskotið frá uppskotsstillarunum.

2. viðgerð 20. august 1966.

§ 1 í lógaruppskotinum fall 8—0.

Alt uppskotið so statt burturdottið.

12. Stuðul til húsalánsgrunnin

Ár 1966, 19. august legði løgmaður fram soljóðandi

UPPSKOT

til

løgtingslóg um stuðul til húsalánsgrunnin.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at ganga í veð fyri láni uppí 500.000 kr. til húsalánsgrunnin.

§ 2.

Húsalánsgrunnurin fær til ognar restogvir sosiala grunn landskassans.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

lagtingslov om støtte til boliglånefonden.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for lån indtil 500.000 kr. til boliglånefonden.

§ 2.

Boliglånefonden får til ejendom landskassens sosiale fonds reslaktiver.

§ 3.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Húsalánsgrunnurin hevur vent sær til landsstýrið í sambandi við lán uppá 500.000 kr., grunninum stendur í boði frá Føroya Brunatrygging Lánitíðin er 10 ár og er rentan 6½% p. a. Tryggingin krevur landskassaveðhald fyri lánið. Treytin er orsakað av, at viðtøkurnar siga, at bert er loyvt tryggingini at læna eftir sonnu reglum, sum galda fyri setan av ognum ómyndinga, og er húsalánsgrunnurin enn ikki góðkendur í so máta.

Eftir § 4 í lógini um húsalánsgrunnin skuldi úr landskassanum veitast grunninum minst 1 mill. kr. sum stovnsfar.

Úr landskassanum eru veittar um sosialgrunnin:

Í 1965/66, jbr. viðm. til § 44-6-3 í fíggjarløgtingslógini	1.250.000,
Í 1966/67, jbr. viðm. til § 44-6-3 á fíggjarløgtingslógini..	250.000,
tilsamans	1.500.000,

Ætlanin var, so hvørt sosialgrunnurin hevði pening tøkan, a flyta hann yvir í húsalánsgrunnin, soleiðis at hin fyyrri grunnurin varð avtikin, nú hann onga sjálvstøðuga uppgávu hevur, síðani tey sosialu málini fáa tørvandi játtan á teim árligu fíggjarlógunum.

Í socialgrunninum eru pr. 17. august 1966 369.401,96 kr. Peningurin er bundin soleiðis:

Lán til kommunala verkið í Vági, nú SEV	208.768,11
Bræva lán	160.615,85

Tað stimbrar húsalánsgrunnin, og ger hann lí betur føran fyri at reisa lán, um hesar ognir longu nú verða fluttar honum. Heraftural er so spurningurin um at játta honum enn meira til stovnsfæið, grunnurin hevur søkt um, at landskassin letur til stovnsfæið tilsamans 2 mill. kr., men verður hetta mál at viðgera í sambandi við fíggjarlógaruppskotið 1967/68.

Til umsóknina um landskassaábyrgd er at siga at tað ikki var hildið, at grunninum tørvaði tílíka ábyrgd, men at landið í veitingunum til stovnsfæið legði støðið, soleiðis at lángevarar m. a. í hesum funnu ta trygd, teir kravdu. Grunnurin hevur eisini fingið lán uppá 200.000 kr. við ongum veðhaldi.

Í fyriliggjandi føri er tað av lániteknískum grundum neyðugt at krevja landskassaveðhald, og tá ið lán ikki fæst aðrastaðni til so lagaligar treytir, sum hesar, og lárið er grunninum neyðugt, eigur at verða vikið frá princippinum.

Síðani her, sum sagt, er talan um eitt undantak, er fyriliggjandi uppskot ikki orðað sum eitt broytingaruppskot til lógina hjá grunninum, men sum eitt sjálvstøðugt uppskot.

1. viðgerð 19. og 20. august legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Vísandi til viðmerkingarnar frá landsstýrinum mælir fíggjarnevndin einmælt til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

2. og 3. viðgerð 20. august 1966.

Uppskotið frá landsstýrinum samtykt 22—0.

13. Veðhald av láni til p-f Skipafelagið Föroyar

Ár 1966, 20. august legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Frá Skipafelagnum Føroyar er umsókn dagsett 2. august 1966 komin á ting og var henda umsókn løgd fram á tingi 11-8-66 og víst í fíggjarnevndina.

Umsóknin er soljóðandi:

«Til Føroya Løgting.

Nevnd Skipafelagsins hevur hildið tað neyðugt og beint at umhugsa at fáa bygt nýtt Tjaldur.

Vit hava tilboð frá Skipasmiðju í Italiu: Navalmeccanica, Napoli, uppá at byggja skip, 126 m. langt við plássi til gott 500 ferðafólk í 2-manskømrum, nøkur fá 1-manskømur og 4 størri kømur til 25 fólk í hvørjum. Skipið kann rúma farmagóðs upp til 1000 tons, og ferðin verður 20 míl. Skipið verður tiðarhóskandi bygt til skjóta innskipan og uppskipan.

Byggipeningurin við rentum vervur ca. 45 míll. kr., byggitíð 2 ár.

10% skal Skipafelagið gjalda í 4 ratum í byggitíðini (2 ár). Henda pening kann Skipafelagið sjálvt fáa tit vegar av rakstri felagsins og við bankaláni her.

80% av byggipeninginum veitir skipasmiðjan sum lán og fær 1. veðrætt í skipinum, at gjalda í 10 ár og at renta við 6% p.a. í 8 ár og 8% p.a. tey tvey seinastu árini.

10% veitir banki í Italiu sum lán at gjalda í 2 ár og renta við 8% p.a.

Viðvíkjandi avdráttum til skipasmiðjuna og italska bankan er avtalað, at avdrátturin til skipasmiðjuna tey 2 fyrstu árini er settur so lágt, at lánið frá italska bankanum verður goldið í 2 ár, og at lánið frá skipasmiðjuni verður goldið í 10 ár. Avdrátturin verður hin sami 9% av byggipeninginum hvørt árið. Lánini við rentum verða annuitetslán.

Vit hava sett upp ætlan um útreiðslur og inntøkur hjá nýggja Tjaldrinum, og úrslitið er, at inntøkurnar vilja kunna gjalda rakstrarútreiðslurnar og rentur og avdráttur. Fyri at lætta um fíggjarviðurskifti felagsins verður núverandi Tjaldrið selt, tá nýggja skipið er liðugt bygt, og royndt verður eisini at selja Blik.

Kravt verður ábyrgd fyri lánið frá italska bankanum og fyri 15% av

láninum frá skipasmiðjuni t.v.s. tilsamans 25% av byggipeninginum ella ca. 11 mill. kr. Bankarnir í Føroyum eru vegna bankalógina ikki førir fyri at veita nevndu ábyrgd.

Løgtingið hevur 70.000 kr. partapening í Skipafelagnum og 2 menn í nevnd felagsins.

Tá núverandi Tjaldur skuldi byggjast, samtykti løgtingið at taka ábyrgd fyri láni frá Aalborg værft uppá 3 mill. kr. at gjalda á 10 ár og renta við 6% p.a., sí løgtingstíðindi s. 4 fyri 1950.

Vit loyva okkum at søkja um, at løgtingið heimilar landsstýrið landskassans vegna at veita ábyrgd fyri tær ca. 11 mill. kr. í láni til Skipafelagið Føroyar til bygging av ferðafólka- og flutningsskipi.

Vit eru tilreiðar at geva nærri upplýsingar við samráð, um ynskist.»

Fíggjarnevndin hevur síðan havt samráðingar við umboðsmenn fyri Skipafelagið: nevndarformann Edward Mitens, stjóra Oddur Nielsen og sakførara D. P. Danielsen. Tann frágreiðing, ið teir góvu er síðan skrivliga send nevndini og saman við teknningum yvir nýggjum Tjaldri viðløgd hesum máli.

Dagsett 18. august er komið bræv undirskrivað av Edward Mitens um hetta sama mál og eisini viðlagt hesum máli.

Somuleiðis hevur nevndin fingið rokuskap fyri seinasta ár fyri tey einstøku skipini hjá Skipafelagnum eins og rakstrarrokuskap og status felagsins.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið.

Minnilutin (Hanus við Høgadalsá og Knút Wang) heldur, at hetta mál er av stórum týdningi, men eigur at verða kannað gjølligari enn stundir hava verið til nú. Minnilutin mælir til, at tað tilfar, sum liggur í málinum verður gjølligari kannað av landsstýrinum og ráðgevarum tess, samstundis hvussu eitt tilíkt í málinum umtalað veðhald hóskar inn í tær veðhaldsskyldir landskassin nú hevur og kemur at hava í fyrsta framtíð við teim ætlanum, sum í aðra máta liggja fyri, og setir minnilutin uppskot til samtyktar samsvarandi hesum.

UPPSKOT
til
samtyktar

frá minnilutanum Hanus við Høgadalsá og Knút Wang.

Ávísandi tað av minnilutanum í álitinum framførda verður málið sent landsstýrinum til nærri kanningar.

Minnilutin (Jacob Lindenskov og Poul Jacob Olsen) setir fram soljóðandi

í fyrstu syftu:	UPPSKOT:
løgtingslóg um veðhald av láni til p/f Skipafelagið Føroyar.	lagtingslov om garanti for lån til p/f Skipafelagið Føroyar.
§ 1.	§ 1.
Í samband við bygging av ferðamanna- og farmaskipi til p/f Skipafelagið Føroyar, verður landsstýrinum heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri lánum upp til 11.000.000 kr.	I forbindelse med bygning af et passager- og fragtskib til p/f Skipafelagið Føroyar bemyndiges landsstyret til på landskassens vegna at garantere for lån indtil 11.000.000 kr.
2. stk. Tað er ein treyt fyri veðhaldinum, at landið fær høvi til at tekna upp til 500.000 kr. afturat í partabrøvum í felagnum.	*Stk.* 2. Det er en betingelse for garantien, at landet får adgang til yderligere at tegne indtil 500.000 kr. i aktier i selskabet.
§ 2.	§ 2.
Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.	Denne lov træder i kraft straks.

Í aðru syftu:	
løgtingslóg um veðhald av láni til p/f Skipafelagið Føroyar.	lagtingslov om garanti for lån til p/f Skipafelagið Føroyar.
§ 1.	§ 1.
Í samband við bygging av ferðamanna- og framaskipi til p/f Skipafelagið Føroyar verður landsstýrinum heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri lánum upp til 11.000.000 kr.	I forbindelse med bygning af et passager- og fragtskib til p/f Skipafelagið Føroyar bemyndiges landsstyret til på landskassens vegne at garantere for lån indtil 11.000.000 kr.
§ 2.	§ 2.
Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.	Denne lov træder i kraft straks.

Minnilutin (Andreas Djurhuus) setir fram soljóðandi

UPPSKOT
til

Løgtingslóg um veðhald av láni til p/f Skipafelagið Føroyar.

§ 1.

Í samband við bygging av ferðamanna- og farmaskipi til p/f Skipafelagið Føroyar verður landsstýrinum heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri lánum upp til 11.000.000 kr.

2. *stk.* Tað er ein treyt fyri veðhaldinum, at partapeningur felagsins verður hækkaður í minsta lagi til 1.250.000 kr.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

Lagtingslov om garanti for lån til p/f Skipafelagið Føroyar.

§ 1.

I forbindelse med bygning af et passager- og fragtskib til p/f Skipafelagið Føroyar bemyndiges landsstyret til på landskassens vegne at garantere for lån indtil 11.000.000 kr.

Stk. 2. Det er en betingelse for garantien, at selskabets aktiekapital forhøjes til mindst 1.250.000 kr.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Minnilutin (Kjartan Mohr) setir fram soljóðandi

UPPSKOT

Í fyrsta syftu:

Løgtingslóg um veðhald av láni til p/f Skipafelagið Føroyar.

§ 1.

Í samband við bygging av ferðamanna- og farmaskipi til p/f Skipafelagið Føroyar verður landsstýrinum heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri lánum upp til 11.000.000 kr.

2. *stk.* Tað er ein treyt fyri veðhaldinum, at partapeningur felagsins verður hækkaður við í minsta lagi 700.000 kr., og at landið fær høvi at tekna upp til 500.000 kr. av hesum. Tað er eisini

Lagtingslov om garanti for lån til p/f Skipafelagið Føroyar.

§ 1.

I forbindelse med bygning af et passager- og fragtskib til p/f Skipafelagið Føroyar bemyndiges landsstyret til på landskassens vegne at garantere for lån indtil 11.000.000 kr.

Stk. 2. Det er en betingelse for garantien, at selskabets aktiekapital forhøjes med mindst 700.000 kr., og at landet får adgang til at tegne indtil 500.000 kr. heraf. Det er endvidere en betingelse, at

ein treyt, at landsstýrið setur kommiteraðan at hava eftirlit við felagnum.	landsstyret indsætter en kommiteret til at have tilsyn med selskabet.
§ 2.	§ 2.
Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.	Denne lov træder i kraft straks.

Í aðru syftu styðjar minnilutin (Kjartan Mohr) uppskotið hjá minnilutanum Andreas Djurhuus.

Minnilutin (Samuel Petersen) setir onki uppskot fram.

2. viðgerð 20. august 1966.

§ á uppskotinum frá minnilutanum (Kj. Mohr) fall 8—0.

Alt lógaruppskotið so statt burturdottið.

§ í uppskotinum frá minnilutanum (A. Djurhuus) fall 12—0.

Alt uppskotið so statt burturdottið.

Soljóðandi *broytingaruppskot* frá minnilutanum J. Lindenskov og Poul J. Olsen):

«Aftaná orðið «felagnum» í 2. stk. í § 1 í uppskotinum frá minnilutanum (J. Lindenskov og Poul J. Olsen) í fyrstu syftu verður sett: «og verður landsstýrið heimlað landskassans vegna at tekna hemla pening.» I danska tekstinum: aftaná orðið «selskabet»: og landsstyret bemyndiges til paa landskassens vegne at tegne nævnte aktiekapital.»

Broytingaruppskotið fall 9—0.

§ 1 í sama uppskotinum (í fyrstu syftu) fall 9—0.

Alt uppskotið so statt burturdottið.

§ 1 í uppskotinum frá sama minnilutanum í aðru syftu fall 6—0.

Alt uppskotið so statt burturdottið.

Uppskotið til samtyktar frá minnilutanum (Hanus við Høgadalsá og K. Wang) fall 11—0.

14. Veðhald av láni til p-f Suðuroyar Fiskiídnað

Ár 1966, 20. august legði figgjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

P/f Suðuroyar Fiskiídnaður hevur sent løgtinginum soljóðandi skriv dagfest 12. august 1966:

«P/f Suðuroyar Fiskiídnaður, Tvøroyri, søkti 27. mars 1965 um landskassaábyrgd fyri 90% av kr. 1.050.000, sum var kostnaðarætlanin yvir fiskamjølsvirkið.

Landsstýrið játtaði landskassaábyrgd fyri 80% av kostnaðarætlanini.

Tað vísir seg nú, at kostnaðarætlanin hevur verið í minna lagi, og hevur virkið veruliga kostað kr. 1.382.700,96, sum tað framgongur av hjálagda status pr. 31. december 1965.

Útreiðslurnar verða specificeraðar soleiðis:

Bygningar	485.015,87
maskinur	854.969,14
transportmateriel	42.715,95
	1382.700,96

Vit loyva okkum tí hervið at søkja um landskassaábyrgd fyri 80% av meirkostnaðinum, ið er kr. 332.700,96. Uppískoytislánið viðvíkjandi hesum kr. 332.700,96 ætlast ikið soleiðis, at tað verður afturgoldið yvir 15 ár, og verður søkt um veðhald fyri sama tíðarskeið.»

Skrivið varð vist í figgjarnevndina.

Spurningurin um veðhald av láni til hetta felag hevur verið til viðgerðar í løgtinginum fyrr, jbr. løgtingsmál nr. 91/1964, Løgtingstíðindi 1964 bls. 258. Samtykt varð tá, at veðhalda av einum láni, sum var hægst 80% av 1.050.000 kr., jbr. eisini løgtingslóg nr. 31 frá 20. mai 1965.

Nevndin hevur býtt sig í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Andreas Djurhuus, Jacob Lindenskov, Kjartan Mohr, Poul Jacob Olsen og Samuel Petersen) mælir til at ganga umsókninni á møti og setir tí fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um veðhald av láni til p/f Suðuroyar Fiskiídnaður.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri einum uppískoytisláni til p/f Suðuroyar Fiskiídnaður, sum er hægst 80% av kr. 333.000,00.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagingslov om garanti for lån til p/f Suðuroyar Fiskiídnaður.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for et tillægslån til p/f Suðuroyar Fiskiídnaður, der højst andrager 80% af kr. 333.000,00.

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

Minnilutin (Hanus við Høgadalsá og Knút Wang) heldur, at málinum tørvar ymsar upplýsingar, áðrenn støða kann verða tikin og setur tí fram soljóðandi

UPPSKOT
til samtyktar

Málið verður vístur til landsstýrið til kanningar.

2. og 3. viðgerð 20. august 1966.

§ 1 í lógaruppskotinum frá nevndarmeiralutanum fall 13—0.

Alt uppskotið so statt burturdottið.

Uppskotið til samtyktar frá minnilutanum (Hanus við Høgadalsá og K. Wang) samtykt 15—0.

Vetrartingið 1966-67

Ár 1966, hósdagin 8. december kl. 17 var løgtingið sett.

Elsti tingmaður Johan M. Fr. Poulsen á Strondum tók við fundarstýrinum eftir § 1 í tingskipanini.

Hann gjørdi kunnugt, at løgmaður í skrivi frá 28. november eftir løgtingslóg nr. 1 frá 13. mai 1948 um stýrisskipan í sermálum hevði boðsent tingmonnum til vetrartings.

Aldurformaðurin hað K. Wang og Poul J. Olsen vera fyrihilsskrivarar.

Valbrøvini vóru so kannað eftir § 1 í tingskipanini og hesir góðkendir sum tingmenn:

Hákun Djurhuus, Klaksvík, ff.
Poul J. Olsen, Klaksvík, jv.
Johan M. Fr. Poulsen, Strendur, sb.
Frederik Hansen, Søldarfjørður, tf.
Jacob Fr. Øregaard, Gøta, jv.
Poul Petersen, Tórshavn, ff.
Tummas Joensen, Kollafirði, sb.
Sugurð Joensen, Tórshavn, tf.
Leon Joensen, Sørvági, sb.
Vilhelm Nielsen, Sandavági, ff.
Trygve Samuelsen, Tórshavn, sb.
Hannis við Høgadalsá, Tórshavn, jf.
Martin Joensen, Tórshavn, jv.
Knút Wang, Tórshavn, ff.
Demmus Henfze, Tórshavn, ff.
Johan P. Davidsen, Sandi, jv.
Johan H. Danbjørg, Porkeri, jv.
Peter Mohr Dam, Tvøroyri, jv.
Kristian Djurhuus, Tvøroyri, sb.
Joen Paulí Thomasen, Vági, jv.

Sum eykamenn:

Finbogi Isaksen, Tórshavn, tf.
Peter F. Christiansen, Tórshavn, sb.
Peter C. Christiansen, Tórshavn, ff.
Karsten Hoydal, Tórshavn, tf.
Kjartan Mohr, Tórshavn, fb.
Hilmar Johansen, Tórshavn, sj.

Aldursformaðurin gjørdi kunnugt, at javnaðarflokkurin hevur 7 tingmenn, sambandsflokkurin 6, Jólkaflokkurin 6, tjóðveldisflokkurin 5, framburðsflokkurin 1 og sjálvstýrisflokkurin 1.

So fór fram val av tingfyrisati.

Eftir uppskoti frá P. M. Dam var Jacob Fr. Øregaard valdur sum tingformaður.

Sum varaformaður var Knút Wang valdur eftir lutakast við Johan Poulsen.

Tingformaðurin tók so við formansskapinum.

Sum skrivarar vóru valdir Martin Joensen og Vilhelm Nielsen eftir lutakast við Leon Joensen. —

Sama dag var Reinhold Silá góðtikin sum varamaður fyri fyrst fyri J. H. Danbjørg sum var burturstaddur fyri sjúku.

Formaðurin bað lingmenn ropa eitt niggju falt hurra fyri kongi og eitt 3 falt fyri Føroyum.

Sum varamenn vóru valdir

21. februar 1967: Andreas Djurhuus fyri Kristian Djurhuus og Reinhold Sólá fyri P. M. Dam.
13. mars 1967: Peter Eli Mikkelsen, Toftir fyri J. F. Øregaard.
13. apríl 1967: Hans Thomsen í Tórshavn fyri Karsten Hoydal.

21. februar 1967 segði tingformaðurin frá:

1) at sambandsflokkurin, javnaðarflokkurin og sjálvstýrisflokkurin vóru gingnir í valbólk til val av nevndum (smbr. eisini 25/4-1967).
2) at fólkaflokkurin og framburðsflokkurin vóru gingnir saman í valbólk til val av mannum og nevndum.

Val av lögmanni og landsstýrismonnum

Ár 1967, hósdagin 12. januar stóð val av løgmanni.
Valið fór fram skrivliga.
Petur Mohr Dam fekk 14 atkvøður,
Hákun Djurhuus fekk 7 atkvøður.
So statt var Petur Mohr Dam valdur løgmaður.
Sama dag stóð val av landsstýrismonnum.
Eftir uppskoti frá løgmanni vóru Kristian Djurhuus og Samuel Petersen valdir við 14 atkvøðum.

Fastar nevndir og aðrar

FIGGJARNEVNDIN: J. F. Øregaard, Hilmar Johansen, Knút Wang, Hákun Djurhuus, Andreas Djurhuus, Johan Poulsen og Hanus við Høgadalsá.

Tiltaksmenn: Poul J. Olsen, Martin Joensen, Vilhelm Nielsen, Kjartan Mohr, Trygve Samuelsen, Peter F. Christiansen og Finbogi Isaksen.

UMSÓKNANEVNDIN: Joen Pauli Thomasen, Leon Joensen og Vilhelm Nielsen.

LANDSSTÝRISMÁLANEVNDIN: J. Fr. Øregaard, Peter F. Christiansen og Peter C. Christiansen.

FISKIVINNUNEVNDIN: Poul J. Olsen, Reinhold Silá, Leon Joensen, Demmus Hentze og Karsten Hoydal.

HAVNA- OG VEGANEVNDIN: Poul J. Olsen, Reinhold Silá, Frederik Hansen, Johan Poulsen, Kjartan Mohr, Poul Petersen og Hilmar Johansen.

EFTA-NEVNDIN: J. F. Øregaard, Martin Joensen, Trygvi Samuelsen, Andreas Djurhuus, Hákun Djurhuus, Poul Petersen og Hanus við Høgadalsá.

LÓGARNEVNDIN: Poul J. Olsen, Martin Joensen, Demmus Hentze, Trygvi Samuelsen og Sigurð Joensen.

SKÚLANEVNDIN: Joen Pauli Thomasen, J. Fr. Øregaard, Finbogi Isaksen, Peter F. Christiansen og Peter C. Christiansen.

SOCIALNEVNDIN: Reinhold Silá, J. H. Danbjørg, Knút Waug, Tummas Joensen og Finbogi Isaksen.

KIRKJUNEVNDIN: J. F. Øregaard, Poul J. Olsen, Tummas Joensen, Hanus við Høgadalsá og Kjartan Mohr.

KOMMUNALNEVNDIN: Tummas Joensen, Peter F. Christiansen, Frederik Hansen, Poul J. Olsen og Reinhold Silá.

LANDBÚNAÐNEVNDIN: Poul Petersen, Trygve Samuelsen, Vilhelm Nielsen, Tummas Joensen, J. F. Øregaard, J. P. Thomasen og Sigurð Joensen.

SKATTANEVNDIN: Poul J. Olsen, Hilmar Johansen, Peter F. Christiansen, Demmus Hentze og Frederik Hansen.

I. Sáttmálaloysi í fiskivinnuni

Ár 1957, 5. januar legði tingformaðurin fram soljóðandi skriv d. 4. s. m.:

Føroya Reiðarafelag loyvir sær við hesum at venda sær til háttvirda Løgting vegna tess, at vit í løtuni eru uttan sáttmála við Føroya Skipara- og Navigatørfelag, hóast vit hava roynt at gera tað, ið vit eru førir fyri, fyri at fáa sáttmálar.

Vit vilja við hesum fyrst geva eina frágreiðing, hvat fram er farið millum bæði feløgini hesum spurningi viðvíkjandi.

Í 1962 varð Føroya Reiðarafelag longu varin við at yvirmannahýrurnar á einstøkum skipum til árvísar veiðir vóru sera høgar mett við inntøkuna hjá fiskimanninum á sama skipi, og tá Føroya Reiðarafelag longu tá, næstan á hvørjum ári, fekk lønarkrav um hýruhækking frá Føroya Fiskimannafelag segði Føroya Reiðarafelag sáttmálarnar við Skipara- og Navigatørfelagið upp fyri at bøta um henda ójavna.

Tað hava síðani tá verið onkur orienterandi fundur við Skiparafelagið uttan úrslit.

Í mei mánaða ár vendi Skiparafelagið sær til Reiðarafelagið um at fáa niðursiglingarhýru teirra hækkaða. Tann 13. mei svaraði Reiðarafelagið, at vit vóru fúsir at samráðast um niðursiglingarhýruna, men samstundis sum yvirmannahýrurnar yvirhøvur; men fingu einki svar.

Tann 23. september 1966 skrivaði Reiðarafelagið til Skiparafelagið — avrit 1 — men fingu einki svar.

Orsøkin til at omanfyrinevnda brev av 23. sept. til Skiparafelagið varð sent er tann, at vit tó høvdu frætt, at Føroya Fiskimannafelag fór at siga upp sáttmálarnar við Føroya Reiðarafelag. Í brævinum verður skrivað til Skiparafelagið: »Tað, ið skiparar og stýrimenn vilja slaka, verður alt sum tað er býtt millum dekksmanningina á avvarandi skipum.«

Hetta uppskot okkara um at manningin fekk fað ið yvirmenninir vildu slaka, hvildi á tí sjónarmiði, at um man fekk nakað harfrá vildi að verða tað lættari at samráðast við Føroya Fiskimannafelag.

So kom uppsøgnin frá Føroya Fiskimannafelag, uttan at vit høvdu frætt nakað frá Skiparafelagnum.

Tær broytingar, sum sáttmálin við Føroya Fiskimannafelag fekk, eru tingmenn vitandi um.

Viðmerkjast skal at tá vit góðtóku semingsuppskotið til sáttmála millum Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag vóru vit enn av tí hugsan at vit fóru hóast alt at fáa ein sáttmála við Skiparafelagið, sum gekk okkum á møti, so mikið meira sum vit, áðrenn vit undirskrivaðu

sáttmálan við Føroya Fiskimannafelag søgdu Skiparafelagnum frá, at vit nú fóru at skriva undir uppá tað, at vit roknaðu við, at teir góðtóku okkara uppskot. Samstundis varð eisini sagt við Føroya Fiskimannafelag, at vit fóru at royna at fáa skiparnar niður, soleiðis at hesin niðurskurður skuldi hjálpa at betala lønarhækking teirra.

Afaná vil vóru lidnir við Føroya Fiskimannafelag varð biðið um samráðing við Skiparafelagið.

Hesar samráðingar byrjaðu fríggjadagin 16. desbr. 1966, men longu leygardagin 17. desbr. sást, at tað ikki var gjørligt at koma til nakað úrslit.

Partarnir samdust so um at boðsenda semingsmannínum sum sama kvøldið helt fund við pørtunum.

Eftir at semingsmaðurin í nakrar dagar hevði samráðst við partaranr uttan úrslit, setti hann so fram semingsuppskot tann 22. desbr. Hetta semingsuppskot hleiv góðtikið av tingingarnevndini hjá Føroya Reiðarafelag, men havnað av tingingarnevndini hjá Skiparafelagnum. Semingsmaðurin sendi síðan uppskotið til uratkvøðu. Hetta fall við 8 atkvøðum.

Støðan er so tann, at vit nú liggja í sáttmálaloysi og at Skiparafelagið hevur tikið ta støðu ikki at loyva nøkrum limi at mynstra fyrr enn sáttmálarnir, ið uppsagdir vóru í 1962, av nýggjum verða góðtiknir av Føroya Reiðarafelag, og tað eru vit ikki sinnaðir at gera.

Broytingarnar í semingsuppskotinum viðvíkja bert teir hægstløntu yvirmenninir innan føroysku fiskivinnuni, soleiðis:

Trolarar - skiparin, ið hevur fingið 6 %, svarar nakað til 6 mannspartar, niður í 5 %. 1. bestimaður frá 3 % niður í 2 ½ %. 2. bestimaður frá 2 ⅓ % niður í 2 ¼ %.

Línuskip yvir 160 BRT á snelluveiðu skiparin frá 10% niður í 8 %. Bestimenn — eingin broyting. Ein skippari á snelluveiðu vil við 10 % fáa frá kr. 40—50.000, — í umleið 3 mánaðar.

Línuskip á ísfiskaveiðu -- bonus hjá skiparanum sett frá 3 % til 2 %, meðan hansara niðursiglingarhýra er hækkað frá kr. 32,- - til kr. 70,- - pr. dag og bestimenninir hækkaðir frá kr. 24, - til kr. 70, pr. dag. Hesar hýrur verða nú prístalsviðgjørdar. Henda lønarhækking fyri niðursigling svarar nakað til tað eina %, sum skiparin í bonus er skorin niður við

Til stuðul fyriskriv okkara senda vit fylgjandi avrit:

avrit 1. Bræv av 23/9-66 til Føroya Skipara- og Navigatørfelag.
avrit 2. Hýrur fyri trolarar.
avrit 3. Hýrur fyri línuskip.

avrit 4. Hýrur fyri snellu- og (linuskip).
avrit 5. Hýrur við kraftblokki.
avrit 6. Sáttmáli millum reiðari og Føroya Fiskimannafelag fyri »Kap Farvel«. Góðtikið av Føroya Skipara- og Navigatørfelag.

avrit 7. Fyribilsavrokning fyri ein fullan túr hjá »Kap Farvel«.

Vísast skal á, at sambart tann sáttmála og avrokning avrit 6 og 7 fær:

Vil skiparin fyri 3 túrar fáa umr.	90.000,	
1. bestimaður fyri 3 túrar fáa umleið	55.000,—	
2. bestimaður fyri 3 túrar fáa umleið	42.000,	187.000,—
Til sammetingar fekk á »Magnus Heinason« fyri 3 túrar í 1965:		
skiparin	170.000,—	
1. bestimaður	85.000,—	
2. bestimaður	66.000,—	321.000,—
	Munur	134.000

avrit 8. Semingsuppskotið.

Føroya Reiðarafelag loyvir sær við hesum at heita á háttvirda løgting um at gera semingsuppskotið til lóg, so skipini fánst út at veiða.

1. viðgerð 5. januar og sama dag legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Føroya Reiðarafelag hevur í skrivi dagssett 4. januar 1967 biðið tingið um at samtykkja, at uppskotið, sum semingsmaðurin í traktini millum Føroya Reiðarafelag og Føroya Skipara- og Navigatørfelag setti fram, verður gjørt til lóg.

Hetta uppskot hevur verið til uratkvøðu millum limirnar í Føroya Reiðarafelag og limirnar í Føroya Skipara- og Navigatørfelag. Meðan uppskotið var samtykt av limum í Reiðarafelagnum, var tað forkasta av limunum í Føroya Skipara- og Navigatørfelag.

Málið kom til fyrstu viðgerð á tingi 5. januar og var beint í fíggjarnevndina. Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur havt fund við umboðsmenn fyri Reiðarafelagið, Aksel Hansen, formann og Thorstein Vilhelm. Frá Reiðarafelagnum hevur nevndin fingið øll skjøl málinum viðvíkjandi, hon hevur biðið um, bæði teir gomlu sáttmálarnar og uppskot til broytingar. Frá semingsmannunum hevur nevndin fingið uppskotið,

sum sent var til atkvøðugreiðslu millum limirnar av báðum feløgunum.

Nevndin hevur eisini havt fund við limir í stýrinum fyri Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Thomas Thomassen, formann og Johan Simonsen, sum løgdu fram samtyktina, sum gjørd var á aðalfundi í felagnum og er soljóðandi:

«Um Føroya Reiðarafelag ikki vil endurnýggja allar teir gomlu sáttmálarnar, er tað ikki loyvt limum í Føroya- Skipara- og Navigatørfelag at mynstra sum skiparar og bestimenn (stýrimenn). Nevndin fær tó heimild til at taka upp samráðingar við Føroya Reiðarafelag, um hetta ynskir tað.»

Spurdir um Skipara- og Navigatørfelagið hevði lýst verkfall á fiskiskipaflotanum, svaraðu teir nei. Spurdir um ikki samtyktin skuldi skiljast so, at eingin limur í teirra felag mátti mynstra sum skipari ella bestimaður, hvønki við trolarum, línuskipum ella kraftblokkaskipum á sildaveiðu, svaraðu teir, at kraftblokkaskip og línuskip til ísfiskaveiðu sigldu fritt. Hetta høvdu teir skiparar, sum høvdu spurt seg fyri hjá felagnum fingið at vita.

Fíggjarnevndin, sum hevur viðgjørt málið, heldur, at sum støðan er í løtuni, har øll skip kunnu sigla fritt utan trolarar, og at nevndin í Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevur fingið upp í hendi at samráðast viðari, ikki kann leggja uppskot fyri tingið.

---

2. Val av eftirlitsmanni í Föroya Lívstrygging

1967, 5. januar stóð val av eftirlitsmanni í Føroya Lívstrygging.

Eftir uppskoti frá P. M. Dam var Joen Pauli Thomasen, løgtingsmaður, úr Vági valdur.

---

3. Løgtingið verður upployst

Ár 1967, 7. januar, legði tingformaðurin fram soljóðandi

UPPSKOT
til samtyktar

Tá ið tað, sum politiska støðan er á løglingi, ikki eru møguleikar at skipa landsstýri, verður løgtingið uppløyst frá týsdegi tann 21. februar 1967.

1. viðgerð 7. og 9. januar legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Síðan tingið kom saman aftaná valið, hava verið samráðingar flokkana millum um skipan av landsstýri. Men árið endaði uttan nakað úrslit. Aftaná nýggjár hlivu hesar samráðingar tiknar uppaftur, men tá heldur einki úrslit fyrilá tann 5. januar kallaði tingformaðurin flokksformennirnar saman til fundar. Á hesum fundi var upplýst, at allar samráðingarroyndir vóru endaðar úrslitaleysar og mælti formaðurin tí til, at tingið varð upploystur, so nýval kundi verða útskrivað. At eitt slíkt uppskot var lagt fyri tingið, vóru allir á einum máli um

Málið er lagt fram av tingformanninum og kom til 1. viðgerð 7. januar. har tað var beint til viðgerðar í fíggjarnevndini.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og mælir meirilutin til (J. Fr. Øregaard, P. M. Dam, Kr. Djurhuus og Hilmar Johansen) tinginum til at samtykkja uppskotið.

Ein minniluti (Sigurd Joensen) setti fram fylgjandi

UPPSKOT

Tá ið tað sum politiska støðan er á løgtingi ikki eru møguleikar at skipa landsstýri á vanligan hátt fyri fýra ár, og av tí, at løgtingið ikki heldur tað bera til at hava val í næstum, samtykkir tingið at skipa eitt fyribils landsstýri, soleiðis at tingið verður upploystur frá 12. december 1967, eftir at nýval er útskrivað til henda dag.

Ein annar minniluti (Hákun Djurhuus) setur einki uppskot fram.

BROYTINGARUPPSKOT

Formaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá Kjartan Mohr d. 11. s. m.:

I staðin fyri uppskotið frá minnilutanum (Sigurð Joensen) í álitinum frá fíggjarnevndini dagfest 9. januar 1967 verður sett:

Tá ið tað sum politiska støðan er á løgtingi ikki eru møguleikar at skipa landsstýri á vanligan hátt fyri fýra ár og av tí, at løgtingið ikki heldur bera til at hava val í næstum, samtykkir tingið at skipa eitt fyribils landsstýri við Hákun Djurhuus sum løgmann og áleggur honum at seta uppskot til løgtingið um val av trimum landsstýrismonnum, ein frá hvørjum av hesum tingflokkum: javnaðarflokkurin, sambandsflokkurin og tjóðveldisflokkurin og samtykkir løgtingið eisini, at løgtingið verður upploystur frá 12. december 1967, eftir at nýval er útskrivað til henda dag.

4. Landingarprísir á sild

1967, 27. februar legði Kr. Djurhuus, varaløgmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um landingarpris á sild.	lagtingslov om landingspris på sild.
§ 1.	§ 1.
Landsstýrinum verður heimilað við kunngerð at fyriskipa, at prísurin á sild landað í Føroyum verður settur av nevndini eftir § 3 í løgtingslóg nr. 72 frá 22. december 1951 um avrokning og lønjavningargrunn fiskimanna. Ásetti prísurin er ein minstiprísur.	Landsstyret bemyndiges til ved bekendtgørelse at foreskrive, at prisen på sild ifandbragt på Færøerne fastsættes af nævnet, der er nedsat i henhold til § 3 i lagtingslov nr. 72 af 22. december 1951 om fiskernes afregning og lønregulerings fond. Den fastsatte pris er en mindstepris.
2. *stk.* Samsýning og aðrar útreiðslur,ið standast av prísásetingini, verða goldnar úr landskassanum.	*Stk.* 2. Vederlag og andre udgifter i forbindelse med prisfastsættelsen afholdes af landskassen.
§ 2.	§ 2.
Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.	Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Føroya Fiskimannafelag hevur vent sær til landsstýrið viðvíkjandi prísinum á sild landað í Føroyum.

Í skrivinum greiðir Føroya Fiskimannafelag frá, at hetta felag og Føroya Reiðarafelag hava sett fylgjandi í sáttmálan leirra millum: «Fyri sild, veidd við kraftblokki, verður avroknað eftir avreiðingarprísi, men koma menn til ósættis um henda pris, verður hann ásettur av prísásetingarnevndini, sbr. lógarkunngerð nr. 16 frá 25. juni 1951».

Fiskimannafelagið sigur, at meðan prísurin á sild til bræðingar er hin sami um alt landið, er ójavnt sum kraftblokkaskipini verða avroknað, tá tey avreiða matsild, t. e. sild, ið verður virkað til saltsild, kryddsild og flak ella agnsild.

Felagið hevur heitt á saltfiskaprísnevndina um at sela prísin, men hevur nevndin svarað, at hon hevur ikki skyldu at taka sær av málinum, síðani hon eftir lógini hert hevur fulltrú at viðgera saltfiskaprísin.

Eftir § 3 í løgtingslóg nr 72 frá 22. december 1951 er tað soleiðis, at tá ið menn koma til ósættis í avrokningini um prísin á saltfiski, verður hann settur av eini nevnd, sum hevur 5 limir, Føroya Skipara- og Navigalørfelag, Føroya Maskinistfelag og Føroya Motorpassarafelag velja í felag ein, Føroya Fiskimannafelag velur ein, Føroya Reiðarafelag velur tveir limir, og hesir 4 limirnir velja hin fimta, sum skal vera utlanveltaður; kunnu teir ikki semjast um valið, velur soriuskrivarin limin. Nøkunlunda tilsvarandi skipan varð gjørd við løgtingslóg nr. 16 frá 9. apríl 1964 viðvíkjandi prísum á ráfiski landaður í Føroyum, her verður prísurin eisini settur av eini 5-mannanevnd, har ráfisknkeypararnir velja tveir og ráfiskaseljararnir tveir limir, hesir fýra velja í felag fimta limin við høvi at leggja málið fyri soriuskrivarin. Tað er tann grundamunur á prísinum, sum hesar tvær nevndirnar seta, at hin fyrra letur ein prís, sum er bindandi partanna millum, tá ið teir eru ósamdir, meðan hin seinna setur ein minstapris.

Tað er óivað rætt, at saltprísanevndin hevur ikki skyldu at taka sær av hesum máli og helst heldur ikki rætt til tað, síðani viðgerðin førir útreiðslur við sær fyri landskassan.

Síðani tað er hugsandi, at tað ikki eru góðar grundir fyri at seta landingarpris á allari sild ella fyri allar veiðubættir er uppskotið, at landsstýrið fær heimild við kunngerð at áleggja nevndini prísásetingina og her verður tað helst so, at tað í fyrsta umfari í lvussu er bert verður ávís veiða, sum kemur undir skipanina.

Eftir uppskotinum verður hin ásetti prísurin ein minstaprísur, sum ikki má seljast ella keypast undir og ikki ein prísur, partarnir vikja frá, um teir eru sæmdir, sum tá talan er um saltfiskaprísin.

1. viðgerð 24. februar og 15. mars legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Nevndin hevur havt fund um málið og er samd um at mæla lingimum til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

2. viðgerð 17. og 3. viðgerð 29. mars 1967.

Lógaruppskotið samtykt 20-0.

5. Veðhald av útgerðarlánum til útróður í Grönlandi

Ár 1967, 17. februar legði varalogmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um ábyrgd fyri útgerðarlánum til útróðurs til lands í Vestur- og Eystur-Grønlandi.

§ 1.

Landsstýrinum er heimilt landskassans vegna at taka ábyrgd fyri útgerðarlánum, ið bátsskipanir, sum reka útróður til lands í Vestur- og Eystur-Grønlandi árið 1967 taka, og sum hvør bátsskipan sínámillum og hvør einstakur av bátsskipanini heftir fyri in solidum.

§ 2.

Henda lóg kemur beinan vegin í gildi.

lagtingslov om garanti for udrustningslån til bådfiskeri til lands i Vest- og Øst-Grønland.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for udrustningslån, som bådelag, der driver bådfiskeri til lands i Vest- og Øst-Grønland i året 1967 optager, og som hvert bådelag indbyrdes og hver enkel af bådelaget hæfter for in solidum.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Henda heimildin hevur verið givin landsstýrinum í mong ár, og hon tørvar framvegis, og so staðt loyvir landsstýrið sær at leggja inn uppskot at endurnýggja lógina fyri eitt ár (sambr. løgtingslóg nr. 6 frá 22/2-1966).

1. viðgerð 24. februar og 3. mars legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Nevndin hevur havt fund um málið og er samd um at mæla løgtinguntil at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

2. viðgerð 7. og 3. viðgerð 15. mars 1967.

Lógaruppskotið samtykt 24 0.

6. Veðhald av lánum til keyp av agni

Ár 1967, 17. februar legði varalogmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um ábyrgd av láni til keyp av agni.

§ 1.

Landsstýrinum er heimilt í fíggjarárinum 1967/68 — 1971/72 landskassans vegna at taka ábyrgd av lánum til keyp av agni uppá 750.000 kr. tilsamans hvørt fíggjarárið.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. apríl 1967.

lagtingslov om garanti for lån til køb af agn.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne i finansårene 1967/68 — 1971/72 at garantere for lån til køb af agn op til 750.000 kr. tilsammen for hvert finansår.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. april 1967.

Viðmerkingar:

Henda heimildin hjá landsstýrinum hevur verið givin í nøkur ár og landskassin hevur bert á einum føri komið undir at lagt úl, men tó ongki tapið havt av hesum veðhaldunum.

Krøvini hava vaksið tey seinnu árini og seinastu fíggjarárini hevur landsstýrið havt heimild upp í kr. 500.000,-- (sml. lagtingslóg nr. 9 frá 22/2-1964).

Í hesum fíggjarárinum rakk heimildin ikki til og so statt leyvir landsstýrið at leggja inn uppskot at endurnýggja heimildina fyri 5 ár og seta markið upp í kr. 750.000,- .

1. viðgerð 28. februar, 2. viðgerð 14. og 3. viðgerð 17. mars 1967.

Lógaruppskotið samtykt 24--0.

7. Fíggjarlögtingslóg 1967-68

Ár 1967, 17. februar legði varalogmaður fram soljóðandi

UPPSKOT

til

Fíggjarløgtingslóg fyri fíggjarárið frá 1. apríl 1967 til 31. marts 1968
Finanslagtingslov for finansåret fra 1. april 1967 til 31. marts 1968

jbr. løgtingsmál nr. 1/1966, verður endurnýggjað við hesum broytingum og uppískoytum:

1) *ad § 10.2.4.* (nýggj konto):
Grunnurin til bygging av løgtingshúsi 500.000,-
Fonden til opførelse af lagtingshus

2) *ad § 10.6* (nýggj konto):
Norrøna Ráðið ..... 50.000,—
Nordisk Råd

3) *ad § 11.3:*
Fiskivinnustova:
Fiskerikontor:

1. Tænastumenn ..... Tjenestemænd	36.800,-	
2. Skrivstovufólk ..... Kontorpersonale	43.700,-	
5. Skrivstovuhald ..... Kontorhold	3.500,-	
6. Porto, telefon, lýsingar v.m. ..... Porto, telefon, annoncer m.v.	11.000,-	
7. Aðrar útreiðslur ..... Andre udgifter	4.500,-	99.500,

4) *ad § 11.4:*
Uttanríkistænasta:
Udenrigstjeneste:

1. Tænastumenn ..... Tjenestemænd		71.100,
2. Skrivstovufólk ..... Kontorpersonale		61.600, –
4. Útreiðslur av egnum og øðrum høltum Ejendoms- og andre lokaleudgifter		19.000,---
5. Skrivstovuhald ..... Kontorhold		5.000,--
6. Porto, telefon, lýsingar v.m. ..... Porto, telefon, annoncer m.v.		80.000,---
7. Aðrar útreiðslur ..... Andre udgifter		4.000,--
8. Ferða- og dagpeningur ..... Rejse- og dagpenge	30.000,--..	
9. Útiviðbót ..... Udstationeringstillæg	52.800,--	
10. ÷ Leiguimtøkur	1.626,—	
÷ Lejeindtægter	———————	322.274,--

5) *ad § 14.8.18:*
Skúlastjórnini at rúða yvir (viðm.) ..... 28.000, -
Til disposition for skolefonden (anm.)

6) *ad § 15.1.* Landsbókasavnið:
4. Ognarútreiðslur 45.000,
Ejendomsudgifter

7) *ad § 15.5.* Fiskirannróknarstovan:
5. Húsaútreiðslur ..... 45.000, -
Lokaludgifter

8) *ad § 15.8.4.* Fróðskaparsetur Føroya:

4. Húsaútreiðslur 50.000,-
Lokaleudgifter

9) *ad § 15.9.10.* Føroya skúlabókagrunnur:

1. Rentustuðningur v.m. til Føroya skúlabókagrunn 80.000,-
Rentetilskud m.v. til Føroya skúlabókagrunn

10) *ad § 15.8.11:*

5. Víkingafundur 8.000,-
Vikingøkongres

11) *ad § 15.10* (nýggj konto):

Fiskiðnaðarstovan

Fiskeriets forsøgslaboratorium

1. Tænastumenn 42.700,--
Tjenestemænd

5. Húsaútreiðslur 40.000,--
Lokaleudgifter

6. Royndir og tól 7.000,
Forsøg og instrumenter

7. Aðrar útreiðslur 2.000,--
Andre udgifter 91.700,

12) *ad § 18.7:*

Føroya Ferðamannafelag 64.000,-
Færøernes Turistforening

13) *ad § 19.10.6* (nýggj konto):

Húsalánsgrunnurin 500.000,
Húsalánsgrunnurin

14) *ad § 26:*

Ymsar ognarútreiðslur 65.000,-
Diverse ejendomsudgifter

15) *ad § 27:*

Yvirtøka av sermálum 1.300.000,--
Overtagelse af særanliggender

gongur út
udgår

K. Djurhuus
landsstýrismaður

/ J. Djurhuus

Lýsing av teim ymsu broytingunum og upplýsingunum í løgtingsmáli nr. 7/1966 (vetrarling): Figgjarløgtingslóg 1967/68.

ad 1. Í grunninum vóru pr. 1. apríl 1966 502.490,17 kr. Tá ið talan er um at byggja løgtingshús, helst úti í Tinganesi, og lánimarknaðurin er strammur, er neyðugt at leggja meira í grunnin.

ad 2. Eftir løgtingsmáli nr. 20/1965 er samtykt at heita á ríkisstýrið um at Føroya Løgting og Føroya landsstýri fáa umhoðan í Norrøna ráðnum. Ferðaútreiðslur til sessiónir og nevndarfundir, skrivstovuútreiðslur og part í felagsútreiðslum til ráðstíðindi, prentlutir v.m. í mun til leir valdu limirnar verður heimastýrið at gjalda. Møguliga verður tað so, at løglingið velur tveir og landsstýrið tilnevnir ein lim. Talið 50.000 kr. er leysliga ætlað.

ad 3. Til vár verður fiskiídnaðarstovan flutt út á Debesur trød. Fiskivinnustovan og fiskiídnaðarstovan kunnu tá ikki sum nú hava felags røkuskap, hin seinri fær so konto undir § 15: Vísind, bókmentir og list eins og fiskirannsóknarstovan.

ad 4. Eins og landsstýrið hevur havt sendifulltrúa í Bretlandi so at siga síðani, heimastýrið var skipað, hevur landsstýrið samtykt at søkja sær heimild at seta sendifulltrúa serliga at hava marknaðin í miðalhavslondunum í hondum. Hesin marknaður hevur árini 1963, 1964 og 1965 tikið áivkavist 38, 39 og 39% av samlaða útflutninginum. Ætlanin er, at sendifulltrúin skal hava seti í Roma. Hugsað er um, at hann eisini skal røkja hin brasilska marknaðin, har útflutningurin nevndi trý ár hevur verið ávikavist 18, 13 og 9% av tí samlaða.

ad 5. Av tí peningi skúlastjórnin hevur at ráða yvir, 10.000 kr. um árið, eru ikki nýttar:

Í 1963/64	3.000,—
Í 1964/65	8.000,—
Í 1965/66	7.000,—
	18.000,—

Skúlastjórnin søkir nú um, at tær 18.000 kr. verða endurjáttaðar í 1967/68 til prentan av ymsum talvum at nýta í skúlunum til undirvísingina.

ad. 6. Í samband við at vísindaliga deildin á landsbókasavninum er flutt í leigað høli verður søkt um hesa eykajáttan:

Húsaleiga, hiti, ljós og reingerð	10.000,
Keyp av hillum	10.000,—
	20.000,—

ad 7, og 11 undirkonto 5.

Til várs er húsið hjá Fróðskaparsetri Føroya liðugt. Hin vestara lonin er ætlað fróðskaparsetrinum sjálvum, meðan hin eystara verður býtt millum fiskiídnaðarstovuna og fiskirannsóknarstovuna.

At tryggja afturrindingina av byggilánum skulu tær tvær stovurnar rinda leigu og herafturat verður latin fróðskaparsetrinum árligur byggistudningur. Leiga og byggistudningur saman við árligari veiting frá donori er roknað soleiðis, at so hvørt rentan av lánum minkar, verður avlop lagt í byggigrunn setursins.

Leigan er býtt við 16.000 kr. til hvørja stovuna, árligi byggistudningurin er 10.000 kr. Tølini eru grundaði uppá ta kostnaðarætlan, sum gjørd var undir byggingini. Tá ið byggiroknskapurin er uppgjørdur verða tey at javna samsvarandi byggikostnaðin.

Tá ið flutt verður inn verða ymsar búnyttur at útvega og eru tær mettar at kosta:

Fiskirannsóknarstovan	25.000,
Fróðskaparsetrið	35.000,
Fiskiídnaðarstovan	20.000,

ad 9. Eftir løgtingslóg nr. 36 frá 13. mai 1959 var landsstýrinum heimilað at veðhalda fyri lánum til Føroya skúlabókagrunn til útgávu av skúlabókum. Lánini skuldu afturrindast av bókasølumi, tó er rentusfuðningur latin yvir fíggjarlógina.

Fíggjarstøða grunnsins er pr. 31. marts 1966 henda:

O G N			
Goymsla av bókum		196.526,11	
Hjá bókahandlara		21.840,37	
Á sparikassabók		1.033,00	219.399,48
S K U L D			
Kassakredittur í Sjóvinnubankanum			
Upprunaligt lán	35.000,—		
Tilskrivaðar rentur	14.403,72	59.403,72	
Kassakredittur í Føroya sparikassa		43.314,47	
Skuld í millumrokning við landskassan		110.844,60	
Eginogn		5.836,69	219.399,48
Bókaútgávan í 1967/68 er mett at kosta		100.000,00	
meðan bókasølan er mett at vera		35.000,00	65.000,00
fyrisitingarkostnaðurin, lá ið renta ikki er uppíroknað, er ætlaður til			10.000,00
Neyðugt verður at tí at læna afturat í 1967/68			75.000,00

Samráðst hevur verið við formann skúlabókagrunnsins um at samla tey ymsu lánini hjá Føroya Sparikassa og herafturat hjá sama stovni at gera útvegir fyri lánveiting til framtíðan bókaútgávu, tí ikki kann roknast við, at sølan helst tey fyrstu fimm árini veksur so mikið, at javnvág verður millum søla og útgáva. Svar fyriliggur tó onki enn.

Hóast hesa óvissu støðu er budgetterað við nevndu ætlan ogverður so støðan henda:

Føroya Sparikassi:		
Flutt frá Sjóvinnubankanum	35.000,00	
Flutt frá landskassanum pr. 31/3-1966	111.000,00	
Landskassin lagt út afturat í 1966/67, ætlað	60.000,00	
Til útgávuslarv í 1967/68	75.000,00	281.000,00

Rentustuðningur 1967/68		
Lánið frá Sjóvinnubankanum renta til 31/3-1967	29.800,00	
Føroya Sparikassi, renta frá 1/4-1966 til 31/3-1967 av 13.300 kr.	2.800,00	
Føroya Sparikassi í 1967/68	17.000,00	49.600,00

Eftir hesum verður rentustuðningurin í 1967/68 50.000 kr.

Undir sama samráðingum reisti formaðurin spurningin, um landið vildi lata studning til raksturin av eini søluniðstøð í felag millum skúlabókagrunnin og bókanevnd Føroya Lærarafelags. Hesar útreiðslur vóru fyrsta árið mettar til 30.000 kr. at býta við 12.000 kr. til lønir og 18.000 kr. til leigu og til keyp av ymsum búnyttum, t.d. reolir og skrivimaskina.

Greitt var frá, at higartil hevur bókahandil havt søluna í kommisión og hevur hann ligið við goymslunum, fyri hetta seinra er samsýning ikki krevd.

Grundin til broytingina skuldi verið at framt søluna. Ætlanin er at leggja 10% afturat bókaprísinum til ríðan av kostnaðinum.

Síðani tey 10% ikki tey fyrstu árini kunnu gjalda útreiðslurnar av søluniðstøðuni, hevur landsstýrið samtykt at mæla til at veita í eykastuðningi í 1967/68 18.000 kr. til stovningina og heraftarat 12.000 kr. Hesar 12.000 kr. skulu so lækkast við 1/5 tey fylgjandi fimm árini, so stuðningurin er fallin burtur 1. apríl 1972.

Studningurin í 1967/68 verður so:

Rentustuðningur	50.000,00
Studningur til søluniðstøð	30.000,00
	80.000,00

ad 10. I samband við 5. Víkingafundin summarið 1966 var samtykt at játta 15.000 kr. til prenting av øllum fyrilestrunum, við 10.000 kr. í 1966/67 og 5.000 kr. í 1967/68.

Fundarnevndin sigur nú, at prentingin er vorðin 3.000 kr. dýrari.

Mælt verður tí til at játta 8.000 kr. í stuðin fyri 5.000 kr.

ad 11. Konteringin er broytt, jbr. viðmerkingarnar til punkt 3.

Viðvíkjandi konto 5 verður víst til viðmerkingarnar til punkt 7, 8 og 11, undirkonto 5.

Til konto 6 er at viðmerkja, at fiskiðnaðarstovan hevur søkt um at

fáa loyvi at útvega sær tól nevnt «Fishtester», sum verður nýtt at máta feskleikan á fiski. Ætlanin er at lata vrakieftirlitsmonnum tólið til nýtslu, tá ið neyðugt er. Tólið kostar 5.000 kr.

ad 12. Ferðamannafelagið søkir um, at hin árligi studningurin verður hækkaður úr kr. 40.000 til 50.000 kr. og at herafturat verður veitt í eykastudningi 14.000 kr. til útgávu av ferðahefti at senda ferðamannastovum úti um.

Felagið vísir á, at lønarkontoin fer at hækka við 10.000 kr. og at ferðaheftið, felagið gav út í 1959 nú er uppi.

ad 13. Eftir § 4 í lógini um búsalánsgrunnin, nr. 49 frá 30. mai 1964 skal landskassin í minsta lagi leggja 1 mill. kr. í grunnin.

Úr landskassanum eru veittar um socialgrunnin:

Í 1965/66, jbr. viðm. til § 44-6-3 á fíggjarløgtingslógini	1.250.000,00
Í 1966/67, jbr. viðm. til § 44-6-3 á fíggjarløgtingslógini	250.000,00
Eftir løgtingslóg nr. 58 frá 2. september 1966, rest ognir sociala grunsins, um	370.000,00
	1.870.000,00

Grunnurin hevur upplýst, at enn tørvar honum útlánspening at ganga teimum mongu lániumsóknunum á møti.

ad 14. Nú fróðskaparsetrið og aðrir stovnar flyta inn í nýggju búsini á Debesar trøð er ætlanin at planera og hampa økið á tí eystara og norðara partinum av trøðni m.a. við at taka niður barakkir og betonfundamentir frá krigmun. Eisini verður fyri eldsvanda neyðugt at leggja sverari vatnleiðing til allar bygningar.

Kostnaðurin er mettur til 75.00 kr.

Mælt verður til at býta kostnaðin yvir 2 ár við 40.000 kr í 1967/68 og 35.000 kr. í 1968/69.

1. viðgerð 21. februar og 11. mars legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Uppskotið til fíggjarløgtingslóg fyri fíggjarárið 1967/68, sum er lagt fyri vetrartingið, er ein endurnýggjan av uppskotinum til Ólavsøkutingið 1966 og herafturat ymsar broytingar og uppískoyti.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt uppskotið í sínni heild og herafturat ymisk tilmæli frá landsstýrinum og ymsum stovnum.

Broytingarnar og uppiskoytini hjá landsstýrinum føra við sær eina meirútreiðslu uppá 1.531.837 kr. og eina minniútreiðslu uppá 1.346.700 kr. ella eina netloútreiðslu uppá 185.137 kr. alt í mun til ólavsøkuuppskotið. Til hesa rætluligu lítlu hækkan er tó at siga, at landsstýrið hevur ikki javnað tey ymsu lønankonti við teimum lógar- ella sáttmálabundnu viðbótum, ið eru komnar pr. 1. oktober 1966 og sum koma pr. 1. apríl 1967.

Eftir fyriliggjandi uppskoti hækka útreiðslurnar við 3.076.160 kr. útyvir her nevndu 185.137 kr., men eru nú lønankonti javnað við umleið 1 % uppeftir svarandi til millum 1 og 2 dýrtíðarviðbøtur.

Í hesum áliti verða bert umrøddar tær broytingar, sum gjørdar eru undir fíggjarnevndarviðgerðini, meðan tað í aðrar mátar verður vist til vetralingið við lýsingum.

Inntøkurnar:

Í samráð við gjaldstovnna og líkningarráðið er mett um inntøkurnar komandi fíggjarár.

Landsskatturin er hækkaður við 800.000 kr. til 21.500.000 kr. ella við um 2,3 %. Henda hækking má metast í samanhangi við uppskotið um broyting í skattalógini, sum veitir ein skattalætta um 2.000.000 kr.

Sjónamsskatturin er hækkaður við 200.000 kr. til 800.000 kr., meðan rentuskatturin hefst er mettur ov høgt, og er hann tí lækkaður við 25.000 kr. til 625.000 kr.

Samlaði skatturin er soleiðis mettur 975.000 kr. lægri ella tilsamans 25.925.000 kr.

Tollgjøldini eru lækkað við 2.000.000 kr. til 36.000.000 kr.

Framleiðslugjøldini av øli og sodavatni eru mett at geva 50.000 kr. meira, meðan gjøldini av sjokolátu og tilíkum eru mett 25.000 kr. lægri.

Samlaðu toll- og framleiðslugjøldini eru eftir hesum lækkað við 2.025.000 kr. til 36.975.000 kr.

Onnur gjøld eru lækkað við 295.000 kr. til 2.471.000 kr., her er tað serliga stuttleikagjøldini og bilgjøldini, sum eru lækkaðí ávikavist við 100.000 kr. og 150.000 kr.

Inntøkur av rentu- og vinningshýti eru lækkaðar við 160.000 kr. til 617.000 kr., og er her størsta lækkingin í rentu av útlánt og øðrum ágóða, 100.000 kr. Nettorentnútreiðslan er tí lækkað frá 1.783.000 kr. til 1.623.000 kr.

Undir landsstovnum er einasta broytingin undir konto 10 asfaltverk. Her eru inntøkur og útreiðslur mettar javnt við 2.500.000 kr. Á hesari

konto verða bert førdar rakstrarútreiðslur og -inntøkur, meðan stovningin av verkunum er førd á ognarrokonskapin.

Nettoinntøkan øll hækkar við 3.544.800 kr. til 63.696.400 kr.

Útreiðslurnar:

Sum sagt frá frammanundan eru lønir bert hækkaðar við viðbótum sum fylgja av lógum og sáttmálum. Broytingar sum hesar verða tí ikki umrøddar undir teimum ymsu lønarkonti.
fylgja av lógum og sáttmálum. Broytingar sum hesar verða tí ikki umrøddar undir teimum ymsu lønarkonti.

§ *10. 3:* Síðani onki fyriliggur um serligt lýsingarblað er kontoin rettað soleiðis at orðið «lýsingarblað» er strokið, og játtanin lækkað við 20.000 kr.

§ 11. 1: Tað eru nú bert tríggir limir í landsstýrinum, kontoin er lækkað við 49.500 kr.

§ *12: Heilsumál:*

Nevndin er gjørd kunnug við uppskotini til figgjarætlan fyri tey trý sjúkrahúsini. Ætlanirnar eru tó ikki enn góðkendar av sjúkrahásstýrunum. Nevndin hevur budgetteað sum árini fyri, við at býla raksfrarundirskotið í helvt millum landskassa og ríkiskassa í rakstrarárinum, bóast tilík føst skipan ikki enn er viðtikin av ríkisstýrinum, í praksis hevur hetta býti tó verið.

Meirútreiðslurnar verða hesar:

Landssjúkrahúsið	588.535,—
Klaksvíkar sjúkrahús	101.500,—
Suðuroya sjúkrahús	91.700,—
	781.735,—

Figgjarætlanin fyri tuberklasløðina er lækkað, so landskassans partur verður 4.300 kr. lægri.

Stuðulin til barnakonur, ið skulu av bygd at eiga, hevur nevndin hildið vera ov lágan og hevur tí hækkað hann við 1.500 kr. til 3.000 kr.

§ 12 er øll hækkað við 781.935 kr. til 5.998.600 kr.

§ *13. Samferðslumál.*

Av tí at fleiri umsóknir eru komnar til landsstýrið og løgtingið, hesar

eru tó ikki viðgjørdar enn, hevur landsstýrið heitt á nevndina um at játtanin til nýggjar vegir og brýr at leggja í grunn verður hækkað við 1.000.000 kr. Nevndin tekur undir í tilmælinum.

Sum nevnt undir inntøkunum eru bilgjøldini hækkað við 150.000 kr. til 1.100.000 kr.

Samlaða hækkingin á § 13 er 1.150.000 kr. til 13.055.000 kr.

§ *14. Skúlamál.*

Føroya Fólkaháskúli upplýsir, at bygningarnir eru virðismetlir av nýggjum og tryggjaðir fyri 1.115.000 kr. ella 247.500 kr. hægri enn áðrenn, studningurin til hús og innbúgv eigur tí at hækka við 3½% av hesum tali ella við 8.662,50 Stýrið fyri skúlan hevur samtykt at hækka lønina hjá fyristøðumanni og lærara, báðir sigast at hava verið undirløntir. Hækkingin verður um 20.000 kr. um árið fyri báðar. Landsstudningurin eigur tí at hækka við 70% av hesum ella við 14.000 kr.

Eftir tí nevndin hevur fingið upplýst verður so fyristøðumaðurin løntur sum inspektørur og lærarin sum yvirlærari, alt við fólkaskúlan, og skuldi svara til lønarskipanina á tilsvarandi háskúlum í ríkinum.

Samlaða hækkingin á konto 14-5 verður so 22.700 kr.

F. S. F. søkir um at studningurin verður hækkaður við 14.500 kr. til 24.500 kr., annars sær felagið seg ikki fært fyri at røkja tær uppgávur, tað hevur tikið uppá seg.

Næmingastudningurin til listamenn er hækkaður við 1.000 kr. til 7.000 kr.

Øll § 14 er hækkað við 122.200 kr. til 9.233.700 kr.

§ 15. *Vísind, bókmentir og list.*

Nú landsskjalasavnið hevur fingið ymisk høli í kjallaraheddini á studentaskúlanum, verður neyðugt at keypa hillur. Játtanin til húsútreiðslur er hækkað við 1.500 kr. til 4.000 kr.

Fornminnissavnið søkir um, at tann hálva skrivstovuhjálpin, savnið hevur játtan fyri, verður heil, so tað nógva skrivingararbeiði, sum liggur fyri, kann verða avgreitt. Játtanin er hækkað við 10.000 kr.

I grunninum til bygging á Skansanum eru um 53.000 kr. Tá ið tað er ein spurningur um skansahúsið verður bygt upp aftur, hevur nevndin strokið játtanina 10.000 kr. Málið kann takast upp aftur, tá tað liggur greiðari fyri.

Setursráð Føroya Fróðskaparsetars hevur samtykt at seta niður eina nevnd at fyrireika eitt miðvist og umfatandi innsavningararbeiði av forntutum og fornminnum, sum ætlast kunnu fara fyri skeyti ella verða gloynd í næstu framtíð. Innsavningararbeiðið er ætlað at vara 3 ár. Fyrsta árið, sum er royndarár, verður kostnaðurin mettur til 15.000 kr.

Av hesum átekur Fróðskaparfelagið sær at lata 5—6.000 kr. Søkt verður um, at landið játtar 10.000 kr.

Nevndin hevur likið hesar 10.000 kr. við í uppskotið undir aðrar útreiðslur.

Játtanin til doyvau av radioóljóði er hækkað við 5.800 kr. til 30.000, tað er arbeiði í Havn sum orsakar hækkingina.

Eftir ábeitan frá Føroya Lærarafelag er rentustudningurin til skúlabókaútgávu felagsins hækkaður við 10.000 kr. til 15.000 kr., men er hetta ein eykastudningur, sum má viðgerast av nýggjum.

§ 16 øll er hækkað við 258.750 kr. til 1.509.430 kr.

§ *16. Fiskivinna, sigling o.t.*

Ætlanin er at taka lógina um oyðing av kópi av. Játtanin 14.000 kr. er tí strokin.

Eftir uppskoti frá landsstýrinum fær prísásetingarnevndin fyri saltfisk eisini prísásetingina fyri sild undir hond. Játtanin er hækkað við 5.000 kr.

§ 16 øll er hækkað við 6.000 kr. til 9.407.700 kr.

§ *18. Handil, ídnaður o.t.*

Játtanin til kolagrevstur er lækkað við 25.000 kr. til 125.000 kr. Eftir fyriliggjandi rokuskapartølum rokkur hesin bardgelpostur.

Hjá fremmandum ferðafólki er tað ógvuliga trupult á bygd at finna sær innivist. Grunnurin til gistingarhús setur á stovn í fíggjarárinum 1949/50 við játtan av 100.000 kr. rokkur ikki at ganga ynstum umsóknum á møti. Skotið er tí upp, at játta 50.000 kr. afturat í grunnin, so hann kemur upp á 150.000 kr.

Øll § 18 er hækkað við 54.000 kr. til 769.100 kr.

§ *19. Almenn forsorg.*

Eftir upplýsingum frá ríkisumboðnum og frá líkningarráðnum viðv. fólkapensiónsskattinum verða broytingarnar hesar:

Fólkapensión	800.000,-
Avlanispensión	80.000,-
Barnastyrkur	20.000,-
Barnaforsorg	5.000,
Almenn forsorg	20.000,-
	885.000,

Løgtingstíðindi 1951, bls. 364 f. er helst soleiðis at skilja, at løglingið hevur góðkent, at landskassi og ríkiskassi býta rakstrarundirskotið hjá Føroya Barnaheimi í helvt. Tá undirskotið er ætlað til 300.000 kr. er játtanin hækkað við 25.000 kr. til 150.000 kr.

Øll § 19 er hækkað við 1.420.000 kr. til 9.612.500 kr.

§ 20. *Pensiónsútreiðslur.*

Kontoin er hækkað við 39.000 kr. til 140.500 kr.

§ 22. *Aðrar og óvissar útreiðslur.*

Sambart fyriliggjandi tingmál um studning til politiskan upplýsing eru settar 130.000 kr. av, so kontoin er hækkað til 219.000 kr.

Samlaðu útreiðslurnar eru mettar til 63.255.721 kr. og herafturat kemur ein munur millum inntøku og útreiðslu uppá 440.679 kr., so javnvágin verður 63.696.400 kr.

Flytingar á ognar og kapitalkonto.

§ 34. Kassakontoin er hækkað við 742.703 kr. til 2.248.019 kr. á útreiðslusíðuni. Likviditeturin skuldi verið hetta betur.

§ 36. *Inntøkueftirstøður.*

Nýggj álíkning er hækkað við 1.000.000 kr. til 56.000.000 kr. og goldin eftirstøða eisini við 1.000.000 kr. til 54.500.000 kr., soleiðis at nettohækkingin í eftirstøðum er óbroytt 1.500.000 kr.

§ 38. *Aktivir hjá grunnum.*

Bilgjaldið til vegagrunnin er sum frammanfyri nevnt hækkað við 150.000 kr., men samstundis er nýtslan úr grunninum hækkað við sama tali til 2.615.000 kr.

Játtanin til aðrar grunnur er hækkað soleiðis:

Nýggir vegir og brýr	1.000.000,
Løgtingshús	500.000,
Skúlabókagrunnurin	59.000,
Gistingarhús	50.000,
	1.609.000,

Nýtsla úr grunnunum er hækkað soleiðis:

Nýggir vegir og brýr	1.000.000,-
Skúlabókagrunnurin	59.000,-
Gistingarhús	50.000,-
	1.109.000,-

§ *44. Grunnar:*

Broytingarnar svara til broytingarnar undir § 38.

Vísandi til tað, ið her er flutt fram, setir ein *meiriluti (Andreas Djurhuus, Hilmar Johansen, Joh. Fr. Poulsen og J. Fr. Øregaard)* fram fylgjandi:

UPPSKOT

Løgtingið samtykkir viðlagda uppskot til figgjarløgtingslóg fyri figgjarárið 1967/68.

Ein *minniluti (Hákun Djurhuus og Knút Wang)* førir fram:

Minnilutin hevur í nevndini mælt til, at § 27: Yvirtøka av sermálum, verður standandi sum í uppskoti til figgjarlóg, ið framlagt var á ólavsøku.

Og minnilutin heldur, at inntøkur eru til tað, uttan at broytingar verða gjørdar í skattastigum og øðrum inntøkulógum og uttan at skerja uppskotið um skattalætta, sum lagt er fram av núverandi landsstýri. Vist verður til skriv frá stjóranum í Líkningarráðnum, Jóhs. Thomsen, dagsett 10. mars 1967, har hann heldur, at vanligur landsskattur kann metast til 24,9 milj. kr. og til frásøgn frá formanninum í figgjarnevndini sambart upplýsingar frá stjóranum á gjaldstovuni, har hann metti vanligu tollinntøkurnar til 37 milj. kr. og seta so statt fram fylgjandi:

BROYTINGARUPPSKOT
og
UPPÍSKOYTISUPPSKOT

I uppskotinum frá figgjarnevndini verða gjørdar hesar broytingar:

I. *Undir inntøkur*

Gr. 1. Skattir	
Skatter	
1. Vanligur landsskattur	24.900.000 kr.
Sædvanlig landsskat	
Gr. 2. Toll- og framleiðslugjøld	
Told- og fremstillingsafgifter	
1. Tollgjøld	36.900.000
Toldafgifter	

II. *Undir útreiðslum*
Udgifter

Sum nýtt stykkið verður sett:

Grein 27:	Yvirløka av sermálum (at seta í grunn) Overtagelse af særanliggender (henlægges i fond	1.300.000 kr.

III. Samanteljingarnar verða at rætta samsvarandi omanfyrislandandi.

Ein *minniluti (Hanus við Høgadalsá)* førir fram

Tjóðveldisflokkurin heldur ikki, at grund er til at rokna við lægri landsskatti enn kr. 25.000.000, so sum umfalað í fíggjarnevndini og sonuleiðis við sonu tollgjøldum kr. 37.000.000. Líkindi eru tí til at fremja flokksins uppskot til fíggjarlóg uttan broytingar í inntøkulógum ella nýggjar inntøkulógir.

Tað er flokksins áskoðan, at tað eru almennar byggingar, ið eiga at koma fyri áðrenn nýggj løgtingshús verða bygd, eitt nú bókasavn og skjalasavn.

Flokkurin heldur ikki, at orsøk er til at hækka veitingina til vegir og brýr, sum støðan er í løtnni, og utlan at tingið hevur fingið at vita, hvat henda hækkaða veiting verður at nýtast til.

Av prinsipptýðningi fyri flokkin er, at játtanin til yvirtøkumál verður ikki niðurlagd, og setur tí uppskot samsvarandi

BROYTINGARUPPSKOT
og
UPPÍSKOYTISUPPSKOT

til upskotið frá fíggjarnevndini.

1)	§ 1.1.	Vanligur landsskattur Sædvanlig landsskat	25.000.000 kr.
2)	§ 2.1.	Tollgjøld Toldafgifter	37.000.000 kr.
3)	§ 10.2.4.	Grunnur til bygging av løgtingshúsi Fonden til opførelse af lagtingshus	gongur út
4)	§ 13.1.	Vegir og brýr Veje og broer	5.000.000 kr.
5)	Sum nýtt pkt. 15 í § 15.9		
		Bóka- og skjalasavn í grunn Bibliotek og arkiv, henlægges i fond	100.000 kr.

6)	§ 27	Yvirtøka av sermálum, í grum Overtagelse af særanliggender, henlægges i fond	2.600.000 kr.
7)		Samanteljingar verða at rætta samsvarandi	

2. og 3. viðgerð 13. mars 1967.

Formaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá Johan Poulsen og J. Fr. Øregaard:

Í § 14. 5. 1. (Føroya Fólkaháskúli) verður posturin: Rokstrarstudningur (Driftstilskud) broyttur soleiðis, at tað í staðin fyri kr. 148.100,00 kemur at standa . . . kr. 134.000,—.

Samanteljingarnar verða at rætta samsvarandi.

Formaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá Leon Joensen o.fl.

Í § 14-8-1 (Skúlabarnaferðir uttanlands) verður «kr. 23.000» broytt til «kr. 35.000».

Í § 14-8-8-1 (Skolebørns rejser udenlands) ændres «kr. 23.000» til «kr. 35.000».

Samanteljingarnar verða at rætta samsvarandi.

So fór fram atkvøðugreiðsla um uppskotið til fíggjarlógina:

1) Broytingaruppskot frá minnilutanum Hamus við Høgadalsá til § 10.2.4 fall 5—0.
2) Broytingaruppskot frá Johan Poulsen o.fl. til § 14.5.1. fall 11—0.
3) Broytingaruppskot frá Leon Joensen o.fl. til § 14.8.8.1. samtykt 18—0.
4) Minnilutauppskot frá H. v. Høgadalsá til § 27 fall 5—0.
   Minnilutauppskot frá H. Djurhuus og K. Wang til § 27 fall 13—0.
   Fíggjarlógaruppskotið so broytt samtykt við 26 atkvøðum.

8. Föroyar gerast partur í EFTA

Ár 1967, 17. februar, legði løgmaður fram soljóðandi:

UPPSKOT
til samtyktar

Løgtingið samtykkir at heila á ríkisstýrið um fyri European Free Trade Association at vátta, at Føroyar gerast lutur av fríhandilssamtakinum.

Viðmerkingar:

Tá ið Danmark í 1960 saman við seks øðrum londum undirskrivaði sáttmálan og gjørdist limur í EFTA (European Free Trade Association) vóru Føroyar, eftir tilmæli hiðani, og Grønland ikki tiknar við. Grønland er tó síðani (í 1961) komið upp í felagsskapin. Sama møguleika hava Føroyar eftir § 2 í art. 13, um Danmark av sínum eintingum sigur frá eins og Føroyar á sama hátt kunnu gerast leysar av EFTA við 12 mánaða frest, jbr. § 7 í sama art.

Hesin spurningur um luttøku Føroya í fríhandilssamtakinum hevur løgtingið eftir tilmæli frá landsstýrinum viðgjørt fleiri ferð, seinast í løgtingssetuni 1965, jbr. løgtingsmál nr. 77: Limaskapur í EFTA. Hóast tað, at bugsanin nest hevur gingið á tað borðið at fara uppí samtakið, er ongin støða tikin til luttøku, og seinasta løgtingssamtyktin áleggur landsstýrinum at halda fram við kanningunum um freylir fyri upptøku, og hvørjar avleiðingar, upptøkan hevur fyri ymisk ávís innanlandis málsøki.

Endamálið hjá EFTA er at lætta um stovnanina av einum fleirlanda samtaki, at heina fyri handilsforðingum og til fremjingar av nærri búskaparligum samarbeiði millum limirnar í OECD (Organisation for Economical Co-operation and Development).

Tað, at Føroyar er millum tey lond, ið eftir fólkatalinum hava størsta útflutning, talar fyri luttøku í fríhandilssamtakinum, tí royndir av handilsforðingum hevur føroyski útflutningurin nógvar. Fyrimunirnir eru m.a., at tollur og kvantitativar restriktiónir, óivað heinanvegin, falla burtur á teimum útflutningsvørum, sum eru ella koma undir EFTA-tollviðgerð, her kann nevnast, frysl fiskafløk, fiskaslógv, sildaolja, lýsi, fiskahermetikk, fiskamjøl, sildamjøl, minkaskinn, ullvørur og skip. Tá ið t.d. klippfiskur, saltfiskur, saltsild og ísfiskur ikki eru tikin við í hesum samanhangi, so er tað tí, at hesar framleiðslur ikki eru undir skipanini um tollfrítøku v.m. Fyri hesar vørur hava limalondini tó, Bret-

land undantikið, bundið seg til ikki at gera nýggjar ella strangari kvantitativar restriktiónir ella hækka tollin. Nøkur av londunum hava afturat lælt um og avtikið tollin á summum av nevndu vørum. Generelt hava øll londini sett sær tann setning undir ymsum treylum at gera útvegir fyri at lætta um fiskahandilin hjá teimum linum, har húskapurin er serliga knýttur at hesum vinnuvegi.

Fyrimunir eru og eru teir rættiliga lættir at meta um. Men spurningurin er eisini, hvørjar eru avleiðingarnar í aðrar mátar, t.d. fyri studningsskipanina í fiskivinnuni og til skipabygging, kunnu útlendingar krevja sær rætt at fiska á landleiðini og, táið partur av endamálinum eisini er at avtaka forðingar í innflutninginum, hvar er neyðugt at broyta í lóggávuni um innflutnings- og framleiðslugjøld. Tað er uttan iva hevnda óvissa, sum hevur gjørt tað torført at taka støðu.

Avgerandi týdning hevur spurningurin, at forboðið um at útlendingar ikki mugu fiska á landleiðini, verður standandi. Hertil er fyrst at siga, at tað er greitt, at konventiónin ikki hevur gildi í veiðu av fiski, sjálvt um rávøran verður nýtt til framleiðslu av vøru, sum er undir tollviðgerð, eitt nú fryst flak og fiskahermetikk. Landleiðin kann tí eftir øllum at døma verða veiðiøki landsins egnu borgarum einsamøll. Sjálvt um konventiónin skuldi verði broytt, eru góðar grundir fyri, at Føroyar, sum so burturav hava fiskivinnuna at liva av, kunnu fáa eina serstøðu.

Tey gjøld, lønjavningargrunnurin krevur av útflutningiinum, eru bert í stríð við sáttmálan, um tey verða løgd á vørur, sum eru undir tollviðgerð t.d. fryst fiskaflak. Táið studningurin til fiskaprísirnar ikki bert verður veittur til tann partin av fiskinum, sum verður útfluttur, men til alla veiðuna, verður skipanin hildin at vera í samsvar við EFTA-sáttmálan. Í øllum førum hava lønjavningargrunnurin og hin grønlendski konjunktururjavningargrunnurin tað felags eyðkenni, at báðir hava socialpolitiskt endamál, og fyri hin seinna varð gjørd undantaksavtala, táið Grønland gjørdist lutur av EFTA-umráðnum.

Allarflestu innflutningsgjøldini eru fiskal, t.v.s., at tey ikki hava til endamáls at verja framleiðslu móti tilsvarandi innfluttari vøru, tey koma tí ikki í stríð við sáttmálan í tann mun at so er. Í summum førum eru gjøldini tó verjutollur, annaðhvørt soleiðis, at framleiðslugjøldini á vøru framleidd her saman við møguligum gjaldi á rávøruni í framleiðsluni eru lægri enn innflutningsgjaldið á tí innfluttu lidnu vøruni, ella um framleiðslan fær goldið gjald av rávøru afturgoldið. Her er ein vandi, men tað er helst ein møguleiki at fáa seravtalu um tilíkan verjutoll, at hann skal takast so líðandi yvir nøkur ár, síðani føroyskur iðnaður, sum nýggjar vinnuvegur, er veikur í mun til útlendskan, og eisini tí tað í

summum førum er av týdningi, at ávís framleiðsla er í landinum.

EFTA-sáttmálin sigur, at allar kvantitativar inn- og útflutningsrestriktiónir skulu avtakast. Frá hesum er so undantakið aftur tor vorur, ið ikki eru undir EFTA-tollviðgerð, t.d. klippfiskur, saltfiskur, saltsild og ísfiskur. Fyri aðrar vørur verður tað tí neyðugt at avtaka bæði innflutnings- og útflutningsforboð og herafturat valutagjaldið 1% á innflutninginum. Tað ber tó til at krevja, at menn søkja um loyvi til útflutning og innflutning um tílík skipan bert hevur tað til endamáls at hava eftirlit og viðkomandi kann krevja loyvi, tá ið hunum torvar tað, sama um endamálið er at tryggja, at útflutningsvøran lúkar lógarásett krøv til góðsku.

Metingin í hesum máli er, at teir fyrimunir, ið kunnu fáast av luttoku í EFTA samgonguni, eru stórir. Hinvegin er tað, sum skal gevast fyri at koma í felagsskapin, langt frá av somu tyngd. Tað er óráð at vera uttanfyri, umráðandi er tí at gerast partur sum skjótast.

Neyðugar samráðingar tekur landsstýrið við ríkisstýrið.

1. viðgerð 24. februar og 11. apríl legði Eftanevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Málið hevur verið viðgjørt av tinginum síðani 1959, og varð longu 15. februar 1961 lagt fram uppskot av landsstýrinum um, at Føroyar fóru upp í handilssamgonguna EFTA. Løgtingið hevur tó onga endaliga støðu tikið, men hevur fyrr og nú seinast í løgtingsmáli nr. 77/1965 samtykt at áleggja landsstýrinum at halda fram við kanningum um treytir fyri upptøku.

Av løgtingsviðgerðini av málinum framgongur, at tað, ið krevur nærri kanningar, er helst spurningurin um, hvørjar avleiðingar, limaskapur kann fáa fyri fylgjandi innlendis mál:

1. Fiskimarkið, niðursetu- og virkisrætturin.
2. Inn- og útflutningsgjøldini,
3. Lønjavningargrunnurin og prislskoytisskipanin.

Eisini er tað av týdningi at fáa greiðu á, um Føroyar fáa fullan fyrimun av limaskapi beinanvegin viðvíkjandi tolllætta fyri fiskaflak og aðrar EFTA-viðgjørdar vørur.

Fiskimarkið, niðurseta og virkisrættur.

Høvuðsreglan í art. 16 í EFTAsáttmálanum, ið umfatar niðursetu- og virkisrættin, er, at limalondini viðurkenna, at restriktiónir verða ikki framdar mótvegis annara limalanda borgarum, soleiðis at hesir fáa verri virkisumstøður enn landsins egnu borgarar.

Sum nú er er tað ikki loyvt fremmandum fiskiførum og fremmandum ríkisborgarum at røkja vinnuligan fiskiskap á landleiðini, harundir fáast

við slíkt, ið stendur í samband við fiskiskap, sbr. gr. 2 í løgtingslóg nr. 12 frá 10. mars 1964 eins og tað í gr. 3 í somu lóg er forboðið á landleiðini at fiska við troli, skovlváð og snurriváð. Heldur ikki er tað loyvt at flyta inn fisk, ið veiddur er við skipi, sum ikki er heimahoyrandi í Føroyum, sí kunngerð nr. 21 frá 25. september 1948, sjálvt um fiskurin er veiddur uttanfyri fiskimarkið.

Fiskivinnan er høvuðsvinnan hjá føroyingum og hongur allur búskapur landsins so at siga í hesi vinnu. Tað er tí umráðandi at landleiðin verður tryggjað landsins egnu borgarum sum veiðiøki, og eigur hetta at verða hildið fram sum treyt undir tingingunum um limaskap.

Inn- og útflutningsgjøldini.

Uppkrevjingini av innflutningsgjøldunum sambært løgtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 (Tolllógin) við seinni broytingum og løgtingslóg nr. 9 frá 27. apríl 1961 við seinni broytingum (5 % gjaldið) er í veruleikanum ein óbeinleiðis skatting, og ger endamálið fiskalt og ikki at verja innlendis framleiðslu. Tað skerst tó ikki burtur, at hesi gjøld í summum førum fremja verju av innlendis framleiðslu. Her eigur at verða royut at fáa í lag eina skipan, so avtøka av tilíkum gjøldum verður liðandi og yvir eitt tiðarskeið, so hon nervar tann innlendis ídnaðin minst møguligt.

Av útflutningsgjøldum eru nú bert eftir gjaldið til Lønjavningargrunn skipsfiskimanna av saltfiski og ísfiski, landaður í útlendskari havn.

Lønjavningargrunnurin og prísískoytisskipanin

Endamál grunsins er at tryggja fiskimonnum við føroyskum fiskiskipum minstuløn og veita ískoyti til fiskaprísin. Prísískoyti verður latið til alla veiðuna og ikki bert til fisk, ið útfluttur verður, og skuldi studningskipanin tí verið í samsvar við EFTA-sáttmálan.

Grunnurin hevur bert socialpolitiskt endamál.

Tá Grønland í 1961 gjørdist lutur av EFTA, varð gjørd undantaksavtala viðvíkjandi grønlendska konjunkturjavningargrunninum, ið hevur sama socialpolitiska endamál sum Lønjavningargrunnurin, og eigur tilsvarandi avtala at verða gjørd viðvíkjandi hesum grunni.

Sambært art. 43, hareftir Føroyar kunnu gerast lutur av EFTA-umráðunum við frásøgn frá Danmark, verða treytirnar fyri limaskap nærri at áseta. Roknað verður við, at ríkisstýrið heldur heimastýrið á jour við tingingum hesum viðvíkjandi, so løgtingið fær høvi til at taka sløðu til úrslitið av tingingunum.

Nevndin (ein meiriluti) heldur, at tað fyri Føroyar við sínum eftir

fólkatalinum stóra útflutningi av fiski og teim stóru sølumøguleikum í EFTA-londunum av fiski og fiskavøru er av størsta týdningi at gerast lutur av hesi samgongu og harvið fáa teir fyrimunir, sum limaskapur gevur viðvíkjandi fiskasølu, eitt nú avtøkan av tolli fyri fiskaflak og øðrum fiskavørum, sum verða EFTA-viðgjørdar, og teim skipanum, sum verða at koma samhert endamál felagsins eftir art. 27, ið er at vaksa um samhandilin við fiski og skapa hóskandi javnvág hjá limalondum, hvørs búskapur er serliga treytaður av útflutningi av hesi vøru.

Nevndin er øll samd um, at Føroyar eiga at fara upp í EFTA, men hevur ikki kunnað samst um eitt felags uppskot til samtyktar.

UPPSKOT
til samtyktar

frá meirilutanum (Andreas Djurhuus, Martin Joensen, Trygve Samuelsen, J. Fr. Øregaard, Hákun Djurhuus og Poul Petersen).

Vísandi til teir í álitinum nevndu viðmerkingar og fyritreytir samtykkir løgtingið at heita á ríkisstýrið um fyri European Free Trade Association at vátta, at Føroyar gerast lutur av frihandilssamtakinum.

UPPSKOT

til samtyktar

frá minnilutanum (Hákun Djurhuus og Poul Petersen):

Hin endaligi limaskapurin verður at góðkenna av løgtinginum.

UPPSKOT
til samtyktar

frá minnilutanum (Hanus við Høgadalsá):

Føroya løgting samtykkir at heita á ríkisstýrið um fyri Efta at vátta, at Føroyar gerast limur av frihandilssamtakinum, um so er, at løgtingið góðtekur tær treytir, sum verða settar fyri upptøku.

1) minnilutauppskot frá Hanus við Høgadalsá	fall	12—0.
2) minnilutauppskot frá H. Djurhuus og P. Petersen	fall	11—0.
3) Uppskotið frá meirilutanum	samtykt	15—0.

9. Kvöld- og ungdómsskúlaundirvising

Ár 1967, 28. februar legði Samuel Petersen landsstýrismaður fram soljóðandi

UPPSKOT

Løgtingið mælir til, at uppskot «om ungdomsskoler og aftenskoler m. v. på Færøerne» dagfest 29. august 1963 frá nevnd, skúlastjórnin hevur setl, verður sett í gildi við kongiligari fyriskipan við hesum broytingum:

1) § 2: í 8. punkti, 4. reglu verður «skoledirektionens» broytt til «den godkendende myndigheds».
2) § 3: Sum nýtt punktum verður sett: «Der åbnes også muligheder for at etablere en aftenhøjskole på foredrags basis iforbindelse med Útvarp Føroya. Ansøgning om godkendelse sker som anført i § 7 om aftenhøjskoler, og udgifterne afholdes på samme måde, som gælder for aftenhøjskoler.»
3) § 4) I punkt 3) verður «16 timer skal» broytt til «ca. 2/3 bør».
4) § 9: í I. stk. verður «lovens § 14» broytt til «§ 14 i lovbekendtgørelse nr. 257 af 14. juni 1960. Der ydes ikke feriegodtgørelse til de omhandlede løninger».
5) § 10: Í 1. stk., 3. reglu, aftaná «lokale» verður sett «m. v.»
6) § 11: í 2. stk., punkt 5) verður «3—4 aftener» broytt til «2 aftener».
7) § 11: í 3. stk. verður «træffer afgørelse» broytt til «afgør».
8) § 12: Í 2. stk. verður aftaná «landskasen» sett «sideorduet».
9) § 13: í 1. stk., næstseinastu reglu verður «skolens eller» strikað
10) § 14: 1. stk. í hesari grein verður strikað, og ástaðin verður sett sum nýtt stk. 1 til § 14:

«Der nedsættes et ungdomsnævn for Færøyar på 5 medlemmer. Nævnet består af
1 medlem valgt af Færøernes landsstyre,
2 medlemmer valggt af ætinget,
rigsombudsmanden og
landsskolekonsulenten.»

Viðmerkingar:

Landstýrið legði málið sum uppskot til samtyktar fyrstu ferð fyri løgtingið í setuni 1963, jbr. Lgt. 1963 bls. 150. Samtykt varð at senda kommununum málið til ummælis og síðani leggja tað aftur fyri løgtingið.

Málið var so av landsstýrinum sent kommununum og av teinum 32 kommununum, sum svaraðu, hevði ongin nakað at finnast at uppskoti-

num, men 16 ella helvtin góvu tí beinleiðis viðmæli, meðan hin helvtin hevði ongar viðmerkingar at gera.

Í løgtingssetuni 1964 varð málið lagt fram aftur og uppskotið til samtyktar endurnýggjað, Lgt. 1964 bls. 74. Tað kom til 1. viðgerð og varð beint í nevnd, men hesa ferð kom tað ikki aftur til tingið.

Aftur í løgtingssetuni 1965, jhr. løgtingsmál nr. 13 legði landsstýrið sama uppskot fram og varð tað beint í skúlanevnd tingsins. Nevndin býtti seg í ein meirilutu og ein minnilutu. Meðan meirilutin mælti til at samtykkja uppskotið hjá landsstýrinum við ymsum broytingum, skjeyt minnilutin upp at leggja málið fyri landsstýrisnevnd viðvíkjandi føroyskari skúlaskipan. Bæði uppskotini fullu við ávikavisl 11 0 og 10 0 atkvæðum.

Tá ið málið enn einaferð verður lagt fram, so eru grundirnar sum higartil hæði at útvega ungdóminum kunnigleika afturat fólkaskúlanum eins og í grannalondunum, so ungdómur okkara ikki minst, nú talan er um á fleiri økjum at skapa felags norrønan arbeiðsmarknað, er kappingarførur og eisini í málvísum ungdómsarbeiði bæði at leiðbeina og at vera ungdóminum til hjálpar at røkja fritíðarhugamál sín.

Fyriliggjandi uppskot er samsvarandi uppskotið frá meirilutanum í løgtingsnevndini, tó við broytingum í samansetingini av ungdómsnevndini. Av principiellum grundum heldur landsstýrið ikki at viðkomandi landsstýrismaður skal vera limur, sum nevndin skjeyt upp, men heldur persónur, valdur av landsstýrinum.

Til broytingina punkt 2 um kveldháskúla í samband við Útvarp Føroya er serliga at viðmerkja, at fört er fram, at tílíkar sendingar mugu vera partur av vanligu útvarpsskránni og eisini, at tað er ógjørligt at hava eftirlit við, hvussu nógv tílíkar sendingar verða avhurlaðar. studningur eigur tí ikki at vera latin frá ríkis- og landskassa. Viðurskiftini í Føroyum eru tó mikið øðrvísi enn í Danmark, har tílíkur studningur ikki verður latin, úti á smábygdum verður tað óivað hæði forfört at fáa læraran til undirvísingina, og eisini at talið av nemingum kemur upp um minstamarkið.

1. viðgerð 3. mars og 10. mai legði skúlanevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Í 1961 setti skúlastjórnin nevnd at kanna moguleikarnar fyri broytan av galdandi skipan kvøld- og ungdómsskúlunum viðvíkjandi. Í nevndini vóru valdir: Niels W. Poulsen, landsstýrismaður, H. Loiborg, fulltrúi Andreas Næs, lærari, J. P. Joensen skúlakonsulentur og J. av Skarði, lærari.

Nevndin sat drúgva tíð og kom so at enda við áliti og uppskoti í máli-

num. Hetta uppskot var lagt fyri tingið av landsstýrinum. Í inngangiinum verður sagt: «Udvalget har i en række møder drøftet spørgsmålet om aften- og ungdomsskoleundervisningen, herunder behovet herfor og mulighederne for at tilrettelægge undervisningen således, at der dels opnås bedre udbytte af denne, ikke mindst for de unge, dels skabes større interesse og derved større tilslutning til denne undervisningsform». Seinari verður ført fram: «Udvalget har erkendt, at undervisning — oplysningsarbejde — er et meget vigtigt led i bestræbelserne for at give de unges fritid et udviklende og fornuftigt indhold.»

Nevndin kemur hóast hesi inngangsorð til tað úrslit, at ungdómsskúlar er ógvuliga dýrur skúlaformur og heldur seg tí ikki kunna mæla til, at lógin um ungdómsskúlaundirvísing verður sett í gildi í Føroyum.

Hildið verður, at tað í einum 8—10 bygdum í Føroyum eru møguleikar fyri stovnan av 8. og 9. klassa og eftir nevndarinnar ætlan, er hetta betri og biligari skúlaskipan.

Álitið endar soleiðis: «Der findes ikke under de nuværende forhold behov for etablering af selvstændige ungdomsskoler.»

Í Danmark eru bæði 8. og 9. klassar, men bæði vísir nevndin á í álitinum, og hevur løgtingsnevndin fingið upplýst, at síðani lógin um kvøldungdómsskúlaundirvísingina kom á gildi í Danmark í 1960, eru eingir skúlar, sum eru so nógv søktir sum ungdómsskúlarnir.

Løgtingið hevur havt hetta mál til viðgerðar í 3 tingseluni. Tann nevnd, sum hevði málið til viðgerðar í 1964 og 1965 setti einki uppskot fram. Í 1966 kom málið til atkvøðu á tingi, men var ikki meirluti fyri at seta lógaruppskotið, sum framlagt var av landsstýrinum, í gildi í Føroyum.

Landsstýrið hevur havt málið til viðgerðar av nýggjum, gjørt smærri broytingar og lagt tað aftur fyri tingið.

Við 1. viðgerð var tað beint til viðgerðar í serligari 5-mannanevnd. Meirilutin í nevndini, sum hevur viðgjørt málið, heldur, at lógin um kvøld- og ungdómsskúlar átti at verið sett í gildi í Føroyum við teim broytingum, sum standast av teimu serligu føroyska viðurskiftunum. Men heldur, at tá málið hevur fingið so ringa fagnu á tingi, so er orsøkin tann, at «Ungdómsskúlaundirvísingin», sum eftir nevndarinnar ætlan er tann mest týðandi táttur í lógini, er tikin burtur.

Hóast møguleikarnir fyri at koma í tekniskar skúlar og at tað í nokrum bygdum eru stovnaðir 8. og 9. klassar, er tó hópur av ungum, bæði gentum og dreingjum, navnliga frá teim smærru bygdunum, sum ongan skúlaskap fáa, aftaná at tey fara úr barnaskúlanum.

Meirilutin (. Fr. Øregaard, J. P. Thomasen og Petur F. Christiansen) mælir til, at landsstýrið tekur hetta mál til umhugsunar av nýggjum og leggur fyri tingið uppskot, har eisini lógin um ungdómsskúlar verður

tikin við, og leggur málið aftur fyri tingið í komandi tingsetu.

Ein minniluti (Petur Christiansen) førir fram:

Viðurskiftini í Danmark og í Føroyum eru alt annað enn lík og tá serliga ikki hvat skúlaskapi viðvíkur. Minnilutin mælir til til, at tingið áleggur landsstýrinum sum skjótast at stovnseta føroyskan skúla. Vitandi, at fyrireikingar til hesa stovnsetan taka drúgva tíð, setur minnilutin fram uppskot samsvarandi.

Ein minniluti (Finnbogi Isaksen) heldur ikki vera neyðugt at broyta alla kvøldskúlalógina fyri at náa tað mál, at «mere tidssvarende regler, navnlig angående faggrupperne . . . er nødvendige forudsætninger for den fornyelse, der er behov for inden for aftenskolen». Fyri at røkka hetta er bert neyðugt at skoyta upp í núgaldandi lóg nakrar av teimum lærugreinum, sum eru nevndar í grein 2 í fyriliggjandi uppskoti.

Eisini má haldast, at fleiri av teimum í uppskotinum nevndu tiltøkunum — kvøldháskúli og fyrilestrarrøðir — eru treytað av ógvuliga væl kvalifiseraðari arbeiðsmegi, sum longu frammanundan er tørvur á til kvøldskúlan, sum hann er.

Í álitinum verður vístá, at næmingatalið á kvøldskúlunum minkaði úr 1164 í 1960/61 til 986 í 1961/62, og hetta verður tikið sum eitt prógv fyri, at skipanin má broytast. Í hesum sambandi skal vera førl fram, at fleiri og fleiri ungfólk leita á handilsskúlar o. l., sum geva eitt prógv. Annars er talið av næmingum á kvøldskúlunum vaksandi aftur, síðani nevndin legði álitið fram. Í 1965/66 vóru 1466 næmingar á kvøldskúlunum, av teimum 1263 kvinnur. Hetta — saman við tí veruleika, at hópur av gentum leita av landinum á matgerðarskúlar o. l. — eigur at vera fullgott prógv fyri, at tað mest tørvandi er ikki nýskipan av kvøldskúlanum, men bygging av matgerðar- og kokkaskúlum og verður uppskot sett fram um hetta.

Viðvíkjandi ungdómsskúlunum heldur minnilutin tað vera heinari at bíða, til 8. og 9. skúlaár eru komin í eina fastari legu, og síðan taka spurningin upp av nýggjum og kanna møguleikarnar fyri samskipan av hesum skúlaárum og ungdómsskúlunum.

UPPSKOT

frá meirilutanum (J. Fr. Øregaard, J. P. Thomasen og P. F. Christiansen:

Málið verður sent landsstýrinum til nærri kanningar.

UPPSKOT

frá minnilutanum (Petur Christiansen):

Í fyrstu syftu: «Landsstýrinum verður álagt at gera fyrireikingar til at

seta á stovn føroyskan skúla og at øll lóggáva og umsiting skúlanum viðvíkjandi verður føroyskt sermál.»

Í aðru syftu: «Uppskotið frá landsstýrinum.»

UPPSKOT
frá minnilutanum (Finnboga Isaksen):

Álagt verður landsstýrinum at geva uppskot til bygging av matgerðar- og kokkaskúlum og leggja málið fyri aftur tingið á ólavsøku í ár.

2. viðgerð 10. mai 1967.

1) Minnilutauppskot frá Finnboga Isaksen fall 9—0.
2) Minnilutauppskot frá Petur Christiansen (1) fall 12—0.
3) Uppskotið frá meirialutanum fall 12—0.
4) Minnilutauppskot frá Petur Christiansen (2) § 1. í lógaruppskotinum fall 6—0.

So stall var lógaruppskotið burturdottið.

---

10. Landsstýrismálini

Ár 1967, 2. mai legði landsstýrisnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Nevndin, sum hevur viðgjørt landsstýrismálini, hevur gjøgnumgangið gerðabók landsstýrisins. Fundir hava verið 39 í tíðarskeiðinum frá 2. august 1965 til 27. juli 1966. Nógv mál eru viðgjørd, men ber ikki til í hesum áliti at taka tey øll til viðgerðar, men skulu nøkur verða nevnd, onnur kunnu koma til umrøðu, tá málið fær viðgerð á tingi.

6. september 1965 hevur verið til viðgerðar umsókn frá tveimum umsøkjarum um studning til 20 tons bátar bygdar í Noregi til kr. 132.700

norskar kr. fyri hvønn. Eingin støða er tikin til umsóknirnar, men er samtykt at spyrja skipasýnið, hvussu tað ber til, at linari treytir verða stillaðar teil skip, sum bygd verða í Noregi, enn til tilsvarandi skip, sum bygd verða í Føroyum, men sæst einki svar at verða komið frá skipasýninum upp á henda spurning.

Á sama fundi verður upplýst, at Kj. Mohr hevur tilboðið landsstýrinum lán, hann kundi skaffa uttanlanda. Málið er lagt fyri bankarnar og búskaparráðið til ummælis. 10. mai 1966 hevur málið aftur verið til viðgerðar, aftaná at bankar og búskaparráð hava givið sítt ummæli, og hevur landsstýrið á hesum fundi samtykt at taka málið til eftirtektar.

Á fundi 1. oktober 1965 hevur løgmaður Hákun Hjurhuus sett fram uppskot um at yvirtaka postverkið og at samráðast við ríkisstýrið um yvirtøkuna. Men semja hevur tó neyvan verið um hesa yvirtøku, tí samtykt var at útseta avgerðina til seinni fund. Á fundi 12. oktober boðaði løgmaður, at hann skuldi til fund í Stokholm í Nordisk Kontaktorgan, og at hann á veg til Stokholm vildi leggja leiðina um København. Har hann ætlaði at samráðast við ríkismyndugleikarnar um postverkið og um hvørvilt ríkisstýrið vildi krevja samsýning fyri teir bygningar, postverkið eigur í Føroyum.

Á fundi 4. november, tá løgmaður var afturkomin av sínu uttanlandaferð, greiddi hann landsstýrinum frá samráðingum sínum við stafsmínistarin um yvirtøku av postverkinum. Støða sæst ikki at verða tikin til uppskot løgmansins um yvirtøku á hesum fundi, og nú hvørvur málið úr landsstýrisins gerðabók, og kom ikki fyri aftur, og var so statt einki burturúr nakrari yvirtøku á hesum sinni.

Tollararnir verða løntir soleiðis, at teir umfram fastu løn sína, eisini fáa løn fyri yvirtíð og fyri vaktarhald umborð á skipum. Afturat hesum fáa teir eisini samsýning fyri lað, teir finna av smuglaragóðsi. Bótin fyri fyrstu fløskuna hevur verið kr. 50 og 25 kr. fyri tær fylgjandi. Av hesum hevur so tollarin fingið helvtina. Á fundi 1. oktober er eftir tilmæli frá gjaldstovuni bótin sett til kr. 100 og samsýningin ettlandi tilsvarandi.

Á fundi 1. oktober er viðgjørd umsókn frá p/f Kjølbro um at sleppa undan at gjalda skatt av inntøkum, felagið hevur havt av sølu av føstum ognum og skipum, alt kr. 247.000. Málið hevur verið til ummælis hjá líkningarvaldinum í Klaksvík, sum hevur samtykt, at allur peningurin skal skattast. Landsstýrið samtykt at eftirgeva landsskattin av hesum vinningi.

Á fundi 12. oktober er samtykt at frítaka útgerðarfelagið Dagsbrún fyri at gjalda skatt av helvtini av vinninginum av søluni av trolaranum Fiskanes.

Vaktar- og bjarginga rskip hevur verið fyri á fleiri fundum. Uppskot um slíkt skip er komið frá norska felagnum A/S Mjellem og Karlsson,

Bergen og frá Skála Skipasmiðju. Samtykt var at arbeiða eftir uppskotinum frá Skála Skipasmiðju. Meira sæst ikki at verða hent í hesum máli. Tann 12. mai 1966 er framlagd rokning frá A/S Mjellem og Karlsson uppá kr. 30.168 norskar, og var samtykt at gjalda hesa rokning. Í landsstýrisins gerðabók sæst ongastaðni nevnda felag at verða biðið um at gera projekteringsarbeiðið, sum kann hava viðført slíkar útreiðslur fyri landskassan.

Á fundi 12. mai 1966 eru til viðgerðar ymiskir spurningar í samband við Royndarstøðina og Hoyvíksgarð. Samtykt var, at Jarðarráðið fær loyvi til saman við Matrikulstovuni at gera útstykkingarplan fyri økið norðan fyri vegin oman fyri Hoydalsá. Plannin verður at leggja fyri landsstýrið til góðkenningar.

Hvat ætlanin hevur verið við hesum útstykkingarplani sæst ikki í landsstýrisins gerðabók, men har verður nú gjørdur vegur, sum er metra enn dupult so breiður, sum vanligir vegir í Føroyum, og kostar ætlandi fleiri túsund krónur pr. metur. Í mong ár hevur tað verið so, at bygdavegir, sum gjørdir verða, annaðhvørt tað eru uppdyrkingarvegir ella vegir gjøgnum byggilendi, so hevur viðkomandi kommuna hildið allar útreiðslur. Hvørvitt tað er Havnar uttanbiggja kommuna, sum letur nevnda veg gera, ella vegurin verður gjørdur fyri landskassans rokning, sæst ikki av landsstýrisins gerðabók. Nevndin heldur tað ti verða rímligt ,um landsstýrið gevur tinginum nærri frágreiðing um hetta veg.

Landskassaábyrgdir. Fiskiskipið «Leikur» er bygt í Noregi við norskari finansiering, sum landskassin veðheldur fyri. Á fundi 24. februar 1966 hevur landsstýrið samtykt, at um ikki terminsgjaldið, sum landsstýrið hevur lagt út 1. februar, verður goldin innan 15. juli, verður peningurin sendur til inkasso. 28. mai sama ár er lagt fram yvirlit yvir Portugalstrofararnar, sum landskassin eisini veðheldur fyri. Eftir hesum yvirliti hevur landskassin lagt út fyri Vágbing kr. 985.298.17, fyri Ólavur Halga kr. 317.185,01 og fyri Leivur Øssursson kr. 1.202.795,78. Málið er tikið til umhugsunnar.

Av lógarmálum eru viðgjørd 21 føroyskar lógir og 31 danskar lógir og kunngerðir. Játtaðar eru 138 umsóknir og sýttar eru 25. Tvær umsóknir um studning eru lagdar fyri tingið. Av skattamálum er lotti veittur í 174 málum og sýttur í 32.

Nevndin, sum viðgjørt hevur málið, setur einki uppskot fram.

II. Studningur í samband við politiska upplýsing

Ár 1967, 3. mars legði Hákun Djurhuus løgtingsmaður fram fyri tingflokkarnar uttan sambandsflokkin soljóðandi

UPPSKOT
til
løgtingslóg um studning í sambandi við politiska upplýsing.

§ 1.
Úr landskassanum verða veittar politisku flokkunum, ið sambært hvørt seinasta løgtingsval hava fingið umboð á tingi, 130.000 kr.

§ 2.
Henda peningahædd verður at javna soleiðis millum flokkarnar, at hvør flokkur fær eitt part fyri hvønn valdan tingmann.

§ 3.
Henda lóg kemur í gildi 1. apríl 1967.

lagtingslov om tilskud i forbindelse med politisk oplysning.

§ 1.
Af landskassen ydes de politiske partier, der i henhold til hvert seneste lagtingsvalg har opnået repræsentation på lagtings, 130.000 kr.

§ 2.
Ovennævnte sum bliver at fordele mellem partierne således, at hvert parti får en andel for hvert valgt tingmedlem.

§ 3.
Denne lov træder i kraft 1. april 1967.

Viðmerkingar:

Umráðandi er í einum fólkaræðisstjórnaðum samfelagi, at veljarafjøldin fær hollan kunnleika um politisku flokkana hugsjónarstreyn og teirra arbeiði.

Á nærsagt øllum týðandi økjum samfelagsins verður í okkara tíð veittur studningur til upplýsing, og eru óivað øll sannført um, hvussu stóran týðning og hvussu neyðugt slíkt upplýsingararbeiði er fyri samfelagsins útbúgving.

Tíverri hava útlitini av hesum knæsetta sjónarmiði higartil ikki rokkið at tí, ið nevnd kann verða politiska arbeiðsøkið, tó at júst á hesum øki verða tey mál viðgjørd og avgjørd, ið standa í sambandi við øll hini økini.

At menn í øðrum londum hava rakt við henda skeivleikan, ið vist er á her, hevur seinasta tíðin givið okkum prógv um. Til dømis er Sveriki

eitt av hesum londum, og í øðrum londum verður spurningurin eisini umrøddur.

Fyri at hjálpa politisku flokkunum at geva veljarafjøldini holla politiska upplýsing, verður hetta uppskot sett fram.

1. viðgerð 7. mars og 11. mars legði figgjarnevndin fram soljóðandi

Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt sig í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (J. Fr. Ørogaard, Hákun Djurhuus, Knút Wang, Hilmar Johansen og Hanus við Høgadalsá) mælir til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Andreas Djurhuus og Johan M. Fr. Poulsen) setir onki uppskot fram.

2. viðgerð 17. og 3. viðgerð 29. mars 1967.

Lógaruppskotið samtykt 18 6.

---

12. Broyting í skattalógini

Ár 1967, 7. mars legði varaløgmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.	lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.
§ 1.	§ 1.
Í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:	I lagtingslov nr. 50 af 2. juli 1963 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) § 9, nr. 2, verður orðað soleiðis:

«a) peningur,ið gongur til arbeiðsloysistrygging, livrentu, eftirsiturentu, avlamisrentu, eftirløntartrygging ella líknandi trygging, ið vissar hinum skattskylduga ella avvarðandi hansara árligar inntøkur.

b) peningur, ið gongur til vanlukkutrygging, sjúkratrygging, lívstrygging ella líknandi tryggingar, ið verða útgoldnar undir einum, tó ikki meira enn 600 kr. árliga.»

2) § 26, 1. stk., 1. punktum, verður orðað soleiðis:

«Fyri hvørt barnið, sum ikki er 16 ár í byrjanini á ti álmanakkaári, sum skatturin er lagdur á, og sum hevur ikki sjálv evni til at kosta uppihald sítt, verða lesi ti eftir 27. gr. útroknaða skatli teirra, ið fulla skattskyldu hava eftir 14. gr. nr. 1–3, drignar 150 kr., tó ið skattleggjandi inntøkan er minni enn 15.000 kr., og 100 kr., tá ið inntøkan er 15.000 kr. ella hægri.»

3) § 27, 1. stk., verður orðað soleiðis:

«Tey í 14. gr. nevndu óavmarkaðu skattskyldigu og tey í 15. gr. nevndu avmarkað skattskyldigu lata skatt til landskassan eftir hesum stiga:

Er stigainntøkan minni enn 6.000 kr. verður ongin skattur at gjalda.

1) § 9, nr. 2, affattes således:

«a) beløb, der anvendes til arbejdsløshedsforsikring, livrente, overlevelsesrente, invalidorente, pensionsforsikring eller lignende forsikring, som tilsikrer den skattepligtige eller hans pårørende løbende årlige indkomster.

b) beløb, der anvendes til ulykkesforsikring, sygeforsikring, livsforsikring eller lignende forsikring som engangsudbetalinger, dog ikke udover et samlet beløb af 600 kr. årlig.»

2) § 26, stk. 1, 1. punktum, affattes således:

«For hvert barn, som ved begyndelsen af det kalenderår, i hvilket skatten ansættes, er under 16 år, og som ikke har midler til at bekoste sit eget underhold, gives der de i § 14, nr. 1–3 nævnte ubegrænset skattepligtige personer et fradrag i den i henhold til § 27 beregnede skat på 150 kr., såfremt den skattepligtige indkomst er under 15.000 kr., og 100 kr., når den er 15.000 kr. eller derover.

3) § 27, stk. 1, affattes således:

«De i § 14 omhandlede ubegrænset skattepligtige personer samt de i § 15 omhandlede begrænset skattepligtige personer svarer skatten til landskassen efter følgende satser:

Er skatteindtægten under 6.000 kr. svarer ingen skat.

Er inntøkan	men minni enn	verður goldið	av	og av hinum
Er indtægten	men mindre end	erlægges	af	og af resten
kr.	kr.	kr.	kr.	pct.
6.000	7.000	75	6.000	8
7.000	8.000	155	7.000	10
8.000	10.000	255	8.000	15
10.000	15.000	555	10.000	18
15.000	20.000	1.455	15.000	26
20.000	30.000	2.755	20.000	33,6
30.000	40.000	6.115	30.000	40
40.000	50.000	10.115	40.000	57
50.000	75.000	15.815	50.000	61
75.000	100.000	31.065	75.000	66
100.000	200.000	47.565	100.000	68
200.000	400.000	115.565	200.000	70
meira enn	400.000	255.565	400.000	73

§ 2.

Henda løgtingslóg fær gildi soleiðis, at broytingin nr. 1 fyrsta ferð kemur í nýtslu fyri skattaárið 1968/69, meðan broytingarnar nr. 2 og 3 fáa gildi frá og við álíkningini fyri skattaárið 1967/68.

§ 2.

Denne lagtingslov træder i kraft således, at ændring nr. 1 første gang finder anvendelse for skatteåret 1968/69, medens ændringerne nr. 2 og 3 får gyldighed fra og med skattelignigen for skatteåret 1967/68.

Viðmerkingar:

Uppskotið inniheldur reglur um størri skattafríar fradráttir, hægri skattafrádrátt fyri børn undir 16 ár og linking í skattastiganum fyri skattskyldugar inntøkur undir 30.000 kr.

ad 1) Tað hevur fleiri ferðir verið framm at fingið broytt reglunna um frádrátt av gjøldum til eftirlønartrygging og aðrar líknandi rentutryggingagr. Bert lítið ella onki av nevndu gjøldum kunna dragast frá í sjálvuppgávuni, síðani frádráttur in fyri hesi saman við øðrum gjøldum til tryggingar er avmarkaður til 600 kr. árliga. Tá eftirløn ella aðrar rentutryggingar við útgjalding verða fult skattaðar, er veruliga talan um tvinnanda skatting, mótvegis kapitaltrygging (lívstrygging), ið er skattafrí við útgjalding.

ad 2) Barnafrádrátturin varð í 1963 settur til 150 kr., har inntøkan var undir 10.000 kr. og 100 kr., um hon var meira. Tá ið inntøkumarkini hava broytt seg hesi árini, heldur landsstýrið tað vera beint at hækka

mærkið, soleiðis at frádrátturin verður 150 kr. upp til 15.000 kr. og 100 kr. yvir.

ad 3) Broytingin í skattastiganum ger fyrst allar inntøkurnar undir 6.000 kr. (fyrr 4.000 kr.) skattafrítar til landskassan og er hann síðani linkaður fyri inntøkurnar millum 6.000 kr. og 30.000 kr. soleiðis, at hesin lætti so liðandi minkar til hann fellur burtur, tá inntøkan er 30.000 kr., har hann fellur saman aftur við núgaldandi stiga.

Umframt lækking í landsskattinum hjá lágiinntøkunum fer henda broyting eisini at lætta um fólkapensjónsgjaldið av skattleggjandi inntøkum, sum eru minni enn 12.000 kr.

Broytingarnar minka um landsskattin helst við u.l. 2 mill. kr.

1. viðgerð 9. mars og 15. legði skattanevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Meirilutin (Peter F. Christiansen, Hilmar Johansen og Poul J. Olsen) mælir til at samtykkja uppskotið hjá landsstýrinum, tó soleiðis at skattafrí frádrátturin fyri vanlukkutrygging, sjúkratrygging og kapitaltryggingar verður hækkaður frá 600 kr. til 800 kr. árliga.

Nevndini er kunnugt, at Tryggingarsambandið Føroyar hevur sent áheitan um, at hesin frádráttur verður hækkaður uppí kr. 1.000 árliga, og at Havnar Handverkarafelag hevur biðið um, at broyting verður gjørd í skattastiganum. Hesi mál eru tó ikki komin nevndini í hendi.

Meirilutin setir tí fram soljóðandi

UPPSKOT

Í uppskoti landsstýrisins § 1 -l-b verður í báðum tekstunum talið «600» broytt til «800».

Ein minniluti (Frederik Hansen) setir onki uppskot fram.

2. og 3. viðgerð 17. mars 1967.

Formaðurin legði fram soljóðandi *Minnilutaálit* frá Demmus Hentze:

Minnilutin (Demmus Hentze) leiðir seg ikki kunna mæla til at samtykkja landsstýrisins uppskot í sini heild og ger hesar viðmerkingar:

Í § 1, sum er ein broyting til § 9 nr. 2 í løgtingslóg frá 2. juli 1963, mælir

landsstýrið til, at hann peningur, ið gongur til tryggingar, ið vissa honum skattskyldugu ella avvarandi hansara, árligar inntøkur, skal kunna dragast frá allur í inntøkuni, meðan peningur, ið gongur til tryggingar, ið verða útgoldnar undir einum, skal kunna dragast frá við upp til kr. 600,00. Minnilutin heldur, at tað samsvarar vel við heildina í uppskotinum, sum er at lætta skattabyrðuna hjá teimum lægst løntu, at arbeiðsloysistrygging, avlamisrenta og fólkapensiónsgjaldið kann dragast frá, meðan fullur frádráttur fyri gjald til eftirlønartryggingar og til serliga eftirlønarskipan ikki samsvarar vel, tí hesir skattgjaldarar sita aloftast í føstum starvi og við góðari løn, og fer uppskot landsstýrisins soleiðis at geva hesum ein munandi lætta við hesum frádrátti, sum fey við lægri inntøkumum ikki fáa. Tað skal her viðmerkjast, at hann, ið tryggjar sær aldurdómin, tó við undantak av livrentu, ongan lætta fær eftir uppskotinum. Hann rindar skatt av allari sínari inntøku og tað tann uppspardi peningurin kastar av sær í rentum, verður eisini fult skattað.

Tá einki er upplýst um, hvussu nógv hesin óavmarkaði frádráttur ávirkar hin samlaða landsskattin, mælir minnilutin til ikki at samtykkja § 1, stk. 1 litra a og b, men at málið verður kannað nærri av landsstýrinum, og greinligari upplýsingar fáast og síðani leggja málið fyri tingið í ólavsøkutingsetuni. Hetta skuldi einki seinka málið, tá henda broyting ikki kemur í nýtslu fyrrenn fyri skattaárið 1968/69.

Til § 1, stk. 2 og 3 hevur sami minnilutti hesar viðmerkingar:

Tá tann skattalætti, sum gjørdur er í skattastiganum ikki er størri enn so fyri inntøkur yvir kr. 12.000,—, at tað, hesir skattgjaldarar fara at gjalda orsakað av tí hækkaða fólkapensjónsgjaldinum, verður meira eftir landsstýrisins uppskotinum enn áður, heldur minnilutin tað verða vel hóskandi, at forsyrgjarar við inntøkum frá 6.000 til 20.000 kr. við tí nógv hækkaða livikoshnaði fáa ein lætta umfram tann, ið skattastigin og tað hækkaða markið fyri barnafrádrátti ger.

Hett heldur minnilutin gerst best við at seta barnafrádráttin til kr. 150,00 fyri tað fyrsta barnið, kr. 200,00 fyri tað næsta og kr. 250,00 fyri hvørt barn, ið er meira enn tvey. Er skattleggjandi inntøka yvir kr. 20.000,—, verður barnafrádrátturin kr. 100,— fyri hvørt barnið.

Minnilutin setir tí hetta

UPPSKOT

Í uppskotinum hjá landsstýrinum verður strikað í § 1, stk. 1 litra a og b.

I forslaget fra landsstyret går ud i § 1, stk. 1 litra a og b.

Stk. 2 og 3 verða til stk. 1 og 2 og stk. 1 verður orðað soleiðis:

Fyri eitt barn, sum ikki er 16 ár í byrjanini á tí almannakkaári, sum skatturin er lagdur á, og sum hevur ikki sjálvt evni til at kosta uppihald sítt, verða frá tí eftir 27. grein útroknaða skatti teirra, ið fulla skattskyldu hava eftir 14. gr. nr. 1—3, drignar 150 kr., tá ið skattleggjandi inntøkan er minni enn 20.000 kr. Fyri tað næsta barnið verða frádrignar 200 kr., fyri tað triðja barnið verða frádrignar 250 kr. Eru fleiri enn trý børn, verða frádrignar 250 kr. fyri hvørt teirra, sum eru meira enn trý. Er inntøkan 20.000 kr. ella hægri verða kr. 100,— frádrignar fyri hvørt barnið.

Stk. 2 og 3 bliver til stk. 1 og 2 og stk. 1 får følgende formulering:

For eet barn, som ved begyndelsen af det kalenderår, i hvilket skatten ansættes, er under 16 år, og som ikke har midler til at bekoste sit eget underhold, gives der de i § 14 nr. 1—3 nævnte ubegrænset skattepligtige personer et fradrag i den i henhold til § 27 beregnede skat på kr. 150, såfremt den skattepligtige indkomst er under 20.000,—. For det andet barn gives der et fradrag på kr. 200,—, for det tredje barn gives der et fradrag på kr. 250,—. Er der flere end tre børn, gives der et fradrag på kr. 250,— for hvert barn, som overstiger tre. Når indtægten er kr. 20.000,— eller derover, gives der et fradrag på kr. 100,— for hvert barn.

Stk. 2 verður orðað sum stk. 3 í landsstýrisuppskotinum.

Stk. 2 formuleres som stk. 3 i forslaget fra landsstyret.

§ 2.

Henda løgtingslóg fær gildi frá og við álikningini 1967/68.

§ 2.

Denne lagtingslov får gyldighed fra og med skatteligningen for skatteåret 1967/68.

Minnilutin tekur undir við uppskotinum hjá meirilutanum, at frádráttur appá 600 kr. verður hækkaður til 800 kr., men tá henda lógarbroyting ikki er ætlað at koma í gildi fyrrenn fyri skattaárið 1968/69, og eingki er upplýst um, hvussu ein óavmarkaður frádráttur í stk. 1 litra a kemur at ávirka samlaða landsskattin, setir minnilutin heita

UPPSKOT

til samtykktar

Landsstýrið verður biðið um komandi ólavsøkutingsetu at leggja málið aftur fyri tingið við teim í álitinum eftirlýstu kanningum.

Broytingaruppskot frá Demmus Hentze til § 1 í landsstýrisins uppskoti var sett undir atkvøða við navnakall.

Ja atkvøddu: Vilhelm Nielsen, P. Petersen, P. Christiansen, Demmus Hentze, H. Djurhuus, Karsten Hoydal, F. Hansen, Kj. Mohr, H. v. Høgadalsá, F. Isaksen, S. Joensen og K. Wang.

Atkvøddu ikki: Martin Joensen, J. H. Dambjørg, H. Johansen, P. E. Mikkelsen, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, Johan Poulsen, P. F. Christiansen, Tummas Joensen, Joen P. Thomasen, R. Sílá, J. P. Davidsen og Poul J. Olsen.

Uppskotið fall 12 - 0.
Landsstýrisins uppskot samtykt við 26 atkvøðum.
Uppskotið til samtyktar frá Demmus Hentze burturdottið.

---

13. Veðhald av lánum til sildavirkir

Ár 1967, 7. mars legði varaløgmaður fram soljóðandi

UPPSKOT

løgtingslóg um veðhald av lánum til sildamjøl og sildaolju á goymslu.

§ 1.

Landsstýrinum er heimilt lands kassans vegna í fíggjarárinum 1967/68 at veita veðhald fyri lánum til sildamjøl og sildaolju á goymslu. Veðhaldið verður givið fyri lánum ikki upp um 70% av lánvirðinum.

§ 2.

Henda lóg kemur beinanvegin í gildi.

lagtingslov om garanti for lån til sildemel og sildeolie på lager.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne i finansåret 1967/68 at garantere for lån til sildemel og sildeolie på lager. Garantien ydes for lån, der ikke må overstige 70% af låneværdien.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Henda heimildin hjá landsstýrinum hevur verið givin í nøkur ár fyri eitt ár í senn (smbr. seinast løgtingslóg nr. 36 frá 27. mai 1966). Hon hevur komið virkinum vel við, landskassin hevur ikki komið undir at rinda.

Tílík virkir fáa eisini útflutningskredit eftir galdandi ríkislóg, men treytin er, at útflutningurin fer út um ríkið.

Tað hevur verið rættuliga munandi, sum útflutt hevur verið til Danmarkar, serstakliga hjá teim smærru virkjunum. Landsstýrið hevur samtykt at samráðast við ríkismyndugleikartar um, at eisini útflutningurin til Danmarkar kann finansierast eftir ríkislógini, so landskassin kann sleppa undan at veita veðhald.

Landsstýrið loyvir sær at leggja inn uppskot at endurnýggja lógina fyri komandi fíggjarár.

1. viðgerð 9. mars og 10. april legði fíggjarnevndin fram soljóðandi:

ÁLIT

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at mæla løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 11. og 3. viðgerð 13. april 1967.

Lógaruppskotið samtykt 25—0.

---

14. Fíggjarætlan fyri kirkjugrunnin

Ár 1967, 7. mars legði Samuel Petersen landsstýrismaður fram soljóð andi

UPPSKOT
til
fíggjarætlan fyri kirkjugrunnin 1967/68.

Inntøkur:

	Rokoskapur 1/4-1966 til 1/3-1967	Fíggjarætlan 1967/68
1. Endurgjald fyri tíggjund	7.800,00	7.800,00
2. Studningur úr landskassanum	300.000,00	310.000,00
3. Ogn pr. 1/4-1966	18.414,00	
4. Ætlað ogn pr. 31/3-1967		95.000,00
	326.214,00	412.800,00

Útreiðslur:

A. Umvælingar av kirkjum	134.116,00	175.000,00
B. Kirkjugarðar	0,00	45.000,00
C. Prestaflutningur	21.961,00	25.000,00
D. Nýggjar kirkjur	60.000,00	60.000,00
E. Tryggingar	7.031,00	7.750,00
F. Kirkjubøar kirkja	8.000,00	24.000,00
G. Ogn pr. 1/3-1967	95.106,00	76.050,00
	326.214,00	412.800,00

Viðmerking:

ad A. Umvælingar:

1964/65	62.668,00 kr.
1965/66	96.211,00 kr.
1966/67	134.116,00 kr.

miðal um kr. 100.000,00.

Uppi í er 5. gjaldið upp á kr. 16.000,00 av 5 ára játtan til umvælingina av Ólavs kirkju í Kirkjubø.

Sum tilskilað í viðmerkingunum til fíggjarætlanina m. a. 1966/67 varð

nakað væl lagt uppfyri á fíggjarlógini 1963/64 f. f. til eina størri umvæling av Sands kirkju. Nú fer umvælingini at líða nakað væl.

ad B. Kirkjugarðar:

Eftir uppgávu frá landsverkfrøðinginum eru nakrir størri kirkjugarðar í gerð, men tað er ikki vist, um nakar studningur kemur til rindingar í fíggjarárinum 1966/67, men helst nakað nógv í hesum, tí er nakað væl lagt uppfyri.

ad D. Nýggjar kirkjur:

5. gjaldið uppá kr. 40.000,—av 5 ára játtan uppá tilsamans kr. 200.000,—til Christians kirkjuna í Klaksvík og 3. gjaldið uppá kr. 10.000,— av 3 ára játtan til bønhúsið í Øravík. Harafturat kemur eykajáttan til Christianskirkjuna 2. gjaldið uppá kr. 10.000,— av 3 ára játtan.

ad F. Tryggingar:

Uppi í er 1/2 tryggingargjald av bønhúsinum í Øravík ella kr. 250,—.

ad F. Kirkjubøar kirkja:

2. gjaldið uppá kr. 24.000,00 av 5 ára játtan uppá kr. 120.000, (smbr. ad. E. 1966/67)

1. viðgerð 10. mars og 26. apríl legði kirkjunevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at mæla løgtinginum til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

2. viðgerð 28. apríl 1967.

Uppskotið frá landsstýrinum samtykt 21—0.

15. Arbeiðsloysistrygging

Ár 1967, 3. mars legði Sigurð Joensen fyri tjóðveklisflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT

til

Løgtingslóg um kannan og skipan av arbeiðsloysistrygging.

§ 1.

Landsstýrinum verður álagt at biðja ta nevnd, sum sett varð samb. løgtingslóg nr. 18 frá 26. apríl 1965 at kana málið um fólkapensjón, um eisini at kanna og leggja til rættis skipan fyri arbeiðsloysistrygging.

Nevndin gevur álit og tilmæli til landsstýrið.

§ 2.

Nevndini verður heimilað at taka sær serkøna og aðra hjálp. Tær útreðslur, ið standast av nevndararbeiðinum, verða at gjalda úr landskasanum.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

lagtingslov om undersøgelse og iværksættelse af en arbejdsløshedsforsikring.

§ 1.

Det pålægges landsstyret at anmode udvalget, der blev nedsat i henhold til lagtingslov nr. 18 af 26. april 1965 at undersøge sagen om folkepension, om tillige at undersøge samt tilrettelægge bestemmelser om en arbejdsløshedsforsikring.

Udvalget afgiver betænkning samt indstilling til landsstyret.

§ 2.

Udvalget beføjes til at anlage kyndig og anden assistance. Udgifterne, der er forbundet med udvalgsarbejdet, afholdes af landskassen.

§ 3.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerking:

Í Føroyum eru gamal og avlamin socialt trygjað, sonuleiðis er tryggjað fólki úrkomu, tá ið tey eru fyri vanlukku ella sjúku.

Í okkara grannalondum eru fólk — umframt at vera tryggjað ámóti elli, avlami, sjúku og vanlukku — eisini tryggjað móti arbeiðsloysi.

Afturat lóg um arbeiðisloysistrygging hoyrir altíð lóg um arbeiðsávísing. Arbeiðsávísingin verður í summum førum umsitin av arbeiðsmannafeløgum, men í flestu førum verður hon umsitin av tí almenna.

Hon verður hildin at vera eitt samfelagsligt áhugamál og eigur ti at vera utfanveltað.

Arbeiðsloysistryggingin má siggjast sum ein neyðugur lutur í einari størri heild av sosialari lóggávu. Uttan arbeiðsloysistryggng er henda lóggáva ófulfíggjað.

Samb. løgtingslóg nr. 18 frá 26. apríl 1965 er nevnd sett at kanna málið um eykafólkapensjón. Tað má haldast vera hóskandi, at heuda nevnd eisini kannar og leggur til rættis skipan fyri arbeiðsloysistrygging.

1. viðgerð 8. mars og 3. mai legði sociala nevndin fram soljóðandi.

ÁLIT

Í viðmerkingunum verður vist á, at í okkara grannalondum eru fólk umramt at vera tryggjað móti elli, avlamni og vanlukku eisini tryggjað móti arbeiðsloysi.

Í løgtingsmáli nr. 45/1961 varð skotið upp av sosialu nevndini at landsstýrið tók upp samráðingar við ríkisstjórnina um setan av nevnd til kannan av lóggávumi viðvíkjandi sjúkratryging og vanlukkutrygging og somulciðis at kanna møguleikar fyri lóggávu viðvíkjandi arbeiðsloysistrygging.

Henda nevnd varð fyrst skipað á summri 1965 og í henni komu at sita Hákun Djurhuus, løgmaður, Johan Djurhuus, skrivstovustjóri, 2 frá socialministeriet og 1 frá arbejdsministeriet.

Nevndin hevur loyst sína uppgávu við tað, at broytingar eru gjørdar í lóggávumi viðvíkjandi avlamis- og fólkapensjón og í sjúkra- og vanlukkutrygging, meðan nevndin ikki hevur hildið seg kunna átaka sær at gera uppskot um arbeiðsloysistrygging.

Við løgtingslóg nr. 18, 26. apríl 1965 hevur landsstýrið fingið heimild at seta nevnd at kanna spurningin um fólk, sum ikki eru upp í aðrari eftir lønarskipan enn fólkapensjón, skulu hava eina eykapensjón.

Í hesi nevnd eru:

Trygvi Árting, skrivari, valdur av Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Handverksmeistarafelag.

Frederik Hansen, løgtingsmaður, valdur av Føroya Fiskimannafelag.

Aksel Hansen, stjóri, valdur av Føroya Reiðarafelag.

Gunnar Petersen, skrivari, við Martin Joensen, løgtingsmanni, sum tiltaksmanni, valdir av Føroya Handverkarafelag, Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðsmannafelag og Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag.

Thomas Thomasen, stjóri, valdur av Føroya landsstýri.

Tá ið so er, at fann fyrr nevnda nevnd ikki kundi átaka sær at gera uppskot til arbeiðsloysistrygging og er annars liðing við arbeiði

sitt, er øll nevndin samd um at fáa ta nevnd, ið vald er við heimild í løgtingslóg nr. 18, 26. apríl 1965 at kanna og gera uppskot um skipan viðvíkjandi arbeiðsloysistrygging.

Nevndin skal tí mæla tinginum til at samtykkja uppskot tjóðveldisflokksins.

2. viðgerð 5. og 3. viðgerð 8. mai 1967.

Uppskotið frá tjóðveldisflokkinum samtykt 23—0.

---

16. Loyvi til trolveiðu innanfyri fiskimark

Ár 1967, 8. mars legði S. Joensen løgtingsmaður fyri tjóðveldisflokkin soljóðandi

UPPSKOT

til løgtingslóg um loyvi undir eftirliti at veiða við troli innan fyri 12 fjórðinga mark.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað at veita smærri fiskiførum loyvi at veiða fisk við troli á landleðini uttan um Føroyar.

§ 2.

Fiskirannsóknarstovan hevur eftirlitið og er landsstýrisins ráðgevari viðvíkjandi fiskingini innan fyri 12 fjórðinga mark.

§ 3.

Nærri treytir fyri veiðuni og eftirlitinum við henni verða at seta í serstaka reglugerð.

til lagtingslov om fiskeri med trawl under kontrol indenfor fiskeriterritoriet.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til at give mindre fiskefartøjer tilladelse at drive fiskeri med trawl inden for fiskeriterritoriet ved Færøerne.

§ 2.

Fiskeribiologisk laboratorium fører kontrollen og er landsstyrets rådgiver vedrørende fiskeriet indenfor 12 sømile grænsen.

§ 3.

De nærmere vilkår for fiskeriet samt kontrollen fastsættes i særligt reglement.

§ 4

Henda lóg fær gildi frá 1. apríl í ár og er galdandi til 31. mars 1968, tá ið hon verður at endurskoða.

§ 4.

Denne lov får gyldighed fra 1. april 1967 og indtil 31. marts 1968, da denne bliver at optage til revision.

Viðmerking:

12. mars 1964 varð fiskimarkið flutt út á 12 fjórðingar úr landi eftir beinum strikum. Síðan tá hava royndir verið gjørdar at fiska reyðtungu og reyðsprøku inni á landleiðini við góðum úrsliti.

Hildið má vera, at tíðin skuldi verið komin at lata smærri før útgjørd við troli undir eftirliti sleppa at royna á landleiðini eftir tí virðismikla fiski, sum har er.

Tíðin at veiða reyðtungu og reyðsprøku skuldi verið best um summarið, tá ið lítil og eingin annar útróður er. Einki er at ivast í, at verður loyvið givið vilja okkara flaka- og frystivinki fáa fitt av rávørn at gera burturúr júst tá tíð á árinum, tá ið lítið annað legst til.

Loyvi er áður givið til áset tal av smáum førum at royna eftir jomfrúhummara við troli inni í fjarðum og sundum. Spurningurin verður tí bara um at viðka tað loyvið, sum longu er, til eisini at galda fyri tey bæði nevndu fiskasløgini inni á landleiðini.

Neyðugt verður at avmarka hesa fisking á landleiðini, soleiðis at tað ikki verður loyvt at royna uttan á ávísum skilliga avmarkaðum leiðum og bert eina snøgt avmarkaða tíð av árinum. Helst verður tað eisini neyðugt at avmarka loyvini til eitt fátal av førum — ið hvussu er til at byrja við — á slíkan hátt sum gjørt er viðvíkjandi hummaraveiðuni.

Tað er ikki haldandi, at ein soleiðis avmarkað veiðing eftir tungu (og smáflundru) á teimum økjum, har hesin fiskur er, verður til nakran skaða, tvørturímóti, siga fiskifrøðingarnir, at tynning av stovninum av reyðtungu og reyðsprøku gerst neyðugt til at fremja vøksturin av hesum báðum fiskasløgum og øðrum fiskasløgum, sum ovnøringin av tí smáa flatfiskinum er til bágu. Her er soleiðis als ikki talan um at gauga frá nøkrum friðingarsjónarmiði innanfyri fiskimark, men talan er um neyðuga røkt og hagreiðing. Ráðiligast man vera eisini at avmarka nøgdina av tí uppfiskaða, soleiðis at fiskirannsóknarstovnur ásetur eitt ávist tonsatal árliga, fyrstu ferð fyri veiðutíðina innkomandi summar.

1. viðgerð 10. mars og 27. apríl legði fiskivinnunevndin fram soljóandi

ÁLIT

Fiskivinnunevndin hevur havt málið til viðgerðar og hevur hetta verið til ummælis hjá J. S. Joensen, fiskirannsóknarmanni á fiskirannsóknarstovu løgtingsins, sum gevur hetta ummæli:

«Frá fiskivinnunevndini hava vit fingið nevnda uppskot til ummælis. Vit skulu í hesum viðfangi vísa á skriv, ið sent er landsstýrinum 14. mars í ár, um «royndir at trola eftir tunga og øðrum fiski undir Føroyum». Avrit av hesum skrivi er hjálagt. Hetta skriv er fyribils frágreiðing um nakrar av teimum royndum, ið hígartil eru gjørdar.

Hugsa vit um allan fiskistovnin undir Føroyum, er tað avgerandi, at skipað verður so fyri, at hesin stovnur kann geva so nógv av sær sum gjørligt. Ella við øðrum orðum, at fiskiskapurin verður rikin á slíkan hátt, at mest gjørligt kann veiðast ár undan ári. Menn tala um eina optimala veiðu, t. v. s. at veiðan er so stór, sum hon kann vera, uttan at stovnurin sum heild minkar.

Føroyingar kunnu ikki einsamallir gera av, hvussu fiskast skal á øllum leiðum undir Føroyum. Bara á landleiðini ráða vit sjálvir. Sum kunnugt fingu vit 12 fjórðinga fiskimark í 1964. Hetta gjørdi landleiðina munandi víðari.

Spurningurin er nú, hvussu veiðast skal á landleiðini, og hvør reiðskapur skal loyvast her. Sum er, verur at kalla bara fiskað við húki á landleiðini. Heldur hetta fram, verður neyvan talan um eina optimala veiðu. Tað kemur fyrst og fremst av, at fleiri fiskasløg kunnu ikki veiðast við húki. Her verður m. a. hugsað um tungu og reyðsprøku. Havfaska kann eisini nevnast.

Tað er líkt til, at væl er til av tungu nú. Leysliga mett skuldi stovnurin tolað ein fiskiskap upp á 1000 tons árliga, ella við øðrum orðum, hin optimala tunguveiðan eigur at vera um 1000 tons. Og tá bretska veiðan liggur um 500 tons árliga, vil tað siga, at føroyingar eiga at kunna veiða tað sama. Hvussu skal so verða veilt? Vit vita av royndum, at væl kann veiðast við troli. Eisini snurruváð er nýtilig, men botnurin, har mest tunga er, er ikki hin besti fyri henda reiðskap. Annar spurningur er, um tungan kann veiðast við gørnum. Hesin reiðskapur er lítið royndur undir Føroyum, og okkum kunnugt er eingin royND gjørd at veiða tungu við gørnum uttan fyri landoddarnar. Menn hava hildið, at streymurin er ov harður til, at roynast kann við gørnum undir Føroyum. Men nú verður hæði upsi og toskur veiddur við gørnum. Eingt er at siga, um ikki tungan eisini kann veiðast við hesum reiðskapi. Í hvussu er eigur royND at gerast at veiða tungu og reyðsprøku við gørnum. Vit ætla at gera slíka royND summar, og tað ljóðar, at onkur annar eisini ætlar at royna.

Um loyvið verður givið at trola á landleiðini, verður spurningurin um eftirlit av avgerandi týdningi. Vit hava tíverri ongan «fiskarikontroll», sum teir hava í øðrum londum. Og eigur hetta at verða tikið til umhugsunar av løgtingi ella landsstýri. Fiskiramsóknarstovan kann ikki átaka sær eftirlit við veiðuni.

Vísandi til frammanfyri standandi skal verða mælt til, at bíðað verður í t. d. 1 ár at taka støðu til málið. Tá fer úrslitið av royndunum í summar at liggja fyri. Eisini eiga fleiri royndir at vera gjørdar við lungutroli.

Tað kann leggjast aftrat, at enn enn er eingin vandi fyri, at stovnurin er so stórur, at ein týning er bráneyðug.»

Tosað hevur eisini verið við fiskirannsóknarmann, doktara Bertelsen, stjóra. Harra Bertelsen er av sonnu áskoðan sum harra J. S. Joensen. Hann mælir til, at fleiri royndir at veiða tungu við gørnum, troli og snurruvað verða gjørdar áðrenn endalig støða verður tikin til málið um loyvi um troling eftir tungu innan fyri 12 fjórðingamark.

Nevndin hevur skipað seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Poul Jac. Olsen, Reinhold Silá, Leon Joensen og Dennus Hentze) er samdur við ummæli frá fiskirannsóknarstovuni, meðan minnilutin (Hans Thomsen) í fyrstu syftu heldur uppá uppskot tjóðveldisfløksins og í aðru syftu styðjur meirilutan.

UPPSKOT

Vísandi til tað í álitinum framflutta verður málið skotið út til endaliga støðutaking, táið umtalaðu royndir eru gjørdar og nýtt ummæli liggur fyri.

2. viðgerð 2. mai 1967.

§ 1 í lógaruppskotinum fall 5—0.

Lógaruppskotið so staff burturdottið.

Uppskot til samtyktar frá nevndini samtykt 23—0.

---

17. Val av álitismonnum og nevndum

Ár 1967, 25. apríl stóð val av álitismonnum og nevndum:

Valdir vóru:

Løgtingsnevndir:

Suðurstreymuoyar prestagjald:

Fastir limir: Oluf Nielsen, Jákup Lindenskov og Karl Jakobsen.

Tiltaksmenn: Eiden Müller, Louis Højgaard, Jákup Wenningstedt.

Norðstreymuoyar prestagjald:

Fastir limir: Arne á Rógvi, Samuel J. Samuelsen, skrivari, Haldórsvík og Alfred Hammeland, Vestmanna.

Tiltaksmenn: Andreas Andreasen, Hans Iversen.

Eysturoyar sýsla:
Fastir limir: Jacob Simonsen, Ismar Joensen, A. Abrahamsen, Fuglafirði.
Tiltaksmenn: Sámal P. Hansen, Norðagøtu, Óli Ellingsgaard, Eiði.

Norðoya sýsla:
Fastir limir: Meinhard Johansen, Jógvan Nielsen, Jakob Samson.
Tiltaksmenn: Einar Waag, Johan Christiansen, Norðdepil.

Vága sýsla:
Fastir limir: Sigmund Frederiksen, D. Danielsen, Karl Petersen.
Tiltaksmenn: Napoleon Nolsøe Petersen, Thomas J. Thomasen.

Sandoyar sýsla:
Fastir limir: Peter Joensen, Skopun, Th. P. Olsen, Húsavík, Hanus Johannesen, Sand.
Tiltaksmenn: Louis Eystberg, Skopun, Óli Danielsen, Húsavík.

Suðuroyar sýsla:
Fastir limir: Dion Nolsøe, Johan O. Djurhuus, Vág og Hans P. Thomasen, Tvøroyri.
Tiltaksmenn: Jaspur Holm og Ingeir Petersen, Tvøroyri.

Kirkjustjórn:
Johan M. Fr. Poulsen, J. F. Øregaard og Kjartan Mohr.

Grannskoðara í Føroya Sparikassa: Jákup Suni Joensen.

Umboðsmaður á aðalfundi í Skipafelagnum: Martin Joensen. Varamaður: Eiler Mikkelsen.

Umboðsmaður á aðalfundi í Sjóvinnubankanum: Eiler Mikkelsen. Varamaður: Peter H. Simonsen.

Stýrið fyri Menntamargrunnin: J. Lindenskov. Varamaður: J. H. Danbjørg.

Grønlandsfelagið: Sigfried Skaale, J. Fr. Øregaard, J. P. Weihe, Sørvág. Varamenn: Leon Joensen, Poul J. Olsen, Oddfríur Gregersen, Syðrugøtu.

Stýrið fyri Føroya Listasavn: Tórur A. Dalsgaard, Jens P. Heinesen og Flemming Samuelsen.

Skúlastjórn: Johan Poulsen, J. H. Danbjørg, Martin Holm.
Tiltaksmenn: Edmund í Garði, P. M. Dam, Peter F. Christiansen.
Skúlastjórn (eftir § 67,2): Zacharias Sørensen.

Føroya Brunatrygging: J. P. Davidsen, Eiden Müller, Vilhelm Nielsen.
Tiltaksmenn: Andrias Olsen, telegrafist, J. F. Øregaard, Kjartan Molr.

Realkreditstovnurin: Poul J. Olsen, Johan P. Petersen, Norðskáta, valdur við lutakasti.

Lønarráðið: Haldor Hansen, Peter Christiansen, Johan Simonsen, Fr. Samuelsen,
Tiltaksmenn. Aage Mikkelsen. Hanus við Høgadalsá, Knút Wang, Reinhold Sílá.

Yvirpolitirættarin: Poul J. Olsen, Trygve Samuelsen við lutakasti.
Tiltaksmenn: Dánial Magnussen, Martin Joensen.

Vanlukkutryggingarráðið: Jákup Lindenskov, Poul Petersen, G. L. Samuelsen.
Tiltaksmenn: Zacharias Zachariassen, Gunnar Hansen, Leon Joensen.

Grunnurin Føroyskt Kirkjumál: J. Fr. Øregaard, Sofus Sivertsen við lutakasti.

Løgtingsgrannskoðarar: Knút Wang, Martin Joensen, Andreas Djurhuus, Hans Thomsen (seinni: Finnbogi Isaksen).

Útvarpsnevndin: Haldor Hansen, Knút Wang, Marius Johannesen, Ólavur Mikkelsen, G. L. Samuelsen.

Yvirheilsunevndin: J. P. Henriksen, Aage Mikkelsen, Ewald Arge.

Nevnd í pf. Skipafelagið Føroyar: J. P. Davidsen og Hákun Djurhuus við lutakasti.

18. Jarðarlóggávan

Ár 1967, 10. mars legði varaløgmaður fram soljóðandi skriv:

Samsvarandi løgtingslóg nr. 17 frá 26. apríl 1965 setti landsstýrið í oktober 1965 landbúnaðarnevnd at endurskoða uppskot til løgtingslógir landbúnaðinum til fromu frá millumtingsnevnd sett samsvarandi løgtingslóg nr. 17 frá 22. mars 1956.

Nevndin fekk hesarlimir:

D. P. Danielsen, bóndi, Velbastað.
Th. Joensen, bóndi, Kollafirði.
Juul Poulsen, traðarmaður, Tórshavn.
Hanus Joensen, bóndi, Hvalvík og
H. O. Danielsen, matrikulstjóri, Tórshavn.

Sum skrivari var settur J. Andreasen, sorinskrivarafulltrúi.

25. juli 1966 gav nevndin frá sær álit í málinum.

Álitið ið inniheldur:

1) Uppskot til løgtingslóg um ymisk tiltøk landbúnaðinum til fromu.
2) Upskot til løgtingslóg um ognarjørð verður við hesum lagt fyri løgtingið.

(Sjmbr. skjal 2).

1. viðgerð 19. apríl og 27. s. m. legði búnaðarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Landsstýrið hevur ongar viðmerkingar til málið, men undir 1. viðgerð komu fram ymisk sjónarmið, su mi summum førum viktu so nógv frá uppskotinu innfrá nevndini, at tað er illa hugsandi, at búnaðarnevndin, sum hevur fingið málið til viðgerðar, verður før fyri at greiða málið í hesi tingsetu.

Nevndin mælir tí til, at hon fær heimild at halda fram sum millumtingsnevnd, og leggur fram álit í komandi tingsetu.

UPPSKOT
til samtyktar

Nevndin, sum sett var at viðgera tingmál nr. 18/1966 (vetrarting): Jarðarlóggávan, verður sitandi sum millumtinganevnd og leggur fram álit í komandi tingsetu.

2. viðgerð 28. apríl 1967.

Uppskotið frá nevndini samtykt 19—0.

---

19. Avtöka av lóg um oyðing av kópi

Ár 1967, 13. mars legði varaløgmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

Løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um oyðing av kópi	Lagtingslov om ophævelse af lagtingslov om udryddelse af sæl.
§ 1.	§ 1.
Løgtingslóg nr. 29 frá 9. mai 1963 fer úr gildi.	Lagtingslov nr. 29 af 9. maj 1963 ophæves.
§ 2.	§ 2.
Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.	Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Eftir fyriliggjandi úrslitum og royndum tykist tað so, at grundarlag er ikki at uppihalda lógini um oyðing av kópinum í Føroyum.

Í skrivi frá 2. februar 1966 hevur fiskirannsóknarstovan mælt til, at lógin verður sett úr gildi (smbr. skriv frá 8. mars 1967).

Fiskirannsóknarstovan sigur m. a.:

«Vit kunnu nú leggja aftrat, at hesi knapt 1 árini, síðan lógin kom í gildi, eru veiddir tilsamans 970 kópar. Av hesum vóru 1. árið veiddir

308, 2. árið 257, 3. árið 277 og 4. árið 128 kópar. Enn eru 2 mánaðir eftir av 4. árinum, so talið verður — at døma eftir undanfarnu árum — umleið 30 hægri. Seinasta árið verður í ollum førum nógv slakasta árið fyri kópaveiðuna, síðan lógin kom í gildi.»

Landsstýrið loyvir sær at leggja inn uppskot til lóg samsvarandi hesum.

1. viðgerð 15. mars og 10. apríl legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at mæla løgtinginum til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

2. viðgerð 12. og 3. viðgerð 13. apríl 1967.

Lógaruppskotið samtykt 22—0.

---

20. Partapeningur í pf. O.V.A, Tórshavn

Ár 1967, 17. mars legði Knút Waug fram soljóðandi

UPPSKOT

til

løgtingslóg um partapening í pf. O.V.A., Tórshavn.	lagtingslov om aktier i pf. O.V.A., Tórshavn.
§ 1.	§ 1.
Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at seta upp til 75.000 kr. í partapeningi í pf. O.V.A., Tórshavn, og at leggja út peningin úr landskassanum.	Landsstyret bemyndiges til at tegne aktier i p/f O.V.A., Tórshavn med et beløb på indtil 75.000 kr. og at disponere over beløbet af landskassens midler.
§ 2.	§ 2.
Eingin partapeningur verður teknaður ella útgoldin fyrr enn allar treytir, landsstýrið skuldi ásett, eru loknar.	Ingen del af aktiebeløbet kan tegnes eller udbetales før alle betingelser, landsstyret måtte stille, er opfyldt.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

§ 3.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í brævi dagsett 15. mars í ár hevur p/f O.V.A. við nevndarformanni sínum harra Arnold Joensen vent sær til løgtingsmenn við áheitan um, at løgtingið teknar 75.000 kr. í partapeningi í felagnum.

Um virki felagsins verður sagt í brævinum:

«Eitt partur av føroyska øllini verður virkaður til skipstroyggjur. Fyri einum ári vóru troyggjur útfluttar fyri 50 kr. stykkið, men er útflutningsprísurin í vetur komin uppá 70 kr. stykkið.

Tað er spell, at tann størsti parturin av seyðaskinnunum fer av landinum sum saltskinn. Hetta kann ikki vera rætta nýnnagongdin. Skinnini mugu verða virkað og garvað her á landi, og so verða útflutt.

Felagið hevur sett skinnvirki á stovn í Sandavági. Ætlanin var at hetta virkið skuldi fara undir garvingina í februar 1966, men orsakað av drúgvari leveringstíð av maskinum og fleiri øðrum byrjunartruplleikum, er felagið komið í fíggjarliga trongd.

Skinnvirkið kann virka 20—25.000 seyðaskinn árliga. Um hesi skinn verða útflutt sum saltskinn, verður útflutningsvirðið um 300.000 kr. Verða tey garvað í landinum, skuldi útflutningsvirðið komið at verið ikki minni enn 550.000 kr.

Allar maskinur eru nýggjar, og kann virkið við teimum framleiða 1. flokks vøru. Prøvar hava verið í Týsklandi, og hava teir fingið gott ummæli.

Enn trýtur 1 maskina, men kemur hon ein av fyrstu døgunum fr Týsklandi.»

Brævið, sum er viðlagt málinum, endar við yuskinum um, at allir tingmenn taka vel undir við hesum máli.

Løgtingið hevur eftir førinnuni styðjað virki, sum hava lagt til brots at royna nýggjar leiðir innan ídnaða og handverk, ella har hetta hevur økt møguleikarnar, har eingi arbeiðsskapandi virki hava verið frammaundan.

Sum dømi um tílík virki kann verða nevnt, at løgtingið seinastu árini hevur selt partapening í Grótvirkið í Havn, í Sildamjølsvirkið í Fuglafirði, í Suðurfisk í Vági og Snarfrost í Iðvági, eins og løgtingið hevur veitt veðhald fyri lánum til Sildaídnaðarvirkið á Drelnesi og Fiskavirkið í Vestmanna, tá ikki aðrir møguleikar vóru.

Við undantak av Grótvirkinum var hetta alt innanfyri fiskivinnuna, men í seinastuni hava innanfyri landbúnaðin møguleikar tikið seg upp

við pf. Grøði, spinnari, ull- og tøtingarvirki hava vit, so nú eru seyðaskinnini eftir.

Virkið O.V.A. við skinnvirkinnu í Sandavági lænir tveimum endamálum, at virka eina vøru, seyðaskinn, sum fór óvirkað av landinum fyri tað mesta, og at skapa virksemi í eini bygd, har ikki eru møguleikar fyri fiskaídnaðarvirki. Haraftarat at skapa størri nationala úrtøku úr landbúnaðinum.

Felagið hevur havt fleiri byrjunartrupulleikar, so at tað er ikki komið í fulla gongd enn, og trongligt verður tí við peningi.

Ætlanin við, at løgtingið setir 75.000 kr. í, er at felagið skal koma undan hesum trupulleikum nú og fara til verka uttan dvøl.

Motiveringin fyri stuðli á henda hátt er tann sama, sum til onnur tílík virki, ið eru tey fyrstu á sínum øki. Tað hevur harmað mangan, at so gott sum øll seyðaskinn skulu fara óvirkað av landinum. Tær royndir, sum fyrr eru gjørdar, hava ikki eydnast. Nú er møguleiki at fáa eitt tílíkt virki á gongd.

Roknskapur felagsins og figgjarstøða eru viðløgd málinum. Av hesum sæst, at felagið hevur tað ikki rúmsátt figgjarliga, fyrrenn tey keyptu skinnini eru virkað ella seld.

Figgjarstøða felagsins vísir, at maskinur pr. 31. december 1966 eru settar til 309.296,50 kr. og vørur á goymsli vóru 210.000 kr. Tað mesta av skuldini er kassakreditur ella veðskuld í Føroya Banka. Partapeningurin er 80.000 kr. Roknskapurin er revideraður av Jógvan Sundstein.

Vit undirritaðu tingmenn mæla løgtinginum til, við at samtykkja frammanfyristandandi lógaruppskot at styðja málið.

Eftir § 1 í uppskotinum verður felagnum beinanvegin veitt 75.000 kr. í partapeningi úr landskassanum og eftir § 2 fær landsstýrið sama møguleika til at fylgja við felagsins virki, sum við øðrum virkjum, sum partapeningur er settur í úr landskassanum.

1. viðgerð 29. mars og 9. mai legði figgjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Løgtingsmenninir Knút Wang og Frederik Hansen hava lagt fram á ting lógaruppskot um, at løgtingið setur kr. 75.000 sum partapening í pf. O.V.A.

Felagið hevur garvingarvirkið í Sandavági. Partapeningurin er kr. 80.000. Løgtingið veðheldur fyri einum láni uppá kr. 214.000. Í umsóknini verður sagt, at av tí at virkið, sum fór undir at keypa skinn í tí treysti, at maskinurnar, sum bilagdar vóru, fóru at koma um sama mundi, men blivu nógv seinkaðar, kom virkið í figgjarligar trupulleikar.

Tá ið umsóknin varð skrivað, vóru enn ikki allar maskinurnar komnar, men stjórin hevur upplýst fyri nevndini, at tann seinasta maskinan nú er komin, men trýtur teinum pening fyri at innloysa hana.

Eftir hvat stjórin upplýsir, hevur felagið enn ongar vørur útflutt, men at øll tey skinn, sum liggja á lager, eru arbeitt so vel ávegis, at tað er til ferdiggerðan av hesum skinnum, nevnda maskina skal brúkast. Nevndin er samd við uppskotsstillararnar, at tað er slórt spell, nú hetta virkið er komið so langt áleiðis, at tað ikki fær møguleika fyri at koma rettuliga í gongd. Annað er hvørvitt tingið skal seta allan tann pening í, sum neyðugur er fyri, at hetta kann verða møguligt. Helst er tað so, at partapeningurin fyri ein part er taptur.

Ein meiriluti (J. Fr. Øregaard, Hilmar Johansen, A. Djurhuus, K. Wang, Hákun Djurhuus og Johan Poulsen) skjýtur upp, at partapeningurin verður niðurskrivaður í helvt, at partaeigararnir sjálvir skaffa 25.000 kr. og at løgtingið setur í sum partapening kr. 50.000, alt treyland av, at tann nýteknaði partapeningurin einans verður til at endurreisa felagið, og ikki til at gjalda skuld við.

Ein minniluti (Hanus við Høgadalsá) skjýtur upp, at partapeningurin verður niðurskrivaður í 10.000 kr., at partaeigararnir skaffa sjálvir miost líka mikið, sum tað sum løgtingið setur í, og at partapeningur tingsins ikki fer upp um kr. 50.000.

BROYTINGARUPPSKOT

frá meiriluttanum (J. Fr. Øregaard, Hilmar Johansen, A. Djurhuus, K. Wang, Hákun Djurhuus og Johan Poulsen):

§ 1 í lógaruppskotinum verður orðað soleiðis:

«Landstýrinum verður heimilað landskassans vegna at seta kr. 50.000 sum partapening í pf. O.V.A. í Tórshavn móti at partapeningurin verður niðurskrivaður 50 % og hvørt partabrævið bareftir, og at partaeigararnir útvega sjálvir kr. 25.000 í partapeningi.

«Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at tegne som aktiekapital kr. 50.000 i pf. O.V.A., Tórshavn, mod at selskabets aktiekapital nedskrives med 50 % og alle aktier nedskrives forholdsmæssigt og derhos, at aktionærerne selv nytegner kr. 25.000.»

BROYTINGARUPPSKOT

frá minniluttanum (Hanus við Høgadalsá).

§ 1 í lógaruppskotinum verður orðað soleiðis:

«Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at seta uppi kr. 50.000 sum partapening í pf. O.V.A. í Tórshavn, móti at partapeningurin verður niðirskrivaður í kr. 10.000 og at partaeigararnir útvega líka nógv, sum landskassans part.»

«Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at tegne sum aktiekapital indtil kr. 50.000 i pf. O.V.A. i Tórshavn, mod at aktiekapitalen nedskrives til kr. 10.000 og at aktionærerne nytegner så meget, som landskassens andel.»

2. viðgerð 9. og 3. viðgerð 10. mai 1967.
§ 1 í tí upprunaliga uppskotinum fall 8-0.
Uppskotið frá meirilutanum í nevndini samtykt 20—0.

---

21. Ymiskar ríkislógir

Ár 1967, 17. mars legði lógarnevndin fram soljóðandi

ALIT

Landsstýrið hevur lagt fyri løgtingið fylgjandi ríkislógir og viðmælir, at tær eftir lóg nr. 51 frá 1. apríl 1896 verða lýstar at galda í Føroyum:

Lóg nr. 86 frá 25. mai 1966 og lóg nr. 90 frá 22. december 1966 «om indfødsrets meddelelse»,
Lóg nr. 338 frá 21. november 1961 «om ændringer i lov om sparekasser» og lóg nr. 79 frá 13. mars 1963 «om tilsyn med banker og sparekasser m. v.» og
Lóg nr. 85 frá 31. mars 1953 «om oprettelse af produktivitetsfonds», gr. 3, stk. 3.

Eisini hevur landsstýrið lagt fyri løgtingið lóg nr. 194 frá 8. juni 1966 «om tatovering», men heldur í framløguskrivinum, at henda lóg helst ongan týdning hevur fyri Føroyar og mælir tí frá at lýsa hana at galda her.

Lógarnevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at mæla til, at

allar tær nevndu lógir verða at galda fyri Føroyar og setir fram fylgjandi:

UPPSKOT

Løgtingið samtykkir, at

1) Lóg nr. 86 frá 22. december 1966 «om indfødsrets meddelelse»,
2) Lóg nr. 338 frá 24. november 1961 «om ændringer i lov om sparekasser» og lóg nr. 79 frá 13. mars 1963 «om tilsyn med banker og sparekasser m. v.»,
3) Lóg nr. 85 frá 31. mars «om oprettelse af en produktivitetsfond», gr. 3, stk. 3, og
4) Lóg nr. 194 frá 8. juni 1966 «om tatovering»,

verða lýstar at galda í Føroyum.

2.viðgerð 29. apríl 1967.

Uppskotið frá nevndini samtykt 24—0.

---

22. Eykaviðbót til fiskaprísin

Ár 1967, 12. apríl legði varaløgmaður fram soljóðandi

UPPSKOT

løgtingslóg um broyting í lóg um serstakt innflutningsgjald.

§ 1.

Í § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 27. apríl 1961 sum broytt í løgtingslóg nr. 31 frá 17. mai 1963 um serstakt innflutningsgjald verður «5 %» broytt til «8 %».

lagtingslov om ændring i lov om en særlig indførselsafgift.

§ 1.

I § 1 i lagtingslov nr. 9 af 27. april 1961 som ændret ved lagtingslov nr. 31 af 17. mai 1963 om en særlig indførselsafgift ændres «5 %» til «8 %».

§ 2.

Í fíggjarárinum 1967/68 er landsstýrinum heimilað at rinda úr landskassanum eftir uppgerð frá lønjavningangrunninum eina eykaviðbót til fiskaprísin til teirra, sum røkja útróður til lands í Grønlandi og heimaútróður upp í 10 oyru pr. kg eftir sama reglum sum higartil og annars eftir reglugerð, sum landsstýrið góðkennir.

§ 2.

I finansaaret 1967/68 bemyndiger landsstyret af landskassen i henhold til opgørelse fra lønreguleringsfonden at yde et ekstraordinært tilskud til fiskeprisen til bådfiskeri i Grønland samt hjemmefiskeri op til 10 øre pr. kg efter hidtil gældende bestemmelser og iøvrigt efter regulativ, godkendt af landsstyret.

§ 3.

Henda lóg fær gildi beinanvegin.

§ 3.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Eftir at prísurin á fiskaflaki og summum fiski er farin munandi niður í seinastuni, hava løgting og landsstýri fingið áheitanir um hægri viðbót til fiskaprísin.

Fyriliggjandi lógaruppskot hevur tí til endamáls at veita føroyskum fiskimonnum, sum røkja útróður til lands í Grønlandi og heimaútróður eina eykaviðbót til fiskaprísin í hesum fíggjarárinum.

Eykaviðbótin er ætlað til tess at javna munin millum ráfiskaprísin, sum hann, tá hann var hægstur í 1966, men ikki uppum 10 oyru pr. kg og eftir sama reglum sum higartil.

Sum tilskilað í § 2 í lógaruppskotinum, skal landsstýrið geva sína góðkenning til reglugerðina, sum eykaviðbótin verður at veita eftir, og tí hon er ætlað at javna prísmunir, verður hon at minka so hvørt, sum prísurin fer upp í ein vissan mun til prísvøksturin.

Eftir fyriliggjandi hagtølum hava veiðunøgdirnar verið nettar í ráfiski:

í Grønlandi: 1965	8.989.825 kg
í Grønlandi: 1966	10.938.000 kg
Heimaútróður 1965/66	13.213.520 kg
Heimaútróður 1966/67 (eftir ætli)	14.000.000 kg

Eftir meting frá gjaldstovuni er hækkingin í serstaka innflutningsgjaldinum mett at geva landskassanum um kr. 3 mill.

1., 2. og 3. viðgerð 12. apríl 1967.

Formaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá Háku Djurhuus og Kjartan Mohr til § 2:

Grein 2 í landsstýrisins verður orðað soleiðis:

Í figjarárinum 1967/68 er landsstýrinum heimilað at rinda úr landskassanum eftir uppgerð frá lønjavningargrunninum eina eykaviðbót til fiskaprísin til teirra, sum røkja útróður til lands í Grønlandi uppí 15 oyru pr. kg og til heimaútróður uppí 20 oyru pr. kg eftir somu reglum sum hingartil og annars eftir reglugerð, sum landsstýrið góðkennir.

I finansåret 1967/68 bemyndiges landsstyret af landskassen i henhold til opgørelse fra lønreguleringsfonden at yde et ekstraordinært tilskud til fiskeprisen til bådfiskeri i Grønland op til 15 øre pr. kg samt til hjemmefiskeri op til 20 øre pr. kg efter hidtil gældende bestemmelser og iøvrigt efter regulativ godkendt af landsstyret.

Broytingaruppskotið var sett undir atkvøðu við navnakall:

Ja atkvøddu: Poul Petersen, Peter Christiansen, Knút Wang, Háku Djurhuus, Karsten Hoydal, Frederik Hansen, Kjartan Mohr, Hanus við Høgadalsá og Finnbogi Isaksen.

Atkvøddu ikki: Martin Joensen, J. H. Danbjørg, Hilmar Johansen, Trygve Samuelsen, Leon Joensen, Andreas Djurhuus, Johan Poulsen, Joen P. Thomasen, Tummas Joensen, Peter F. Christiansen, Reinhold Silá, J. P. Davidsen, Poul J. Olsen og J. Fr. Øregaard.

Burtur: Vilhelm Nielsen, Demmus Hentze og Sigurð Joensen.

Uppskotið fall 9—0.

§ 2 í landsstýrisins uppskoti var sett undir atkvøðu við navnakalli:

Ja atkvøddu: Martin Joensen, J. H. Danbjørg, Poul Petersen, Peter Christiansen, Hilmar Johansen, Knút Wang, Háku Djurhuus, Trygve Samuelsen, Leon Joensen, Andreas Djurhuus, Johan Poulsen, Peter F. Christiansen, Tummas Joensen, Joen P. Thomasen, Karsten Hoydal, Frederik Hansen, Kjartan Mohr, Reinhold Silá, Hanus við Høgadalsá, Finnbogi Isaksen, J. P. Davidsen, Poul J. Olsen og J. Fr. Øregaard.

Burtur: Vilhelm Nielsen, Demmus Hentze og Sigurð Joensen. 23—0.

Lógarupskotið sum heild samtykt 14—0.

23. Sunnudagshvíld á skipum

Ár 1967, 11. apríl legði lógarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Føroya Fiskimannafelag hevur sent løgtinginum soljóðandi skriv, dagfest 21. februar 1967:

«Stjórn Føroya Fiskimannafelag hevur samtykt at heita á Føroya løgting um at gera reglurnar um sunnudagshvild á skipum so strangar, at tær verða hildnar».

Málið var beint í lógarnevndina.
Nevndin hevur viðgjørt málið og skal vísa á tær reglur, ið eru galdandi viðvikjandi sunnudags- og heiligdagsarbeiði umborð á skipum.
Tann av løgtinginum í seinastu tingsetu samtykta sjómansløgtingslóg fyrisetur í § 56 fylgjandi:

«Sunnudagar og aðrar í landinum fyriskipaðar heiligdagar má sjómaður ikki fáa fyrisett arbeiði, sum kann freistast.»

Í viðmerkingunum til rikislóg nr. 181 frá 1. mai 1923 (Sømandsloven), hvørs § 56 er orðað eins og § 56 í sjómansløgtingslógini verður m.a. sagt:

«Som eksempler på arbejde, som ikke kan opsættes, kan nævnes:
Arbejde, som fordres til skibets sikkerhed og manøvrering, maskineus betjening, nødvendig daglig rengøring, kosttilberedning og fornøden bådtjeneste og sejltørring».

Eisini verður víst til løgtingslóg nr. 5 frá 28. februar 1956 um hvíldartíð á føroyska fiskiskipum og løgtingslóg nr. 36 frá 30. apríl 1957 um uppískoyti til løgtingslóg nr. 5 frá 28. februar 1956 og til løgtingslóg nr. 56 frá 28. juni 1963 um broyting í løgtingslóg nr. 5 frá 28. februar 1956, har § 1 er soljóðandi:

«§ 1 stk. 1 í løgtingslóg nr. 5 frá 28. februar 1956 sum broytt við løgtingslóg nr. 36 frá 30. apríl 1957 verður orðað soleiðis:

«Manningin á føroyskum fiskiskipum hevur, tá viðurskiftini gera hað ikki ómøguligt, rætt til sunnudagshvíld frá kl. 24 leygardag til kl. 24

sunnudag, aðrar dagar 8 tímar hvíld um samdøgrið, soleiðis at 6 tímar av hesi hvíld verða óbrotnir».

Eftir § 2 í løgtingslóg nr. 5 frá 28. februar 1956 hevur skipari ábyrgd av, at lógarreglan verður hildin og eftir § 3 kemur tann, ið brýtur hesar reglur undir sekt ella hefting.

Sjómansløgtingslógin hevur í § 77 samsvarandi straffireglur.

Av hesum skilst, at tað neyvan skyldast tørvandi lóggávu, at reglurnar ikki verða hildnar.

UPPSKOT

Eintak av álitinum verður sent Føroya Fiskimannafelag.

2. viðgerð 13. apríl 1967.

Uppskotið frá nevndini samtykt 18–4.

24. Broyting í reglum um uppmáling av skipum

Ár 1967, 14. apríl legði varaløgmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

broytingar í løgtingslóg um uppmáling av skipum.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 38 frá 1. mai 1957 um uppmáling av skipum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 5 verður litra a) orðað soleiðis:
«a) bruttotonsatalið, sum inniheldur tonsatalið av øllum

ændringer i lagtingslov om opmåling af skibe.

§ 1.

I lagtingslov nr. 38 af 1. maj 1957 om opmåling af skibe foretages følgende ændringer:

1) I § 5 affattes litra a) således:

«a) bruttotonnagen, der omfatter alle lukkede rum i

luktum rúmum skipsins undantikið serstakliga dupultbotnstangar og - undir vissum treytum — rúm á ovasta millumdekki og oman fyri ovasta dekk, og»

skibet med undtagelse navnlig af dobbeltbundtanke og på visse betingelser — rum i skibets øverste mellemdæk og over dets øverste dæk, og»

2) § 6, litra b) verður orðað soleiðis:

«b) umafturmáling, um so er, at broytingar verða gjørdar í máldum skipi, herundir í nýtsluni av rúmum, sum ávirka brutto- ella nettotonsatal skipsins ella onnur viðurskifti, sum nevnd eru í málibrævi skipsins, smb. § 7, stk. 1.»

2) § 6, litra b), affattes således:

«b) ommåling, såfremt der efter skibets første måling foretages forandringer, herunder i benyttelsen af rum, der påvirker skibets brutto- eller nettotonnage eller andre forhold, der er anført i skibets målebrev, jfr. § 7, stk. 1.»

3) § 7, stk. 2 verður orðað soleiðis:

«Stk. 2. Málingarmyndugleikin kann krevja, at upplýsingar, sum eru avgerandi fyri tonsatalið, verða merktar á skipið.»

3) § 7, stk. 2 affattes således:

«Stk. 2. Målingsmyndigheden kan kræve, at oplysninger, der er afgørende for tonnagen, påmærkes skibet».

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í mai 1965 eru gjørdar ymsar broytingar í millumlandasáttmálanum um uppmáling av skipum. Broytingarnar viðvíkja serliga framgangsmátanum viðv. uppmáling av chelterdeksrúmum og øðrum opnum rúmum. Sjálvt princippið er tó óbroytt, at eitt skip kann hava eitt hægri ella lægri tonsatal, alt eftir sum rúmið millum ovasta dekk og dekk nr. 2 (chelterdeksrúmið) verður viðroknað ella ikki. Meðan eitt slíkt rúm nú verður roknað uppí bruttotonsatalið, um tað er lukt, kunnu eftir nýggju reglunum vanlig lastarúm og ávís storesrúm oman fyri málidekkið frítakast fyri at verða roknað uppí bruttotonsatalið, sjálvt um rúmini verða lukt permanent.

Eigarin ger sjálvur av, eftir hvørjum reglum hann ynskir skipið uppmált, ella um hann ynskir málibrev við tveimum tonsatølum (opið og lukt.)

Fyri at málibrøvini hjá føroyskum skipum skulu verða viðurkend í útlendskum havnum, er tað tí neyðugt at broyta lógini, sum skotið er upp, so hon samsvarar við millumlanda málireglum.

1. viðgerð 17. og 27. apríl legði lógarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Galdandi løgtingslóg um uppmáling av skipum er frá 4. mai 1957. og førir landsstýrið fram í sínum viðmerkingum til uppskotið um broytingar í nevndu lóg, at tað í mai 1965 eru gjørdar ymsar broytingar í millumlandasáttmálum um uppmáling av skipum serliga viðvíkjandi uppmáling av chelterdeksrúmum og øðrum opnum rúmum, og at tað tí er neyðugt at ajourføra galdandi lóg, fyri at málibrøvini hjá føroyskum skipum skulu verða viðurkend í útlendskum havnum.

1. viðgerð av málinum fór fram tann 17. apríl h.á. og varð málið beint í lógarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 2. og 3. viðgerð 6. mai 1967.

Lógaruppskotið samtykt 21—0.

---

25. Broyting í lóg um stuðul til bygging av farmaskipum

Ár 1967, 17. apríl legði varaløgmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til bygging av farmaskipum.	lagtingslov om ændring i lagtingslov om støtte til bygning af fragtskibe.

§ 1.

I § 6 í løgtingslóg nr. 15 frá 31. marts 1966 um stuðul til bygging av farmaskipum verður gjørd henda broyting: «3,75 %» verður til «6,00 %».

§ 2.

Henda lóg fær gildi frá 13. april 1967.

§ 1.

I § 6 i lagtingslov nr. 15 af 31. marts 1966 om støtte til bygning af fragtskibe foretages følgende ændring: «3,75 %» bliver til «6,00 %».

§ 2.

Denne lov træder i kraft fra 13. april 1967.

Viðmerkingar:

Eftir § 6 í løgtingslóg nr. 15 frá 31. marts 1966 um stuðul til bygging av farmaskipum letur landskassin til fulla ella partvísa endurrinding av serliga innflutningsgjaldinum, ið eisini verður latið av tilfari til bygging av farmaskipum á føroyskum skipasmiðum, í studningi uppi 3,75 % av virði skipsins eftir meting.

Tá ið lógin kom í gildi var serliga innflutningsgjaldið 5 %, men er tað nú við løgtingslóg nr. 11 frá 12. april 1967 hækkað upp í 8 %. Hækkingin er so statt 60 %.

Tá ið ætlanin við studninginum er at veita skipasmiðjunum eina kompensatión, er skotið upp, at studningurin eins og innflutningsgjaldið verður hækkað til 60 % ella frá 3,75 % til 6,00 %.

1. viðgerð 18. og 20. april legði figgjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd við landsstýrinum í, at gjøld og avgiftir, sum álagd verða fyri at gera landskassan føran fyri at lúka ávísar uppgávur, sum í hesum føri prísískoti til fiskaprísin, ikki megu raka aðrar vinnugreinir, so tær av tí orsøk verða minni kappingarførar.

Nevndin er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskoti.

2. viðgerð 24. og 3. viðgerð 26. april 1967.

Lógaruppskotið samtykt 23—0.

26. Vedhald av lánum til skipabygging

Ár 1967, 17. apríl legði varaløgmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um veðhald av prioritetslánum til fiskiskip.

§ 1.

Landsstýrinum er heimilt landskassans vegna at ganga í veð fyri prioritetslánum til nýbygd fiskiskip.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin og verður at endurskoða í løgtingssetuni 1969.

lagtingslov om garanti for prioritetslån til fiskeskibe.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for prioritetslån til nybyggede fiskeskibe.

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft og optages til revision i lagtingssamlingen 1969.

Viðmerkingar:

Løgtingslóg nr. 17 frá 25. apríl 1960, sum eisini gav landsstýrinum saman við fíggjarnevndini heimild at ganga í veð fyri útlendskum íleggingum til skipabygging galt tit fíggjarárið 1964/65 var úti, men henda heimildin var ikki endurnýggjað í nú galdandi løgtingslóg nr. 4 frá 24. mars 1965 um veðhald av lánum v.m. til bygging av fiskiskipum.

Henda lógin frá 1965 gevur landsstýrinum heimild at ganga í veð fyri byggilánum yvirhøvur og harafturat, at føroyskar skipasmiðjur eru førar at halda byggitreytir eftir sáttmálum, men ikki at ganga í veð fyri prioritetslánum í skipum, hvørki heima ella úti.

Nú tað tykist neyðugt at gera sáttmála m.a. við norskar skipasmiðjur um bygging av fiskiskipum, m.a. tí lán úr realkredittstovninum og fiskaríbankanum eru so dýr framvegis orsakað av stórum kursmunum, hevur landsstýrið hildið tað verið neyðugt at fáa heimildina endurnýggjaða m.a. at ganga í veð fyri norskum lánum til byggingar av fiskiskipum. Eftir uppskotinum skal henda lógin galda so leingi sum nr. 4 frá 24. mars 1965.

1. viðgerð 18. og 20. apríl legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Í viðmerkingunum frá landsstýrinum verður vist á, at lánini frá Realkreditinstituttinum og Fiskaribankanum eru so dýr vegna stóran kursmun, at aðrar leiðir megu roynast fyri at skaffa lán til endurnýggjan av fiskiskipaflotanum.

Nevndin er samd við landsstýrið í hesum, men heldur annars ikki at rætta leiðin er, at landskassin tekur ábyrgd av øllum lánum til endurnýggjan av fiskiskipaflotanum, sum náturligt skuldi verið fyrst og fremst hjá Realkreditstovninum.

Allar royndir mugu tí verða gjørdar fyri at skaffa hesum stovni bíligan pening til útlán til fiskiskipabygging. Hetta er so mikið meira neyðugt av teirri orsøk, at um finansieringin skal verða frá øðrum londum enn Føroyum og Danmark, hvaðani Realkreditstovnurin higartil hevur fingið peningin, vilja tær føroysku skipasmiðjurnar missa hesi arbeiði, og setur nevndin fram uppskot samsvarandi hesum.

Annars er nevndin samd við landsstýrið, at inntil tað er eydnast at skaffa bíligari pening, eigur landsstýrinum at verða heimilt at ganga í við fyri nevndu lánum, men skýtur upp, at hetta verður gjørt saman við figgjarnevndini í hvørjum einstøkum føri, og at lánihæddin verður at avmarka til 50 milliónir.

I. UPPSKOT

Gr. 1 verður orðað soleiðis:

§ 1.

Landsstýrinum er heimilt saman við figgjarnevndini landskassans vegna at ganga í við fyri prioritetslánum til nýbygd fiskiskip. Hetta veðhald má tilsamans ikki fara uppum 50 milliónir krónur.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til sammen med finansudvalget landskassens vegne at garantere for prioritetslån til nybyggede fiskeskibe. De samlede garantier må ikke overstige 50 millioner kroner.

II. Uppskot til samtyktar.

Landsstyrinum verður álagt at royna at fáa til vega eins bílig lán til byggjan av føroyskum fiskiskipum, ið bygd verða á føroyskum skipasmiðjum, sum tey ið útlendskar skipasmiðjur kunnu bjóða.

2. viðgerð 24. og 3. viðgerð 26. april 1967.

Broytingaruppskot til § 1 samtykt 21—0.
Landsstýrisins uppskot so broytt samtykt 23—0.
Uppskotið frá nevndini til samtyktar samtykt 22—0.

---

26. Eykaveðhald av láni til Suðuroyar fiskiídnað

Ár 1967, 17. apríl legði varaløgmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um veðhald fyri láni til p/f Suðuroyar Fiskiídnaður.	lagtingslov om ændring i lagtingslov om garanti for lån til p/f Suðuroyar Fiskiídnaður.
Í § 1 í løgtingslóg nr. 31 frá 20. mai 1965 um veðhald av láni til p/f Suðuroyar Fiskiídnaður verður gjørd hendu broyting: «kr. 1.050.000» verður «kr. 1.382.000».	I § 1 i lagtingslov nr. 31 af 20. maj 1965 om garanti for lån til p/f Suðuroyar Fiskiídnaður foretages følgende ændring: «kr. 1.050.000 bliver til «kr. 1.382.000».

Viðmerkingar:

Í løgtingssetuni 1964, jbr. løgtingstíðindi 1964 bls. 253, samtykti tingið at geva landsstýrinum heimild fyri einum láni til p/f Suðuroyar Fiskiídnaður uppí hægst 1.050.000 kr. svarandi til kostnaðarætlanina fyri tað fiskamjølsvirki, byrjast skuldi við.

Virkið hevur verið í rekstri síðani marts 1965 og hevur landsstýrið nýtt veðhaldsheimildina.

Á Ólavsøku 1966 vendir felagið sær aftur til løgtingið, jbr. løgtingsmál nr. 14/1966 og greiðir frá, at upprunaliga kostnaðarætlanin holt ikki, men er kostnaðurin vorðin um 332.000 kr. hægri. Felagið søkir um eykaveðhald fyri einum láni, sum er 80% av meirkostnaðinum at galda

aftur yvir 15 ár. Løgtingið samtykti at senda landsstýrinum málið til kanningar.

Síðani er málið kannað, virkisnevndin hevur havt tað til ummælis, og annleggið er virðismett.

Fíggjarnevndin hevur nú sent landsstýrinum nýggja umsókn frá felagnum um eykaveðhald.

Hóast tað at málið møguligt hevði fingið eina aðra gongd, um landsstýrið av fyrstani hevði fingið høvi til at viðgjørt tað, áðrenn tað var lagt fyri løgtingið, liggur tað nú soleiðis fyri, løgtingið hevur tikið principiella støðu og projektið er óbroytt, og tað ikki er rætt ikki at ganga umsóknini á møti.

1. viðgerð 18. og 25. apríl legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Í viðmerkingunum hjá landsstýrinum verður víst á, at um tað var landsstýrið, sum av fyrstan tíð hevði havt málið til viðgerðar, vildi viðgerðin kanska havt verið annarleiðis. Men sum málið nú er komið at liggja, millum annað bleiv virkið dýrari enn upprunaliga roknað við og at tað er ilt at fáa lán til nevnda meirkostna, um ikki landskassin eisini tekur ábyrgd av hesum, mælir landsstýrið til, at tað verður gjørt.

Fígjarnevndin, sum hevur viðgjørt málið, er (við undantak av Hanus við Høgadalsá) samd við landsstýrið, men setir sum treyt, at tey brek og teir manglir, sum sýnsmaður hjá landsstýrinum hevur gjørt vart við, verða rættað.

Uppskot frá meirilutanum (J. Fr. Øregaard, Hilmar Johansen, Hákun Djurhuus, Knút Vang, Andreas Diurhuus og Johan Poulsen):

Uppskot landsstýrisins verður at samtykkja.

Áðrenn landsstýrið landskassans vegna tekur ábyrgd av nevnda láni, verður vissa fingin fyri, at teir manglir, sum nevndir eru í sýnsforrætningini verða rættaðir.

Minnilutin (Hanus við Høgadalsá setir onki uppskot fram.

2. viðgerð 27. apríl og 3. viðgerð 2. mai 1967.

Lógaruppskotið samtykt 15—0.

Uppskot II frá nevndini samtykt 21—0.

---

28. Broyting í lögtingslóg um endurnýgging av fiskiskipaflotanum

Ár 1967, 17. apríl legði varaløgmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um endurnýgging av fiskiskipaflotanum

§ 1.

Í § 5, stk. 2 í løgtingslóg nr. 48 frá 30. mai 1664 um endurnýgging av fiskiskipum verður gjørd henda broyting:

«3,75 %» verður til «6,00 %».

§ 2.

Henda lóg fær gildi frá 13. apríl 1967.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om fornyelse af fiskeflåden.

§ 1.

I § 5, stk. 2 i lagtingslov nr. 48 af 30. mai 1964 om fornyelse af fiskeflåden foretages følgende ændring:

«3,75 %» bliver til «6,00 %».

§ 2.

Denne lov træder i kraft fra 13. april 1967.

Viðmerkingar:

Víst verður til løgtingsmál nr. 25/1966.

1. viðgerð 18. og 20. apríl legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Orsøkin til uppskotið er løgtingslóg nr. 11 frá 12. apríl 1967, har innflutningsgjaldið var hækkað frá 5 uppí 8 %. Við hesum uppskoti er so talan um eina kompensasjón fyri tær meirútreiðslur, sum skipasmiðjurnar annars vildu fingið uppá skipabygging.

Nevndin er samd um at mæla løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 24. og 3. viðgerð 26. apríl 1967.

Lógaruppskotið samtykt 23-0.

29. Forboð at skjóta grindafisk

Ár 1967, 18. april legði J. P. Davidsen, løgtingsmaður, fram soljóðandi uppskot:

Eftir grindareglugerðini er tað ikki loyvt hvørjum, sum vil at skjóta grindafisk, og tað er yvirhøvur ikki loyvt hvørjum, sum vil at selja tvøst og spik her á landi uttan loyvi frá landsstýrinum eftir løgtingslóg nr. 15 av 15. september 1948, men tað tykist tó so, at hvør sum vil kann jakstra grind eftir ognum tykki og koma til lands við fonginum eftir egnum tykki at selja.

Her er ikki spurningur at seta forboð at skjóta á opnum havi, men so langt sum grindareglugerðin røkkur, skuldi tað bert verið ein spurningur at handheva eina galdandi regla, eina týðandi regla, tí enn sum fyrr hevur grind týdning fyri landið.

Eftir okkara tykki skuldi tað borið á sama borðið at byrgt fyri tilíkari jakstring av grind, at loyvi verður ikki givið av landsstýrinum at selja tvøst og spik og hvat annað av tílíkum hvali frá føroyskum sum útlendskum fari.

Vísandi hertil loyva vit undirskrivaðu okkum at seta fram soljóðandi

UPPSKOT
til samtyktar

Landsstýrinum verður álagt eftir løgtingslóg nr. 15 av 15 september 1948 ikki at loyva sølu av tvøsti og spiki av hvali so sum framført í viðmerkingunum.

1. viðgerð 24. april og 5. mai legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Meirilutin (Dennnus Hentze, Leon Joensen, Hans Thomsen og Poul J. Olsen) setur einki uppskot fram.

Minnilutin (Reinhold Sílá) mælir til at samtykkja uppskotið frá J. P. Davidsen og R. Sílá.

2. viðgerð 6. mai 1967.

Uppskotið til samtyktar fall 3—0.

30. Broyting í lóg um studning til heimaútróður

Ár 1967, 25. apríl legði varaløgmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til
løgtingslóg um broyting í lóg um studning til fiskaprísin v. m.

§ 1.

§ 2 í løgtingslóg nr. 21 frá 6. maí 1965 um endurnýgging av skipanini um studning til minstuløn og viðbót til fiskaprísin verður orðað soleiðis:

Studningurin hjá mannum, sum røkja heimaútróður, er:

1) Hjá dekksførum sum opnum bátum 15 oyru pr. kg. (opnum bátum við benzinmotori tó 18 oyru) av øllum rundum, kruvdum ráfiski við høvdi avreiddur í Føroyum.

2) Hjá opnum bátum á sildaveiðu til agn, frystingar ella saltingar 15 oyru pr. kg.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

lagtingslov om ændring i lov om tilskud til fiskeprisen m. v.

§ 1.

§ 2 i lagtingslov nr. 21 af 6. maj 1965 om forlængelse af tilskudsordningen med hensyn til mindsteløn samt tilskud til fiskeprisen affattes således:

Tilskuddet til fiskere, der driver hjemmefiskeri, udgør:

1) For dæksfartøjer som åbne både 15 øre pr. kg (dog åbne både med benzinmotor 18 øre) af al rund råfisk uden indvolde, men med hoved, der indhandles på Færøerne.

2) For åbne både, der driver sildefangst til agn, frysning eller saltning 15 øre pr. kg.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Henda broytingin er bert ein umskriving, eftirsum hon hevur verið nakað ógreið, serstaklíga hvat orðinum «virking» viðkemur, men tað var ætlað so, sum tað eisini stendur í reglugerðini (sbr. kunngerð nr. 25 18/5-1965 IV), at fiskur, sum verður hongdur upp at visna ella furka, skuldi eisini komið undir studning, at koma tilikum bygdum tilgóðar, sum hava langt at fara at avreiða.

Tá ið tað bert er viðfáningur, sum verður ikki virkað til útflutnings, er eisini freytin um útflutning strikað í uppskotinum.

1. viðgerð 27. apríl og 5. mai legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Nevndin er samd um at mæla til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

2. og 3. viðgerð 6. mai 1967.

Lógarupskotið samtykt 20—0.

---

31. Brúgv um Hvannasund

Ár 1967, 25. apríl legði Finnbogi Isaksen, løgtingsmaður fyri tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um brúgv um Hvannasund.

§ 1.
Landsstýrið letur kanna, hvat er gagnligasti háttur til sambindingar av Borðoy og Viðoy: brúgv ella tipping av sundinum.

§ 2.
Kostnaðarætlan og projekt verða gjørd, og málið verður lagt fyri tingið aftur á ólavsøku 1967.

§ 3.
Útreiðslur til kanningar og pro-

lagtingslov om bro over Hvannasund

§ 1.
Landsstyret lader undersøge, hvad der er den mest hensigtsmæssige forbindelse mellem Borðoy og Viðoy: bro eller opfyldning af sundet.

§ 2.
Der udarbeides budget og projekt, og forslaget forelægges tinget igen på Olaj 1967.

§ 3.
Udgifter i forbindelse med

jektering verður at rinda úr landskassanum.

§ 4.

Henda lóg kemur á gildi beinanvegin.

undersøgelse og projektering betales af landskassen.

§ 4.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Bergholini í Norðoyum eru nú liðug at sprongja, og í løtuni fer fram arbeiðið við at stoypa koyribreytirnar í háðum holunum. Roknað verður við, at opnað verður fyri almennari ferðslu millum Klaksvík og Norðdepil á august í ár.

Bergholsgerðin kemur ikki til sín rætt sum samferðsluvegur, uttan so at brúgv verður gjørd um Hvannasund ella sundið verður tipt, so at eisini hvannasundsmenn og viðoyingar fáa beinleiðis samband við Klaksvíkina.

Í Norðdepli og í Hvannasundi eru menn ójavnir á máli um, hvat er gagnligast at gera. Teir, ið vilja tippa sundið, føra fram, at bert eini 5 % av tí fiski, ið kemur upp á land í sundi, kemur frá útróðri norður eftir, og teir vilja eisini vera við, at ein tipping kann skapa eina av landsins bestu havnum sunnantil.

Hinvegin halda aðrir, at tað kemur at tarna útróðri og skipaferðslu yvirhøvur almikið, um tað ikki verður siglandi gjøgnum sundið. Sonuleiðis vilja teir halda, at um sundið verður tipt, verður brimpláss norðanfyri tippinglna og nógvur rennusúgur sunnanfyri.

Tað eru hesir spurningar, landsstýrið, skal lata kanna og meta um, áðrenn endalig projektering verður gjørd.

Haldast má, at tað fyri allar partar er gagnligast, um arbeiðið við samferðslumálum eystan fyri Múla heldur fram og verður fullfiggjað beinanvegin. At hetta arbeiði eigur rætt til at verða gjørt fram um mong onnur, kann ongin ivi vera um, eftirsum Norðoyggjar í samferðslumálum eru mest forsømdi partur í landinum.

1. viðgerð 27. apríl og beint til havna- og veganevndina.

32. Ymiskar ríkislógir

Ár 1967, 26. apríl legði lógarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Landsstýrið hevur lagt fyri løgtingið og viðnælir, at kunngerð frá 1. desember 1964 av «toldkonvention om velfærdsmateriel for søfarende» eftir art. 16 í millumlandasáttmálanum verður lýst at galda í Føroyum.

Málið hevur verið til viðgerðar í lógarnevndini, ið er samd um at mæla til fylgjandi

Løgtingssamtykt

Løgtingið samtykkir, at kunngerð av «toldkonvention af 1. december 1964 om velfærdsmateriel for søfarende» verður lýst at gakda í Føroyum.

2. viðgerð 18. mai 1967.

Uppskotið frá nevndini samtykt 18—0.

33. Spariskipan hjá ikki-uppihaldarum

Ár 1967, 27. apríl lesði varaløgmaður fram soljóðandi

UPPSKOT

til

løgtingslóg um spariskipan hjá ikki-uppihaldarum.	lagtingslov om opsparingsordning for unge ikke-forsørgere.
§ 1.	§ 1.
Fólk, ið eru undir ásetanunum í eftir § 2, skulu eftir reglunum í hesi lóg seta pening á serlig sparikonti.	Personer, der omfattes af bestemmelserne i § 2, skal i overensstemmelse med reglerne i denne lov foretage indskud på særlige opsparingskonti.

§ 2.

Innskot eftir § 1 verða at seta av fólki, ið við byrjanini av skattaárinum, lúka hesar treytir:

1) hava fulla skattaskyldu til landið,
2) ikki hava fylt 21 ár 1. januar nærmast frammanundan og
3) við skattleggingini ikki verða mett sum uppihaldarar.

2. stk. Innskot verða fyrstu ferð at seta fyri 2. hálvár av skattaárinum 1967/68 av fólki, sum við byrjanini av hesum skattaári lúka treytirnar eftir 1. stk.

§ 3.

Innskotið er fyri hvørt skattaárið sama peningahæddin, sum inntøkuskatturin til landið, viðkomandi skal gjalda. Fyri skattaárið 1967/68 verður innskotið at áseta eftir inntøkuskattinum til landið, viðkomandi skal gjalda fyri 2. hálvár nevnda skattaár. Innskotið fyri skattaár kann ikki koma uppum 6.000 kr., fyri 2. hálvár av skattaárinum 1967/68 tó ikki uppum 3.000 kr.

2. stk. Er inntøkuskatturin til landið fyri skattaárið 100 kr. ella minni, verður tó onki innskot at seta.

3. stk. Sjómansskattur eftir fremmandi lóggávu verður ikki at taka við, tá ið talan er um innskot eftir 1. stk.

§ 2.

Indskud som nævnt i § 1 udredes af personer, der ved begyndelsen af det pågældende skatteår, opfylder følgende betingelser:

1) er fuldt skattepligtige til landet,
2) ikke er fyldt 21 år den nærmeste foregående 1. januar og
3) ved skatteberegningen ikke skal stilles som familieforsørger.

Stk. 2. Indskud udredes første gang for 2. halvår af skatteåret 1967/68 af personer, der ved begyndelsen af dette skatteår opfylder de i stk. 1 anførte betingelser.

§ 3.

Indskudet andrager for hvert skatteår samme beløb, som den indkomstskat til landet, der påhviler den skattepligtige at udrede. For skatteåret 1967/68 fastsættes indskudet på grundlag af den indkomstskat til landet, som den skattepligtige skal udrede for 2. halvår af nævnte skatteår. Indskudet for et skatteår kan ikke overstige 6.000 kr., for 2. halvår af skatteåret 1967/68 dog ikke over 3.000 kr.

Stk. 2. Udgør indkomstskatten til landet det pågældende skatteår 100 kr. eller mindre, skal den skattepligtige ikke forelægge indskud.

Stk. 3. Sømandsskat, der svares i henhold til fremmed lovgivning, tages ikke i betragtning ved fastsættelsen af de i stk. 1 omhandlede indskud.

§ 4.

Føroya gjaldstova sigur fólkunum eftir § 2 frá hæddini av innskotsupphæddini.

§ 5.

Sparikonti eftir § 1, nevnd spari konti hjá ikki-uppihaldarum, verða stovnað í føroyskum bankum og sparikassum.

2. stk. Sparikonto hjá ikki-uppihaldarum verður at tilskila sum tílík í bókum peningastovnsins og fær árit um navn og hústað kontohavarans.

3. stk. Innskot á sparikonto hjá ikki-uppihaldarum verður at renta av peningastovninum. Rentur kunnu takast út eftir reglunum hjá peningastovninum.

§ 6.

Forfallstíðin fyri at seta pening inn á sparikonto hjá ikki-uppihaldarum er hin sami, sum galdandi er fyri landsskatt hjá viðkomandi, eins og býtið í gjaldsterminir er hitt sama sum fyri landsskatt.

2. stk. Tá ið innskot er sett gevur viðkomandi peningastovnur beinanvegin Føroya gjaldstovu boð um, at konloin er stovnað, hvussu nógv er sett inn, eins og stovnurin, tá ið seinri verður sett inn, sigur gjaldstovuni frá hvussu nógv.

§ 4.

Færøernes oppebørselskontor giver de i § 2 nævnte personer meddelelse om indskudsbeløbets størrelse.

§ 5.

De i § 1 omhandlede opsparings konti, der benævnes opsparingskonti for ikke-forsørgere, oprettes i færøske banker og sparekasser.

Stk. 2. En opsparingskonto for ikke-forsørgere skal betegnes som sådan i pengeinstituttets bøger og skal bære påtegning om kontohaverens navn og adresse.

Stk. 3. Indskud på en opsparingskonto for ikke-forsørgere forrentes af vedkommende pengeinstitut. Tilskrevne renter kan hæves i overensstemmelse med de af vedkommende pengeinstitut fastsatte regler herom.

§ 6.

Forfaldstiden for at foretage indskud på en opsparingskonto for ikke-forsørgere er den samme, som er gældende for landsskatten for den pågældende, ligesom inddelingen i betalingsterminer er den samme som for landsskat.

Stk. 2. Ved indbetaling af indskud giver vedkommende pengeinstitut straks Færøernes oppebørselskontor underretning om kontoens oprettelse samt om størrelsen af det indbetalte beløb ligesom pengeinstituttet ved alle senere indbetalinger straks underretter oppebør-

selskontoret om det indbetalte beløbs størrelse.

§ 7.

Innskot á sparikonto hjá ikkiuppihaldarum verður standandi til kontohavarin er fyltur 25 ár. Peningur settur inn kann tó krevjast goldin áðrenn, um tað við hjúnarbandsváttan verður prógvað, at kontohavarin er giftur. Tilík útgjaldan kann eisini krevjast av kontohavara, ið eigur barn og prógvar hetta við føðingarváttan hjá barninum.

2. stk. Prógvar kontohavarin, at hann rekur sjálvstøðuga vinnu, kann landsstýrið loyva, at innskotin peningur verður loystur. Eisini kann landsstýrið geva loyvi til útgjalding, tá ið kontohavarin fer í læru ella á annan hátt úthúgvar seg, ella fer úr Føroyum, ella tá ið kontohavarin í øðrum førum enn við at gifta seg ella við at eiga barn lúkar treytirnar eftir lógini í skattleggingini at verða mettur sum uppihaldari.

3. stk. Landsstýrið kann gera av, at heimildirnar eftir 2. stk. kunnu innast av øðrum myndugleikum.

§ 8.

Kontohavarin kann hvørki við sølu, pantseting ella á annan hátt ráða yvir peningi, sum settur er inn, meðan hesin ikki er loystur eftir reglunum í § 7, 1. og 2. stk., eins og peningahæddirnar eru

§ 7.

Indskud på en opsparingskonto for ikke-forsørgere skal blive indestående, indtil kontohaveren er fyldt 25 år. De indskudte beløb kan dog kræves udbetalt inden dette tidspunkt, såfremt det ved forevisning af vielsesattest dokumenteres, at kontohaveren har indgået ægteskab. En sådan udbetaling kan også kræves af en kontohaver, der har født et barn og dokumenterer dette ved forevisning af barnets fødselsattest.

Stk. 2. Hvis en kontohaver godtgør, at han driver selvstændig erhvervsvirksomhed, kan landsstyret tillade, at det indskudte beløb frigives. Landsstyret kan endvidere tillade udbetaling i tilfælde, hvor kontohaveren går i lære eller på anden måde uddanner sig, eller definitivt forlader Færøerne, eller hvor kontohaveren i andre tilfælde end ved indgåelse af ægteskab eller ved barnafødsel opfylder de betingelser, der i lovgivningen er fastsat ved skatteberegningen at kunne stilles som familieforsørger.

Stk. 3. Landsstyret kan bestemme, at de i stk. 2. tillagte beføjelser kan udøves af andre myndigheder.

§ 8.

Kontohaveren kan hverken ved salg, pantsætning eller på anden måde disponere over de indskudte beløb, så længe disse ikke er frigivet efter reglerne i § 7, stk. 1 og 2, ligesom beløbene skal være und-

undan rættankrevjing frá kreditorum hansara. Peningahæddirnar skulu tó loysast, tá ið kontohavarin doyr ella fer á húsagangi, og verða tær tá goldnar deyðsbúnum ávikavist trotabúnum. Eisini skulu peningahæddirnar verða loystar, um kontohavarin fær tvingsilsakkord uttanfyri konkurs góðkenda av skiftirættinum eftir lóg nr. 225 frá 14. apríl 1905.

§ 9.

Annars koma reglurnar um inntøkuskatt til landið hjá persónum viðv. broytingum í skattleggingini, uppkrevjingini, at halda aftur í løn v.m. og panting í nýtslu viðv. innskot á sparikonto hjá ikkiuppihaldarum, um tær eru sambarligar við reglurnar eftir hesi lóg.

§ 10.

Landsstýrið ger gjøllari reglur til fremjingar av ásetanunum í hesi lóg og fær heimild at halda tær úlreiðslur, ið standast av fremjingini.

§ 11.

Henda lóg fær gildi frá og við 2. hálvári av skattaárinum 1967/68.

draget retsforfølgning fra hans kreditorers side. Beløbene skal dog frigives i tilfælde af kontohaverens død eller konkurs og udbetales dødsboet, henholdsvis konkursboet. Endvidere skal frigivelse finde sted, såfremt kontohaveren opnår en af skifteretten godkendt tvangsakkord uden for konkurs i henhold til lov nr. 225 af 14. april 1905.

§ 9.

I øvrigt kommer de for indkomstskatten til landet af personer gældende regler vedrørende ændringer i ansættelsen, opkrævning, tilbageholdelse i løn m.v. samt udpantning til anvendelse med hensyn til indskud på opsparingskonti for ikke-forsørgere, for så vidt disse er forenelige med de i denne lov indeholdte regler.

§ 10.

Landsstyret fastsætter de nærmere regler for gennemførelsen af bestemmelserne i denne lov og bemyndiges til at afholde de med gennemførelsen forbundne udgifter.

§ 11.

Denne lov træder i kraft fra og med 2. halvår af skatteåret 1967/68.

Viðmerkingar:

Seinastu fimm fíggjarárini hevur skattskylduga inntøkan verið støðugt vaksandi. Endurnýggingini av fiskiskipaflotanum, hækkandi fiskaprísir og stórar íleggingar á landi eru óivað høvuðsorsøkirnar til, at fleiri hendur hava fingið arbeiði, og at meðalinntøkurnar eru hækkaðar. Afturat hesum koma so m.a. broytingar í lønarsáttmálum.

Yvirlitið her vísir gongdina:

Skattnár	Tal av skattgjaldarum	Samlað skattskylding inntøka í 1000 kr.	Meðalinntøka hjá skattgjaldarum í kr.
1962/63	16.085	114.092	7.100
1963/64	16.652	130.789	7.900
1964/65	16.765	148.309	8.800
1965/66	17.053	167.761	9.800
1966/67	17.437	202.331	11.600

Eftir hesum er meðalskattainntøkan hækkað við 63,4 %.

Í vøkstrinum, í procentum er hann stórur, hevur ungdómurin ella tann partur av honum, sum er í vinnu og sum ikki útbúgvar seg, fingið lut.

Síðani hitt almenna bæði beinleiðis og óbeinleiðis eigur sín stóra part í leinum fíggjarligu og vinnuligu framstigunum, sum er grundin undir inntøkuvøkstrinum, er tað ikki ógrundað, at tað verður kravt av hinum unga fólkinum, ið ikki eru hevur skyldur sum uppihaldarar at partur av inntøkunum verður bundin eina tíð.

Eftir uppskotinum verður framd spariskipan hjá ikki-uppihaldarum undir 21 ár og sum hava fulla skattskyldu til landið. Hesir fáa skyldu at stovna sparikonto í føroyskum banka og sparikassa. Innskotini í sparikonto svara til inntøkuskattin til landskassan tað árið, er inntøkuskatturin lægri enn 100 kr., verður tó onki innskot kravt, eins og hámarkið fyri innskot er setl til 6.000 kr. fyri eitt skattaár. Innskotini verða standandi til viðkomandi fyllir 25 ár, men kunnu tó undir serligum umstøðum krevjast útgoldin áðrenn, t.d. tá konto-ígarin giftist, og í øðrum førum kann landsstýrið geva loyvi til útgjaldan, t.d. um eigarin rekur sjálvstøðuga vinnu ella fer í læru. Kontohavarin kann ikki selja, pantseta ella á annan hátt ráða yvir innskotinum og innskotið er undan rettarkrevjing frá kreditorunum.

1. viðgerð 2. og 8. mai legði lógarnevndi uppfram soljóðandi

ÁLIT

Landsstýrið hevur lagt fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg um spariskipan hjá ikki-uppihaldarum. Tey, ið koma inn undir hesa spariskipan, eru ikki-uppihaldarar undir 21 ár, sum hava fulla skattskyldu til landið. Innskotini svara til støddina á landsskattinum, tó hægst kr. 6.000, og eru tey undantikin, ið álíknaði eru fyri skattaárið kr. 100 ella minni og falla til gjaldingar samstundis løgtingsskattinum. Spariinnskot verða at seta

inn á konto hjá viðkomandi í føroyskum bankum ella sparikassum og verða standandi, til kontohavarin fyllir 25 ár ella lýkur lógarinnar treytir fyri at koma inn undir tey undantaksloyvi, sum lógin heimilar landsstýrinum at geva í vissum førum, sum til dømis, tá kontohavarin verður uppihaldari, fær sjálvstøðuga vinnu ella fer í læru.

Undir 1. viðgerð varð málið beint í lógarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg sundur í ein meirilutu og 2 minnilutar.

Meirilutin (Martin Joensen, Poul J. Olsen og Trygve Samuelsen) mælir tinginum at samtykkja uppskot landsstýrisins við tí broyting í gr. 1, at helmingurin av innskotunum kann dragast frá í skattskyldugu inntøku kontohavaraus, og setur fram uppskot samsvarandi.

Minnilutin (Demmus Hentze) setur onki uppskot fram, men førir fram:

Landsstýrisins uppskot um lvungna uppsparing er merkt av lítlari sjálvstøðugari hugsan og er ein beinleiðis avskriving av broti úr danskari lóg, ið galt fyri 7–8 árum síðani. Danska lógin hevði síni motiv, meðan landsstýrisins uppskot eingi onnur motiv hevur, utan tey at seta okkara vinnandi ungdóm undir almennum formyndarskap viðvíkjandi nýtslurættinum til tað, teir forvinna og eiga. Hetta er eitt misálit serliga á ungdómin til sjós og teirra foreldur, tí lógin frátekur hesum ungu rætt til at seta sín uvlopspening, har, ið mest fæst burtur úr honum, men gevur peningastovnum «hands- og hálsrætt» yvir hesum peningi, uttan at hitt almenna á nakran hátt tryggja hendla pening, tað tekur frá eigaranum sínum til aðrar at umsita, ella gevur eigaranum nakran fyrimun á nakran hátt, sum teir ikki hava frammanundan.

Uttan við einum tali at upplýsa nakað um, hvussu uppsparingin verulíga er, ger landsstýrið her eitt kostnaðarmikið apparat, ið krevur nógv økta manning á skrivstovuarbeiðsøkinum, og hetta heldur landsstýrið verða neyðugt fyri at spæla formyndari fyri okkara sjófarandi ungdóm og teirra foreldur og roynir harvið at spenna bein fyri góða, gamla uppsparingsvenjing, ið hvílir á einstaklinga ábyrgd, frælsi til at duga at húsast við sínum, sum ein maður er til.

Stigið her, at skerja einstaklinga nýtsluræt yvir sínum, er principielt, og sýnist at boða frá eini skerjan av privata initialivinum og kann beinleiðis føra við sær eina mitukan av arbeiðsligum ágrýtni, ið kann koma at kosta samfelagnum dýrt. Hesum kann fólkaflokkurin ikki taka undir við.

Tá skattalógin var til viðgerðar, mælti fólkaflokkurin til eisini at veita spararum sonna søndir til skattalætta, sum øðrum, ið avseta pening til

eftirlønargjald o.t.

Ein tvungin uppsparing í tí líki, sum skotin upp av landsstýrinum vil vikna um líkindini hjá lívstryggingarstovnintum at tæna tí endamáli, sum fyrisett er í lógini.

Fólkaflokkurin vil vera við at umhugsa og skapa eina lóggávu fyri allar spararar, ið eggjar til uppsparing við skattalætta fyri ávísa peningahædd.

Minnilutin (Demmus Hentze) setir so statt einki uppskot fram í hesum føri.

Minnilutin (Sigurð Joensen) setir onki uppskot fram, men førir fram:

Uppskotið er eitt verbatim avrit av eini danskari lóg «om en opsparingsordning for unge ikke-forsørgere», sum var galdandi nøkur ár frá 7. Juni 1958. Aldurin var tó ávikavist 25 og 30 ár í donsku lógini, og hámarkið var kr. 2.000,— fyri teirri tvungnu uppsparingini. Eisini høvdu tey ungu skattskyldugu niðanfyri 25 ár valið imillum at seta tað, sum svaraði til statsskattin inn og at gjalda ein fjórðing av tí eyka í statsskatti. Umframt bankar og sparikassar nevndi danska lógin eisini andeilskassar og yvirformyndaríið.

Londini rundan um okkum hava í peningapolitikki sínum royndt seg við ymiskum uppsparingartiltøkum, eitt tú tvungna sparing, premiusparing og kapitalbinding, tað vísir seg at vera ringt at koma til rættis við. Tað hevði verið lættari at taka støðu til hetta uppskot landsstýrisins, um tað hevði verið moliverað, hvat tað als ikki kann sigast at vera. Einasta upplýsing er eitt yvirlit yvir meðalinntøkuvøksturin tey seinastu fimm árini. Ólíka áhugaverdari hevði tað verið at vita, hvussu stór tann sjálvkravda sparingin hevur verið tey seinastu 5 árini, og serliga hvat tann aldursbólkurin, sum ætlanin er at ráma við hesi lóg, hevur spart. Nú lð meirilutin hevur broytt uppskotið soleiðis, at helmingurin av tí sparda skal vera skattafrium, hevði tað havt týdning at vita, hvat hetta hevur at síga fyri landskassan. Í framleguskrívi landsstýrisins verður sagt, at tann parturin av ungdómínum, sum er í vinnu, og sum ikki «útbúgvar» seg, hevur fingið lut í inntøkuvøkstrinum. Tað er at vóna, at so er, men spurningurin er, hvussu stórur hesin lutur er, og um ikki tann stóra fjøldin av hesum ungdómi nýtir meginpartin av síni inntøku á skilagóðan háll. Og spurningurin er, um tað er beint, at tað almenna ger seg til formyndara fyri ein part av fólkinum millum 16 og 21 ár, og tá serliga tann partin, sum er menn millum menn og ikki næmingar ella lærlingur.

Í einum máli sum hesum, har tað almenna við lóg ætlar at leggja seg úlí landsbúskaparlig viðurskifti, ætti búskaparráðið at verið spurt til ráðs.

Skal tað almenna leggja band á inntøkur ungdómsins, vildi minnilutin bildið tað fyri eina avgjørda treyt, at hetta varð gjørt til tess at gagna hesum sama ungfólki sær í lagi. Eftir minnilutans áskoðan er tað bert ein stovnur, sum talan kann vera um her, nevniliga Húsalánsgrunnurin. Av tí at tað ikki tykist møguligt at broyta § 5 í uppskotinum, soleiðis at húsalánsgrunnurin kemur ístaðin fyri bankar og sparikassar, leggur minnilutin ikki í at seta nakað uppskot fram.

Tað er annars at siga, at landsstýrið hevur enn ikki gjørt sær tann ómak at kanna og upplýsa, hvør kostnaðurin verður av at umsita lógina, um hon verður samtykt. Tað er fryktandi fyri, at lógin verður meira møði enn føði hjá tí almenna.

UPPSKOT

frá meirilutanum (Martin Joensen, Poul J. Olsen og Trygva Samuelsen):

Løgtingið samtykkir uppskot landsstýrisins við hesi broyting.

Í § 1 verður sett sum nýtt 2. stk. fylgjandi:

Av tí peningi, sum sambært hesa lóg er inngoldin á sparikonto, skal helmingurin dragast frá, tá skattskyldug inntøka verður uppgjørd.

Af det beløb, som i henhold til denne lov er indbetalt på sparekonto, fradrages halvdelen ved opgørelsen af den skattepligtige indtægt.

2. viðgerð 9. og 3. viðgerð 10. maí 1967.

Broytingaruppskotið frá meirilutanum í nevndini til § 1 í lógaruppskotinum samtykt 14—0.

Lógaruppskotið so broytt samtykt 14—0.

---

34. Prístilskot til útróðrarfisk

Ár 1967, 28. april legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Frá útróðrarfeløgunum í Fuglafirði, Klakksvík, Vági og Ravns Stóroy í Grønlandi eru kommar umsókuir til tingið um hækkaðan prísstudning orsakað av at ráfiskaprísurin er munandi fallin. Hesi mál eru oll beind til viðgerðar í fiskivinnunevndini. Tá nevndin var vitandi um, at summar av hesum umsóknum eisini vóru sendar landsstýrinum, og at landsstýrið fyrireikaði uppskot til inntøkur at gjalda meirútreiðslurnar til hækkaðan prísstudning, steðgaði nevndin við viðgerðini av hesum máli.

Nú hevur landsstaýrið framlagt uppskot um hækkaðan prísstudning, sum verður at fyrisita av lønjavningargrunninum, og inntøkur at gjalda hesar útreiðslur við. Hesar lógir eru samtyktar av tinginum. Eisini er gjørd nýggj reglugerð fyri prísstudning úr lønjavningargrunninum, henda reglugerð verður kunngjørd fyrsta dagin.
ikki at tað er grundarlag fyri at seta fram uppskot til tingið hesum viðvíkjnadi, men setur fram fylgjandi.

UPPSKOT

Eitt eintak av álitinum verður at senda umsøkjarunum.

2. viðgerð 2. maj 1967.

Uppskotið frá nevndini samtykt 16 0.

35. Veðhald av láni til Klakksvíkar kommunu

Ár 1967, 28. apríl legði kommunala nevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Klakksvíkar kommuna hevur vent sær til løgtingið við umsókn um landskassaábyrgd fyri láni 3 milj. kr. til gerð av nýggjum vegum og kloakkum og til mundandi pábót av gomlum vegum.

Málið var beint í kommunalu nevndina.

Nevndin hevur søkt sær nærri upplýsingar og frá kommununi fingið soljóðandi frágreiðing:

«Í samband við umsókn okkara um loyvi til upptøku av láni og um løgtingsábyrgd fyri láni, stórt 3.000.000 kr., sum vit ætla at útvega okkum, skulu vit geva hesar upplýsingar.

Peningurin skal nýtast til pábót av vegum og kloakkum og til nýbyggjan av vegum og kloakkum.

Soleiðis sum útviklingurin hevur verið her í bygdini eru nógv fleiri hús bygd, enn vegur og kloakk er til. Haraftrat er ferðslan eftir vegunum vaksin so nógv, at heilt stórur partur av vegunum treingja til stórar ábøtur, av tí at teir ikki hava verið gjørdir til fa ferðslu sum tíðin kom at bera við sær.

Vit koma onga leið við hesum máli, um vit einans skulu byggja kloakkir og vegir við tí peningi, sum tøkur er árliga av álíknaðum skatti.

Fáa vit nú bygt høvuðsvegirnar í neðra góðar og sterkar, kemur hetta at bera við sær, at tað verður figgjarliga lættari at byggja út í komandi árum, av tí at tann størsta og tyngsta ferðslan er eftir vegunum í neðra.

Tá ið byggjan av kloakkum ikki hevur fylgt við bygdarvøkstrinum, er tað skilligt, at her treingir til stórarbeiði eftir okkara viðareskiftum. Eitt ótíðarhóskandi kloakksystem ella einki tílíkt, har tælt er bygt, kann gera heilsuumstøðurnar hættisligar. Tí noyðast vit nú at fara undir hesa kloakkbygging.

Til tey arbeiði, sum nevnd eru, noyðast vit at læna pening, og tí hava vit søkt háttvirdu løgting um ábyrgd fyri lánum uppá 3.000.000 kr.

Enn hava vit ikki tilsøgn um at fáa lánið, og vita vit tí ikki nakað vist at siga um lánitreytirnar, men rokna vil við treytum, sum vanligar hava verið nú í seinastuni.

Ætlanin er at læna eina milj. kr. í ár. Á figgjarætlanini fyri 1967/68 hava vit roknað rentu og avdrátt upp í láni av einari milj. kr. í ár. Hin partin av lánunum ætla vit at útvega okkum, so hvørt sum peningurin

verður neyðugur til nevndu arbeiði. Tó megu vit hava vissað okkum peningin, áðrenn 2 ár eru liðin.

Viðlagt senda vit fíggjarligar frágreiðingar, sum lýsa hendan táttin hjá kommununni»

Aftrat hevur nevndin fingið upplýsingar um fíggjarliga viðurskifti kommununnar og framgongur av hesum, at kommunan hevur lán um 5,9 milj. kr. við landskassaábyrgd, og at øll lán eru á jour.

Kommunan sigur seg bert ætla at lána 1 milj. kr. í ár og hevur hon á fíggjarætlanini 1967/68 roknað við hesum. Restin verður so tikin, so hvørt peningurin er neyðugur og tá lán fæst.

Nevndin er samd um, at neyðugt er hjá kommununni at fáa veg- og kloakkgerðina í rættlag og í fasta legu og gerst hetta helst bæði betur og bíligari, um mest møguligt kann verða gjørt undir einum. Sum viðurskiftini eru, kann hetta bert verða gjørt, um kommunan fær lán, og er nevndin tí samd um at mæla tinginum til at veðhalda fyri umsøktu lánum, tá ið hesi ikki fáast uttan landskassaábyrgd.

Nevndin setur tí fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um ábyrgd fyri láni til Klakksvíkar kommunu til vega- og kloakkgerð.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri láni til Klakksvíkar kommunu upp í 3 milj. kr. til vega- og kloakkgerð.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

lagtingslov om garanti for lån til Klakksvik kommune til vej- og kloakanlæg.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for lån til Klaaksvik kommune indtil 3 mill. kr. til vej- og kloakanlæg.

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

2. viðgerð 2. og 3. viðgerð 6. mai 1967.
Lógaruppskotið frá nevndini samtykt 20 0.

36. Eykafíggjarlögtingslóg 1966—67

Ár 1967, 2. mai legði varaløgmaður fram uppskot til eykafíggjarløgtingslóg 1966/67 (smbr. Skjal 3).

1. viðgerð 5. mai og 9. s. m. legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Uppskotið til eykafíggjarlóg vísir tær broytingar, sum hendar eru síðan fíggjarlógin 1966/67 varð samtykt.

Nevndin er undir viðgerðini gjørd kunnug við, at undir § 19-1: Fólkapensjón, er ein feilur komin í. Í uppskotinum eru meirútreiðslurnar settar til 2.080.000 kr. Landskassans partur av útreiðslunum til fólkapensión hevur tó bert verið kr. 4.102.000, ella bert kr. 18.000 minni enn avsett á fíggjarlógini.

Yvirskot landskassans verður av hesi grund kr. 2.098.000 størri enn í uppskoti landsstýrisins.

BROYTINGARUPPSKOT
frá
allari nevndini

§ 19-1: (Fólkapensjón) í landsstýrisins uppskoti verður broytt til:
(Fólkapensjón)

§ 19-1:	Fólkapensjón		
	Fólkapensjón	4.120.000	+ 18.000	4.102.000

Samanteljingarnar á eykafíggjarlógini verða at rætta samsvarandi.

2. viðgerð 9. og 3. viðgerð 10. mai 1967.
Broytingaruppskot til § 19 samtykt 24—0.
Lógaruppskotið so broytt samtykt 21—0.

37. Stuðul til fiskaidnaðin

Ár 1967, 2. mai legði løgmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um veðhald av lánum til fiskiidnaðin.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað saman við fíggjarnevndini landskassans vegna í fíggjarárinum 1967/68 at veðhalda fyri lánum til fisikiidnaðin. Hin samlaða veðhaldsupphæddin má ikki fara upp um 5 milj. kr.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

ligtingslov om garanti for lån til fiskeriindustrien.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til sammen med finansudvalget på landskassens vegne i finansåret 1967/68 at garantere for lån til fiskeriindustrien. Det samlede garantibeløb må ikke overstige 5 mill. kr.

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Ymisk flakavirkir hava vent sær til landsstýrið um hjálp úr tí fíggjarligu trongstøðu, tey eru komin í. Viðurskiftini, m. a. fallandi prísur á flaki og ov stórar fleggingar, hava ført við sær, at virkini ikki eru for fyri at gjalda fallna skuld. vandi er tí fyri, at tey ikki kunnu halda fram, uttan tey verða loyst úr likviditetskreppuni.

Landsstýrið ásannar, at ein orsøkin til likviditetstrupulleikarnar er hitt stóra fallið í fiskaflakaprísinum á verðinsmarknaðinum seinasta árið. Fallið kennist serliga meint her hjá okkum, tí rætluliga øyggir framleiðarar á hesum øki eru føroyingar. At koma inn á marknaðin hevur krevt stórar fleggingar eftir stuttari tíð, og lá tað eina lánimarknaðurin hevur verið, er torfort at útvega lán til anlegg er í mongum førum tann teki peningurin, ið skuldi nýtast til onnur endamál, nýttur at byggja fyri.

Eftir uppskotinum fær landsstýrið saman við fíggjarnevndini heimilet í fíggjarárinum 1967/68 at veðhalda fyri lánum uppi 5 milj. kr.

Tað er ikki ætlanin at nýta heimildina til nýggjar fleggingar, men til lán, ið eru neyðug at loysa felagini úr likviditetstrongstøðuni. Tað stendur til landsstýri og fíggjarnevnd at leggja veðhaldstreytir við, eitt

nú at landsstýrið setur mann at hava eftirlit við felagnum, til veðhaldslánini eru afturgoldin.

1. viðgerð 3. mai og sama dag legði liggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Ein meirihluti (Andreas Djurhuus, Hákun Djurhuus, Hilmar Johansen,

Ein meirihluti (Andreas Djurhuus, Hákun Djurhuus, Knút Wang, Hilmar Johansen, Johan M. Fr. Poulsen, J. Fr. Øregaard) er samdur um at taka undir í uppskoti landsstýrisins.

UPPSKOT

Løgtingið samtykkir uppskot landsstýrisins til løgtingslóg um veðhald av lánum til fiskiídnaðan.

Ein minnihluti (Hanus við Høgadalsá) heldur ikki, at hetta mál er nóg væl kannað og kann flokkurin tí ikki á fyriliggjandi grundarlagi taka undir við lógaruppskotinum og setur tí eina uppskot fram.

2. og 3. viðgerð 3. mai 1967.
Lógaruppskotið samtykt 18--0.

---

38. Vegir og lendingar

Ár 1967, 8. mai legði havna- og veganevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Havna- og veganevndin hevur viðgjørt her o.a. 90 umsókninar um studning til vega- og lendingabyggingar, sum innkomnar eru og lingmál nr. 31/1966: Brúgv um Hvannasund.

Nevndin hevur gjørt tvær ferðir — fleiri vóru tað ikki stundir til í hesi setuni — fyri at á staðnum at gera seg kunnugan við, hvat fraint er,

og hvussu umstøður og líkindi vóru á plássum, har søkt er um stuðul til byggingar.

V e g i-r.

Viðvíkjandi útbyggingini av landsvegunum hevur nevndin fingið frágreiðing frá landsverkfrøðinginum dagfest 14. mars 1967, sum er hjáløgd.

Í henni verður greitt frá, hvat framt er av tí landsvegaplani, sum tingið samtykkti í 1962 og hvat, ið frestar.

Higartil hevur størsti denturin verið lagdur á at savna vegastrekkini, sum vóru, samanu við heildir og at knýta bygdir, sum lógu uttan vegasamhand, uppí veganetið á avvarðandi oyggj, sigur frágreiðingin; men heldur, at í komandi árum eigur stórur dentur at verða lagdur á at fáa størra partin av tí samlaðu vegalongdini asfalterað. Hesum er landsstýrið samt í og kann nevndin einmælt styðja hesa málsetting.

Á figgjarløgtingslógini eru settar av kr. 6.000.000 til nýggjar vegir og brýr. Viðvíkjandi býti av teim skal nevndin loyva sær at seta fram soljóðandi

UPPSKOT

I V E G I R

A. Til bygging, umbygging og asfaltering av landsvegum	5.524.750,—
B. Til kanningar við skitsuprojekti og kostnaðarætlan av brúgva-, vega- og tunnilsambandi millum Sundalagið og vegin millum Fjarða	50.000,—
Henda kanning verður at gera saman við tí kanning, sum er í gongd viðvíkjandi dýping av Streyminum.	
Til kanningar við skitsuprojekti og kostnaðarætlan av brúgvusambandi um Hvannasund	50.000,—
C. Til niðanfyrinevndu vegir	275.250,—
	6.000.000,—

Kommuna	Studningurin er til	Studningur % av kr.
Viðareiðis		
	Brúgv um Loksará	20.000,—
Húsar		
	Norður frá Húsum	20.000,—

Mikladals
Suður frá Mikladali 20.000,-

Elduvíkar
Veg norður frá Funningsfirði 60.000,-

Kvívíkar
Ovara veg í Leynum 25.000,-

Kirkjubøar
Veg norður í Fossadal 20.000,-

Bíggjar
Veg vestur frá Bø 10.000,-

Mikines
Åbøtur á gøtuna út í hólmin ..... 10.000,—

Húsavíkar
Veg í bygdini í Húsavík 30.000,-
Breiðking av vegi í Dali 10.000,-

Skúvoyar
Veg í bygdini 2.000,-

Froðbiar
Frá kirkjuni út í Skarð 20.000,-

Vágs
Frá Toftá til Skálá 20.000,-

Sumbiar
Veg til leikvallarøki 40.000,-

Tórshavnar
Framhald av vegi í Havnardali 30.000,-

¾ av kr. 367.000,-

= kr. 275.250,-

II. Lendingar.

Játtanir, sum falnar eru til gjaldingar undan 1/4 1967, men sum ikki er bygt fyri, er utilsamans ¾ av o.u. 1.260.000 ár. — o.u. 945.000 kr.

Játtanir fyri fíggjarárið 1967/68, sum samtyktar eru áður, eru hesar:

Kommuna	til	Stuðningur ¾ av kr.
Hvannasunds		
	Bátabrúgv í Hvannasundi (4. ársgjald av 5. ára játtan) ikki bygt	30.000,-
	Norðdepli: Lendibrúgv (3. ársgj. av 3. ára játtan) bygt	20.000,-
Klakksvíkar		
	Leinging av lendibrúgv á Borðoyarvík (2. ársgjald av 3 ára játtan) ikki bygt	60.000,-
Kunoyar		
	Áhøtur á lending í Kunoy (3. ársgjald av 3 ára játtan) bygt	20.000,
	Lendibrúgv í Kunoy (2. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	40.000,
Oyndarfjarðar		
	Dráttur, bátaspæl og spæl (3. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	25.000,
Gøtu		
	Strandvegur í Norðagøtu (3. ársgj. av 4 ára játtan) bygt	25.000,
	Lendibrúgv undir Gøtuciði (2. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt	30.000,
	Leingjan av brimgarði og dýpan av bátahyli í Syðrugøtu (2. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	40.000,
Sjóar		
	Lendibrúgv á Selatrað (3. ársgj. av 3 ára játtan) bygt	25.000,
	Til lendibrúgv á Selatrað (2. ársgjald av 2 ára játtan) bygt	45.000,
	Bátahyl við Skálafjørðin (2. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	80.000,
	Uppískoyli til havnajáttan (2. ársgjald av 2 ára játtan) bygt	20.000,

Vestmanna

Uppískoyti til havnajáttan (2. ársgjald av 2 ára játtan) bygt	20.000,-

Kaldbaks

Ábøfur til lendibrúgv á Sundi (3. ársgj. av 4 ára játtan) bygt	20.000,-
Lendibrúgv og bátahyl í Kaldbak (3. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	20.000,-

Hests

Bátahyl (3. ársgjald av 3 ára játtan) bygt	50.000,-

Nólsoyar

Leinging av pieri (4. ársgjald av 5. ára játtan) bygt	50.000,-
Leinging av pieri (1. ársgjald av 2 ára játtan) bygt	50.000,-

Mikines

Bátadrátt (4. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	25.000,-

Skopunar

Pier í Skopun (3. ársgjald av 3 ára játtan) bygt	60.000,-
Pier í Skopun (1. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	10.000,-

Skálavíkar

Bátahyl (2. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	80.000,-

Skúvoyar

Lendingarábøtur (3. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	50.000,-

Hvalbiar

Bátahavn við Býggjargarð (3. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	40.000,-
Lendibrúgv á Nesi (3. ársgjald av 3 ára játtan) bygt	25.000,-
Bátahavn við Býggjargarð (2. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	40.000,-

Froðbiar

Vegagerð í sambandi við havnabygging (2. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt	50.000,-

Hovs

Støting av bátahyli (5. ársgj. av 5 ára játtan) ikki hygt		10.000,-
	¾ av kr.	1.090.000,-
	= kr.	817.500,

Tøkur peningur á lendingakontoini verður fyri 1967/68:

Í grunnium	o. u.	400.000,-
Játtan fyri 1967/68	o. u	1.000.000,-
	o. u.	1.400.000,
Bundið í studningi	o. u.	1.760.000,
	o. u.	360.000,-
Hall	o. u.	360.000,-

Viðvíkjandi nýjáttanum skal nevndin lovva sær at seta fram soljóðandi

UPPSKOT

Kommuna	Studningurin er til	Studningur ¾ av kr.
Fugloyar		
	Lending við Skorðagjógv	20.000,
	Lending við Trøllagjógv	10.000,
Viðareiðis		
	Lending við Døtlisgjógv	20.000,
Mikladals		
	Til ehnotor til rennistrong	8.000,
Oyndarfjarðar		
	Til bátadrátt og -spæl (fyri 1969/70)	25.000,
Leirvíkar		
	Bátadrátt	30.000,
Fuglafjarðar		
	Uppiskoyti til havnajáttan (⅔ av 130.000 kr./árið í 5 ár)	130.000,
	Ábøtur á lendibrúnna á Hellunum (20.000 kr./ár í 3 ár)	20.000,

Gøtu

Strandvegurin (¾ av 25.000 kr. um árið í 4 ár frá 1969/70)	25.000,

Nes

Lending á Nesi	30.000,
Brimverja í Lamba	20.000,—
Bryggjuplass í Søldarfirði	35.000,—
Uppískoyti til havnajáttan (¾ av 120.000 kr. um árið í 5 ár)	120.000,
Fergulegu á Toftum (¾ av 90.000 kr. um árið í 6 ár)	90.000,

Gjáar

Ábøtur á lendingina	30.000,—

Eiðis

Leinging av bátabrúgv í Svinánum (40.000 kr um árið í 3 ár)	40.000,—

Kirkjubøar

Leinging av lendibrúnni í Kirkjubø (¾ av 30.000 kr./ár í 2 ár)	30.000,—

Hests

Bátastøð v.m. (¾ av 25.000 kr./ár í 3 ár) frá 1968/69	25.000,—

Sandavágs

Bátastøð v.m. (¾ av 20.000 kr./ár í 4 ár)	20.000,

Miðvágs

Leinging av bryggjuni úti á Kletti (¾ av 20.000 kr./ár í 5 ár)	20.000,

Mikines

Lending (¾ av 25.000 kr./ár í 3 ár) frá 1968/69	25.000,

Skálavíkar

Til elektriskt bátaspæl	15.000,

Húsavíkar

Lending á Skarvaskeri	30.000,

Skúvoyar	
Eykajáttan til bryggjuna	25.000,
Rennistrong í Dímun	10.000,
Hvalbiar	
Bátahavn við Býargarð (¾ av 40.000 kr./ár í 2 ár 1970/71)	40.000,
Lending á Nesi	20.000,-
Froðbiar	
Lending í Víkargerði í Froðba (¾ av 30.000 kr. um árið í 2 ár og ¾ av 15.000 kr. til spælið)	45.000,
Bryggju á Hvítanesi (¾ av 75.000 kr./ár í 2 ár)	75.000,-
Fámjins	
Til ábøtur við lendingina	20.000,-
Havs	
Bátahavn (¾ av 50.000 kr./ár í 5 ár) frá 1968/69	50.000,
Vágs	
Regulering av havnarøki í Vági.....	16.000,-
	1.149.000,
Herav fyri árið 1968/69 og seinri ár	165.000,-
Fyri árið 1967/68 ..... ¾ av kr.	984.000,
= kr.	738.000.

B. Landsverkfrøðinginum verður álagt at gera kanninga rvið skitsuprojekti og kostnaðarætlanum fyri

1. Havn fyri minni dekksfør í Svínáum.
2. Øking um havnarplássið í Haldórsvík.
3. Leinging av lendibrúnni í Oyndarfirði.
4. Bryggju í Lopra.
5. Bryggju í Funningsfirði.
6. Ábøtur á lendingina í Hósvík.
7. Lendingarábøtur á Økrum.
8. Bryggju á Toftum.

C. Játtanir, veittar til Svínoyar kommunu, kunnu verða nýttar til lendingarábøtur til bygging, sum sóknarstýrið og landsverkfrøðingurin eru samd um.

2. viðgerð 9. mai 1967.

Formaðurin legði fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT

1) frá Hákun Djurhuus (til pkt. B):

Í staðin fyri nevndarinnar uppskot undir B. viðvíkjandi brúgvasambandinum um Hvannasund verður sett.

Álagt verður landsstýrinum at skipa fyri at farið verður undir at gera brúgvasamband um Hvannasund, tá bergholsarbeiðið Klaksvík- Norðdepli er um at vera liðugt.

L ó g a r u p p s k o t:

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilt at lána neyðugan pening til detailprojektering og gerð av brúgvasambandi um Hvannasund.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til at optage nødvendigt lån til detailprojektering og udførelse af broforbindelse over Hvannasund.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

2) frá Demmus Hentze og J. P. Davidsen (sum pkt D):

Undir nevndarinnar uppskoti viðvíkjandi studningi til lendingar verður um D. sett:

Álagt verður landsstýrinum at skipa fyri, at farið verður undir at gera innsiglingina í Skopunar havn og dýpa hana soleiðis, at hon kann verða nýtt av størri førum enn nú møguligt.

Løgtingslóg um viðkau og dýping av Skopunar havn.

§ 1.

Veittur verður úr landskassanum 500.000,— kr. at gjalda yvir 2 ár við 250.000,— kr. um árið, fyrsta ferð í fíggjarárinum 1967/68 til breiðkan av innsiglingini í Skopunar havn og dýpingar av hennt.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

§ 1.

Af landskassens midler bevilges kr. 500.000, at betale over 2 år med kr. 250.000, - om året, første gang i finansåret 1967/68 til udvidelsen af indsejlingen til Skopun havn og uddybning af denne.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

3) frá Poul Petersen (sum pkt. E):

Landsstýrið stílar fyri, at eitt vist í peningi av vegajáttanini verður sett av í fíggjarárunum 1967/68 og framyvir, og so mikið skungið út og melt, at maskinamboð kunnu setast inn í vegagerð:

Elvuvík - Funningsfjørð,
Funning - Funningsfjørð,
Húsar - Mikladal og
Bø — Gásadal.

Nevndaruppskotið I. A. Vegir: samtykt 23- 0.

Broytingaruppskotið frá H. Djurhuus til B var sett undir atkvøðu við navnakall:

Ja atkvøddu: Vilhelm Nielsen, Poul Petersen, Petur Christiansen, Demmus Hentze, K. Wang, Hans Thomsen, H. Djurhuus, Frederik Hansen, Kjartan Mohr, Hans við Høgadalsá, Finbogi Isaksen og Poul J. Olsen.

Atkvøddu ikki: Martin Joensen, J. H. Dahljørg, Hilmar Johansen, Trygve Samuelsen, Leon Joensen, Andreas Djurhuus, Johan M. Fr. Poulsen, Peter F. Christiansen, Tummas Joensen, Joen P. Thomasen, Reinhold Sílá, Sigurð Joensen, J. P. Davidsen, J. F. Øregaard.

Uppskotið fall 12-- 0.

Nevndaruppskotið I. B. og C. vegir: samtykt 25 0.
Nevndaruppskot II. A. B. og C. Lendingar samtykt 26 0.

Broytingaruppskot sum nýtt pkt. D. frá Demmus Hentze og J. P. Davidsen var sett undir atkvøðu við navnakall:

Ja atkvøddu Martin Joensen, Vilhelm Nielsen, J. H. Danbjørg, Poul Petersen, Petur Christiansen, Hilmar Johansen, Demmus Hentze, Knút Wang, Hákun Djurhuus, Trygve Samuelsen, Leon Joensen, Tummas Joensen, Joen P. Thomasen, Hans Thomsen, Frederik Hansen, Kjartan Mohr, Reinhold Silá, Hanus við Høgadalsá, Finbogi Isaksen, Sigurð Joensen, J. P. Davidsen, Poul J. Olsen.

Atkvøddu ikki: Andreas Djurhuus, Johan M. Fr. Poulsen og Peter F. Christiansen, J. Fr. Øregaard.

Broytingaruppskotið samtykt 22—0.

Broytingaruppskot (minnilutauppskot) sum nýtt H. E.) frá Poul Petersen samtykt 20—0.

---

39. Fíggjarligur stuðul til trolarafelög

Ár 1967, 3. mai legði varaløgmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til trolarafeløg.	lagtingslov om finansiel støtte til trawlerselskaber.
§ 1.	§ 1.
Landsstýrið verður heimilað úr landskassanum at veita p/f Fuglafjarðar Samvinnufelag, Fuglafirði, ið eigur trolaran «Ólav Halga» og p/f Rútafelli, Váði, ið eigur trolaran «Vághing», sludnin gtil keyp og ísetan av nýggjum spølum í trolararnar.	Landsstyret bemyndiges til af landskassen at yde a/s Fuglafjarðar Samvinnufelag, Fuglafirði, der er ejer af trawleren «Ólavur Halgi», og a/s Rútafelli, Vági, der er ejer af trawleren «Vághingur», tilskud til køb og installation af nye spil i trawlerne.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur innheintað tilboð uppá nýggj trolspøl til teir 3 portugalstrolararnar. Hugsað verður um at taka við tilboði frá týskari verksmiðju uppá el-drivin av sama slag, sum tað í m/s «Sundaberg», ið hevur royust væl. Um 3 spøl verða bilagd, verður prísurin, ísetting viðroknað, umleið 220.000 kr. fyri hvørt spølið.

Feløgini eru ikki sjálvi før fyri at rinda kostnaðin yvir raksturin.

Tað er ein royndur lutur, at spølini í portugalstrolarunum hava roynst illa og eiga at verða útskift við nýggj spøl.

1. viðgerð 5. mai og 8. s.m. legði figgjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Spølini á portugalstrolarunum hava roynst sera illa, og hava teir nærum á hvørjum ári mist nógva fíð, av tí at trolspølini hava verið í álagi. Í desomber 1966 fóru Sámal Samuelsen og Hans P. Johannesen til Onglands og til Týsklands at kanna, hvørji spøl mundu verða hóskiligast at seta í. Biðið var um tilboð og komu inn 6 talt. Av teimum kundi verða talan um tvey, eitt eingilskt og eitt týskt. Feløgini vóru á einum máli við umboðsmenn landsstýrisins at taka við tilboðnum frá Achelis Søhne úr Týsklandi, um so var at landskassin kundi leggja peningin út, tá feløgini ikki vóru før fyri at greiða tað yvir raksturin.

Spølini kosta ísett umleið kr. 220.000 hvørt, um so er at bátarnir fara til Týsklands at fáa tey ísett. Landsstýrið hevur sett fram uppskot til lóg, har løglingið játtar nevnda pening sum stuðul.

Málið varð við 1. viðgerð beint í figgjarnevndina, sum hevur viðgjort tað, men heldur nevndin, at tað er ikki rætt, at hesin peningur verður veittur sum stuðul, men heldur sum lán, so feløgini, um so verður, at tey verða før fyri tað, gjalda peningin aftur.

Nevndin skjýtur tí upp, at grein 1 verður broytt samsvarandi, og setur fram fylgjandi

UPPSKOT

Uppskot landsstýrisins verður at samtykkja við teirri broyting, at í gr. 1 verður orðið «studningur» broytt til «lán».

2. viðgerð 8. og 3. viðgerð 9. mai 1967.
Lógaruppskotið við broytingini frá nevndini samtykt 19 0.

---

40. Broyting í lívstryggingarlógini

Ár 1967, 3. mai legði Samuel Petersen landsstýrismaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lívstryggingarvirki.	lagtingslov om ændring i lagtingslov om livsforsikringsvirksomhed.
§ 1.	§ 1.
Í løgtingslóg nr. 64 frá 10. oktober 1966 um lívstryggingarvirki verða gjørdar hesar broytingar:	I lagtingslov nr. 64 af 10. oktober 1966 om livsforsikringsvirksomhed foretages følgende ændringer:
Í § 23 verður ískoytt uppi:	I § 23 tilføjes:
4. stk. Landsstýrinum er heimilað at loyva frávik frá ásetanini í 1. stk.	Stk. 4. Landsstyret bemyndiges til at meddele dispensation fra bestemmelserne i stk. 1.

5. stk. Fyri tær samlagslivstryggingar, ið bera við sær vanda fyri serligum vága, verður kravt eykatryggingargjald uttan so, at landsstýrið gevur loyvi til frávik.

Stk. 5. For de gruppelivsforsikringer, der indebærer risiko for særlig fare, opkræver bestyrelsen ekstra forsikringspræmie, medmindre landsstyret meddeler dispensation.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Seinastu árini eru flestu lívstryggingarvirkini í Norðurlondum farin undir at tekna nýtt slag av tryggingum nevnd samlagslívstryggingar (gruppelivsforsikringer).

Í skrivi 29. apríl 1967 sigur Føroya Lívstrygging frá, at stovnurin ætlar sær nú eisini at tekna nevndu tryggingar. Fyri at hetta letur seg gera mugu broytingar gerast í § 23 í lívstryggingarlógini, nú er tað ikki stovninum loyvt at tekna hesar tryggingar.

Samlagstryggingaravtala er sáttmáli, sum fingin er millum eitt virki eitt felag ella eina organisasjón og ein lívstryggingarstovn. Avtalan fevnir um samlagstrygging av starvsfólkinum ella limum, sum verða nevndir samlagslimir. Tryggingarhæddin verður útgoldin, tá ein samlagslimur doyr, og verður vanliga útgoldin til fey næst avvarandi. Av tí, at tað galda vissar reglur fyri minstustøddina á talinum av samlagslimunum, nevnliga 25, og av tí at samlagstryggingaravtalan obligatoriskt fevnir um allar samlagslimirnar, er tað gjørligt at ásetta tryggingargjøld ógvuliga lágt. Hesar tryggingar hava tí vunnið nógv fram aðrastaðir; serliga eru tað fakfeløg, sum hava áhuga fyri á henda hátt at tryggja limir sínar.

ad. 4. stk. Sambært § 23, 1. stk. er ikki uttan samtykki frá tí tryggjaða loyvt at tekna nakað slag av lívstrygging, har lívstryggingarstovnurin ábyrgist at gjalda størri peningshæld enn goldið tryggingargjald við rentu. Av tí at ásetingin um samtykki frá tí tryggjaða forðar fyri teknan av samlagstryggingum, ið obligatoriskt fevna um allar samlagslimirnar, er tað neyðugt, at tað verður heimilað landsstýrinum at geva loyvi til frávik frá hesi áseting.

Viðmerkt verður, at í Danmark er eftir § 139, 1. stk. í lov om Forsikringsvirksomhed, nr. 147 frá 13. mai 1959 heimilað Forsikringsrådet at geva dispensasjón, og at tryggingarfeløg, sum tekna samlagstryggingar hava fingið tilíkt serloyvi.

ad. 5. stk. Uppískoyti er hildið neyðugt, um lívstryggingarstovnurin ger avtalu um samlagstryggiug við samløg, har vandi er fyri ovurstórum deyðsendurgjaldsútgjaldingum, eitt nú samløg av fiskimonnum. Tað er eyðsæð, at lívstryggingarstovnurin, við eini avtalu um samlagstrygging fyri fiskimenn, kann koma fyri so stórum útgjaldingum, at hann ikki sjálvur kann gjalda tær, men verður noyddur at venda sær til landskassan, jbr. § 2, stk. 1 í lívstryggingarlógini. Tað er tí neyðugt at krevja eykatryggingargjald fyri tilíkar samlagstryggingar, um landsstýrið ikki gevur loyvi til frávik.

1. viðgerð 5. og 8. mai legði lógarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Av tí at ásetingin í § 23, 1. stk. í nevndu lóg forðar lívstryggingarstovninum fyri at tekna samlagslívstryggingar (gruppelivsforsikringer), verður neyðugt at gera broyting í lógargreinini, so landsstýrið fær heimild at loyva frávik frá ásetanini í 1. stk., eins og landsstýrið fær heimild at loyva frávik viðvíkjandi uppkrevjing av eykatryggingargjaldi fyri samlagslívstryggingar, tó bera við sær vanda fyri serligum vága.

1. viðgerð av málinum fór fram 5. mai 1967 og varð tað beint í lógarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at mæla løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. og 3. viðgerð 9. mai 1967.

Lógaruppskotið samtykt 23 0.

41. Samanlegging og sundurtöka av kommunum

Ár 1967, 5. mai legði Sigurð Joensen løgtingsmaður fram soljóðandi

UPPSKOT

løglingslóg um samanlegging og sundurtøku av kommunum.

§ 1.

Tá ið tvær ella fleiri av teimum núverandi kommunum í Føroyum ynskja at ganga saman í eina kommunu, skal Føroya landsstýri fyrireika fólkaatkvøðu í kommununum um spurningin. Til fess at krevja tilíka fólkaatkvøðu krevst gild kommunustýrissamtykt í hvørjari kommunu sær, og má eingin samtyktin vera eldri enn 3 mánaðir, tá ið landsstýrið fær málið til viðgerðar.

§ 2.

Tá ið kommunustýrið í einari av núverandi kommunum landsins eftir ummælta fundarsamtykt, ið ikki má vera meir enn ein mánaða gomul, ynskir kommununa sundurbýtta, skal Føroya landsstýri fyrireika fólkaatkvøðu um spurningin. Tað krevst, at fullfíggjað uppskot um marknaskjal innanfyri kommununa og uppskot um á hvønn hátt sundurbýti av ogn og skuld kommununnar skal fara fram, fylgir við umsóknini.

Sama er, um adressa undirskrivað av meirihutanum av teimum íbúgvum kommununnar, sum eru á vallista, krevja fólkaatkvøðu um sundurløku, og Føroya landstýri, eftir ummæli kommu-

lagtingslov om sammenlægning og deling af kommuner.

§ 1.

Når to eller flere af de nuværende kommuner på Færøerne ønsker at forenes til en kommune, skal Færøernes landsstyre foranstalte folkeafstemning i kommunen om spørgsmålet. For at kræve sådan folkeafstemning udkræves der gyldig kommunalbestyrelsesbeslutning i hver kommune for sig, hvorhos ingen af disse beslutninger må være mere end tre måneder gammel, når landsstyret får sagen til behandling.

§ 2.

Når kommunalbestyrelsen i en af landets nuværende kommuner efter enstemmig beslutning, der ikke ligger længere tilbage end en måned, ønsker kommunen delt, skal Færøernes landsstyre foranstalte folkeafstemning om spørgsmålet. Det er en forudsætning, at et fuldstændigt forslag angående grænsen indenfor kommunen og forslag om, på hvilken måde deling af kommunens aktiver og passiver skal ske, medfølger henvendelsen til landsstyret.

På samme måde forholdes i tilfælde, hvor en adresse, der er underskrevet af flertallet af de beboere i kommunen, som er på valgliste, forlanger folkeafstem-

nustýrisins er fingið, heldur sundurtøku vera gagnliga.

§ 3.

Landsstýrið ásetir dagin, ið fólkaatkvøðan skal fara fram, og ger almannakunnugar teir spurningar, ið atkvøðan er um, ikki seinni enn 8 vikur frammanundan atkvøðudeginum.

Í hesar somu 8 vikur skal tann av landsstýrinum góðkenda samanleggingar- ella sundurbýtisætlan liggja frammi á kommunuskrivstovunum ella kommunuskrivstovuni til alment eftirlit, og tá ið talan er um sundurtøku, shr. § 2, kortuppdráttur, sum týðuliga vísir tað ætlaða kommunumarkið.

Viðvikjandi atkvøðurætti og atkvøðugreiðslu, so eisini hrævatkvøðum, galda somu reglur sum við kommunuval.

§ 4.

Atkvøðugreiðsla um samanlegging av kommunum, sbr. § 1, fer fram í hvørjari kommunu sær. Atkvøðugreiðsla um sundurtøku fer fram hvørjumegin tað ætlaða markið á valstøðum, sum landsstýrið skipar fyri í samráð við kommunustýrið. Hvør veljari velur tímegin markið, har hann hevur sín fasta bústað. Er ivi um helta, velst um, hvønn bústað hann hevur eftir vallistanum.

§ 5.

Tað krevst meiriluti av greiddum atkvøðum í eini kommunu til

ning om deling, og Færøernes landsstyre, efter at kommunalbestyrelsens betænkning er indhentet, anser deling for formålstjenlig.

§ 3.

Landsstyret fastsætter dagen, hvor folkeafstemningen skal foregå, samt offentliggør med et varsel af mindst 8 uger indtil afstemningsdagen de spørgsmål, afstemningen angår.

Indenfor de samme 8 uger skal den af landsstyret godkendte sammenlægnings- eller delingsplan ligge fremme på kommunekontoret eller kommunekontorerne til offentligt eftersyn, hvorhos i tilfælde af deling, jfr. § 2, en kortskitse, der tydelig angiver dem påtænkte kommunegrænse.

Angående stemmeret, afstemning, fraværende personers adgang til at vælge m. v. gælder de samme regler som ved kommunevalg.

§ 4.

Afstemning om sammenlægning af kommuner, jfr. § 1, sker i hver kommune for sig. Afstemning om deling sker på hver side af den foreslåede grænse på valgsteder, som landsstyret foreskriver i samråd med kommunalbestyrelsen. Enhver vælger stemmer på den side af grænsen, hvor han har sin faste bopæl. Er der tvivl herom, er det afgørende, hvilken bopæl, der for hans vedkommende er angivet på valglisten.

§ 5.

Der udkræves flertal af afgivne stemmer i en kommune, før at den skal kunne sammenlægges med en

tess at leggja hana saman við aðrar kommunur.

Til tess at taka sundur kommunu krevst meiriluti av øllum íbúgvum hennara, sum á vallista eru atkvøðudagin, og má hvørgumegin tað ætlaða markið meirilutin av greiddum atkvøðum vera ímóti sundurtøku.

§ 6.

Verður samanlegging ella sundurtøka samtykt við fólkaatkvøðu, skipar landsstýrið fyri hvønn dag og á hvønn háttt samanleggingin ella sundurtøkan gongur í gildi.

§ 7.

Henda løgtingslóg gongur í gildi beinanvegin. Samstundis gongur úr gildi § 1, 3. pkt., í Lov nr. 30 om de færøske landkommuners styrelse fra 28. februar 1872.

§ 8.

(fyribilsgrein)

Landsstýrið fyrireikar beinanvegin fólkaatkvøðu í Nes søknar kommunu og soleiðis, at atkvøll verður í fylgjandi bygdum sær: Nes, Toftir, Saltnes, Runavík, Saltangará, Glyvrar, Søldarfiørður, Rituvík, Æðuvík og Lamba. Við atkvøðuna er galdandi tað mark, sum landsstýrið hevur góðkent 16. februar 1967, soleiðis sum matrikulstovan hevur sett tað útú korl og við føstum punktum í lendinum, og soleiðis at markið eystanfyri Toftavatn gongur í beinari linu gjøgnum punktini 5 og 6 í Toftavatn.

anden eller med andre kommuner.

For at kunne dele en kommune kræves det, at der er flertal herfor af samtlige de indbyggere, der er på valgliste afstemningsdagen, hvorhos der hverken på den ene eller den anden side af det foreslåede skel må være et flertal af afgivne stemmer imod delingen.

§ 6.

I tilfælde, hvor deling eller sammenlægning besluttes ved folkeafstemning, foreskriver landsstyret fra hvilken dag og på hvilken måde delingen eller sammenlægningen træder i kraft.

§ 7.

Denne lagtingslov træder straks i kraft. Samtidig ophæves § 1, 3. pkt., i lov nr. 30 om de færøske landskommuners styrelse af 28. februar 1872.

§ 8.

(foreløbig bestemmelse)

Landsstyret foranstalter straks folkeafstemning i Nes sogns kommune og således, at der vælges i følgende bygder hver for sig: Nes, Toftir, Saltnes, Runavík, Saltangará, Glyvrar, Søldarfiørður, Rituvík, Æðuvík og Lamba. Ved afstemningen gælder den grænse, som landsstyret har godkendt den 16. februar 1967, således som matrikelkontoret har afmærket den i kortet og med faste punkter i marken og således at grænsen øst for Toftavatn går i lige linie gennem punkterne 5 og 6 i Toftavatn.

Bestemmelserne i foranstående

Reglurnar í frammanfyristandandi §§ 1—7 eru galdandi við hesa fólkaatkvøðu.

§§ 1 7 finder anvendelse ved denne folkeafstemning.

Greinagerð:

Um sundurtøku av kommunum finnast ikki aðrar reglur enn § 1 í lógini (nr. 3) frá 28. februar 1872. Um samanlegging av kommunum finnast ongar reglur.

Flestir halda í núlíðini, at tað man vera hollari fyri samfelagið, at leggja kommunur, ið nógvar eru smáar, saman enn at taka kommunur sundur.

Á hin bógvin samsvarar tað best við fólkaræðið og tankan um kommunalt sjálvstýri, at íbúgvararnir hava eitt orð at siga, tá ið tað kemur til spurningin um, hvørjir ið skulu vera saman í kommunum. Fólkaviljin skuldi komið best til sjóndar í eini væl og greiðliga fyriskipaðari fólkaatkvøðu. Tað tykist ríniligt, at fólkaatkvøða verður havd, hvørja ferð broyting er ætlað í verandi kommunubýti í landinum.

Viðvíkjandi § 8 um sundurbýti av Nes sóknar kommunu er at siga, at hesin spurningur hevur verið til viðgerðar hjá kommunustýrinum og í landsstýrinum tey seinastu 2 árini, eins og fólkaatkvøða var hildin 21. desember um spurningin.

Av tí at Nes sóknar kommunustýri einmælt er ímóti sundurtøku, og av tí at tað tykist ógreitt, hvussu íbúgvararnir nú eftir at stríðið um sundurbýti hevur staðið í 2 ár og so langt frálíðið, síðnu fólkaatkvøðan, sum eftir landsstýrisins tilskilan bert var vegleiðandi, var bildin, ikki minst tí at treytirnar fyri sundurtøku, og tá serliga tað komandi kommunumarkið, valla hevur staðið veljarunum greilt tá — eru sinnaðir, hvat sundurbýti viðvíkur, man einasta gongda leið verða at halda eina nýggja fólkaatkvøðu úl frá støðuni í dag, hvat løgtingið hevur heimild til at samtykkja, ið hvussu er, um § 1 pkt. 3, í lóg nr. 30 frá 28. februar 1872 samstundis verður avtikin.

Undirritaða kommunustýrið í Nes sóknar kommunu hevur einmælt samtykt at leggja frammanfyristandandi uppskot til løgtingslóg fram á løgting við áheitan um, at málið verður avgreitt, áðrenn tingið fer heim.

Á kommunuskrívstovu Nes sóknar kommunu 3. mai 1967.

sign. Petur Georg Poulsen
sign. Peter Knudsen
sign. Alfred Olsen
sign. Clement Jacobsen
sign. Johannes Poulsen
sign. Jacob Højgaard
sign. Frederik Olsen

1. viðgerð 6. og 8. mai legði lógarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Kommunustýrið í Nes sóknar kommunu hevur lagt fram á ting uppskot til løgtingslóg um sammanlegging og sundurtøku av kommunum. Lógaruppskotið inniheldur í teim 7 fyrstu greinunum generellar reglur um, hvussu fara skal fram, tá talan verður um annaðhvørt sammanlegging ella sundurtøku av kommunum, meðan 8. grein, ið nevnir seg «fyrihilsgrein», viðvíkir fólkaalkvøði í Nes sóknar kommunu.

1. viðgerð fór fram 6. mai 1967 og varð málið beint í lógarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg sundur í ein meirluta og ein minniluta.

Meirlutin (Demmus Hentze, Martin Joensen, Poul J. Olsen og Trygve Samuelsen) vísir á, at sambæt løgtingslóg nr. 29 frá 27. mai 1966 hevur landsstýrið sett 5-mannanevnd til at kanna kommunalu lóggávuna, og skal nevndin geva frágreiðing og tilmæli til landsstýrið.

Fyriliggjandi uppskot ger m. a. broyting í 1. gr. lóg nr. 30 frá 28. februar 1872 «om de færøske landkommuners styrelse» og viðvíkur tí beinleiðis ti starvi, sum við nevndu løgtingslóg er álagt nevndini.

Meirlutin mælir tí tinginum at beina málið í nevndu kanningarnevnd og setur fram uppskot samsvarandi.

Minnilutin (Sigurð Joensen) mælir tí tinginum at samtykkja uppskotið frá Nes sóknar kommunustýri.

UPPSKOT

frá meirlutanum (Demmus Hentze, Martin Joensen, Poul J. Olsen og Trygve Samuelsen):

Málið verður beint í ta sambæt løgtingslóg nr. 29 frá 27. mai 1966 settu nevnd til kannan av kommunalu lóggávuni.

2. viðgerð 9. mai 1967.

Lógaruppskotið var sett undir atkvøði við navnakall:

Ja atkvøddu: Hilmar Johansen, Johan F. Fr. Poulsen, Hans Thomsen, Hanus við Høgadalsá, Finnbogi Isaksen, Sigurð Joensen og J. P. Davidsen.

Atkvøddu ikki: Martin Joensen, Vilhelm Nielsen, J. H. Dambjørg, Poul Petersen, Peter Christiansen, Demmus Hentze, Knút Wang, Hákun Djurhuus, Trygve Samuelsen, Leon Joensen, Andreas Djurhuus,

Tummas Joensen, Joen P. Thomasen, Kjartan Mohr, Reinhold Sílá, Poul J. Olsen og J. Fr. Øregaard.
Burtur: Peter F. Christiansen og Frederik Hansen.

Uppskotið fall 7—0.
Uppskotið til samtyktar frá meirilutanum í nevndini samtykt 18—0.

---

42. Prísstudningur til ídnaðarsild

Ár 1967, 6. mai legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Frá Heina Svarthamar, Tórshavn og fleiri er komin umsókn til tingið, um at veitt verður fiskimonnum við føroyskum skipum, sum veiða sild til ídnað, prísstuðul til landingarprísin, so hann ongantíð fer niður um kr. 0,30. Hetta umsókn var beind til viðgerðar í fiskivinnunevndini, sum hevur umbugsað hana.

Nevndin hevur fingið upplýst frá fiskiídnaðarstovuni, at tann basisprísur, sum settur er á ídnaðarsild, kr. 0,18,5 við feiltinnihaldi 12% svarar til ein meðalpris uppá kr. 0,21. Pristilskotið skuldi so statt verið kr. 0,09, um tingið skuldi gingið umsøkjarnunum á møti.

Røknað verður við, at tey føroysku kraftblokkaskipini veiða og selja til føroysk sildaídnaðarvirkir eini 50.000 tons. Studningur 9 oyru skuldi so statt blivi kr. 4.500.000.

Løglingið hevur samtykt at geva landsstýrinum heimild til, at saltfiskaprísnevndin eisini ásetur landingarprísin á ídnaðarsild.

Henda nevnd hevur enn ikki viðgjørt síldaprísin, og er tað tí enn ov tíðliga hjá tinginum at taka støðu til, hvørvítt tað verður neyðugt at veita prístilskot.

Fiskivinnunevndin setur fram fylgjandi

UPPSKOT

Eitt eintak av álitinum verður sent umsøkjarunum.

2. viðgerð 6. mai 1967.
Uppskotið samtykt 16 - 0.

---

43. Fyrispurningur frá Johan Poulsen til lögmann

Ár 1967, 28. apríl boðaði tingformaðurin frá soljóðandi fyrispurningi:

Harra løgmaður!

Reglulig rutuflúgving millum Føroyar og útheimin byrjaði á sumri í 1963. Á vári 1963 hevði «Ministeriet for offentlige arbejder» heitt á Luftfartsdirektoratet at kanna, um ikki heinari var at leggja ta endaligu lufthavnina aðrastaðni í Føroynum enn í Vágum. Frágreiðingin frá hesi kanning var landsstýrinum í hendi *í januar 1964*. Men hóast tað lat landsstýrið ikki við seg koma og gekk meira enn eitt ár uttan, at løgtingið frætti nakað viðvíkjandi úrslitinum av teimum kanningunum, ið fram vóru farnar. Tað skuldi onki minni enn ein løgtingssamtykt til fyri at fáa hana fram.

3. februar 1965 samtykti løgtingið við 21 st. - 0 fylgjandi uppskot, sum figgjarnevndin einmælt hevði sett fram.

Uppskotið var soljóðandi:

«Tingið heitir á landsstýrið um at geva tí greiðligar upplýsingar um tað, sum fram er farið í flogmálinum».

Ikki fyrr enn o.u. 2 mánaðar aflaná løgtingssamtyktina, tann 7. apríl 1965, kemur frágreiðingin frá landsstýrinum.

(sbr. løgtingsmál nr. 81/1964: Frágreiðing í flogmálinum).

Av henni sæst, at tey pláss, talan kann verða um at útbyggja til flogvøll eru hesi: í Eysturoynni: sunnan fyri Toftavatn á Skorhædd. í Sandoynni: vestan fyri Sands bygd. í Streymoynni:

a) í Hoyvíkshaganum norðan fyri Havnina.
b) vestan fyri Glyvursnes.
c) norðan fyri Kirkjubønes.

Luftfartsdirektoratið kom til tað úrslit, at mest talaði fyri at leggja hesa permanentu lufthavn á Skorhæddina sunnan fyri Toftavatn, men nevnir í sama viðfangi, at tað hevði ikki verið gjørligt at taka øll relevant viðurskifti við í kanningunum.

Landsstýrið helt vera rættast at lata allar møguleikar kanna gjøllari hvar so flogvøllurin enn verður bygdur, sjálvt um tað førir við sær at bíðað verður eftir endaligari avgerð í eini 2 ár. Hendan fráðreiðing var sum nevnt landsstýrnum í hendi í januar 1964, og er so stall meira enn 3 ár liðin síðan tá. 22. marts 1966 setti eg fyrispurning til landsstýrismann Erland Pætursson viðvíkjandi tí gjøllari eftirkanning, sum boðað var frá í frágreiðingini, men var hann ikki førur fyri at siga nakað nýtt í málinum.

Loyvi eg mær nú aftur á øðrum sinni at spyrja háttvirda løgmann P. M. Dam: Er nakað hent í hesum máli í tey 3 árini, viðvíkjandi tí gjøllari eftirkanning, sum varð lovað, og hvat er hent?

Løgmaður gav honum svar 9. mai 1967.

44. Avhending av fastari ogn

Ár 1967, 9. mai legði løgmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um avhending av fastari ogn landsins.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilt at lata av hondum til Tórshavnar býráð til vegabreiðkan partar av matr. nr. 1023, 1025a og 1026b Tórshavnar bý tilsamans 1.430 m², eins og landsstýrinum verður heimilt at seta treiytirnar fyri avhendingini m. a. pris.

§ 2.

Henda lóg fær gildi beinanvegin.

lagtingslov om afhændelse af landets faste ejendom.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til at afhænde til Tórshavn byråd til vejudvidelse dele af matr. nr. 1023, 1025a og 1026b Tórshavn by tilsammen ca. 1430 m², ligesom landsstyret bemyndiges til at fastsætte betingelserne for afhændelsen, bl. a. pris.

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerking:

8. mai 1967 hevur Tórshavnar býráð sent landsstýrinum soljóðandi skriv:

« Ísamband við at vegurin til og frá vestaru bryggju er breiðkaður, verður tað bráneyðugt eisini at breiðka J. C. Svabosgøtu.

Ferðslan til og frá nevndu bryggju er økt so nógv og er so stór, at hesin vegur er ein av leimum hættisligastu, sum er í býnum.

Fyri at henda vegbreiðkan kann fara fram, verður tað neyðugt hjá kommununi at ognast sær nøkur øki, sum eru ogn løglingsins.

Hesi øki eru heimeftir burtur av matr. nr. 1023 av Danielsens trød, matr. nr. 1025 av Poul Møllers trød og matr. nr. 1026b av Debesar trød.

Tey øki, sum neyðug eru til ætlaðu vegabreiðkan hava hesar støddir:

Burtur av matr. nr. 1023	o. u. 160 m²
Burtur av matr. nr 1025 a	o. u. 900 m²
Burtur av matr. nr. 1026 b	o. u. 370 m²
Tilsamans	o. u. 1430 m²

Tann upprunaliga ætlanin var, at vegurin skuldi gerast 10 m breiður, men heldur býráðið, at so nógv sum ferðslan er økt, verður tað neyðugt at gera vegin 12,5 m breiðan.

Tá ið hetta umsókn helst nú fyri lingið, verður landsstýrið biðið um at leggja hetta mál fyri tað høga ting beinan vegin, men um hetta ikki kann lata seg gera, so at geva loyvi til, at vegbreiðkanin kann fara fram.

Tað hava ikki verið stundir at kanna áheitanina, m. a. í samráðing við teir stovnar, ið sita á nevndu stykkjum. Fær landsstýrið søluheimild verður málið lagt fyri stovnunum til umannelis áðrenn avgerð verður tikin.

1.viðgerð 9. og 2. og 3. viðgerð 10. mai 1967.
Lógaruppskotið samtykt 25—0.

---

45. Lutapeningur í flakavirki í Skopun

Ár 1967, 9. mai legði løgmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um lutapening í I/F Skopunar útróðrarfelag.	lagtingslov om andelskapital til I/f Skopunnar útróðrarfelag.
§ 1.	§ 1.
Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at seta kr. 50.000 í lutapeningi í I/F Skopunar útróðrarfelag og at leggja peningin út úr landskassanum.	Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at tegne kr. 50.000 som andelskapital i I/f Skopunar útróðrarfelag og at afholde beløbet af landskassen.

§ 2.

Ongin peningur verður settur í ella úlgoldin fyrr enn allar treytirnar, sum landsstýrið setur, eru loknar.

§ 3.

Henda lógkemur í gildi beinanvegin.

§ 2.

Ingen del af andelskapitalen kan tegnes eller udbetales førend alle betingelser, som landsstyret måtte opstille, er opfyldt.

§ 3.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

8. apríl hevur D. P. Danielsen, sakførari, sent landsstýrinum soljóðandi skriv:

«Á nevndarfundi í Skopunar Útróðrarfelag 3. apríl varð einmælt samtykt at biðja løgtingið sela kr. 50.000 av hlutapeningi í felagið.

Hetta er í samband við byggingina av flakavirki felagsins í Skopun, sum nú skjótt fer at vera liðugt. Henda byggingin verður umleið kr. 85.000 dýrari, enn hon var metti til av virkisnevndini og øðrum. Og støðan er tann, at vil løgtingið útvega felagnum kr. 50.000 av hesum meirkostnaði, so er felagið sjálvt fært fyri at klára tað óreslaða.

Eg viðloggi fíggjarstøðu felagsins 31. december 1966, og aðrar upplýsingar, sum kunnu vera av týdningi fyri málið.»

Skilað verður til, at felagið er lutafelag eftir samtyktum frá 15. januar 1966 (smbr. § 11, sum sigur: «Fyri peningaligu skyldur felagsins ábyrgjast limirnir og arvingar teirra við solidariskari ábyrgd, men bert við innskotspeninginum og tiltaksgrunni felagsins»).

Landsstýrið loyvir sær at leggja fram uppskot við tilmæli.

1. viðgerð 9. og 10. mai legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Skopunar útróðrarfelag hevur við sakfarna D. P. Danielsen beitt á landsstýrið, um at seta sum partapening kr. 50.000 í flakavirkið teirra.

Viðlagt málinum er fíggjarstøða felagsins pr. 31/12-1966, sum vísir, at felagið hevur ein innskotspening uppá kr. 59.600 og ein tiltaksgrunn uppá kr. 27.552.

Bygningur, inventar, maskinur hava kostað kr. 475.000. Felagið hevur

eitt byggilán uppá kr. 140.169, sum øllandi kann prioriterast, tá virkið er fullført.

Játtanin 40.000 kr. í 1966/67 hevur landsstýrið skylt soleiðis, at tær 30.000 kr. eru til ymisk eykatiltøk og er tí bert vanligur studningurin 10.000 kr. settur av til komandi figgjarlóg.

108) ad § 19-10-1: Fráhaldsfeløg.

Smbr. skriv 9. juli 1966.

Sum svar á skriv landssýrisins, dagssett 3. og 29. juni, skulu vit siga frá, at felagsnevndin hevur havt fund í Havn hin 8. juli, og har tikið stoðu til spurningin um uppskot til figgjarløgtingslóg fyri 1967/68.

Felagsnevndin skal fyrst loyva sær at takka fyri tann partin av studninginum til fráhaldsfeløgini, fyri figgjarárið 1965/66 — kr. 7.500,—, sum er latin felagsnevndini og teimum feløgum hon umboðar.

Felagsnevndin skal eisini takka fyri, at landsstýrið hevur tikið ta avgerð, at býta studningin fyri figgjarárið, sum vit eru í, við ⅔ til okkara og ⅓ til Blá Kross. Tíverri vísir tað seg, at hóast avgerð landsstýrisins, fáa vit bert helvtina, av tí at landsskrivstovan hevur latið Blá Kross fáa kr. 7.500 av studninginum.

Felagsnevndin hevur býtt studningin fyri 1965/66 soleiðis millum feløgini:

Nólsoyar Fráhaldsfelag	130,00
Havnar Avhaldsfelag	100,00
Haldórsvíkar Avhaldsfelag	370,00
Miklادals sóknar Fráhaldsfelag	400,00
N.I.O.G.T. (10 losjur)	2.000,00
Mál og Mantan (Glaðustrok)	1.500,00
Felagsnevndin	1.500,00
Til útreiðslur í samband við fyrireikingar til Norrønu Good-Templarskeiðið í 1967	1.500,00
Tilsamans	7.500,00

Býtið er gjørt yvirhøvur í mun til limatalið hjá felagunum. Enn hava vit tó ikki fingið uppgerð yvir limatalið, sum tað er nú, frá øllum felagunum, men tykist tað sum aftangongdin er steðgað, og tað eru fekin til, at tað fer at ganga framá.

Viðvíkjandi studningi fyri komandi figgjarár, so loyva vit okkum at heita á landsstýrið um munandi hækking í tí peninganøgd, sum verður lutað okkum. Um felagini skulu verða før fyri at avrika nakað munandi, so krevst almennur studningur, tí tey eru ikki før fyri sjálvi at útvega meiri enn tær 40.—50.000 kr., sum tey árliga nýta í fráhaldsarbeiðinum.

Sum landsstýrinum kunnugt, eru fráhaldsfelagini uppi í alheims fráhaldsarbeiðinum, við tað at N.I.O.G.T. er sjálvstøðugur limur í internationala good-templara felagsskapinum. Umfram at gjalda limagjald har, standast eisini útreiðslur av umboðan á alheimsfundum, til dømis letur felagið seg umboða á internationala good-templara fundinum í Lausanne í Sveits í hesum mánaða.

Felagsnevndin er eisini sjálvstøðugur limur í Norrønu Fráhaldsnevndini, har øll norðanlond eru við. Norrøna Fráhaldsnevndin fyrireikar triðja hvørt ár norrøna fráhaldsstevnu, í ár verður hendu stevna í Åbo í Finlandi. Umboðan í hesi nevnd, og umboðan á fráhaldsstevnuni, krevur ikki so lítið av peningi, tí ferðaútreiðslurnar, so langt av leið, eru stórar.

Umfram hetta nevnda, er N.I.O.G.T. limur í Norrøna Good-Templar Ráðnum, sum umboðar good-templarfelagini í øllum seks norðanlondum. Hetta ráðið fyrireikar m.a. skeið fyri good-templarar og onnur fráhaldsfólk á hvørjum ári. Í 1964 var tílíkt skeið í Islandi, í fjør var tað í Svøriki, og vit høvdu luttakarar í báðum, og komandi ár er ætlanin at skeiðið skal vera í Føroyum. Tað er eitt ódnartak hjá N.I.O.G.T. at taka uppá seg at standa fyri hesum skeiði. Tað verður roknað við millum 100 og 200 luttakarum úr øllum norðanlondum. Vit skulu takka fyri, at landsstýrið hevur verið so beinasamt, at lata okkum skúlan í Hoy-

dølum til at halda skeiðið á, hetta er góður stuðul, sum vit eru sera takksamir fyri. Skeiðið kemur eisini at bera aðrar stórar útreiðslur við sær, og vilja vit eisini heita á landsstýrið um figgjarligan stuðul til hetta tiltak.

Eisini skulu vit loyva okkum at minna á nøkur týðandi mál, sum krevja almennan stuðul, um tey skulu kunna fremjast, og sum vit nevndu í umsókn okkara hin 7. juli í fjør, t.d. lán og studning til felagshús, studning til ungmannaarbeiðið og útbúgving av leiðarum, studning til útgávu av alkoholleru á føroyskum, keyp av filmum um alkoholvanda o.t.

Í samband við hetta kunnu vit nevna, at losjurnar í Havn, í vetur hava gjørt eina roynd at savna ungdómin í Havn til samkomu eitt kvøld um vikuna, har tey ungu sjálvi stíla fyri undirhaldi o.t. Undirtøkan millum ungdómin var ófør, luttøkan var millum 200 og 300 hvørt kvøldið, og gjørdust tað neyðugt at avmarka luttakarafalið. Alt hetta var gjørt púra ókeypis og afgongan var ókeypis. Tað skal leggjast aftrat, at tað var ikki treyt fyri luttøku, at tey ungu eru limir í fráhaldsfelag ella losju.

Tað er tó ein opin spurningur, um tað letur seg gera, at taka henda táttin upp aftur komandi vetur, útreiðslurnar hjá losjunum til hetta hava verið stórar, og eru hølini illa farin av hesi stóru vitjanini. Losjurnar hava ætlanir um at byggja aftrat húsunum, t.d. eina stóra samkomuhøll, og er kostnaðurin av hesum mettur til ca. 300.000 kr. Feløgini eru bert før fyri at útvega o.u. ⅓ av hesum peningi, og hava ikki ráð at forrenta lán uppá restina, um tílík lán yvirhøvur kunnu fáast. Heilt verður tí á landsstýrið, um at umhugsa studning ella lagaligt lán til losjurnar til hetta endamál. Tað er eyðsæð, at tað er tørvur á einum høli, har ungdómurin í Havn kann koma saman og hugna sær undir góðum og tryggum umstøðum, og vil tað tí, eftir okkara tykki, verða rimuligt at hitt almenna stuðlar tílíkt ungmannaarbeiði.

Tað er vón okkara, at háttvirda landsstýrið vil viðgera umsóknir okkara við vælvild, og umhugsa nevndu mál. Fráhaldsarbeiðið, og serstakliga arbeiðið millum ungdómin, hevur alstóran týdning fyri samfelagið, og skuldi tað tí verið sjálvsagt, at samfelagið stuðlaði tiltøk, sum eru fólki okkara og ungdómin til gagns.

Viðemrking frá landsstýrinum.

Landsstýrið er sinnað við vælvild at umhugsa spurningin um á onkran hátt at veita felagnum stuðul til bygging av nevndu samkomuhøll. Fyrr enn umsókn fyriliggur er tó ógjørligt at taka støðu.

Í býtinum av rakstrarstudninginum 1966/67 er onkur misskiljing ikomin, útvegir verða royndir at rætta hetta upp aftur.

109) ad § 19-10-1: Frábaldsfeløg.

Figgjaratlan
1967/6868
Det blaa Kors, Havn.

Inntøkur:

konto 1. Rentur	2.000,00
— 2. Studning frá Føroya løgtingi	7.500,00
— 3. Studning frá Sparikassum	700,00
— 4. Studning frá Kommunum	1.200,00
— 5. Gávur	1.000,00
— 6. Limagjald	350,00
	12.750,00
— 7. Aðrar inntøkur	7.050,00
	19.800,00

Útreiðslur:

Konto 20. Bøkur, bløð v.m.	3.000,00
— 21. Rentur (Byggefond)	1.800,00
— 22. Blaa Kors Redningshjem	15.000,00
	19.800,00

110) ad § 19-10-4: Barnahjálpargrunnurin.
Smbr. skriv 17. juni 1966.

I sambandi við brævi landsstýrisins 9. juni 1966 skulu vit siga frá, at stovnsfæ grunnsins nú er komið uppá 500.000 kr., eftir at uml. 375.000 kr. eru býttar út tey farnu árini.

Vit eru takksamir fyri, at grunnurin er komin uppá fíggjarlógina við 20.000 kr., og loyva okkum at mæla til sonu upphædd fyri fíggjarárið 1967/68.

111) ad § 19-10-5: Sjúkragrunnur verkamanna.
Smbr. skriv 23. juni 1966.

Sambært skriv Føroya landsstýrisins frá 9. juni 1966 F.L.j. nr. 400-11 loyvir Føroya Arbeiðarafelag sær hervið at seta fram uppskot til fíggjarløgtingslóg

1967/68 viðvíkjandi kontu: § 10-10-5 sjúkragrunnur verkamanna , at veitt verður grunninum ein stuðul uppá kr. 100.000.

Avrit av roknskapi og fíggjarstandi sjúkragrunnsins fyri árið 1965 er hjálagdur.*)

Við 1. mai merkjusølu, part av ½% gjaldinum og stuðli frá Føroya løgtingi fyri fíggjarárið 1966/67 er ogn sjúkragrunnsins í dag kr. 387.264,18.

Sum háttvirdu fíggjarnevnd løgtingsins kunnugt er ætlanin at sjúkragrunnurin skal byrja virki sitt, tá hann hevur ein tøkan pening uppá kr. 500.000, og tí hevði tað glett felagið og felagslimirnar almikið, um hesin peningur var tøkur til komandi roknskaparár.

Við vón um bestu vælvild.

---

*) til skjals á landsskrivstovuni.

112) **ad § 20-1-1: Pensiónir.**
Smbr. skriv 20. juni 1966.

Viðvíkjandi eftirlønum verður við hesum sagt frá, at gjaldstovan eftir tí, ið nú verður útgoldið, hevur mett hesar útreiðslur til 75.500 kr.

Til sammetingar kann upplýsast, at roknskapartalið fyri 1965/66 er 92.969,52 (við eftirgjaldingum), og at játtanin á fíggjarlógini 1966/67 er 55.000 kr.

113) **ad § 20-1-2: Bíðipeningur.**
Smbr. skriv 20. juni 1966.

Viðvíkjandi bíðipeningi verður her sagt frá, at í løluni fáa 2 landsstýrismenn bíðipening, og at hesar útgjaldingar verða at steðga tann 31. januar 1967.

Út frá hesum kann gjaldstovan ikki gera nakra meting.

114) **ad § 22-1: Útreiðslur av vali.**

Roknskapur 1965/66	Játtan 1966/67
2.655,00	10.000,00

115) **ad § 22-2: Landsstýrinum at ráða yvir.**

Roknskapur 1965/66	Játtan 1966/67
84.918,12	100.000,00

116) ad § 22-3: Dóms- og løgreglumál.

	Rokenskapur 1965/66	Játtan 1966/67
	1.685,30	7.000,00

117) ad § 23-4: Til kirkjugrunnin.

Smbr. skriv 21. juli 1966.

.....		
Almindelig vedligeholdelse		175.000,—
Kirkegårde		25.000,—
Præstens befordring		25.000,—
Nye kirker		
Christianskirken	50.000,—	
Ørdevig	10.000,—	60.000,-
Forsikring		7.500,—
Kirkebø kirke		24.000,—
Udgifter ialt		316.500,—
fragår: tiendeafløsning		7.800,—
Nettoudgift		308.700,-

Det kan ikke påregnes, at der findes disponibel kapital i kirkefonden pr. 1. april 1967.

118) ad § 24: Avdráttir av lánum.

Smbr. skriv frá gjaldstovuni 21. juni 1966.

Sjóvinnubankin, lán nr. 1579	20.000,-
Sjóvinnubankin, veðhaldslán	80.000,-
Føroya sparikassi, lán nr. 5265B	1.000,-
Føroya sparikassi, lán nr. 9554	30.000,—
Føroya sparikassi, lán nr. 9951E	7.600,-
Búagrunnurin, saneringslán	50.755,-
Búagrunnurin, sjómannaskúlin	34.000,
Búagrunnurin, sjómannaskúlin	20.000,-
Búagrunnurin, til portugalstrolararnar ..	0,—
Tryggingarsambandið, til tinganesognirnar	31.000,-
Tryggingarsambandið, til portugalstrolararnar	30.000,-
Tryggingarsambandið, til Oyggjarvegin ..	50.000,-

Ríkiskassin, til landssjúkrahúsið	? *)
Ríkiskassin, til landssjúkrahúsið	75.000,-
Ríkiskassin, til vega- og havnamál	2.000.000,-
Ríkiskassin, 60-miljónagrunnurin	? *)
Brævalán 1958, til portugalstrolararnar ..	98.800,—
Brævalán 1959, til studentaskúlan	67.400,-
Brævalán 1962 til vega- og havnamál	100.000,-
Brævalán 1963 veðhald	68.000,-
Danmarks Fiskeribank, til «Jens Chr. Svabo»	23.000,-
Tórshavnar kommuna, grundøki til sjómannaskúlan	5.727,-

Her er roknað við leinum lánum, sum landskassin hevur í løtuni. Tað er tó ikki gjaldstovuni kunnugt, nær tað verður talan um at afturrinda lánini frá ríkiskassanum (til landssjúkrahúsið,) 60-miljónagrunninum (berghol v.m.) og felagsbyggigrunninum.

Viðmerking frá landsstýrinum.

*) Hesi lán koma ikki undir avdrátt fyrr enn byggingin er liðug.

Møgulig nýggj lán í 1967/68:

Til nýtt strandfaraskip	1.500.000,
Til studentaskúlan	1.000.000,
	2.500.000,

119) **ad § 25 og 30: Avskrivingar.**

Specifikatión til avskrivingar, fastar ognir og anlegg.

	Grundstykkir	Samlað uppr. virði	Niðurskr. virði	Avskrivingar
1.				
Matr. nr. 1026a Tórsh.	10.077,-	10.077,-	10.077,-	0,-
Húsini í Stórustovu	30.000,-	102.122,06	80.484,19	7.212,81
Húsini við Landavegin	15.000,	49.500,-	44.325,-	1.725,-
Grundstykki (Müllerstræð) ..	315.000,-			0,-
				8.937,81
2.				
Sanatoriutrøðin	200.000,-	200.000,-	200.000,	0,-
Yvirlæknahúsini + garagu ..	0,-	40.286,53	28.200,12	4.028,
Løgtingshúsið	48.283,43	48.283,43	48.283,43	0,-
Landsbókasavnið	70.000,-	70.000,-	70.000,-	0,-
Laboratoriið, Skansavegur ..	0,-	75.414,47	52.790,55	7.541,45

Skansin	8.000,-	8.000,-	8.000,-	0,-
Umboðsmannahúsini í Aberdeen	20.000,-	126.047,22	94.233,50	10.004,50
Tinganes	100.000,-	807.054,10	594.937,31	70.705,69
Fornminnissavnið	0,-	274.400,21	233.239,71	13.720,21
Realskúlabarakkin	0,-	80.854,71	32.342,23	16.170,77
Sjómansskúlin	100.000,-	2.128.941,90	1.885.469,78	81.157,22
) Hoyvík				
Royndarstøðin) Sandi	92.958,66	92.958,66	92.958,66	0,-
Studentaskúlin		7.500.000,-		300.000,-
Maskinistskúlin		150.000,-		150.000,-
Náttúrugripasavn	0,-	120.000,-		6.000,-
				659.927,84
4.				
Flogvøllurin í Vágum	50.260,-	50.260,-	50.260,-	0,-
Oljugoymslurnar	0,-	365.789,16	256.053,76	36.578,24
Oljubrúgv í Søldafirði	0,-	586.850,77	417.794,31	59.685,00
Hvalastøðin við Áir		239.035,97	239.035,97	0,-
Sildaoljufabrikkin í Kollafirði	55.405,55	55.405,55	55.405,55	0,-
Asfaltverk og eablering av samu pr. 20/7-66		1.459.201,48		150.000,-
				246.263,24
Jens Chr. Svabo		1.200.000,-		120.000,-

120) ad § 26: Ymsar ognarútreiðslur.

Rokuskapur 1965/66	Játtan 1966/67
5.541,65	35.000,00

121) ad § 38-5-1 og 2 og § 44-6-1 og 2: Rentur og gjøld og játtan til ymsar grunnar.

		Renteinntøka v.m.	Játtan v.m.
§ 13-1	Vegir og brýr	0,-	5.000,000,-
§ 13-2	Havnagerð	0,-	2.555,000,-
§ 13-3	Lendingar	0,-	1.000,000,-
§ 13-4	Flogvøllurin	20.000,-	250.000,-
§ 44-1	Eftirlønargrunnur landskassans	70.000,-	150.000,-
§ 44-3	Eftirlønargrunnur sjúkrahúsanna	55.000,-	115.000,-

§ 22-4*)	Kirkjugrunnurin	0,-	310.000,-
§ 44-6	Eftirlønargrunnur læraranna	30.000,-	130.000,-
§ 44-7	Socialgrunnurin	15.000,-	
§ 44-9	Grunnurin fyri arbeiðstól til havna- og vegagerð	1.900.000,-	(leiga)
§ 23-1 *)	Apotekaragrunnurin	100.000,-	30.000,-
§ 13-13*)	Vegagrunnurin	15.000,-	2.000.000,-
§ 15-9-12	Útgáva av orðabókum	0,-	12.500,-
§ 15-8-3	Mentunnargrunnurin	20.000,-	40.000,-
§ 14-8-9	Skúlabyggigrunnurin	3.000,-	1.000.000,-
§ 15-9-10-1	Skúlabókagrunnurin	0,-	21.000,-
§ 14-8-13	Grunnurin til bygging av studenta- og kostskúla	0,-	500.000,-
§ 44-22	Sjúkrahúsbyggigrunnurin	6.000,-	
§ 14-7-1	Fimleikargrunnurin	3.000,-	120.000,-
§ 44-24	Grunnur til bygging av hotellum og ferðamannabúðum	5.000,-	0,-
§ 44-25	Grunnur til bygging av løgtingshúsi	28.000,-	0,-
§ 44-26	Frítíðargrunnurin	20.000,-	
§ 16-9*)	Grunnurin til endurnýgging skipaflotans	5.000,-	2.000.000,-
§ 13-5*)	Byggigrunnur strandferðslu landsins	0,-	500.000,-
§ 14-8, 1-3	Lestrargrunnar	4.000,-	120.000,-
§ 14-8-5	Lærlingagrunnur	5.000,-	100.000,-
§ 44-19	Búnaðarskulu Royndarstøð	11.000,-	0,-
§ 44-46	Grunnurin til el-verk á bygd	500,-	0,-
§ 44-51	Grunnurin til umvælan av skansanum	1.200,-	10.000,-
§ 23-2 *)	Avlopið frá Telefonverkinum	0,-	250.000,-
§ 23-3 *)	Avlopið frá Útvarpinum	0,-	0,-
§ 44-58	Grunnurin: Vaktarskip	20.000,-	1.000.000,-
	Útvarpsgrunnurin	500,-	25.000,-
§ 44-29	Sjóoleikarhús	3.000,-	50.000,-
§ 44-32	Dýping av Streyminum	3.000,-	100.000,-
§ 18-3	Høli til motorsakkøna		
§ 44-33	Grunnur til yvirtøku av sermálum		1.300.000,-
	Ymsir aðrir grunnar	2.000,-	150.000,-
		2.345.200,-	18.838.500,-
		*) 120.000,-	*) 5.090.000,-
		2.225.200,-	13.748.500,-

*) Hesir grunnar v.m. ern førdir upp aðrastaðni á ognarroknskapinnu.

122) ad § 38-5-4 og § 44-6-3: Nýtt úr grunnum.

§ 13-1	Vegir og brýr	5.000.000,
§ 12-2	Havnagerð	4.555.000,
§ 13-3	Lendingar	1.100.000,
§ 13-4	Flogvøllurin	0,
§ 44-1	Eftirlønargrunnur landskassans	70.000, -
§ 44-2	Eftirlønargrunnur sjúkrahúsanna	70.000, -
§ 44-6	Eftirlønargrunnur lararanna	150.000,
§ 15-9-12	Útgáva av orðabókum	40.000,
§ 44-9	Grunnurin fyri arbeiðstól til havna- og vegagerð	1.200.000,
§ 15-8-3	Mentunargrunnurin	50.000,- -
§ 14-8-9	Skúlabyggigrunnurin	1.003.000, -
§ 15-9-10-1	Skúlabókagrunnurin	21.000, -
§ 14-8-13	Grunnurin til bygging av studenta- og kostskúla	500.000, -
§ 44-19	Rúnaðarskúli -- Royndarbrúk	250.000,
§ 44-22	Sjúkrahúsbyggigrunnurin	170.000,
§ 14-7-1	Fimleikargrunnurin	150.000,
§ 44-24	Grunnurin til bygging av hotellum og ferðamannabúðum	10.000,
§ 44-25	Løgtingshús v.m.	500.000,
§ 44-26	Frítíðargrunnurin	0,
§ 14,8, 1-3	Lestrargrunnar	150.000, -
§ 14,8-5	Lærlingargrunnur	110.000,
§ 44-46	Grunnurin til el-verk á bygd	0,- -
§ 44-51	Grunnurin til umvelan av skansanum	30.000,
	Grunnurin til at standa móti lapum av ótfánum, veðhaldum v.m.	500.000,
	Grunnurin: nýtt vaktarskip	1.000.000,
	Útvarpsgrunnurin	30.000,
	Grunnurin: Sjónleikarhús	100.000,
§ 44-32	Dýping av Streymnum	50.000,
§ 44-33	Yvirtøka av serrúlun	1.500.000,
§ 18-3-3	Høll til motorsekkonan	150.000,
	Ymsir aðrir grunnar	5.000,
		18.464.000,

YVIRLIT

yvir

SKJØLINI TIL FÍGGJARLØGTINGSLÓGINA 1966/67

	Skjal	síða		Skjal	síða
§ 10-1	1	1	§ 12-10	33	25
§ 10-2	2	1	§ 12-13	34	26
§ 10-3	3	2	§ 13, 1, 2, 3, 4 og 6	35	27
§ 10-4	4	3	§ 13-5	36	27
§ 10-5	5	3	§ 14-1	37	27
§ 11-1	6	3	§ 14-2	38	30
§ 11-2	7	4	§ 14-3	39	33
§ 11-3	8	6	§ 14-4	40	36
§ 11-4	9	6	§ 14-5	41	36
§ 11-5	10	7	§ 14-6	42	37
§ 11-6	11	8	§ 14-7	43	37
§ 11-7	12	8	§ 14-8-1, 2 og 3	44	38
§ 11-8	13	12	§ 14-8-2	45	38
§ 11-9	14	13	§ 14-8-4, 6 og 7	46	39
§ 11-11	15	13	§ 14-8-5	47	39
§ 11-12	16	14	§ 14-8-8	48	39
§ 11-13	17	15	§ 14-8-10 og 11	49	39
§ 11-14	18	15	§ 14-8-12	50	39
§ 11-15	19	17	§ 14-8-13	51	39
§ 11-16	20	17	§ 14-8-15	52	40
§11-17	21	18	§ 14-8-16	53	40
§ 11-18	22	18	§ 14-8-17	54	41
§ 11-19	23	18	§ 14-8-19	55	41
§ 11-20	24	20	§ 14-9	56	41
§ 12-1	25	20	§ 15-1	57	42
§ 12-2	26	21	§ 15-2	58	43
§ 12-3	27	22	§ 15-3	59	44
§ 12-4	28	23	§ 15-4	60	45
§ 12-5	29	24	§ 15-5	61	46
§ 12-6	30	25	§ 15-7	62	48
§ 12-7	31	25	§ 15-8	63	49
§ 12-8, 9, 11 og 12	32	25	§ 15-9-1	64	49

	Skjal	síða
§ 15-9-2	65	50
§ 15-9-3	66	50
§ 15-9-4	67	51
§ 15-9-7	68	52
§ 15-9-8	69	52
§ 15-9-10	70	52
§ 15-9-11	71	55
§ 15 9-12	72	55
§ 15 9-13	73	55
§ 16-1	74	55
§ 16-2	75	56
§ 16-3	76	56
§ 16-3	77	57
§ 16-4	78	57
§ 16-5	79	57
§ 16-6 og 7	80	57
§ 16-9	81	58
§ 16-10, 11, 12 og 13	82	59
§ 17-1-1, 3 og 4	83	59
§ 17-2	84	60
§ 17-2	85	60
§ 17-3	86	62
§ 17-4	87	65
§ 17-5-1	88	65
§ 17-5-2	89	66
§ 17-5-3	90	66
§ 17-7	91	66
§ 17-5-8 og 9	92	67
§ 18-1-1	93	68
§ 18-1-2	94	68
§ 18-2	95	68
§ 18-3	96	69
§ 18-4	97	69
§ 18-5	98	69
§ 18-6	99	70
§ 18-7	100	70
§ 18-8	101	70
§ 18-9	102	70
§ 18-10	103	71
§ 19-1	104	71
§ 19-6	105	73
§ 19-7	106	73
§ 19-9	107	73
§ 19-10-1	108	73
§ 19-10-1	109	74
§ 19-10-4	110	74
§ 19-10-5	111	74
§ 20-1-1	112	77
§ 20-1-2	113	77
§ 22-1	114	77
§ 22-2	115	77
§ 22-3	116	78
§ 23-4	117	78
§ 24	118	78
§ 25 og 30	119	79
§ 26	120	80
§ 38-5-1 og 2 og § 44-6-1	121	80
§ 38-5-4 og § 44-6-3	122	82

ÁLIT

frá landbúnaðarnevndini, ið sett varð sambært løgtingslóg nr. 17 frá 26. apríl 1965

ÁLIT
frá landbúnaðarnevndini, ið sett varð sambært løgtingslóg nr. 17 frá 26. apríl 1965.

Við heimild í løgtingslóg nr. 17 frá 26. apríl 1965 setti landsstýrið í oktober mánað 1965 landbúnaðarnevnd at endurskoða uppskot til løgtingslógir landbúnaðinum til fratna frá millumtinganevndini eftir løgtingslóg nr. 17 frá 22. mars 1956 og við endurskoðanini at hava í huga tær lógarbroytingar, sum kunnu standast av løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m.. Nevndini er álagt at geva álit, ið eigur at umfata bæði ognar- og festijørð, til landsstýrið, sum so leggur málið fyri løgtingið. Í nevndina vórðu valdir hesir limir:

D. P. Danielsen, bóndi, Velbastað,
Th. Joensen, bóndi, Kollafirði,
Jnul Poulsen, traðarmaður, Tórshavn,
Hanus Joensen, bóndi, Hvalvík, og
H. O. Danielsen, matrikulstjóri, Tórshavn.

Sum skrivari hjá nevndini varð settur J. Andreasen, sorinskrivarafulltrúi.

Nevndin hevur hildið 22 fundir.

Frá millumtinganevndini eftir løgtingslóg nr. 17 frá 22. mars 1956 komu tvey uppskot. Annað var uppskot til løgtingslóg um ymisk tiltøk landbúnaðinum til fratna, prentað í Løgtingstíðindi 1959 skjal 3. Partar av hesum uppskoti eru gjøgnumførdir við løglingslógunum nr. 28 frá 24. apríl 1957 og nr. 23 frá 25. apríl 1960. Hitt var uppskot til løgtingslóg um uttanbiggjajørð, prentað í Løgtingstíðindi 1959 bls. 118 til 121. Teir vóru ikki samdir um nakað av uppskotunum í sínt heild.

Nevndin hevur gingið ígjøgnum bæði uppskotini grein fyri grein, men skal áðrenn nomið verður við tær einstøku greinirnar loyva sær at gera hesar viðmerkingar um landbúnaðarviðurskifti okkara sum heild.

Endamálið við einari nýggjari jarðarlóggávu eigur at vera at skapa betri møguleikar fyri einari øktari framleiðslu av landbúnaðarvørum. Í hesum sambandi er tað av stórum týdningi, hvussu tær eindir, ið skulu vera grundarlagið undir framleiðsluni eru hattaðar og serliga at tær hava eina passandi støld. Tó eigur at verða undirstrikað, at tað eisini eru aðrir spurningar, sum hava alstóran týdning fyri framleiðslumøguleik-

arnar, t.d. spurningar sum útbúgving av teimum, ið røkja landbúnaðin, herundir spurningurin um landbúnaðarskúla, landbúnaðarroyndir, alistøðir, lánimøguleikar, søluviðurskifti viðvíkjandi landbúnaðarvørum o.s.fr.; men teir flestu av hesum spurningum liggja utlanfyri ta uppgávu, nevndini er litin upp í hendur.

Nevndin hevur kannað ymisk hagtøl landbúnaðinum viðvíkjandi, og eru tey tikin við í hesum áliti sum skjøl.

Tann galdandi lóggávan viðvíkjandi tí parti av jørðini, sum verður nevnd almenn jørð, er vorðin til í einari tíð, tá tað var av størsta týdningi at lata smámannin fáa jørð til uppdyrkingar, so at tað á henda hátt skuldi vera gjørligt hjá honum at hava eina kúgv sum uppískoyti í tí dagliga húsarhaldinum. Hetta er í flestu førum ikki neyðugt longur. Nevndin er tí samd um, at lógin eigur at gera støðuna hjá traðarmanninum greiðari, soleiðis at tann, ið røkir trøðna, sum hon skal, fær eina tryggari støðu — við lógfestum rætti til at fáa trøðna til ognar, tá hon er velt, og við at hann fær samsýning fyri tað arbeiði, hann hevur lagt niður í eina leigutrøð, sum grundstykki verða seld burturav. Uppá ta aðru síðuna heldur nevndin tað vera skeivt, at traðir sum verða innlagdar av almennari jørð fáa loyvi at liggja í órøkt. Nevndin er tí sinnað at broyta treytina fyri uppdyrkingini, eins og nevndin tekur undir við milluntingnevndini í, at tað eigur at byggjast fyri, at menn fáa traðir burtur av almennari jørð við tí í huga at vinna slóran pening við at stykkja tær út í grundstykki.

Viðvíkjandi festaskipanini er nevndin av teirri áskoðan, at ein føst skipan sum tann galdandi hevur sínar fyrmunir og síni brek. Uppá tað einu síðuna hindrar hon at ógreiða verður um, hvør skal festa, og kann soleiðis eisini fyribyrgja klaudri millum systkini. Hinvegin kann hon hindra, at teir, sum best egnaðir eru sleppa framat. Nevndin gongur tí í prinsippinum inn fyri at varðveita eina fasta skipan, men við møguleika hjá sitandi festara at gera sáttmála við jarðarráðið, um hvør skal festa.

Spurningurin um at láta festagarðarnar til ognar varð gjølla viðgjørdur av tí búnaðarnevnd, sum sett varð samhart lóg frá 13. mars 1908.

Landbúnaðarnevndin var ósamd um tað hevði verið eitt framstig, um festijørðin varð latin til ognar, men hon gjørdi tó uppskot, sum miðjaði móti hesum (sí Landbokommissionens Betænkning bls. 255 og áteftir). Frammanundan hevði spurningurin ferð eftir ferð verið viðgjørdur í løgtinginum (sí Landbokommissionens Betænkning Tillæg IX bls. 679 og áteftir).

Nevndin tekur undir við, at festigarðarnir undir ávísum treytum skulu kunna latast til ognar. Nevndin hevur ta áskoðan, at hetta fer at elva bøndrum til at spenna seg meira út. Sum er hava teir onga trygd fyri,

at tann peningur og tað arbeiði, teir leggja niður í garðin kemur leimum sjálvum til góðar, og tað vil eisini gera tað lættari hjá monnum, sum hvørki hava hug ella evni til at røkja garðin, at sleppa sær av við hann til aðrar, sum eru betri egnaðir sum bøndur. Hinvegin er nevndin samd um, at tað má byrgjast fyri, at garðarnir eins og ognarjørðin verður pettað sundur. Viðvikjandi søluprísinum eigur at vera havt í huga, at festirættirin er ogn ættarinnar, og at festileigan er lág, og tað er tí rímligt, at sølnprísurin verður hareftir. Annars heldur nevndin tað ikki vera rætt at lata menn yvirtaka garðarnar til ognar fyri lítið og einki fyri kanska beinanvegin at selja teir við stórum vinningi. Nevndin hevur tí gjørt broytingaruppskot um, at jarðarráðið hevur rætt til at yvirtaka garðarnar aftur eftir meting, um teir verða latnir øðrum enn hjúnafelaga ella lívsarvingum.

Hetta er eisini tað, sum er galdandi viðvíkjandi traðum, sum eru latnar til ognar, og nevndin er samd um, at hann, ið situr við leigutrøð og festari eiga at javnstillast mest møguligt.

Eftir galdandi lóg førir sorinskrivarin eitt sokallað brúksregistar yvir alla ta jørð, sum er umfatað av III. og IV. bólki í uppskotinum. Hetta er ikki nakað serliga fullfiggjað yvirlit, men nevndin má mæla til at bøtt verður um hetta, við at øll jørðin í Føroyum verður matrikulerað skjótast gjørligt. Løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m. áleggur eisini matrikulstovuni at gera fullfiggjaða matrikulering av øllum føstum eigindómum í Føroyum. Tað fer at gera viðurskiftini enn meira fløkt, um uppaftur ein nýggjur formur fyri skráseting av jørð verður innført. Nevndin tekur tí ikki undir við VII. bólki í uppskotinum, men er hugað fyri at brúksregisturið verður fört sum higartil. Tó heldur nevndin tað vera rættast, at myndugleikin til at góðkenna sundurbýti v.m. verður lítin matrikulstovuni upp í hendur.

Viðvíkjandi ognarjørðini er nevndin samd um, at tað hevði verið rætt, at eftirlit er við sundurbýti av henni. Í teimum bygdum, har matrikulering er farin fram, krevst loyvi til sundurbýti sambært løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m. § 15 ff og lóg nr. 140 for Færøerne om indskrænkning i retten til udstykning af udskiftet jord. Í ómatrikuleraðum bygdum eru ikki aðrar reglur enn lóg frá 4. mars 1857, hvorved udstykning af det private jordegods på Færøerne søges indskrænket, § 17, ið setir forboð fyri at býta sundur jørð smærri enn niður í heilan gyllin, og § 18, ið setir forboð fyri uttan loyvi at skilja bø frá haga. Nevndin hevur ta áskoðan, at tað verður ógvuliga trupult at hava eftirlit við, at jørð í ómatrikuleraðum bygdum ikki verður býtt sundur, og heldur tað tí vera nyttuleyst at gera lógarreglur um forboð hesum viðvíkjandi.

Viðvíkjandi uttanbiggjajørðini er nevndin samd um, at tað ikki eigur at vera loyvt at hava jørð í aðrari bygd, uttan so at talan er um jørð, sum liggur í grannabygd, hvørs høur markar at tí bygd, eigarin býr í. Tann definitión, ið millumtinganevndin hevur gjørt viðvíkjandi uttanbíggjajørð, verður ivaleyst ov trupul at umsita. Nevndin hevur ta áskoðan, at tað ikki bert eigur at vera forboðið sølu av jørð til uttanbíggjamann, men at tað eisini verður álagt jarðaeigara, sum flytir av bygdini, at lata jørðina til mann, ið býr í bygdini, áðrenn eina ávísa freist.

Tað eigur at vera havt í huga, at bæði fraðarmaður og festari eftir galdandi lóg hava skyldu til at sita á brúkinum, og at sama skylda eigur at liggja áeigara av oguarjørð.

Nevndin kann sostatt taka undir við uppskotinum frá millumtinganevndini við teimum broytingum, sum framganga av omanfyristandandi viðmerkingum.

Tórshavn, hin 25. juli 1966.

sign. *D. P. Danielsen* sign. *Juul Poulsen* sign. *H. O. Hansen*
sign. *Th. Joensen* sign. *Hanus Joensen*

/

sign. *Joen H. Andreasen* skr.

UPPSKOT
til

løgtingslóg um ymisk tiltøk landbúnaðinum til frama.	lagtingslov om forskellige foranstaltninger til jordbrugets fremme.
I. Bólkur. Jarðarráð og álitismenn.	Kapitel 1. Landbrugsråd og tillidsmænd.
§ 1. Jarðarráðið hevur tey størv um hendi, sum verða álagd tí sambært lóg ella eftir avgerð landsstýrisins. Landsstýrið fyriskipar reglugerð fyri jarðarráðið.	§ 1. Landbrugsrådet udøver de funktioner, som i henhold til lov eller efter landsstyrets bestemmelser overdrages dette. Landsstyret udfærdiger reglement for landbrugsrådet.
§ 2. Í jarðarráðnum eru tríggir limir, ið allir skulu vera jarðarbrúks-	§ 2. Landbrugsrådet består af 3 medlemmer, der alle skal være

kønir. Landsstýrið velur tveir teirra og Føroya Búnaðarfelag ein.

Starvstíðin er fýra ár.

Fyri hvønn lim verður tiltaksmaður valdur eftir reglunum í 1. petti.

Landsstýrið velur formann ráðsins.

jordbrugskyndige. Landsstyret vælger de 2 af dem og Føroya Búnaðarfelag 1 medlem.

Funktionsperioden er fire år.

For hvert medlem vælges en suppleant efter reglerne i stk. 1.

Landsstyret udpeger rådets formand.

(Broytingaruppskot frá Juul Poulsen til petti 1):

I jarðarráðnum eru triggir limir, ið allir skulu vera jarðarbrúkskønir, og sum landsstýrið velur, tveir teirra tó eftir bundnari innstilling ávikavist frá Føroya Bóndafelag og Føroya Traðarmannafelag. Hvørt felag skal innstilla trý valevni.

Landbrugsrådet består af 3 medlemmer, der alle skal være jordbrugskyndige og som vælges af landsstyret, de 2 dog efter bunden indstilling henholdsvis fra Føroya Bóndafelag og Føroya Traðarmannafelag, der hver skal indstille 3 kandidater.

§ 3.

Limir ráðsins eru inhabilir til at luttaka í málsviðgerðum eftir somu reglum sum sorinskrivari.

Við avgerðum ráðsins skulu fylgja frágreiðslur, ið gjøllari greina avgerðina.

Eingin avgerð kann samtykkjast í jarðarráðnum, eru ikki tvær atkvøður fyri henni.

§ 3.

Rådets medlemmer er udelukket fra at deltage i sagsbehandlinger efter samme regler, som gælder for dommeres inhabilitet.

Rådets afgørelser skal være ledsaget af bemærkninger, der nøjere begrunder afgørelsen.

Ingen afgørelse kan træffes i landbrugsrådet, medmindre der er afgivet mindst 2 stemmer for den.

§ 4.

Jarðarráðnum er heimilað fyri jarðargrunnsins rokning at seta so nógvar álitismenn kring landið, sum tørvur er á.

Álitismenninir ganga jarðarráðnum til handa við uppmálingum o.t., og í málum, ið krevja serkunnleika til viðurskiftini á plássinum. Avgerðarrætt hava teir ongan.

Eftir somu reglum kann ráðið taka sær serkøna hjálp.

§ 4.

Landbrugsrådet bemyndiges til for jordfondens regning at antage det fornødne antal tillidsmænd omkring i landet.

Tillidsmændene yder landbrugsrådet bistand med opmålinger m.v. samt i sager, hvor særlig kendskab til lokale forhold er påkrævet. De har ingen beslutende myndighed.

Efter samme regler kan rådet antage sagkyndig bistand.

§ 5.

Dagpeningur til limir jarðarráðsins ásetur landsstýrið, og verða teir goldnir úr jarðargrunninum, ið somuleiðis rindar ferðaútreiðslur eftir rokning. Jarðargrunnurin rindar útreiðslurnar til skrivstovuhald ráðsins eftir fyriskipan landsstýrisins.

Álitismenn og senkønir senda jarðarráðnum rokning í hvørjum máli sær fyri samsýning og ferðaútreiðslur.

II. Bólkur.
Jarðargrunnurin.

§ 6.

Jarðargrunnurin er ein sjálveigandi stovnur (smbr. Kunngerð frá 26. oktober 1956 um yvirtøku av jarðargrunninum og kongsjørðini), ið verður at nýta føroyskum landbúnaði til fram.

Á fíggjarlógini verður árliga játtaður peningur at leggja í grunnin.

Við loyvi landsstýrisins í hvørjum einstakum føri er grunninum heimilað at taka upp langfreistað lán. Hesi lán kunnu ikki fara upp um fimm ferðir samlaðu ognir grunnsins á ársroknskapinum undanfarna roknskaparár.

Í grunnin fara allar inntøkur av teirri jørð, sum umtalað er í § 8, tó ikki traðarleiga (smbr. § 16 stk. 4), og allur peningur, sum kemur inn fyri sølu av slíkari jørð. Tó verður søluperningur fyri jørð, ið verður seld frá einum brúki at bóka á festikonto, ið verður at føra fyri hvørjum ein-

§ 5.

Dagpenge til rådets medlemmer fastsættes af landsstyret og udredes af jordfondens midler tillige med befordringsudgifter efter regning. Jordfonden udreder udgifterne til rådets kontorhold efter landsstyrets bestemmelse.

Tillidsmænd og sagkyndige indsender regning til landbrugsrådet i hver enkelt sag for honorar og befordringsudgifter.

Kapitel II.
Jordfonden.

§ 6

Jordfonden er en selvejende institution (jfr. Bekendtgørelse af 26. oktober 1956 om overtagelse af jordfonden og kongsjorden), der vil være at anvende til fremme af færøsk landbrug.

På finansloven bevilges årlige beløb til fonden.

Med landsstyrets samtykke i hvert enkelt tilfælde er fonden bemyndiget til at optage langfristede lån. Disse lån må dog ikke overstige fem gange jord fondens samlede formue i det sidste forløbne regnskabsår.

I fonden indgår alle indtægter af del i § 8 omhandlede jordegods, bortset fra trøleje (jfr. § 16 stk. 4), og alle beløb for salg af sådan jord. Dog skal provenuet for salg af jord fra et brug bogføres på fæstekonto, der vil være at føre for hvert enkelt brug. Vedkommende brug skal have ret til at anvende disse beløb til ved-

stakum brúki, og hevur viðkomandi brúk rætt til at nýta henda pening til umbøtingar ella íleggingar, tá hesi tiltøk frammanundan eru góðkend av jarðarráðnum.

§ 7.

Jarðargrunnurin verður fyrisitin av jarðarráðnum sambært gjøllari fyriskipan, sum landsstýrið ger.

Roknskapur grunsins verður grannskoðaður av grannskoðara løgtingsins, og løgtingið skal góðtaka roknskapin.

III. Bólkur
Jørð hjá tí almenna.

§ 8.

Eftir niðanfyri nevndu reglum umsitur jarðarráðið alla almenna jørð á føroyskum hondum, ið ikki verður umsitin av øðrum almennum stovnum.

Landsstýrið kann fyriseta gjøllari reglur fyri hesari umsiting.

Har sum annað ikki er ásett, kunnu avgerðir jarðarráðsins leggjast fyri landsstýrið. Slík kærumál skulu vera framkomin til landsstýrið í seinasta lagi vikudagin seks vikur aftaná, at avgerð ráðsins er kunngjørd viðkomandi, ella er send honum á posthúsið.

§ 9.

Tann jørð, sum nevnd er í § 8 kann

1. nýtast í almennum endamáli.
2. latast í festi (smbr. § 10).
3. útleigast eitt ásett áramál, ella

tigeholdelser eller investeringer, når disse i forvejen er godkendt af landbrugsrådet.

§ 7.

Jordfonden administreres af landbrugsrådet efter nærmere af landsstyret fastsatte regler.

Fondens regnskab revideres af lagtingets revisor, og lagtinget deciderer regnskabet.

Kapitel III.
Jord i offentlig eje.

§ 8.

Efter de nedenfor anførte regler bestyrer landbrugsrådet al færøsk jord i offentlig eje, der ikke bestyres af andre offentlige institutioner.

Landsstyret kan fastsætte nærmere forskrifter for denne bestyrelse.

Hvor andet ikke er fastsat kan landbrugsrådets afgørelser indankes for landsstyret. Sådanne kæremål skal være fremkommet til landsstyret senest ugedagen seks uger efter, at rådets afgørelse er kommet til vedkommendes kundskab eller tilsendt ham gennem postvæsenet.

§ 9.

Det i § 8 nævnte jordegods kan

1. anvendes til offentlige formål,
2. bortfæstes (jfr. § 10)
3. udlejes på bestemt åremål eller

so leingi leigutakarin og hjúnafelagin eru á lívi (smbr. § 16), og

4. handast yvir til ognar (smbr. IV. bálk).

§ 10.

Jarðarráðið hevur rætt til at láta almenna jørð í festi.

Festið stendur við, so leingi festarin ella hjúnafelagin er á lívi, tó bert til festarin ella, um hann er deyður, hjúnafelagin er vorðin 70 ár, uttan so at jarðarráðið loyvir tað í hvørjum einstøkum føri.

Undir serligum umstøðum kann jørð latast í festi eitt avmarkað stytri áramál.

Festitreytirnar verða ásettar í einum festibrævi. Festibrøvini, sum altíð gjølla skulu skila til, hvat festinum tilhoyrir, verða prentað á oyðubløð, sum landsstýrið skal góðtaka.

§ 11.

Festarin rindar øll gjøld, sum hvíla á festinum, og rindar jarðargrunninum festileigu.

Festileigan er ásett til 7 kr. 06 oyru fyri skattamørkina árliga og fellur til gjaldingar 1. desember á hvørjum ári.

§ 12.

Verður festið leyst aftaná lívsfesti, hava lívsarvingar seinasta festara, um teir annars eru skikknðir, frammihjáratt til at taka við festinum í hesari raðfylgju:

1. elsti sonur ella eftirkomarar hansara,

for lejers og dennes ægtefælles levetid (jfr. § 16), og

4. overdrages til selvejendom (jfr. kapitel IV).

§ 10.

Landbrugsrådet er beføjet til at bortfæste jord i offentlig eje.

Fæsteforholdet vedvarer, så længe fæsteren eller dennes ægtefælle er i live, dog ikke udover fæsterens, eller i tilfælde af dennes død, ægtefællens fyldte 70. år, medmindre landbrugsrådet i hver enkelt tilfælde giver sin tilladelse hertil.

Under særlige omstændigheder kan jord bortfæstes for et bestemt kortere åremål.

De for bortfæstningen gældende vilkår optages i et fæstebrev. Fæstebrevene, som altid nøje skal angive, hvad der tilhører fæstet, udfærdiges efter en af landsstyret godkendt formular.

§ 11.

Fæsteren betaler alle fæstet påhvilende afgifter, ligesom han vil have at betale fæsteleje til jordfonden.

Fæstelejen er fastsat til 7 kr 06 øre for hver skattemærk årlig, og den forfalder til betaling hvert år 1. december.

§ 12.

Ved fæsteledighed efter livsfæste skal der tilkomme sidste fæsters livsarvinger, om de i øvrigt er egnede, fortrinsret til at overtage fæstet i følgende orden:

1. ældste søn eller dennes afkom,

2. yngri snour ella eftirkomarar hansara,
3. elsta dóttur ella eftirkomarar hennara,
4. yngri dóttur ella eftirkomarar hennara.

Fyrsta síðulinja fær frammihjárætt í sonnu raðfylgju, um festari doyr barnleysur.

Sitandi festari hevur tó altíð rætt til at gera bindandi avtalu við jarðarráðið, hvør av lívsarvingum hansara, ella, hevur hann ikki lívsarvingar, hvør arvingur í síðulinjuni skal festa garðin eftir sog. Áðrenn slík avtala verður góðkend, skal jarðarráðið boða øllum hinum lívsarvingunum frá ella arvingum av fyrstu síðulinjuni, um festarin er barnleysur. Er ein slík avtala gjørd, kann hon ikki takast aftur av festaranum, uttan so at tilstundandi festari samtykkir í tí, ella hann doyr ella verður óarbeiðsførur.

Situr tann, sum hevur frammihjárætt sambært hesi grein, longu við almennari jørð, missir hann frammihjárættin soleiðis at skilja, at jarðarráðið kann treyta nýtsluna av frammihjárættinum av, at hann sigur brúkið frá sær, hann hevur frammanundan.

Hvør tann, sum fyri jarðarráðnum verður boðaður at hava frammihjárætt, skal hava boð um avgerðina, og fær hann ikki viðhald, kann hann krevja málið lagt fyri landbúnaðarstevnu við kærurætti til yvirlandbúnaðarstevnu sambært teimum galdandi reglunum. Áheitan um hetta skal hann senda sýslumanninum í seinasta lagi vikudagin fýra vikur

2. yngre søn eller dennes afkom,
3. ældste datter eller dennes afkom,
4. yngre datter eller dennes afkom.

Første sidelinie har fortrinsret i samme rækkefølge i de tilfælde, hvor fæsteren dør barnløs.

Siddende fæster har dog til enhver tid ret til at træffe bindende aftale med landbrugsrådet, hvem af hans livsarvinger, eller i tilfælde af at den aktuelle fæster er barnløs, hvilken arving af første sidelinie skal have gården efter sig. Forinden en sådan aftale bliver godkendt, skal landbrugsrådet underrette alle de øvrige livsarvinger eller alle de øvrige af første sidelinie. Når en sådan aftale er truffet, kan fæsteren ikke tilbagekalde den, medmindre den tilstundende fæster samtykker heri, eller han dør eller bliver uarbejdsdygtig.

Hvis en fortrinsberettiget allerede er bruger af jord i offentlig eje, bortfalder hans fortrinsret på den måde, at landbrugsrådet kan betinge anvendelsen af den af, at han giver afkald på det brug, han allerede besidder.

Enhver, der for landbrugsrådet anmeldes som fortrinsberettiget skal have meddelelse om afgørelsen, og kan da, hvis han forbigås, begære sagen forelagt for landvæsenskommissionen med appel til overlandvæsenskommissionen efter de gældende regler. Begæring herom skal dog sendes til sysselmanden senest 1 ugers dagen efter, at han er blevet

aftaná, at avgerð ráðsins er kunngjørd honum ella er send honum á posthúsið.

§ 13.

Sundurbýti av festigørðum í fleiri brúk kann bert fara fram undantaksvís og bert eftir avgerð jarðarráðsins. Tað gerst ikki, uttan so at ráðið ætlar um, at bæði tey nýggju festini kunnu røkjast sum sjálvstøðugir festigarðar, ella so at fað frábýtfað verður lagt aftur at einum festigarði, ið frammanundan er ov lítil at verða røktur sum sjálvstøðugur garður.

Avgerð jarðarráðsins kann av viðkomandi krevjast løgd fyri landbúnaðarstevnu við kærurætti til yvirlandbúnaðarstevnu.

Verður sundurbýti framt við festiskifti, hevur tann, ið var tilstundandi festari eftir § 12 rætt til at velja, hvat av teimum nýggju festunum, hann tekur.

§ 14.

Festibrøv, sum eru í gildi, tá hendu lóg fær gildi, verða óbroytt, so leingi festarin ella hjúnafelagi hansara sita við festinum, eisini í so máta, at tann galdandi festileigan verður óbroytt so leingi.

§ 15.

Hann, ið hevur jørð frá ti almenna í festi, skal hava bústað sín í teirri bygd, har festið er, hevur jarðarráðið ikki loyvt undanfak frá hesum. Hann skal røkja festið sum eitt væl umsitið jarðarbrúk, eisini innisløðu, bygning-

gjort bekendt med afgørelsen eller meddelelse om denne er afgivet til besørgelse af postvæsenet.

§ 13.

Udstykning af fæstegårde i flere brug må kun finde sted i undtagelsestilfælde og kun efter landbrugsrådets bestemmelse. En sådan udstykning kan kun finde sted, såfremt rådet skønner, at begge de nye brug kan drives som selvstændige fæstegårde, eller således at det fraskilte sammenlægges med en fæstegård, der i forvejen er for lille til at kunne drives som selvstændigt brug.

Landbrugsrådets afgørelse kan af vedkommende indankes for landvæsenskommission med appel til overlandvæsenskommission.

Finder udstykning sted i forbindelse med fæsteskifte, skal den i henhold til § 12 tiltrædende fæster have ret at vælge, hvilke af de nye fæster, han ønsker at overtage.

§ 14.

De ved denne lov ikrafttrædende gældende fæstebreve beholder deres gyldighed for vedkommende fæstere eller dennes ægtefælles livstid, også i den forstand, at fæstelejen forbliver uændret så længe.

§ 15.

Den, der har jord i offentlig eje i fæste, skal have bopæl i den bygd, hvor den pågældende fæstegård ligger, medmindre landbrugsrådet har givet samtykke til andet. Han skal opretholde et veldrevet landbrug, også hvad besæt-

um, anboðum og seyði viðvikjandi.

Festarin hevur rætt til at nýta festið við øllum tí, ið hoyrir tí til, á ein slíkan hátt sum samsvarar vanligt og forsvarligt brúk av tí. Hann hevur veiðirættindi á festinum og rætt til at fiska í áum og vøtnum. Hann hevur torvskurðar- og kolanámsrætt til egna nýtslu. Meðan hann situr við festinum hevur hann rætt til at útleiga øðrum veiðirættindi, herundir fuglabjørg og urðar, og fiskirættindi, tó í mesta lagi fyri fimm ár um ferðina. Hann hevur eisini rætt til at selja grót, eyr, sand og tara undir teirri treyt, at tað ikki minkar um virðið av festinum sum jarðarbrúk. Søla í størri um krevur loyvi frá jarðarráðnum, sum kann treyta tílíkt loyvi av, at peningurin verður settur á festikontoina hjá viðkomandi brúki.

§ 16.

Jarðarráð hevur rætt til at leiga út traðir og traðarstykkir, stykkir til urtagarðsbrúk, grundstykkir til húsabygging, iðnaðarendamál og tílíkt.

Verður jørð útleigað til traðarbrúk, skal ráðið fyrst ætlað um lendlð er hóskiligt dyrkilendi, og at tað skaðar seyðabrúkinum sum minst. Ráðið skal ansa eftir, at jørð ikki verður innløgd av hagamum, so leingi innløgd jørð er, ið ikki verður nýtt sum hon eigur at verða.

Leigar jarðarráðið ódyrkað lendi til traðarbrúk, skal ráðið áleggja leigaranum, at tað sum dyrkandi er av trøðnt verður velt áðrenn 20 ár, og soleiðis at minst helvtin er velt aftaná 10 ár.

ning, bygninger, redskaber og fæ angår.

Fæsteren har ret til at bruge fæstet med alt dets tilliggende på en måde, der stemmer med sædvanlig og forsvarlig brug af det. Han har jagtret på fæstet og ret til at fiske i åer og indsøer. Han har tørveskærs- og kulbrydningsret til husbehov. Han kan for indtil 5 år ad gangen inden for sin besiddelsestid bortleje jagtret, herunder fuglebjerge og urer, samt fiskerirettigheder. Han har også ret til at sælge sten, grus, sand og tang under forudsætning af, at salget ikke forringer værdien af fæstet som landbrug. Salg i større omfang kræver tilladelse af, at salgssummen indsættes på brugets fæstekonto.

§ 16.

Landbrugsrådet er beføjet til at udleje trøer eller trøstykker, arealer til havebrug, grundstykker til byggeri, industrielle formål o.lign.

Ved bortlejning af jord til trøbrug skal rådet først skønne, om arealet er egnet til opdyrkning, og at bortlejningen skader fårebruget mindst muligt. Rådet skal påse, at der ikke indlægges nye arealer af hangen såkænge der forefindes indhegnet jord, der ikke anvendes som den skal.

Bortlejer landbrugsrådet udyrkede arealer til trøbrug, skal rådet pålægge lejeren pligt til opdyrkning af den dyrkbare del af trøen inden 20 år og således, at mindst halvdelen er opdyrket efter 10 års forløb.

Leigan er 4 kr. árliga pr. ha. og tilkennur hon viðkomandi festara av tí festi, sum trøðin er leigað burturav.

Við leigumálinum fylgja eingi rættindi til útrakstur ella onnur rættindi og hamindi, sum eru ikki nevnd í leigusáttmálanum, og leigumálið í seg sjálvt broytir einki í tí vetrarbiti, sum aðrir hava á tí leigaða. Leigutreytirnar viðvíkjandi traðum og traðarstykkjum ásetur jarðarráðið í einum leigusáttmála, sum verður at prenta á oyðublað, sum landsstýrið hevur góðkent. Undir serstøkum umstøðum kann jarðarráðið við samtykki landsstýrissins gera frávik frá tí vanliga orðaljóðinum í leigusáttmálanum. Leigusáttmálar, sum eru í gildi, fá henda lógin fær gildi, verða óbroyttir, so leingi viðkomandi leigari ella hjúnafelagi hansara sáta við trøðni.

Við útleigu av lendi til urtagarðsbrúk, byggigrundir til húsabygging, idnaðarendamál og tilikt skal jarðarráðið ansa eftir, at ódyrkað lendi verður útleigað fram um dyrkað, og jørð sum er óvanda dyrkilendi fram um gott lendi. Somuleiðis skal ráðið ansa eftir, at ikki verður útleigað økt, ið liggja soleiðis fyri, at leigumálið skaðar ella minkar um virðið á uttanum liggjandi dyrkilendi meira enn neyðugt er. Treytirnar, harundir leiguna, fyri útleigan av lendi, sum nevnd eru í hesum petti, ásetur jarðarráðið í hvørjum einstøkum føri.

Áðrenn jørð verður útleigað burturav einum festigarði ella leigutrøð, eigur viðkomandi festari ella traðarmaður at verða efi-

Lejen udgør 4 kr. årlig pr. ha, og den tilfalder vedkommende fæster af det brug, trøen hidrører fra.

Med lejemålet følger ingen rettigheder til udrægster eller andre rettigheder eller herligheder, som ikke er specielt nævnt i lejekontrakten, og lejemålet i sig selv bevirker ingen ændring i den vintergræsningsret, andre har på det lejede. Lejevilkårene vedrørende trøer og trøstykker fastsættes af landbrugsrådet i en lejekontrakt, der udfærdiges på en af landsstyret godkendt formular. Under særlige omstændigheder kan landbrugsrådet med landsstyrets tilladelse fravige den sædvanlige ordlyd i lejekontrakten. Lejekontrakter, der er gældende ved denne lovs ikrafttræden, forbliver uændret gældende, så længe lejeren eller dennes ægtefælle besidder trøen.

Ved udlejning af arealer til havebrug, byggegrunde, industrielle formål o.lign. skal landbrugsrådet påse, at udyrkede arealer udlejes fremfor dyrkede, og at jord, som er mindre egnet til opdyrkning udlejes fremfor arealer, der er velegnede til opdyrkning. Ligeledes skal rådet påse, at der ikke udlejes arealer, som har en sådan beliggenhed, at lejemålet skader eller forringer værdien af omliggende dyrkningsarealer mere end nødvendigt. Vilkårene, herunder lejen for udleje af de i dette stk. nævnte arealer fastsættes af landbrugsrådet i hvert enkelt tilfælde.

Inden udlejning af jord fra en fæstegård eller lejetrø, skal sagen forelægges vedkommende fæster

irspurdur, og sýtir hann fyri at ganga við til leigumálið, kann hann krevja málið lagt fyri landbúnaðarstevnu við kærurætti til yvirlandbúnaðarstevnu.

§ 17.

Verður leigumál leyst viðvíkjandi trøð ella traðarstykki, hava tey í nevnd eru í § 12 frammíhjárætt til nýtt leigumál eftir sonnu reglum, sum tær ið har eru ásettar og við sama rætti hjá sitandi leigara sum hjá sitandi festara, til at gera av, hvør av arvingunum skal hava trøðna.

§ 18.

Hann, ið hevur trøð í leigu frá jarðaráðnum, skal røkja trøðna sum eitt væl umsitið jarðarbrúk, og hann kann ikki nýta hana til annað endamál. Hann kann ikki gera nakað, sum minkar um virðið á trøðni sum dyrkilendi, uttan við samtykki jarðarráðsins.

§ 19.

Við festiskifti, og hvørja ferð eitt leigumál er at enda komið, letur jarðarráðið viðkomandi brúk kanna og meta, og tekur støðu til um grundarlag er fyri endurgjaldskravi móti seinasta festara ella leigara ella móti arvingunum.

§ 20.

Festari ella leigari, sum ikki rætstundis svarar jarðargrunnínum tey gjøld sum henda lóg áleggur, kann pantast.

eller lejer til udtalelse, og denne kan, hvis han modsætter sig lejemålet, kræve sagen forelagt for landvæsenskommission med appel til overlandvæsenskommission.

§ 17.

Bliver lejemål vedrørende trø eller trøstykke ledigt, er de i § 12 nævnte personer fortrinsberettiget til nyt lejemål efter de i nævnte bestemmelse fastsatte regler, og med samme ret for siddende lejer som for siddende fæster til af tage bestemmelse om, hvem af arvingerne skal have trøen.

§ 18.

Den, der har trø til leje fra landbrugsrådet, skal drive trøen som et veldrevet landbrug, og han kan ikke anvende den til noget andet formål. Han er uberettiget til at foretage noget, som forringer trøens værdi som landbrugsjord, medmindre landbrugsrådet samtykker heri.

§ 19.

Ved fæsteskifte, og hver gang et lejemål udløber, foranlediger landbrugsrådet vedkommende brug besigtiget og vurderet, ligesom rådet tager stilling til, hvorvidt der er grundlag for at rejse erstatningskrav mod sidste fæster eller lejer eller mod arvingerne.

§ 20.

Afgifter, som det påhviler fæster eller lejer at udrede til jordfonden, og som ikke indbetales rettidigt, kan inddrives ved udpantning.

§ 21.

Ætlar jarðarráðið um, at maður sum situr við jørð hjá tí almenna í festi ella til leiga,, misrøkir jørðina, tilhoyrið, innistøðuna, bygningar ella annað, at hann ikki bøtir um ásjóntig brek, ikki veltir nóg nógv upp úr nýggjum, ella hevur hann ikki lokið gjaldtreytir sínar til jarðargrunnin, harundir rentur og avdrátt av lánum, sum fallin eru til gjaldingar, og hevur hann ikki goldið í seinasta lagi 6 mánaðar aftaná gjalddag, hóast kravdur, ella mistýtir ella misrøkir hann brúkið í aðrar mátar, tilhoyr, innistøðu, bygningar ella annað, og ger tað at brúkið stórliga minkar í virði, ella hevur festari ella leigutakari av almennari jørð í aðrar mátar gjørt grov brot á tær reglur, sum rættindi hansara fylgja, so skal jarðarráðið, tá tað úrslitaleyst hevur heitt á viðkomandi um at lúka skyldur sínar, hevja rættarmál við Føroya rætt við tí sakarkravi, at festið ella tað leigaða verður at taka frá honum.

Í dóminum kann avgerð takast um, at viðkomandi skal endurgjalda jarðargrunninum tað tap, sum brúkinum hevur verið fyri av ávum hansara, ella um viðkomandi skal hava samsýning fyri at missa brúkið ella fyri møgulig veltingararbeiði á brúkinum, ella fyri aðrar fleggingar.

§ 21.

Finder landbrugsrådet, at fæster eller lejer af jord i offentlig eje, vanrøgter jorden, tilliggende, besætning, bygninger eller andet, at han ikke afhjælper synlige mangler, at han ikke opdyrker til strækkeligt af udyrket jord, eller har han ikke opfyldt sine betalingsforpligtelser overfor jordfonden, herunder forfaldne renter og afdrag af lån, og har han ikke inden 6 måneder efter påkrav betalt ydelserne, eller misbruger og vanrøgter han i øvrigt bruget, tilliggende, besætning, bygninger eller andet, og forårsager dette at brugets værdi væsentlig forringes, eller har fæster eller lejer af jord i offentlig eje på anden måde groft tilsidesat de regler, hvorfil hans rettigheder er knyttet, skal landbrugsrådet efter forgæves at have opfordret ham til at opfylde sine forpligtelser, anlægge sag ved Færøernes ret med påstand om fortabelse af fæstemålet eller lejemålet.

I dommen kan der tages stilling til om, hvorvidt vedkommende skal erstatte de tab, som han måtte have påført bruget, eller om der skal ydes vedkommende erstatning for afståelsen af bruget eller for mulige opdyrkningsarbejder på bruget, eller for andre investeringer.

IV. Bólkur.

Søla av almennari jørð og keyp av ognarjørð.

§ 22.

Jarðarráðið hevur rætt til at

Kapitel IV.

Salg af jord i offentlig eje og køb af odelsjord.

§ 22.

Landbrugsrådet er bemyndiget

selja burturav almennari jørð til urtagarðsbrúk, grundstykkir til húsabygging, idnaðarendamál og tilíkt.

Verða øki seld til slík endamál, sum nevnd eru í 1. petti, skal ráðið ansa eftir at selja ódyrkaða jørð fram um dyrkaða, og jørð sum er óvanda dyrkilendi fram um gott lendi. Sommleiðis skal ráðið ansa eftir, at ikki verða seld øki, ið liggja soleiðis fyri, at sølan skaðar ella minkar um virðið á uttanum liggjandi jarðarbrúki meira enn neyðugt er.

Áðreum selt verður, skal ráðið samráðast við avvarandi sóknarstýri um spurningar sum afgongnveg, vatuleiðingar, kloakkir og tilíkt, og ráðið kann treyta søluna av, at slíkir spurningar verða greiddir eftir krøvum sóknarstýrisins.

Jørð, sum seld verður sambæri hesi grein, verður at gjalda í hondina. Berl í undantaksføri kann ráðið hjóða borg, og fá bert móti 1. veðræfti í tí sekda ella móti aðrari fullgóðari trygd.

§ 16 seinasta petti er eisini galdandi sølum viðvíkjandi.

§ 23.

Maður, sum hevur trød í leigu frá tí almenna, kann krevja at fáa trøðna til keyps, tá allur lann dyrkiligi parturin av lenni er vellur, og aftaná at trøðin er sýnað og góðkend av jarðarráðnum.

Sølupeningurin er 25 ferðir ta árligu leiguna.

til af jord i offentlig eje at bortsælge jord til havebrug, grundstykker til boligbyggeri, industrielle formål og lignende.

Bortsælges arealer til de i stk. 1 nævnte formål, skal rådet påse, at bortsælge udyrkede arealer frem for dyrkede, og arealer som er mindre velegnede til opdyrkning frem for arealer, der er velegnede til opdyrkning. Ligeledes skal rådet påse, at der ikke afhændes arealer, som har en sådan beliggenhed at værdien af omliggende landbrug forringes mere end nødvendigt.

Inden afhændelsen skal rådet forhandle med vedkommende kommune om spørgsmål som vejadgang, vandledninger, kloakker og lignende, og rådet kan belinge afhændelsen af, at sådanne spørgsmål løses i overensstemmelse med sognerådets krav.

Jord, der bortsælges i overensstemmelse med denne paragraf skal betales kontant. Kun i undtagelsestilfælde kan rådet tilbyde kredit, og i så fald kun mod 1. prioritets panteret i det solgte eller mod anden betryggende sikkerhed.

§ 16 sidste stykke finder tilsvarende anvendelse i tilfælde af salg.

§ 23.

Lejer af trø i offentlig eje har på begæring ret til at få trøen overdraget til eje, når hele den opdyrkelige del af den er opdyrket, og efter at trøen er synet og godkendt af landbrugsrådet.

Købesummen udgør 25 gange den årlige leje.

§ 24.

Við sølu av trød sambært § 23 fylgja eingi rættindi til útrakstur ella onnur rættindi og lunnindi, sum eru ikki nevnd í søluhrævinum, eins og sølan einki broytir í tí vetrabitsrætti, sum aðrir hava á trødni.

§ 25.

Sølu av jørð sambært § 23 kann jarðarráðið treyla av, at jørðin verður røkt sum eitt vanligt vel umsitið traðarbrúk, at eigarin verður búgvandi í bygdini, at hann ikki selur burturav, útleigar ella makaskiftir nakað av trødni, og at hann ikki ger nakað, sum kann minka um virðið á ognini sum jarðarbrúk.

§ 26.

Selur maður byggigrundir burturav dyrkijørð, sum hann hevur fingið til ognar sambært reglunum í hesi lóg, skal helvtin av nettosølupeningínum ganga inn í jarðargrunnin.

Verður trød ella partur av trød, sum lødin er til ognar sambært hesi lóg, stykkjað út til byggigrundir, soleiðis at trødin harvið missir sítt virði sum jarðarbrúk, kann jarðargrunnurin yvirtaka ognina fyri ein pris, ið svarar til tann upprunaliga søluprísin umframt virðið av tí arbeiði og teimum peningaíløgum, sum lagdar eru í jørðina, aftaná at jarðarráðið seldi hana.

Semjast eigarin og jarðarráðið ikki um prísin, verður hann at áscta av avvarandi landbúnaðar-

§ 24.

Ved overdragelse af trø i henhold til § 23 medfølger ingen rettigheder til udrægsler eller andre rettigheder og herligheder, som ikke fremgår af salgsdokumentet, ligesom salget ikke medfører nogen ændring i den vintergræsningsret, andre har på trøen.

§ 25.

Landbrugsrådet kan belinge overdragelse af jord i henhold til § 23 af, at der på denne opretholdes et sædvanligt veldrevet trøbrug, at ejeren bevarer sin bopæl i bygden, at han ikke frasælger, udlejer eller mageskifter nogen del af trøen, og at han ikke foretager foranstaltninger, hvorved ejendommens værdi som jordbrug formindskes.

§ 26.

Ved salg af byggegrunde af opdyrkningsjord, der er overdraget til eje efter reglerne i denne lov, skal halvdelen af nettoprovenuet tilfalde jordfonden.

Ved udstykning af trø, der er overdraget til eje i henhold til denne lov, eller dele deraf til byggegrunde, hvorved trøen mister sin værdi som landbrug, kan jordfonden overtage ejendommen for en pris, der svarer til den oprindelige salgspris med tillæg af værdien af det arbejde og de investeringer, der er nedlagt i jorden efter overdragelsen fra landbrugsrådet.

I tilfælde af uoverensstemmelse mellem ejeren og landbrugsrådet om prisen, fastsættes denne af vedkommende landvæsens-

stevnu við kæruretti til yvirlandbúnaðarstevnu sambært teimum galdandi reglunum.

§ 27.

Selur maður øðrum enn lívsarvingum sínum trøð, sum hann hevur fingið til ognar sambært hesi lóg, kann jarðarráðið við samtykki landsstýrisins gera av, at trøðin fellur aftur til jarðargrunnin. Prísurin verður tá áseftur eftir sonnu reglum sum í § 26, 2. og 3. pátti.

§ 28.

Selur jarðarráðið til byggigrundir ella tílíkt burturav dyrkaðari trøð, sum maður hevur leigað, hevur viðkomandi leigutakari rætt til helvtina av nettosøluupeninginum, meðan hin helvtin fer í jarðargrunnin.

§ 29.

Festari hevur rætt til at yvirtaka garð, sum hann hevur í festi, til keyps.

Slíkari sølu fylgja tó altíð hesar treytir:

1. at keyparin og eftirmenn hansara verða búgvandi í bygdini,
2. at garðurin verður forsvarliga rikin sum landbrúk,
3. at garðurin framvegis hevur sonnu skyldu til at lata hagajørð til uppdyrkingar sum kongsgarðarnir,
4. at garðurin ikki uttan samtykki jarðarráðsins verður býltur sundur. Slíkt loyvi eigur bert at verða givið undir teimum í § 13 nevndu førum,
5. at einki verður selt burturav

kommission med appel til overlandvæsenskommissionen efter de gældende regler.

§ 27.

Når trø, der er overdraget til eje i henhold til denne lov, søges overdraget til andre end den hidtidige ejers livsarvinger, kan landbrugsrådet med landsstyrets samtykke træffe bestemmelse om, at trøen påny overtages af jordfonden. Prisen fastsættes i så fald efter de i § 26, 2. og 3. stk. fastsatte regler.

§ 28.

Afhænder landbrugsrådet byggegrunde af opdyrket lejetrø, tilkommer der lejelageren halvdelen af nettoprovenuet, medens den anden halvdel tilfalder jordfonden.

§ 29.

En fæster har ret til at få den gård, han har i fæste, overdraget til eje.

For et sådant salg gælder dog altid følgende vilkår:

1. at køberen og dennes successorer forbliver boende i bygden,
2. at gården drives forsvarligt som landbrug,
3. at gården fortsat har pligt til i samme omfang som kongsgårdene til at afgive haugejord til opdyrkning,
4. at gården ikke uden landbrugsrådets samtykke deles. Tilladelse hertil bør kun gives i de i § 13 nævnte tilfælde,
5. at der ikke uden landbrugs-

garðinum til byggigrundir ella tilíkt uttan við samtykki jarðarráðsins,

6. at keyparin hevur skyldu til at bjóða jarðargrunninum at yvirtaka garðin aftur eftir meting, um stig verða tikin til, við sølu ella á annan hátt, at lata øðrum hann enn hjúnafelaga ella lívsarvinga eigarans.

Verður garður seldur sambært reglunum í hesi grein, er sølupeningurin við fyrstu søluna 25 ferðir ta árligu leiguna, soleiðis sum hon er ásett sambært § 14 í hesi lóg umfraint virðið av innistøðu v.m..

Jarðarráðið kann bjóða borg fyri ein part av sølupeninginum í eitt hóskandi áramál, sum ráðið ásetur í hvørjum einstøkum føri, tó ongantíð meira enn tiggju ár, og móti at keyparin gevur jarðargrunninum 1. veðrætt í garðinum ella 2. veðrætt, um so er, at grunnurin hevur 1. veðrætt frammanundan.

Sølupeningur, sum ikki verður goldin í hondina, verður at renta við vanligari sparikassaútlánsrenta.

Í sølubrævinum verður gjølla tilskilað alt sum selt verður, jørðin innan- og uttangarðs, bygningar, innistøða og annað. Áðrenn garðurin verður latin til ognar, skal hann verða sýnaður av umboðsmanni fyri jarðarráðnum saman við festaranum.

Halda keyparin og eftirmenn hansara ikki treytirnar, kann jarðarráðið krevja at yvirtaka grðin aftur eftir meting. Slík meting verður framd av tveimum

rådets samtykke fraskelges noget af gårdens jord til byggegrunde eller lignende,

6. at køberen har pligt til at tilbyde jordfonden at overtage gården påny efter vurdering, såfremt den ved salg eller på anden måde søges overdraget til andre end ejerens ægtefælle eller livsarvinger.

Afhændes en gård i henhold til bestemmelserne i denne paragraf, udgør købesummen ved første salg 25 gange den årlige leje, således som denne er fastsat i henhold til § 14 i denne lov, hvortil kommer værdien af den fæstet tilhørende besætning m.v..

Landbrugsrådet kan give henstand med hensyn til en del af købesummen for et passende åremål, som rådet fastsætter i hvert enkelt tilfælde, dog aldrig mere end 10 år, og mod at køberen giver jordfonden 1. prioritets panteret i gården eller 2. prioritet, såfremt fonden i forvejen har 1. prioritet i den.

Den del af købesummen, der ikke erlægges kontant, forrentes med sædvanlig sparekassendlånsrente.

I overdragelsesdokumentet angives nøje alt det, der indgår i købet, jord inden- og udengårds, bygninger, besætning og andet. Inden gården overdrages til eje, skal den besigtiges af en repræsentant for landbrugsrådet i forening med fæsteren.

Overholder køberen og dennes successorer ikke vilkårene kan landbrugsrådet fordange at overtage gården igen efter vurdering. En sådan vurdering foretages af

metingarmonnum, ið báðir verða útnevndir av Føroya rætti.

Tað sum verður at gjalda eigaranum við slíkari yvirtøku, er tann upprunaligi søluprisurin fyri sjálvan garðin, virðið av innistøðu, bygningum og av tí arbeiði og peningaíløgum, sum lagdar eru í garðin, aftaná at jarðarráðið seldi hann.

§ 30.

Hann, ið hevur fingið jørð til ognar sambært reglunum í hesi lóg, hevur fult ræði yvir ognini sum ognarmaður, bert við teimum frávikum, sum henda lóg fyriskrivar.

§ 31.

Maður sum hevur fingið garð ella trød til ognar sambært reglunum í hesi lóg, kann sjálvur í testamenti gera av, hvør av livsarvingum hansara skal hava garðin ella trødna effir seg, og eisini hvussu nógv hann skal taka garðin ella trødna fyri, og harvið hvussu nógv hann verður at svara búnum.

§ 32.

Jarðarráðið kann áleggja manni, sum hevur jørð í leigu ella festi, ella hevur fingið jørð til ognar sambært reglunum í hesi lóg, at hava jørðina við bygningum, innistøðu og øðrum tilhoyri neyðturviliga tryggjaða í einum tryggingarfelag, sum jarðarráðið góðtekur.

§ 33.

Liggur ognarjørð, sum ikki verður røkt av eigaranum, og er innangarðsjørðin gott dyrkilendi,

to vurderingsmænd, der begge udmeldes af Færøernes ret.

Det, der bliver at udbetale ejeren i tilfælde af en sådan overtagelse, er den oprindelige salgspris for selve gården, værdien af besætning, bygninger og af det arbejde og de investeringer, der er nedlagt i gården, efter at landbrugsrådet overdrog den til eje.

§ 30.

Den, der har fået overdraget jord til eje i henhold til reglerne i denne lov, udøver med de af denne lov flydende indskrænkninger en ejers fulde rådighed over ejendommen.

§ 31.

Den, der har fået gård eller trø overdraget til eje i henhold til denne lov, kan i et testamente selv træffe bestemmelse om, hvem af hans livsarvinger gården eller trøen skal tilfalde, og også om størrelsen af det beløb, arvingen skal overtage gården eller trøen for, og derved om størrelsen af arvingens tilsvar overfor boet.

§ 32.

Landbrugsrådet kan pålægge lejer eller fæster eller den, der har fået jord til ejendom i henhold til reglerne i denne lov at holde jorden med bygninger, besætning og andet tilbehør behørigt forsikret i et af landbrugsrådet godkendt forsikringsselskab.

§ 33.

Findes der odelsjord, der ikke bliver drevet af ejeren, og er indengårdsjorden velegnet til op-

so hevur jarðarráðið rætt til, tá tað ætlar um, at tørvur er á dyrkilendi har í bygdini, at taka upp tingingar við avvarandi eigara um at fáa jørðina til keyps.

Fæst slíkt keyp í lag, og verður tað góðtikið av landsstýrinum, skal jarðarráðið útleiga jørðina til mann í bygdini, sum eftir ráðsins ætlan er skikkaður til at røkja hana, lata slíkum manni jørðina í festi, ella selja honum hana alt samhært reglunum, sum fyriskipaðar eru í hesi lóg.

Somuleiðis kann jarðarráðið vegna jarðangrunnin og við samtykki landsstýrisins keypa ognarjørð til ávíst almení endamál, tá tørvur er á slíkum.

V. Bólkur.
Lán úr jarðargrunnunum.

§34.

Sambært reglum, ið landsstýrið fyriskrivar, fáast lán úr jarðargrunnunum

1) til at stovna nýggj jarðarbrúk,
2) til at velta upp úr nýggjum og til jarðaráhøtur,
3) til nýggjar bygningar á almennari jørð,
4) til fjós, høyløður, seyðahús, køstar og súrhoylbrunnar
5) til keyp av maskinum og amboðum,
6) til rekstrarlán til jarðarbrúk,
7) til høsnarhald,
8) til mjólkasølur og meiarií.

§ 35.

Landsstýrið kann áseta hámark

dyrkning, er landbrugsrådet berettiget til, når det skønner, at der er trang til opdyrkningsjord i den pågældende bygd, at optage forhandlinger med vedkommende ejer med henblik på at erhverve jorden ved køb.

Opnås et sådant køb, og bliver det godkendt af landsstyret, skal landbrugsrådet udleje jorden til en mand i bygden, der efter rådets skøn er egnet til at drive den, overlade ham jorden i fæste eller sælge ham den alt i overensstemmelse med reglerne i denne lov. -

Ligeledes kan landbrugsrådet på jordfondens vegne og med landsstyrets samtykke opkøbe odelsjord til bestemte offentlige formål, når der er trang dertil.

Kapitel V.
Om lån af jordfondens midler.

§34.

Efter nærmere af landsstyret foreskrevne regler, kan der tilstås lån af jordfondens midler

1) til oprettelse af nye jordbrug,
2) til opdyrkning af rå jord og til jordforbedringer,
3) til nye bygninger på jord i offentlig eje,
4) til staldbygninger, hølader, fårehus, møddinger og ensilagebrønde,
5) til indkøb af maskiner og redskaber,
6) til driftslån til jordbrug,
7) til hønsehold,
8) til mælkeudsalg og mejerier.

§ 35.

Landsstyret kan fastsætte mak-

fyri lánveitingum úr jarðargrunninum í einum álmanakkaári.

§ 36.

Tað er ein treyt fyri lánveiting, at lántakarin

a) hevur fastan bústað í Føroyum,
b) er myndugur, og, um hann skal nýta lánið til nýtt jarðarbrúk, ikki er yvir 50 ára gamal,
c) skal vera førur fyri at driva brúkið og
d) ikki sjálvur eigur neyðturvuligan pening til endamálið.

Umsøkjarin skal eisini sannføra, at peningaliga ætlan hansara er haldgóð. Hann skal leggja fram kostnaðarætlan og inntøkuætlan fyri brúkið.

§ 37.

Lániumsókn verður at senda jarðarráðnum, ið skal ganga umsøkjaranum til handa við neyðturvuligum upplýsingum, sum teknningum, kostnaðarætlan og tilíkum.

Í fyriskipan landsstýrisins, sum nevnd er í § 7, kann landsstýrið seta hægsta lánsvirði, sum ein ogn kann metast til, tá lán verður veitt.

Áðrenn lán verður veitt, kann jarðarráðið lata viðkomandi brúk sýna og meta.

§ 38.

Lánihæddinn ásetur jarðarráðið. Burtursæð frá festijørð ella leigujørð má lánið ikki vanliga vera hægri enn 60 % og onganntíð hægri enn 80 % av lánsvirðinum, sum brúkið verður sett í, tá alt

simumsbeløb for ydelse af lån af jordfondens midler pr. kalenderår.

§ 36.

Det er en betingelse for at yde lån, at låntageren

a) har fast bopæl på Færøerne,
b) er myndig, og i tilfælde af at lånet skal anvendes til oprettelse af nyt jordbrug, ikke er over 50 år gammel,
c) skal være i stand til at drive bruget og
d) ikke selv har tilstrækkelige midler til formålet.

Ansøgeren skal også godtgøre, at hans financielle planer er forsvarlige. Han skal fremlægge kalkulation over udgifterne samt driftsbudget for bruget.

§ 37.

Andragende om lån indsendes til landbrugsrådet, der har at bistå andrageren med nødvendige oplysninger, såsom med tegninger, omkostningsoverslag og lignende.

I henhold til de af landsstyret i henhold til § 7 fastsatte bestemmelser, kan dette fastsætte den højeste låneværdi, som en ejendom kan ansættes til, når lån skal ydes.

Forinden ydelse af lån kan landbrugsrådet lade de pågældende brug besigtige og vurdere.

§ 38.

Lånets størrelse fastsættes af landbrugsrådet. Bortset fra fæstejord eller lejejord, må lånene i almindelighed ikke overstige 60% og aldrig overstige 80 % af den låneværdi, bruget ansættes til,

arbeiðið er gjørt, sum jarðarráðið krevur, og tá møguligur fremuri veðrættur ella virði á møguligari kapitaliseraðari grundbyrðu er frádrigið.

Viðvíkjandi láni til festara ella leigutakara skal jarðarráðið ansa eftir, at ikki verður veitt meira, enn at avvarandi festtari ella leigutakari við vanligari røkt er neytur at klára renta- og avdráttarbyrðuna, og slík lán eiga ikki vanliga at fara upp um 60 % av kostnaðinum til tað, sum lánið skal nýtast til.

Til jarðarábøtur og til at velta uppúr nýggjum kann ráðið tó í øllum førum veita upp til 90 % í láni av virðisvøkstrinum á jørðini.

Rakstrarlán mugu ikki vanliga fara uppum 80 % av tí virðinum, tey eru latin til, og lán til maskinur og amboð ikki upp um 60 %.

Lánið verður útgoldið tá viðkomandi arbeiði er góðtikið av jarðarráðnum. Til jarðarráðbøtur og velting uppúr nýggjum verða lán tó bert útgoldin einaferð um árið. Rakstrarlán verða útgoldin eftir avgerð í hvørjum einstøkum førí. Av lánum til slovnan av nýggjum brúki kann ein partur gjaldast út frammanundan, svarandi til 75 % av jarðarvirðinum, tá umsøkjarin hevur fingið tinglisið ognarbrev uppá jørðina. Heldur jarðarráðið tað vera tilráðiligt, kann eisini ein partur gjaldast frammanundan, tá bygningurin er komin undir tak, tó í mesta lagi 50 % av láninum.

Tilsøgn um lán dettur burtur, er ikki tað kravda arbeiðið gjørt innan eitt ár frá tí degi, tilsøgnin varð givin, og tilsøgn um lán

når alle ar landbrugsrådet krævede arbejder er udført, efter fradrag af eventuelle forprioriteter og værdien af eventuelle kapitaliserede grundbyrder.

Med hensyn til lån til fæster eller lejer skal landbrugsrådet påse, at der ikke ydes højere lån end at vedkommende fæster eller lejer ved sædvanlig drift er i stand til at klare renter og afdrag af lånet, og sådanne lån bør sædvanligvis ikke overstige 60 % af udgifterne til det, lånet skal anvendes til.

Til jordforbedringer og til nyopdyrkning kan rådet dog i alle tilfælde yde op til 90 % lån af jordens værdistigning.

Driftslån må sædvanligvis ikke overstige 80 % af værdien af det, de er ydet til, og lån til maskiner og redskaber ikke overstige 60 %.

Lånet udbetales, når vedkommende arbejde er godkendt af landbrugsrådet. Lån til jordforbedringer og til nyopdyrkning udbetales dog kun een gang årlig. Driftslån udbetales i henhold til afgørelse i hvert enkelt tilfælde. Af lån til oprettelse af nye brug, kan en del udbetales forskudsvis, svarende til 75 % af jordens værdi, når andragøren har fået tinglæst skøde på ejendommen. Anser landbrugsrådet det tilrådeligt, kan også en del udbetales forskudsvis når bygningen er indelukket, dog ikke ud over 50 % af restlånet.

Lånetilsagn bortfalder, når del krævede arbejde ikke er udført inden eet år fra den dag at regne, da tilsagnet blev givet, eller, når der er tale om lån til jordfor-

til jarðarábøtur og velling uppúr nýggjum dettur burtur, er ikki tað árliga arbeiðið gjørt, sum jarðarráðið hevur álagt.

§ 39.

Lán verður ikki veitt, kann ikki viðkomandi brúk hjóða jarðargrunninum 1. veðrætt. Undantikin er tó jørð hjá ti almenna, og jørð sum frammanundan hevur givið jarðargrunninum 1. veðrætt ella tá talan er um lættari grundbyrður, hvørs kapitaliseraða virði ikki fer upp um 20 % av jarðarvirðinum.

Rakstrarlán verða veitt, sjálvt um 1. veðrættur ikki er leysur, men tó krevst at avvarandi kommuna mótvegis jarðargrunninum tekur ábyrgd fyri helvtini av ti tapi, sum standast kann av viðkomandi láni.

§ 40.

Lán verða bert veitt rakstrarlánsinntøkum, tá viðtøkur teirra eru góðtiknar av jarðarráðnum.

Viðtøka kann ikki góðtakast, inniheldur hon ikki hesar fyriskipanir:

a) Endamál samtøkanna skal bert vera at veita limunum lán til keyp av rossum, neytum, seyði, grísum, geitum, arbeiðsvagnum og landbúnaðarumboðum, ella til tað, seteplir ella sáð. Lánini skulu kunna veitast einstøkum limum ella fleiri limum í felag.
b) Við uppløkuni skal hvør limur geva ábyrgd fyri skyldur samtøkunnar í minsta lagi 25 kr. og í mesta lagi 500 kr. Inn-

bedringer og nyopdyrkning, det af landbrugsrådet krævede årlige arbejde ikke er udført.

§ 39.

Lån kan kun ydes, når der kan tilbydes jordfonden 1. prioritets panteret i det pågældende brug, medmindre det drejer sig om jord i offentlig eje, eller jord, hvori jordfonden i forvejen har 1. prioritet eller når der er tale om mindre grundbyrder, hvis kapitaliserede værdi ikke overstiger 20 % af jordværdien.

Driftslån kan dog ydes, selv om der ikke gives 1. prioritets panteret, men i så fald er det en betingelse, at vedkommende kommune overfor jordfonden garanterer for halvdelen af det tab, som det pågældende lån måtte medføre.

§ 40.

Lån til driftslåneforeninger kan kun ydes, når foreningernes vedtægter er godkendt af landbrugsrådet.

For at vedtægter skal kunne godkendes, må denne indeholde følgende bestemmelser:

a) Foreningernes formål skal udelukkende være at yde medlemmerne lån til indkøb af heste, kvæg, får, svin, geder, arbejdsvogne og landbrugsredskaber, eller til gødning, læggekartofler og frø. Lånene skal kunne ydes medlemmerne enkeltvis eller til flere medlemmer i forening.
b) Ved optagelse som medlem af foreningen skal hvert enkelt medlem tegne en garanti for

anfyri hesa peningahædd, sum ábyrgd soleiðis er givin fyri, ábyrgjast limirnir mótvegis jarðargrunninum ein fyri allar og allir fyri ein.

c) Lán verða bert veitt limum, sum sita við traðum ella aðrari jørð, sum nýtt verður í búnaðarendamáli.

Hægsta lán, sum veitast kann einum limi, er 2.000 kr.. Lán til keyp av tøðum, seteplum og sáði verða at afturrinda í mesta lagi í tvey ár, og onnur lán í mesta lagi fimm ár. Í aðrar mátar ásetur nevndin lánihæddina, lánitreytirnar og treytirnar fyri afturrindanini.

d) Ágóði samtøkunnar hjá limum kann pantast.

e) Ongar broytingar eru loyvdar á viðtøkum samtøkunnar uttan við samtykki jarðarráðsins.

f) Hvørt ár skal samtøka senda jarðarráðnum frágreiðing um virki samtøkunnar, og samtøkan hevur skyldu til at geva ráðnum allar upplýsingar, sum ráðið krevur viðvíkjandi virki og viðurskiftum samtøkunnar, og til at geva seg undir eftirlit ráðsins við, at samtøkan verður stjórnað sambært hesi lóg og viðtøkum samtøkunnar.

g) Stendur samtøkan í skuld til jarðargrunnin, tá hon verður avtikin, skal jarðarráðið góðtaka avgerðina um avtøku samtøkunnar.

§ 41.

Útlánsrentan og avdráttartiðin

foreningens forpligtelser på mindst 25 kr. og ikke over 500 kr. Inden for dette beløb hæfter foreningens medlemmer solidarisk overfor jordfonden.

c) Udlån må kun ske til medlemmer, der er trøbesiddere eller besiddere af anden jord, der anvendes til landbrugsformål.

Det højeste lån et medlem kan opnå er 2.000 kr.. Lån til indkøb af gødning, læggekartofler og frø skal tilbagebetales i løbet af højst to år, og andre lån i løbet af højst fem år. I øvrigt fastsætter bestyrelsen størrelsen af lånene samt vilkårene for disse og deres tilbagebetaling.

d) Foreningens tilgodehavende hos medlemmerne kan inddrives ved udpantning.

e) Ingen forandringer må foretages i foreningens vedtægter uden landbrugsrådets samtykke.

f) Foreningen skal hvert år til landbrugsrådet indsende beretning om foreningens virksomhed, og foreningen er pligtig til at meddele landbrugsrådet alle oplysninger, som det måtte forlange angående foreningens virksomhed og forhold, samt underkaste sig rådets tilsyn med, at foreningen ledes i overensstemmelse med denne lov og foreningens vedtægter.

g) Såfremt foreningen ved dens opløsning måtte være i gæld til jordfonden, udkræves landbrugsrådets godkendelse af beslutningen om foreningens opløsning.

§ 41.

Udlånsrenten samt afdragstiden

verða fyrisett av jarðarráðnum eftir góðkenning frá landsstýrinum. Fyri rakstrarlán áseta tó jarðarráðið lánitíðina í hvørjum einstøkum føri, og má hon ongantíð fara upp um fimm ár.

Lániveitarin kann ikki siga upp lánið, soleingi viðkomandi brúk verður røkt sum tað skal.

Fyri peningaskyldur til jarðargrunnin kann skuldarin pantast.

§ 42.

So leingi lán úr jarðargrunninum ikki er fult afturgoldið, gevur viðkomandi brúk seg undir reglurnar, §§ 15, 18, 21, 25 og 32.

VI. Bólkur.

Studningur úr jarðargrunninum.

§ 43.

Árliga verður á figgjarlógini settur studningur til tey í hesi grein nevndu endamál. Jarðarráðið umsitur studningin eftir reglum, sum landsstýrið ger. Í hesum reglum evrður at áseta hvussureglum verður at áseta hvussu í studningi.

Studningurin verður veittur til hesi endamál:

1) Til jarðarábøtur og til veltingar uppúr nýggjum. Arbeiðið verður at fara fram eftir einari ætlan, sum jarðarráðið hevur góðtikið frammanundan.
2) Til nýggjar køstur, landbrunnar og súrhoyhrunnar, tá kostnaðaraetlan er góðtikin av jarðarráðnum frammanundan.
3) Til hegn, sum fyrstu ferð verð-

fastsættes at landbrugsrådet efter indhentet godkendelse fra landsstyret. For drifslån fastsætter landbrugsrådet afdragstiden i hvert enkelt tilfælde, og denne må aldrig overstige fem år.

Lånet er uopsigeligt fra kreditors side, så længe den pågældende ejendom vedligeholdes efter sin bestemmelse.

For ydelser til jordfonden haves udpantningsret.

§ 42.

Så længe lån, ydet af jordfonden, ikke er fuldt tilbagebetalt, er den pågældende ejendom undergivet de i §§ 15, 18, 21, 25 og 32 fastsatte regler.

Kapitel VI.

Tilskud af jordfonden.

§ 43.

På de årlige finanslove bevilges tilskud til de i denne paragraf nævnte formål. Landbrugsrådet administrerer tilskudene i overensstemmelse med regler, som landsstyret udfærdiger. Disse regler skal fastsætte, hvorledes tilskudene ydes og med hvilke beløb.

Tilskud ydes til disse formål:

1) Til jordforbedringer og opdyrkning af rå jord. Arbejdet udføres efter en af landbrugsrådet forud godkendt plan.
2) Til opførelse af møddinger, ajlebeholdere og ensilagebrønde, når omkostningsplan i forveien er godkendt af landbrugsrådet.
3) Til hegn, som første gang sæt-

ur sett nm jørð til uppdyrkingar, ella til kulturbeiti til neyt.

§ 44.

Umsóknir um studning sambært § 43 verða at senda jarðarráðnum.

§ 45.

Studningur sambært § 43 verður fyrst og fremst latin brúkum, sum hava møguleika fyri at verða røkt sum jarðarbrúk í framtíðini.

§ 46.

Studningur verður ikki latin, fyrr enn viðkomandi tiltøk eru liðug, og tá tey eru sýnað og góðkend av jarðarráðnum.

VII. Bólkur.

Aðrar reglur.

§ 47.

Yvir ta í III. og IV. bólki nevndu jørð, sum liggur í ómatrikuleraðum bygdum, heldur sorinskrivarin eins og higartil brúksskrá.

Til sundurbýti, samanlegging, marknaðarumskipan v. m., av jørð, sum brúksráð verður førd yvir krevst góðkenning frá matrikulstovuni eftir sonnu reglum, sum galdandi eru fyri matrikuleraðar eigindómar við teimum frávikum, sum fylgja av, at eingin matrikul er gjørdur hesi jørð viðvikjandi.

§ 48.

Henda lóg kemur í gildi .....

.....

tes omkring indlagt jord til opdyrkning, eller til kulturgræsningsarealer til kvæg.

§ 44.

Andragender om tilskud i henhold til § 43 indgives til landbrugsrådet.

§ 45.

Tilskud i henhold til § 43 ydes fortrinsvis til jordbrug, som i fremtiden har mulighed for at blive drevet som sådanne.

§ 46.

Tilskudene ydes først, når de pågældende arbejder er udført, og når de er synet og godkendt af landbrugsrådet.

Kapitel VII.

Andre bestemmelser.

§ 47.

For den i kapitel III. og IV. nævnte jord, der ligger i bygder, hvor matrikulering ikke har fundet sted, fører sorenskriveren på samme måde som hidtil brugsregister.

Til udstykning, sammenlægning, skelforandringer m.v. med hensyn til jord, der er omfattet af brugsregistret, udkræves Matrikulstovens approbation efter de for matrikulerede ejendomme gældende regler med de afvigelser, der følger af, at der ikke forefindes nogen matrikel for denne jord.

§ 48.

Denne lov træder i kraft .....

.....

Frá tí degi, lógin fær gildi, fara úr gildi § 5 í lóg nr. 56 frá 13. apríl 1894 om afhændelse af trøer og grundstykker fra statens fæstegods på Færøerne, lóg nr. 174 frá 24. mai 1937 om jordbrugets fremme, við seinni broytingum, nevniliga midl. best. nr. 57 frá 22. december 1942, løgtingslóg nr. 28 frá 24. apríl 1957, løgtingslóg nr. 23 frá 25. apríl 1960 og løgtingslóg nr. 24. frá 25. apríl 1960.

Fra denne lovs ikrafttræden ophæves § 5 i lov nr. 56 af 13. april 1894 om afhændelse af trøer og grundstykker fra statens fæstegods på Færøerne, lov nr. 174 af 24. maj 1937 om jordbrugets fremme med senere ændringer, nemlig midl. best. nr. 57 af 22. december 1942, lagtingslov nr. 28 af 24. april 1957, lagtingslov nr. 23 af 25. april 1960 og lagtingslov nr. 24 af 25. april 1960.

VIÐMERKINGAR

Ein stórur partur av uppskotinum er beinleiðis tikið eftir uppskotinum frá millumtinganevndini, og verður tí eisini víst til viðmerkingarnar hjá henni viðvíkjandi teimum einstøku greinunum.

Tær broytingar, sum gjørdar eru, eru hesar:

í I. bólki er raðfylgjan broytt eitt sindur.

ad § 1:

í 1. petti er «samhært hesi lóg» broytt til «samhært lóg», tí tað er væl hugsandi, at jarðarráðið fær størv at røkja við heimild í øðrum lógum.

í 2. petti er seinna pkt. burturdottið.

Skal reglugerðin samtykkjast av løgtinginum, kundi hon eins væl verið tikin upp í lógina. Harafturímóti gongur nevndin út frá sum ein sjálvfylgja, at reglugerðin verður send avvarandi feløgum til ummælis, áðrenn hon verður sett í gildi.

ad § 2:

Nevndin er samd um, at tað í lógini verður ásett, at limir jarðarráðsins skulu verða jarðarbrúkskønir. Hesin kunnleiki kann tó vera bæði teoretiskur og praktiskur.

Viðvíkjandi valinum av jarðarráðnum hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta. Meirilutin heldur ikki vera grundarlag fyri at broyta tær galdandi reglurnar, ið komu í gildi við løgtingslóg nr. 28 frá 24. apríl 1957. Minnilutin (Juul Poulsen) heldur ikki, at allir bólkar innanfyri føroyskan landbúnað eru nóg væl umboðaðir við lí galdandi skipanini, og setur tí broytingaruppskot fram hesum viðvíkjandi.

Nevndin er samd um, at tað ikki er grund fyri at lógfesta nakran atgongurætt hjá landbúnaðarráðgevaranum til fundir jarðarráðsins.

ad § 3:

1. petti er orðað meira samsvarandi reglunum í rættargangslógini.

ad. § 5:

2. petti 2. pkt. og restin av greinini er burturdottin út frá tí sjónarmiði, at tað ikki er vanlig mannagongd, at almennur stovnur áleggur honum, ið reist hevur mál, kostnaðin av tí. Hesar reglur hava eisini verið lítið og einki nyttar. At reglurnar detta burtur, fordar ikki jarðarráðnum við t.d. sølu av grundstykki í sølutreytunum at áleggja keyparanum at rinda útreiðslurnar av uppmáling og tilíkum eins og aðrar søluútreiðslur.

ad § 6:

Frá og við fíggjarárinum 1963/64 eru á fíggjarlógini árliga játtaðar 200.000 kr. í studningi, sum jarðarráðið umsitur. Hvussu nógv skal játtast eigur løgtingið til einahvørja tíð at taka støðu til eftir teimum fíggjarligu umstøðunum og eftir tí tørvi, ið er á studningi. 1. petti er tí broytt samsvarandi hesum sjónarmiði.

Sambært § 19 í løgtingslóg nr. 1 frá 13. mai 1948 um stýrisskipan Føroya í sermálum kann landskassin ikki taka ábyrgd av lání uttan við heimild í løgtingslóg. Treytin um landskassaábyrgd er tí broytt til, at landsstýrið skal geva loyvi til lánupptøku í hvørjum einstøkum føri.

At søluspurningurin fyri grundstykkir uppá ta eina síðuna fer í jarðargrunnin og uppá ta aðru síðuna skal tilkoma viðkomandi brúki, kann tykjast sjálvmótsigandi, og er 3. petti tí orðað eitt sindur øðrvísið. Viðviðvíkjandi nýtslu av peningi á festikonto heldur nevndin § 6 petti 4, 2. pkt. í uppskotinum frá millumtinganevndini verða óneyðugt, tá kravt verður, at tiltøkini verða góðkend av jarðarráðnum frammanundan.

At jarðargrunnurin, ið er stovnsettur sambært lóg, hert kann avtakast við lóg, er ein sjálvfylgja.

Tey tvey seinastu pettini eru tí strokin.

ad § 8:

Í petti 1 hevur nevndin roynt at avmarka ta í hesi lóg umhandlaðu almennu jørð frá aðrari almennari jørð, t.d. grundøki hjá kommunum og løgtingi.

3. petti er orðað soleiðis, at einhvør, ið verður raktur av avgerðum jarðarráðsins, skal kunna skjóta hesar fyri landsstýrið. Summar bygdir í Føroyum liggja soleiðis fyri, at long tíð kann ganga og einki poslsamband er við tær, og er kærufreistin longd til 6 vikur.

ad § 10:

Í 2. petti er «einkjan» broytt til «hjúnafelagi» og í 4. petti «við einsljóðandi orðaljóði» til «á oyðubløð».

ad § 11:

Nevndin er samd um at halda fast við eitt leigugjald uppá 7,06 kr. fyri skattamønkina, og heldur hon tí tað ikki vera neyðugt at geva nakra heimild til at seta hesa ógvuliga lágu leigu niður.

ad § 12:

Vist verður til tað, sum sagt er í inngangínum. Annars er eisini tann broyting gjørd, at treytin um at viðkomandi skal vera føddur í hjúnabandi er strokin, eins og nevndin gongur út frá, at adoptivbørn hava sama rætt sum onnur børn eisini hvat festigørðum viðvíkur.

Nevndin tekur eisini undir við minnilutauppskotinum frá millumtinganevndini, at sigulinja festarans fær ein lógfestan frammihjárætt til festigarðin, um adoptivbørn og børn, sum ikki eru fødd í hjúnabandi, javnstillast við onnur børn.

Sitandi festari kann fyribyrgja, at t.d. børn sum ikki eru fødd í hjúnabandi festa framm um børn fødd í hjúnabandi við at nýta rættin til at gera bindandi avtalu við jarðarráðið, um hvør skal hava garðin aftaná seg.

Fyri at rætturin ikki skal verða misbrúktur, heldur nevndin tað vera neyðugt, at jarðarráðið áðrenn tað fyri sín part góðtekur avtaluna, skal boða øllum teimum, sum eftir lógini hava frammihjárætt, frá, tó soleiðis at um lívsarvingar eru, nýtist bert at geva teimum boð.

ad § 13:

Aftaná «festigørðum» í 1. petti er lagt aftrat «í fleiri brúk» fyri at skilja hesi fyribrigdi frá t.d. frásøln av grundstykkjum.

Við sundurbýti av festigørðum er tað sjálvandi ein treyt, at festari ella tilstundandi festari samtykkja. Reglan um, at avgerð jarðarráðsins kann krevjast løgd fyri landbúnaðarstevnu, hevur tí serliga týdning, um jarðarráðið noktar sundurbýti.

ad § 14:

At leigan fyri prestajørð, ið verður fest, er tann sama sum fyri aðra almenna festijørð fylgir av § 11, og er tí 2. petti óneyðugt.

ad § 15:

Greinin er býtt soleiðis upp, at skyldur festarans eru í 1. petti, meðan 2. og 3. petti umhandla rættindi hansara. Eftir tí galdandi lógini hevur

festari rætt til at selja grót v.m. eftir reglum, sum viðkomandi búnaðarnevnd hevur gjørt, og sambært § 9 í reglement for landbrugsudvalgene frá 22. mars 1938 skulu hesi ansa eftir, at sølupeningurin verður goldin inn í jarðargrunnin, ella eftir serligum loyvi verður nýttur til jarðarábøtur. Nú má tað so vera jarðarráðið, ið skal ansa eftir hesum sb. løgtingslóg nr. 28 frá 24. apríl 1957 § 2.

Nevndin hevur ta áskoðan, at tá tað verður loyvt festaranum at selja, má meiningin eisini vera, at hann skal hava ágóðan av søluni. Ger sølan tað, at brúkið minkar í virði sum jarðarbrúk, heldur nevndin tað tó vera rættast, at peningurin verður nýttur sjálvum brúkinum til frama, eins og tá talan er um sølu av grundstykkjum, og kann jarðarráðið tí eftir uppskotinum treyta søluna av, at peningurin verður settur á festikonto.

Av tí at torvskurður hevur lítlan og ongan týdning í dag, heldur nevndin einki grundarlag vera fyri, at hava reglur hesum viðvíkjandi.

ad § 16:

Av tí at tað í dag í nógvum førum er gjørligt at nýta maskinamboð til velting, hevur nevndin hildið tað vera rætt at broyta freistina fyri velting av leigutrøð.

Nevndin er av tí áskoðan at leigumál viðvíkjandi traðum, sum liggja í órøkt, eiga at verða uppsøgd fyri at aðrir, ið hava betri hug til tess kunnu sleppa framat, tí møguleikin fyri nýggjum traðarinnleggum er nógvastaðni avmarkaður.

Nevndin heldur tað vera rætt, at eitt lágt leigugjald verður lógfest eins og festileigan er tað.

Tann galdandi lógin ásetur í § 38, at selt kann verða burturav almennari jørð, hóast hon er latin í festi ella er útleigað. Hetta er burturdottið í uppskotinum frá millumtinganevndini, men eigur eftir nevndarinnar áskoðan at setast innaftur í uppskotið fyri ikki at skapa ógreiðu á sølurættindi jarðarráðsins mótvegis viðkomandi brúkara, sum tó altið eigur at verða eftirspurdur, eins og hann skal kunna leggja málið fyri landbúnaðarstevnu.

ad § 21:

Nevndin hevur umhugsað, um tað ikki hevði verið ein fyrimunur, at hesi mál vórðu avgjørd av landbúnaðarstevnu, tí kunnleiki til jarðarviðurskifti er av stórum týdningi í hesum málum, men tað vildi uppá tað aðru síðuna ført við sær, at rætturin verður avskorin frá at taka støðu sb. § 11 í lóg nr. 84 frá 31. mars 1926 um landvæsenskommissioner, og nevndin hevur tí ikki gjørt broytingaruppskot hesum viðvíkjandi.

2. petti er orðað øðrvísið fyri at samsvara betri við vanligar rættargangsreglur. Eisini er lagt afturat, at samsýning kann veitast fyri aðrar

íleggingar. Tað má tó vera ein treyt, at hesar veruliga hava verið brúkinum at gagni.

ad § 23: (og § 24 í uppskotinum frá millumtinganevndini).

Greinin er broytt til, at tað er ein treyt fyri at kunna krevja at fáa trøðna til ognar, at hon er fult uppdyrkað. Henda broyting er gjørd fyri at skorða undir, at traðirnar verða væl røktar.

Eftir nevndarinnar áskoðan eru áhugamál hins almenna nóg væl tryggjað við reglunum í §§ 26 og 27, og tað skapar eisini stóran ótryggleika hjá tí, ið keypir, at jarðarráðið til eina og hvørja tíð skal kunna taka ein part av trøðni aftur og møguliga á henda hátt gera tað, at trøðin missir sítt virði sum traðarbrúk hjá viðkomandi.

Nevndin heldur tað eisini vera rætt, at prísurin við keyp av leigutrøð, eins og við keypi av festigarði, verður settur í mun til leiguna.

Um prísurin verður settur til 25 ferðir leiguna, ið eftir uppskotinum fer at liggja um 4 kr. árliga fyri eina vanliga trøð, skuldi tað ikki verið neyðugt at bjóða borg.

ad § 24:

Nevndin hevur hildið tað verið neyðugt at tilskila, at sølan einki broytir viðvíkjandi vetrarbitinum á tí selda.

ad § 25:

Nevndin heldur tað vera meiningsleyst at krevja, at maður sum fær leigutrøð til ognar skal búgva á sjálvari trøðni, og skjýtur tí upp í staðin at krevja, at hann býr í bygdini. Eisini er tað ógreitt hvat liggur í, at trøðin skal røkjast sum eitt sjálvstøðugt jarðarbrúk. Skotið verður tí upp, at hon skal røkjast sum eitt vanligt traðarbrúk.

ad § 26:

Her er bert gjørd tann broyting viðvíkjandi 2. petti, at í staðin fyri «Ætlar ....» verður sett «Verður ....». Í 1. petti er eisini tilskilað, at tað er helvtin av nettovinninginum, ið gongur í jarðargrunnin.

ad § 28:

«Sølupeninginum» broytt til «nettosølupeninginum.»

ad § 29:

Víst verður til tað, sum sagt er frammanfyri í innganginum.

Nevndin heldur, at tað greiðasta er, at festarin skal hava ein beinleiðis rætt til at yvirtaka garðin, um hann annars lúkar tær trteytir, sum tilskilaðar eru niðanfyri í uppskotinum, og petti 1 er tí broytt samsvarandi.

Viðvíkjandi treytunum fyri søluni í petti 2 er nr. 1 broytt samsvarandi § 15 1. petti og § 25. Ein av orsøkunum fyri at nevndin gongur inn fyri søla er tann, at menn sum lítlan hug hava at fáast við garðin skulu hava møguleika fyri at sleppa av við hann, uttan sjálvir at líða nakað tap, og her má havast í huga, at teir vanliga sjálvir eiga húsini, og heldur nevndin tí, at at treytin um at keyparin skal hava umsitið garðin væl áðrenn yvirtøkuna eigur at broytast til, at garðurin í framtíðini verður forsvarliga rikin, og er nr. 2 í uppskotinum tí broytt hesum viðvíkjandi.

Eisini treytin um at keyparin ikki er vorðin 50 ár er strokin.

Nevndin heldur tað vera neyðugt, at garðarnir skulu kunna krevjast aftur eftir meting, tá t.d. roynt verður at selja teir til aðrar enn næstringar, soleiðis sum søkupeningurin er ásettur í uppskotinum. Her má tó havast í huga, at hetta kann koma at kosta nógvan pening, tí tað sum jarðargrunnurin skal yvirtaka aftur er ikki bert tað, sum hevur hoyrt festinum til, men eisini tað, sum festarin átti á tí av bygningum o.t. Tað er tó at vóna, at tað ikki verður stórur tørvur á at nýta henda møguleika hjá jarðargrunninum, men tað er avgjørt neyðugt at hava hann. Hetta rímar eisini væl við reglunum viðvíkjandi traðum, sum verða latnar til ognar.

Nevndin heldur eisini, at tørvur er á at áseta metingargrundarlagið í lógini.

Fyri at tað ikki skal vera ein fyrimunur hjá keyparanum at fáa garðin uppá borg móttvegis tí, ið rindar í hondina, er neyðugt at hækka rentuna, og heldur nevndin at ein hóskandi renta er vanlig sparikassaútlánsrenta.

Seinasta petti er burturdottið, tí tað sama framgongur av § 30.

ad § 31:

Nevndin heldur, at tørvurin hjá manni, ið hevur fingið garð til ognar, við testamenti at kunna avgera, hvør av arvingunum eftir hann skal yvirtaka garðin eftir hann og fyri hvussu nógv, er enn størri enn tá talan er um traðirnar.

Reglurnar um at avgerðin kann leggjast fram fyri notarius publicus stava frá lógini frá 4. mars 1857, og heldur nevndin ikki, at hesar reglur eru neyðugar longur, men eiga fólk at brúka ta vanligu mannagongdina viðvíkjandi testamentum.

ad § 34:

Tær broytingar, ið gjørdar vórðu til § 40 í tí galdandi lógini við løgtingslóg nr. 24 frá 25. apríl 1960 § 1, eru tiknar við. Harumframt heldur nevndin tað vera rætt serskilt at nevna lán til maskinur og amboð.

ad § 35:

Nevndin heldur tað ikki vera rætt í lógini at seta eitt ávist hámark fyri lánveitingum, men heldur at landsstýrið til eina og hvørja tíð eigur at kunna gera tað.

ad § 36:

Greinin er orðað eitt sindur øðrvísi. Av realitetsbroytingum eru bert tær, at treytin um at viðkomandi ikki skal vera undir 25 ár er strokin, tí nevndin kann ikki síggja hví ein maður undir 25 ár ikki skuldi havt minst líka góðar møguleikar fyri at drivið jarðarbrúk, sum ein sum er yvir. Tó er tað natúrligt at krevja, at umsøkjarin er myndugur, tí annars krevst eisini loyvi til skuldbindingina frá pupilautoritetunum.

Tað avgerandi kann ikki vera, hvat umsøkjarin eigur frammanundan, men teir møguleikar hann hevur fyri at dríva viðkomandi brúk, so at hann verður førur fyri at greiða lániskyldur sínar mótvegis jarðar grunninum, og er tí litra c broytt samsvarandi hesum sjónarmiði.

ad § 37:

Greinirnar 39 og 40 í uppskotinum frá millumtinganevndini eru stroknar. Tó er 1. pkt. í § 39 tikið uppí § 37 sum 3. petti.

ad § 38:

2. og 3. petti eru umskift, og harumframi er 4. petti broytt, soleiðis at lánshámarkið í øllum førum verður 80% viðvíkjandi rakstrarlánum og fyri maskinur og amboð 60% av virðinum, tey eru latin til.

ad § 45:

At tosa um sjálvstøðug brúk uppá eitt kúfóður heldur nevndin vera meiningsleyst, og leggur hon tí ongeira dent á framtíðarmøguleikarnar hjá teimum brúkum, studningur verður veittur til, tí tað er sjálvsagt lítið høpi í at geva studning til uppdyrking av lendum, sum fara undir bygging um fá ár.

ad § 47:

Víst verður til tað, sum sagt er frammanfyri í inganginum.

ad § 48:

Í at kalla øllum lógum viðvíkjandi føroyskum jarðarviðurskiftum hevur verið ásett, at annars fara allar reglur úr gildi, sum stríða ímóti tí, sum henda lóg fyriskrivar. Hetta,ið annars er ein sjálvfylgja, er ikki mikið upplýsandi fyri tann, ið lesur lógina, tá ikki verður tilskilað, hvat fer úr gildi.

UPPSKOT
til

løgtingslóg um ognarjørð.

§ 1.

Henda lóg miðar ímóti at skipa ognarviðurskiftini soleiðis, at hann, sum hevur ella tekur fastan bústað í bygdini, har jørðin liggur, skal eiga ta jørð, sum hoyrir bygdini til.

Við bygd er í hesi lóg at skilja tað markatalsumráði, sum avmarkar bygdina í hvørjum einstøkum føri.

Undantikið frá reglunum í hesi lóg eru grundstykkir ella lendi, sum liggja soleiðis fyri, at tey ikki kunnu fáa týdning sum búnaðarjørð.

§ 2.

Eigaraskifti er bert loyvt til persón, sum hevur fastan bústað í bygdini ella í grannabygd, hvørs bøur markar upp at bønum í teirri bygdini, har jørðin liggur.

Fyri avfólkaðu bygdina Skarð er eigaraskifti bert loyvt til persón, sum hevur fastan bústað í oynni og fyri bygdina Skálatoftir til persón, sum hevur fastan bústað í Klaksvík ella á Strond.

Eigaraskifti er tó eisini loyvt til persón, sum býr uttanfyri tey í hesi grein nevndu umráði, um hann tekur fastan bústað í bygdini áðrenn 2 ár frá ti degi, hann fekk jørðina til ognar. Avhendir hann aftur, áðrenn 2 ár eru farin, og áðrenn hann hevur tikið fastan bústað í bygdini, til persón sum

lagtingslov om odelsjord.

§ 1.

Denne lov sigter hen imod at tilrettelægge ejendomsforholdene på en sådan måde, at den, der har eller tager fast bopæl i bygden, hvor jorden er beliggende, skal have ejendomsretten til den jord, der hører til bygden.

Ved bygd forstås i denne lov det manketalsområde, der afgrænser bygden i hvert enkelt tilfælde.

Undtaget fra reglerne i denne lov er grundstykker eller arealer, der har en sådan beskaffenhed, at de ikke vil kunne få nogen betydning som landbrugsjord.

§ 2.

Ejerskifte er kun tilladt til person, der har fast bopæl i bygden eller i nabobygden, hvis indmark grænser op til indmarken i den bygd, den pågældende jord ligger i.

M.h.t. den ubeboede bygd Skarð er ejerskifte kun tilladt til person, der har fast bopæl på den pågældende ø, og m.h.t. bygden Skálatoftir kun til person, der bor i Klaksvík eller Strond.

